Við hesum uppskoti verður hendan skipan nú strikað. Um vilji er at stuðla familjupolitisk tiltøk, so eigur hetta at verða gjørt í aðrari lóggávu enn í dagpeningalóggávuni.

Tá sparingar skulu fremjast á almannaøkinum er neyðugt at verja øki, har stuðul er harðast tiltrongdur, hóast tað ongantíð er løtt avgerð at skerja í galdandi rættindum.

Men sæð í tí ljósi, at dagpeningaskipanin er ein endurgjaldsskipan fyri mista inntøku orsakað av sjúku ella barnsburði, verður skotið upp, at vent verður aftur til lógargrundarlagið fram til 1987 viðvíkjandi heimaarbeiðandi kvinnum.

Broytingin verður mett at hava við sær eina árliga sparing uppá 9 mió. kr., svarandi til, at í 1992 verður sparingin uml. 4,5 mió. kr.

Landsstýrið metir eisini, at herumframt verður neyðugt at fremja broytingar í galdandi skipan viðvíkjandi barnsburðarfarloyvinum soleiðis, at galdandi reglur, avtalaðar millum løntakarafeløgini og landsstýrið, verða broyttar soleiðis, at barnsburðarfarloyvið goldið av arbeiðsgevara verður 20 viknr, meðan 4 eyka viknr verða at veita yvir dagpeningaskipanina. Slík broyting vil í størri mun javnseta alment sett starvsfólk við tímalønt starvsfólk. Slík broyting kann ikki verða framd í einum sáttmálaskeiði.

Fyrispurningar

100-1. Fyrispurningur til John Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi flutningi av skurðseyði oyggjanna millum í samband við sjúkuna ridluskriða

Ár 1991, 22. august boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Asbjørn Joensen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

1. Hvør er ætlan landsstýrismanins viðvíkjandi flutningi av skurðseyði oyggjanna millum í heyst í samband við sjúkuna ridluskriða.
2. Eigur fyriskrivað regla um forboð móti seyðaflutningi ikki at verða avtikin.

Viðmerkingar:

Nú tað stundar til mikkjalsmessu, verða menn at hugsa um fjøllini, skurðtíð er, so meira og minni er hjá fólki at fáa til høldar. Slaktiarbeiði krevur sítt, og tá bæði viðvíkjandi arbeiðsmegi, arbeiðsumstøðum og húsarúmd.

Til nú er bóndin so fyri, at sendast kann móttakara seyðin í livandi lívi. Hvønn týdning hetta hevur fyri tann stóra ognarmannin ella uppsitaran, er ikki torført at hugsa sær til. Hesum varð ætlan at seta forboð fyri seinasta heyst, men til alla lukku gjørdist hetta bann ikki veruleiki.

Eingin ivi er heldur um, at verður hetta at eydnast, tá verður starvsstovan læknanum skjót á baki við fyriskipan um, hvussu flettast skal og hvar v. m.

Um nakar veruligur peningur var í hesum mongu seyðafylgjum, váru onkur ráðini til at taka, men so er ikki.

Annað er so, at vit við hesum forboði eru við at beina fyri eon einum eyðkenni her á landi.

Týdningurin av hesum forboði kann eisini vera torførur at fáa eyga á, tá hugsað verður um eitt nú seyðahegn. Fleiri í vánaligum standi. Ásannandi hetta og havandi í huga, hvussu langt seyður kann ferðast av haga, tykist avmarking og bann nyttuleyst. Eitthvørt annað verður til at taka, tí valla eru ráðini eisini her, at djóralæknin gevur boð um skurð, so oyggj við ridluskriða verður týnd fyri seyð, við tí fíggjarliga úrsliti, at almenningurin skal rinda kostnaðin av at sleppa upp-

aftur á somu skipan.

Tað má og eigur at verða møguligt at samskipa alment eftirlit saman við áliti á teir, ið hava seyðarøkt um hendi her á landi. At hesin seyðamaðurin ella ognarin er meira hugaður at beina fyri sjúkuni enn at menna hesa, kann eingin ivi vera um. Øll onnur loysn krevur kostnaðarmikla íløgu, ið ráðini ikki eru til.

30. august 1991 svaraði John Petersen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar:

Eftir áheitan frá landsdjóralæknanum setti landsstýrið í desember 1990 kunngerð í gildi um forboð fyri at flyta livandi seyð (millum oyggjar við tí fyri eyga at forða spjaðing av sjúkuni riðluskriða.

Av tí at viðurskiftini innan seyðahald eru so ymisk, (ognarjørð/kongsjørð, uttanbíggjajørð, skorðaseyður, søluhátturin av seyði, røktin um veturin (t.d. taka seyð heim) o.s.fr.), so er trupult at gera reglugerð um fyribyrging soleiðis, at ikki onkur verður heldur hart raktur. Tí má Húsdjóranevndin hava heimild at gera undantøk.

Síðan 11. desember 1990 hevur forboð verið fyri flutningi av seyði oyggjanna millum, men fyri ikki at gera slaktiarbeiðið ógjørligt hjá fólki, er ætlanin at gera ávísar broytingar í kunngerðini. Húsdjóranevndin hevur sent landsstýrinum broytingaruppskot til kunngerðina, soleiðis at Húsdjóranevndin eftir umsókn og eftir nærri ásettum treytum í heilt serligum førum kann geva undantaksloyvi frá ásetingini.

Harumframt hevur Húsdjóranevndin ynski um, at kunngerðin verður broytt, soleiðis at seyður kann verða fluttur úr teimum stongdu økjunum á somu oyggj, tó bert til dráps.

Hesar broytingar verða lagdar fyri landsstýrið í komandi viku. Ein stórur trupulleiki er óvissan, um allur seyður til dráps, verður dripin (ein kann ikki rokna við, at øll taka spurningin í sama álvara).

Um kanningararbeiðið ikki hevði verið so væl fyritreikað beinanvegin, tá riðluskriði varð staðfestur (fyri at drepa alla ættina hjá smittaðum seyði), so kundi hent, at støðan fyri allar Føroyar hevði verið, sum hon er í Fugloy í dag, og hon er alt annað enn góð.

Tiltøkini hava verið strong og fyri onkran kanska í so strong, men tey eru neyðug.

Fyri at smittan skal breiða seg sum minst fyri ikki at siga als ikki, er neyðugt við fyriskrivaðum reglum og ætlar landsstýrið tí at fylgja tilmæli djóralæknans um forboðið fyri flutningi av seyði oyggjanna millum.

100-2. Fyrispurningur til Maritu Petersen, landsstýris-kvinnu, um hvat landsstýrið ger í samband við, at lægsta tilboð í bundnari licitatión í almennum byggimáli ikki verður tikið

Ár 1991, 19. september boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Hvat ger landsstýrið við tað, at lægsta tilboðið í bundnari licitatión varð umlopið í almennum byggimáli, sum m.a. landskassin ber kostnaðin av, sjálvt um bæði arkitekturin og teir, ið projekterað hava, mæltu til at taka við lægsta tilboðnum.

Viðmerkingar:

Løgtingið játtar á hvørjum ári væl av peningi til ítøgur og býbyggingar.
Á verandi fíggjarlóg er soleiðis játtað 1,5 mió. til nýtt listasavn, og landsstýrið skjýtur upp at játta ta somu upphædd fyri 1992.

Arbeiðið við at byggja nýggja listasavnið er boðið út millum 7 góðkend byggifeløg, og tað hevur loypt rættiligan hvøkk á bæði feløg og fólk, at stýrið fyri Listaskálan á fundi herfyri samtykti ikki at taka av tí lægsta tilboðnum, sjálvt um bæði arkitekturin og felagið, ið projekterað hevur, mæltu til at gera tað.

Tað átti at verið sjálvsagt, tá ið talan er um bundna licitatión sum hesa, og skuldi verið ein fortreyt fyri tílíkari útbjóðing.

Eingin hevur givið nakra grundgeving fyri hesa løgnu avgerð hjá stýrinum, sum brýtur við allan vanligan byggisið og útbjóðingar bæði her heima á landi og í útlondum.

Ein av stýrislimunum hevur í Sosialinum hin 14. september 1991 kallað avgerðina hjá meirilutanum í stýrinum fyri bæði "óheiðurliga og óreiðiliga".

Meistarafelagið hevur eisini í skrivi til stýrið fyri Listaskálanum spurt, hví

lopið varð um lægsta boð og tikið við tí næstlægsta.

Søgur eru farnar at ganga um, at politikkurin nú er, at onnur felog enn tey í Havn sleppa ikki upp í part, tá ið talan er um almenna bygging í høvuðsstaðnum, eisini har landskassin rindar meginpartin av kostnaðinum.

Tað er greitt, at hvørki arbeiðsgevarar ella arbeiðstakarar, landið ella nakar annar í longdini kann liva við teirri óvissu, sum her hevur stungið seg upp.

Tá ið stýrið fyri Listaskálan, sum eisini er politiskt valt, onga frágreiðing gevur almenninginum fyri hesa løgnu avgerð sína, verður spurt, hvat ið landsstýrið ger við støðuna, sum í er komin. Eitt greitt svar kemur øllum væl við.

7. oktober 1991 svaraði Marita Petersen, landsstýriskona, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Á fíggjarløgtingslógini fyri 1991 er undir rakstrarstað 15997 sum íløga játtað 1,5 mió. kr. til Listasavn Føroya, sum er ein sjálvsognarstovnur við virðtøkum frá 20. oktober 1989, sum eru góðkendar av landsstýrinum 15. desember 1989.

Játtanin í 1991 er fyrsti partur av eini samlaðari játtan uppá hægst 5 mió. kr. til útbyggingina av Listaskálanum, tó hægst 1/3 av veruligu kostnaðinum, sum eftir íløgumetlan landsstýrisins verður at rinda við 1,5 mió. kr. hvørt árið í 1991, 92 og 93 og 500.000 kr. í 1994.

Um lógargrundarlagið og gongdina í hesum máli kann eg upplýsa: at í § 4, stk. 1, pkt. 2) í løgtingslóg um útbjóðing v.m. nr. 106 frá 15. november 1984 er ásett:

"Útbjóðarin hevur, tá ið útbjóðingin er bundin, skyldu til, um annað ikki skilliga er greitt frá í útbjóðingarskrivinum, at taka við lægsta boðnum ella at havna teimum øllum og boða luttakarunum frá hesum", meðan eitt er ásett um, at útbjóðarin skal geva grundgeving, um annað skilliga er greitt frá í útbjóðingar-skrivinum, og útbjóðarin ikki tekur við lægsta boðnum, at í útbjóðingarskrivinum dagfest 17. juli 1991 hevur útbjóðarin skilliga greitt frá, at hann skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu tilboðini ella møguliga eitt at taka, og at í skrivi dagfest 11. september 1991 til Føroya Listasavn hava J. P. Gregoriussen, arkitektur, og Landsbyggifelagið P/F tilskilað, at tey bæði lægsta tilboðini eru sera jøvn, og at tey hava kannað tilboðini gjølla og mæla nevndini til, sum siður er, at taka við lægsta tilboði, men teir skoyta uppí:

"Ávísandi útbjóðingarskrivinum 17.7.1991 stendur til arbeiðsnevndarinnum frítt at velja millum innkomnu tilboðini ella møguliga eitt at taka."

Í viðmerkingunum til fyrispurningin verður m.a. tikið soleiðis til:

" ... tá ið talan er um almenna bygging í høvuðsstaðnum, eisini har landskassin rindar meginpartin av kostnaðinum."

Til hetta er at siga, at talan er ikki um, at landskassin ber meginpartin av kost-

naðinum av útbygging Listaskálans.

Útbyggingin er mett at kosta uml. 15 mió. kr. Augustinusgrunnurin í Danmark hevur givið tilsøgn um at veita 4 mió. kr. í studningi, landsstýrið, sum framman-fyri tilskilað, hægst 5 mió. kr., tó hægst 1/3 av veruliga kostnaðinum, og Tórshavnar býráð hevur samtykt at lata 30% av kostnaðinum og grundøkið, eins og býráðið letur gera økið rundanum, t.d. parkeringsøki.

Landskassin rindar sostatt ein stóran part av kostnaðinum, nevniliga 1/3 av veruliga kostnaðinum, men ikki meginpartin.

Í viðmerkingunum til fyrispurningin verður eisini tikið soleiðis til:

"Tað er greitt, at hvørki arbeiðsgevarar ella arbeiðstakarar, landið ella nakar annar í longdini kann liva við teirri óvissu, sum her hevur stungið seg upp."

Til hetta er at siga, at talan er ikki um nakra óvissu.

Teir bjóðandi vistu, tá teir bjóðaðu, at útbjóðarin, sum útbjóðingarlógin heimilaði, hevði skilað sær rætt til frítt av velja millum innkomnu tilboðini ella møguliga eitki at taka, og tann, sum hevði lægsta tilboðið, hevði sostatt onga vissu fyri, at útbjóðarin fór at taka við hansara tilboði.

Eftir hesum er niðurstøða landsstýrisins, at hóast siður er at taka við lægsta tilboðnum í slíkum føri, hevur nevndin eftir løgtingslóg nr. 106/1984 ikki skyldu til tess og heldur ikki skyldu til at geva nakra grundgeving fyri, at hon ikki tekur við lægsta tilboðnum, og landsstýrið hevur sostatt onga orsøk til at gera nakað í málinum.

100-3. Fyrispurningur til John Petersen, landsstýrismann um søluna av laksakvotuni 3 tey næstu árini

Ár 1991, 25. september boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Leivur í Buð, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Fyrispurningur

Hvussu nógvan pening varð laksakvotan seld fyri, hvussu verður peningurin frá Orra Vigfússyni býttur, og hvussu tryggjar landsstýrið sær, at manningin fær sín

part.

Viðmerkingar:

Avtalan við NASCO gevur Føroyum loyvi til at veiða 550 tons av laksi fyri 1992. Hetta er tað sama, sum í meðal hevur verið loyvt tey seinastu árini.

Síðan 1984 hevur veiðan verið sambært upplýsingunum frá Hagdeildini.:

1985:	566	tons
1986:	630	"
1987:	518	"
1988:	217	"
1989:	364	"
1990:	361	"

Í vár varð sagt frá, at tað umsíðir var eydnast Orra Vigfússyni at keypa føroysku laksakvotuna fyri áhugaðar í Íslandi og aðrastaðir.

Spurt hevur verið, hvør tað er, sum selir. Er tað felagið "Laksaskip" og/ella landsstýrið, og tað er ongantíð komið greitt fram, hvussu nógvan pening laksakvotan er seld fyri, og spurt hevur verið.

Í bræv dagf. 18. september 1991 sigur felagið "Laksaskip", at bæði Føroya landsstýri og Laksaskip hava ræði á konto, sum peningurin fyri søluna er settur inn á.

Fleiri av laksaskipunum t.d. norðanfjørðs vildu sleppa at halda fram við laksafiskiskapinum og vóru ikki fyri at selja kvotuna.

Ein spurningur, sum tekur seg upp, er, hvussu peningurin frá Orra Vigfússyni verður býttur.

Fleiri av skipunum hava ikki roynt tey seinastu árini, og onnur eru annaðhvørt seld ("Petur á Regni"), farin á tvingsilssølu ("Boðanes" og "Kyrjasteinur") ella hava fingið upphøggingarstuðul ("Drangur").

Uppaftur ein spurningur, sum er av sera stórum týdningi, er, hvussu verður við manningunum á teimum skipunum, id peningurin verður býttur til, og hvussu landsstýrið ætlar at tryggja teimum tann part, id teirra er.

29. november 1991 svaraði John Petersen, landsstýrismaður, fyrispurningunum soleiðis:

Svar

Áðrenn eg svari teimum beinleiðis spurningunum, sum settir eru, er neyðugt at gera nakrar viðmerkingar. Eg fari eisini at vísa til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 103/1990.

Tað, sum talan er um her, er, at landsstýrið hevur góðkent ein sáttmála, sum er gjørdur millum Felagið Laksaskip og Samtak Kaup Úthafslaxkvotu. Landsstýrið

bevur ikki verið beinleiðis uppi í hesum samráðingunum, men hædi hetta landsstýrið og landsstýrið undan hesum hava vita um hesar samráðingar og sagt seg vilja viðgera úrslitið. Sostatt eru treytirnar í sáttmálanum eina ábyrgdin hjá samráðingarpørtunum. Tá úrslitið lá fyri, var tað kannað, og hóast kanska okkurt kundi verið øðvísi, so metti landsstýrið tá - við viðurskiftunum hjá laksaveiðuni yvirhøvur og fiskivinnusamstarvinum við Ísland í huga - at neyðugt var at góðkenna avtaluna.

Peningurin, sum verður latin 13 bátum, sum høvdu laksaloyvi, tá sáttmálin varð gjørdur, er settur út í § 3 og 4 í sáttmálanum. Í § 5 eru teir laksabátar, sum eru partar í sáttmálanum, nevndir, og í § 6 eru gjaldsfreistirnar settar út.

Virðið fyri eina kvotu upp á 550 tons er sett til 2.55 mió. $.

Endurgjaldið er 27 % av hesum, 688.000,00 $. Fyri part av kvotuni í 1991 og kvotuna í 1992 er partvíst goldið í fiski, og peningauppheddin verður 582.750,00 $. Hesin peningurin er inngoldin á konto í føroyskum banka, sum landsstýrið og Felagið Laksaskip ráða yvir.

Landsstýrið fer at halda fast um, at hesin peningur skal býtast millum skipini, so at helvtin verður býtt javnt millum tey skrásettu skipini, sum ikki fáa laksaloyvi, og helvtin verður býtt eftir veiðuni seinasta 3 veiðitíðirnar. Landsstýrið hevur ongan møguleika at tryggja nanningini sín part. Hetta er ein spurningur millum nanningarnar og skipaeigararnar.

100-4. Fyrispurningur til Jógvan Sundstein, landsstýrimann, viðvíkjandi lógini um almennar skráir og nýtslu av p-talinum

Ár 1991, 3. oktober boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Lisbeth L. Petersen, landsstýrislimi, sum var soljóðandi:

Hvat er hent við p-talinum í sambandi við peningskonti, og hvat er hent við lógini um almennar skráir?

Viðmerkingar:

Lóg um almennar skráir og harundir nýtslu av p-talinum varð sett í gildi í 1984 í

100-6. Fyrispurningur til John Petersen, landsstýrismann um kvotuna hjá m/t "Nónhamri" til møguligan keypara av m/t "Skálafjall"

Ár 1991, 31. oktober boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Heina O. Heinsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Tá landsstýrið hevur samtykt, at møguligur keypari av m/t "Skálafjall" skal fáa kvotuna, ið tillutað er m/t "Nónhamri", verður spurt um henda landsstýrissamtykt framhaldandi umfatar aðrar møguligar keyparar.

7. november 1991 svaraði John Petersen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Spurningurin frá Heina O. Heinesen er soleiðis orðaður, at hann kundi verið svaraður við einum orði: "ja". Men av tí at hetta mál hevur verið so nógv frammi í fjølmiðlunum, er tað rætt at útlýpa spurningin nærri. Tá samgonguskjalið varð skrivað, varð tað niðurfelt, at roynt skuldi verða at varðveita ávís skip, ið eftir vóru, um møguleiki var til fess. Víst verður til atfinningarnar, tá "Faroe Prawns" og "Ango" fóru á tvang, um at landsstýrið einki gjørdi fyri at varðveita hesar bátar í landinum, tó at fleiri royndir vórðu gjørdar, sum partvís endaðu í, at annar báturin varð verandi. Við hesum fyri eyga varð farið til verka stutt eftir, at "Skálafjall" varð lýstur til tvang. Ásannast má, at um bátinum skuldi verða lív lagað í svartkjaftavinnuni og fiskiskapi í Irmingarhavinum eftir kongafiski, nátti annað veiðiloyvi fáast aftur at, so at báturin kundi vera í vinnu alt árið. Landsstýrið vendi sær fyrst til Skipskreditgrunnin og lýsti sína støðu í málinum, at ynskt var um at varðveita bátin í Føroyum, um tað var gjørligt. Hesum sjónarmiði vísti grunnurin vælvild. Síðani varð farið til verka. Landsstýrið setti seg í samband við Føroya Banka, ið tá við 1. prioriteti aftaná Skipskreditgrunnin. Ætlanin varð lýst fyri bankanum. Um hann var áhugaður í at fáa eitt felag upp at standa, ið kundi keypa bátin eftir hesum treytum. Kjølbro skuldi verða ein partur í felagnum. Báturin fekk hálva kvotu frá "Nónhamri". Hin helvtin varð latað út til hinar bát-

arnar eystanfyri. Báturin skuldi vera ein part av árinum í svartkjafti, ein part skuldi báturin royna í Irmingarhavinum eftir kongafiski. Landsstýrið var sinnað at lata ávísan stuðul til royndarveiðuna í trý ár, hetta skuldi tó verða undir skipaðum viðurskiftum. Henda ætlan varð slept, aftaná at arbeitt hevið verið við hesmi í 1-2 mánaðar. Síðani varð farið yvir í aðra ætlan, ið varð ótokilig frá øðrum felag. Hetta eftir at Skipskreditgrunnurin hevði vent sær beinleiðis til Per Gulklett, meklara hjá A. P. Møller, og biðið hann selt bátin til Føroya, um seriøstur keypari fanst, og man kundi vísa á eina rakstrarætlan, ið helt. Tann ætlan er framløgd, tí hevur landsstýrið samtykt og givið tilsøgn til skipskreditgrunnin um treytirnar, ið føroyskt felag kann fáa, ið keypir "Skálafjall".

Hendan ætlan er ikki, sum framført er av fleiri pørtum, at landsstýrið ætlar at taka kvotur frá Nónhamri og geva øðrum skipi. Hetta er ein ætlan, ið gjørd er í samband við at varðveita eitt av okkara spesialskiptum, seinasta av sínum slag sum er eftir í landinum. Harmuligt vildi verið, um vit, aftaná at hava offrað 100 tals milliónir, stóðu eftir við ongum skipi, tó at vit vita, at aðrir fáa tað at bera til við hesari vinnu. At landskassin fer inn og keypir, kemur ikki uppá tal, hann hevur víst sína ónegd í hesi vinnu, tað skal ikki roynast aftur, tí hesa loysn.

Tær síðstu treytirnar til Skipskreditgrunnin vóru hesar:

"Landsstýrið hevur samtykt, at føroyskt felag aftaná keypið av m/s "Skálafjall" skal fáa tilluta kvotuna hjá m/s "Nónhamri" norðanfyri 62° N, sum í 1991 var av toski og hýsu: norsk kvota 241 tons, sovjetisk 1.357 tons, Svalbard 69 tons og av flatfiski 609 tons, alt tons í ósløgdum fiski, treytað av at allur fiskurin verður landaður í Føroyum, og herav helvtin í Klaksvík. Ætlanin er, at fiskurin skal víðari viðgerast í Føroyum.

Um kvoturnar norðanfyri 62° N verða minni enn fyri 1991, verður kvotan hjá "Skálafjall" at minka lutfalsliga. Verða kvoturnar størri enn í 1991 verður omanfyri nevnda kvota ikki at hækka.

Tilluting av kvotuni er sjálvandi treytað av, hvørja kvotu Føroyar fær norðanfyri 62°, tá henda kvota skal býtast við hinar trolaramar.

Ein treyt frá landsstýrinum fyri at "Skálafjall" skal fáa kvotuna hjá "Nónhamri" er, at trolarin í 3 ár skal royna 3-4 mánaðir /800 tons á kongafiskaveiðu í Irmingarhavinum og verða á svartkjaftaveiðu 3-4 mánaðir /800 tons av farsi um árið, partar av hesum veiðum møguliga í samarbeiði við Fiskirannsóknarstovuna.

Somuleiðis treytar landsstýrið sær, at mannagin á "Nónhamri" stendur í boði at fáa tjans við m/s "Skálafjall" fyrsta túrin í Barentshavið.

Eisini skulu partabrøvini í felagnum, sum keypir "Skálafjall" tjóða uppá navn, og mugu partabrøvini við avgerðar- og atkvøðurætti ikki seljast uttan við loyvi frá landsstýrinum, so leingi skipið fiskar av føroyskum kvotum."

100-7. Fyrispurningur til Jóannes Ejdesgaard, landsstýrismann,viðvíkjandi Bústovninum við Hoyvíksvegin fyri talibrekað børn av bygd

Ár 1991, 29. november boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Pauli Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvat ger landsstýrið fyri at varðveita bústovnin við Hoyvíksvegin fyri talibrekað børn av bygd, sum tey avvarðandi og børnini eru so glað fyri?

Viðmerkingar:

Bústovnurin við Hoyvíksvegin hevur í 23 ár ligið undir skúlanum á Tróðni og verið rikin saman við skúlanum.

Tá landsstýrið yvirtók skúlan á Tróðni og legði hann undir landskúlafyrisitingina, var semja um, at næmingaheim skuldi vera undir almannaverkinum.

Tí kemur tað dátt við at fretta í fjølmiðlunum, at landsskúlafyrisitingin ætlar at niðurleggja skúlaheimið við Hoyvíksvegin fyri talibrekað børn og kanska flyta børnini út á næmingaheimið á Argjum, sum ikki kann metast at rúma bæði teimum, sum frammanundan eru har, og teimum sum í dag eru á bústovninum við Hoyvíksvegin.

Foreldrini hava mótmælt, at lagt verður á, har garðurin er lægstur, og biðja um, at tann peningur framhaldandi verður játtaður, ið neyðugur er til at reka bústovnin.

Tí verður hesin spurningur settur fram.

100-8. Fyrispurningur til Maritu Petersen, landsstýriskvinnu, Viðvíkjandi broyting av lógini um fosturtøku

Ár 1991, 5. desember boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Nær ætlar landsstýrið at taka neyðug stig til at broyta "anordning nr. 228 af 20. juni 1959 om ikrafttræden på Færøerne af lov om foranstaltninger i anledning af svangerskab v.m."?

Viðmerkingar:
Lógin um fosturtøku galdandi fyri Føroyar er frá 1956 og varð við kgl. fyriskipan sett í verk 20. juni 1959.

Sambært hesi lóg kann fosturtøka fremjast sum her tilskilað:

§ 1.

Stk. 1. En kvinde kan få sit svangerskab afbrudt i følgende tilfælde:

1) Når svangerskabets afbrydelse er nødvendig for at afværge alvorlig fare for kvindens liv eller helbred. Ved bedømmelsen af denne fare skal der på grundlag af en vurdering af samtlige omstændigheder, herunder forhold, hvorunder kvinden må leve, tages hensyn ikke alene til fysisk eller psykisk sygdom, men også til tilstedeværende eller truende fysiske eller psykiske svækkelses tilstande.
2) Når kvinden er blevet besvangret under sådanne omstændigheder, som omhandles i Borgerlig Straffelov af 15. april 1930 § 210 eller § 210, jfr. § 212, samt når svangerskabet skyldes krænkelse af kvindens kønsfrihed under sådanne omstændigheder, der omhandles i straffelovens §§ 216-223 eller disse paragraffer sammenholdt med § 224.
3) Når der er nærliggende fare for, at barnet på grund af arvelig anlæg eller på grund af beskadigelse eller sygdom, pådraget i fosterlivet, vil blive lidende af sindssygdom, åndssvaghed, andre svære mentale forstyrrelser, epilepsi eller alvorlig og uhelbredelig abnormitet eller legemlig sygdom.
4) Når i ganske særlige tilfælde alvorlige fysiske og psykiske defekter eller andre lægeligt begrundede forhold medfører, at kvinden skønnes uegnet til at tage vare på sit barn.

Sostatt skulu ávísar fyritreytir verða til staðar, til tess at galdandi lóg heimilar fosturtøku.

Spurningurin, sum í hesum sambandi hevur verið frammi, er, hvussu galdandi lóg verður umsitin?

Hóast "sosial orsøk" (indikatión) sambært galdandi lóg ikki heimilar fosturtøku, so er tað nógv, ið bendir á, at júst henda "indikatión" helst ofta ger seg galdandi. Her verður m.a. havt í huga útvarpssendingin um sama evni fyri stuttum, har tveir læknar góvu greiða ábending um, at júst tann sosiali spurningurin vigaði tungt í støðutakanini at loyva fosturtøku.

Vísandi til ársfrágreiðing landslæknans sæst, at í tíðarskeiðnum 1982 - 1990 eru 720 fosturtøkur framdar her á landi.

Til samanlíkningar skal nevnast at í tíðarskeiðnum 1971 - 1980 eru 529 fosturtøkur framdar.

Ein møgulig øking av fosturtøkum framyvir kemur óivað at kunna setast í samband við menningina innan tann sokallaða prænatala dignostikkin ella fosturkanningina.

Upprunin til umtaladu kanning var ynski um skjótast gjørligt at ávísa møguligar sjúkur hjá fostrinum við tí fyri eygað at veita møguliga viðgerð longu í móðurlívi, ella beint eftir at barnið varð borið í heim. Vend tykist nú at vera komin í, soleiðis at endamálið nú í alt størri mun er at staðfesta møgulig brek ella sjúkur, soleiðis at mammuna/foreldur fáa tilboð um fosturtøku, ístaðin fyri at barnið verður borið í heim.

Tá er endamálið at finna og bjarga lívi broytt til í størst møguligan mun at minka talið av brekaðum børnum.

Her kann tí av rættum spyrjast, hvat slag av samfelag er tað, vit so spakuliga men miðvíst - stýra ímóti?

Eitt samfelag verður mangan mett í mun til, hvussu farið verður um tey veikastu, og kann tað tí á ongan hátt góðtakast, at tað mest hjálparleysa og veika - barnið í móðurlívi - orsakað sosialar ella fíggjarligar umstøður, ikki verður borið í heim her á landi.

Ei heldur kann tað metast rætt og rímiligt, at mogulig brek/sjúka hjá barni í móðurlívi skal avmarka tess rætt til lívið.

Sostatt hvílir stór ábyrgd eisini á landsins myndugleikum, at stimbra og seta lív eru neyðug tiltøk til tess, at umstøður av m. a. nevnda slagi ikki verður stýrandi í avgerðini um møguliga fosturtøku.

At veita tí ófødda rettartrygd er fult í tráð við SÍ-viðtøkur frá 20. november 1959 um rættindi hjá børnum, har m.a. sagt verður: "at barnið orsakað sítt veika líkamliga og sálarliga føri tørvar serliga vernd og umsorgan, fróknað torvandi jurdiska vernd - bæði áðrenn og eftir føðing".

Tí er tað eisini umráðandi, at galdandi lóg verður broytt, soleiðis at ófødda barninum veitist neyðug rættartrygd.

Í hesum sambandi eigur eisini at havast í huga áheitanin viðvíkjandi broyting av galdandi lóg um fosturtøku, sum fyri uml. tveimum mánaðum síðan av fleiri varð send landsins myndugleika.

18. desember 1991 svaraði Marita Petersen, landsstýriskona, fyrispurninginum soleiðis:

Svar:

Lóg nr. 177 frá 23. juni 1956 "om foranstaltninger i anledning af svangerskab" varð sett í gildi fyri Føroyar við kgl. fyriskipan nr. 228 frá 29. juni 1959, og fara fosturtøkurnar fram við heimild í hesi lóg.

Barnsferð kann eftir hesum lógum verða avbrotin, um tveir góðkendir læknar eru samdir um, at treytirnar í lógini eru loknar.

Ilt er at siga, um tað verða framdar ov nógvar fosturtøkur í Føroyum. Heilsumyndugleikarnir hava ikki gjørt vart við, at talið av fosturtøkum eftir galdandi skipan ikki er á rættari leið.

At talið av fosturtøkum er økt, nýtist ikki at koma av, at lógin ikki verður umsitin, sum hon skal, men kann koma av, at tað meira framkomna tøknið til kanning av barnakonum ger, at fleiri tilburðir verða funnir, har tað verður mett forsvarligt at fremja eina fosturtøku, og er hetta í fullum samsvari við galdandi lóg. Tað vil tó altíð vera ein persónligur spurningur hjá tí einstaka, um tað rætta ella tað órætta í fosturtøkum.

Fosturtøkulógin er ein donsk fólkatingslóg, og málsøkið liggur sostatt undir donskum myndugleika bæði viðvíkjandi lóggeving og eftirliti við lógini.

Landsstýrið umhugsar ikki í løtuni at seta núgaldandi donsku lógina um fosturtøku í gildi ella at broyta verandi lóg.

100-9. Fyrispurningur til Atla P. Dam, løgmann, um neyðhjálp til kurdarnar

Ár 1991, 11. desember boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvat hevur landsstýrið gjørt við samtykt løgtingsins um at senda málið til landsstýrið um at veita tí neyðstadda kurdiska fólkinum hjálp úr grunninum fyri menningarhjálp?

Viðmerkingar:

Tá ið neyðin leikaði harðast á fyri kurdarnar á markinum millum Iraq og grannalondini í vár, og fjølmiðlarnir opinskáraðir talaðu um fólkamorð, setti Kristiligi Fólkaflokkurin Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur, fram á tingi uppskot um beinanvegin at veita kurdunum 1 mió. kr. í neyðhjálp úr grunninum fyri menningarhjálp.

3.5 mió. kr. eru settar av á fíggjarlógini í ár til menningarhjálp, og reglugerðin fyri grunnin heimilar, at stuðul kann verða veittur til "manngott arbeiði, sum bøtir um livilíkindini".

Víst kann verða til hjálp, sum frammanundan er veitt úr grunninum til brekað børn í Botswana og til teirra, ið búgva á háslættanum í Bolivia.

Kurdarnir høvdu skjóta hjálp fyri neyðini, og løgtingið arbeiddi skjótt og samtykti eitt uppskot frá fíggjarnevndini um at senda málið til landsstýrið at viðgera eftir galdandi reglum.

Nú eru meira enn 7 mánaðir farnir, uttan at nakað er frætt frá landsstýrinum og fíggjarnevndini, sum saman skulu taka avgerð til játtanir úr menningarhjálpargrunninum.

Kurdarnir eru framvegis sera illa fyri. Teir verða jagstraðir og noyðast at flýggja niðan í fjøllini, har kavi og kuldi beinir fyri nógvum av teimum, ið ringast eru fyri, børnum, gomlum og sjúkum.

Hjálparfeløg hava m. a. eisini í Føroyum savnað varl av peningi inn. Kirkjur og trúarfeløg hava latið talvuna gingið. Tað er vanligt, at hitt almenna eisini letur sín part, tá ið talan er um neyð sum hesa.

Skotið varð upp, at hjálpin verður veitt gjøgnum Neyðhjálp Fólkakirkjunnar, sum hevur hjálpararbeiði í gongd á staðnum.

Fólki leingist eftir at hoyra frá landsstýrinum. Tí verður hesin fyrispurningur settur løgmanni.

25. mars 1992 svaraði Atli P. Dam, løgmaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Samtykt løgtingsins ljóðaði, at málið um at veita tí neyðstadda kurdiska fólkinum hjálp úr grunninum fyri menningarhjálp varð sent landsstýrinum at viðgera eftir galdandi reglum.

Landsstýrið er smb. § 11 í fíggjarlógini fyri 1992 saman við fíggjarnevnd løgtingsins heimilað at veita "menningarhjálp". Landsstýrið tulkar hesa heimild soleiðis, at umframt stuðul til føroyskar fyritøkur ella ætlanir, har føroyskar royndir og serkunnleiki er partur, fevna bert um arbeiðsætlanir, sum hækka livikorini ella varðveita og menna sjálvbjargni í tilaftirskomnu londunum. Tað er sostatt ikki landsstýrisins meting, at heimildin fevnir um beinleiðis neyðhjálp.

Hendan tulkingin av § 11 hevur verið fylgd í praksis smb. hjáløgdu reglugerð fyri veitan av stuðli til tiltøk innan menningarhjálp.

100-10. Fyrispurningur til Atla Dam, løgmann, viðvíkjandi støðu Føroya í eini felags europeiskari gjaldoysisskipan

Ár 1991, 16. desember, boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

I. Hava føroyingar trygd fyri at kunna verða uttanfyri felags europeisku gjaldoyrisskipanina (ECU), um Danmark fer upp í skipanina?

II. Um svarið er nei, hvørji neyðug politisk stig verða føroyingar so at taka, til tess at varðveita frælsi uttan fyri ECU-gjaldoyrisskipanina?

25. mars 1992 svaraði Atli P. Dam, løgmaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar:

Viðv. I:

Í samráðingarúrslitinum úr Maastricht er fylgjandi protokol:

"... Bestemmelserne i artikel 14 i protokollen um statutten for det Europæiske System af Centralbanker og Den Europæiske Centralbank berører ikke Danmarks Nationalbanks ret til at udføre sine nuværende opgaver vedrørende de dele af Kongeriget Danmark, der ikke udgør en del af Fællesskabet."

Hetta merkir, at Danmark stendur frítt yvirfyri sínum samstarvspartnarum í EF til at gera serskipanir fyri gjaldoytað í Føroyum og Grønlandi.

Viðv. II:

Heimastýrislógin nevnir ikki gjaldoyraviðurskifti sum A- ella B- mál. Sostatt eru tey felagsmál ("ríkismál").

"Lov om pengesedler m.v. på Færøerne" (L. 248 frá 12/4 1949) kann broytast av fólkatinginum sambært teimum reglum, ið heimastýrislógin ásetur fyri ríkislógir, ið viðvíkja Føroyum. Av tí at innihaldið so at siga bert viðvíkur Føroyum, má metast, at ein broytingarlóg má fylgja teirri reglu, ið sigur, at stjórnaruppskot til slíkar lógir skulu leggjast fyri heimastýrið, áðrenn tey verða løgd fyri fólkatingið. Undir øllum umstøðum skal slík lóg leggjast fyri heimastýrið, áðrenn hon verður sett í gildi. Umframt hesar løgfrøðiligu metingar kann leggjast aftrat, at 1949-lógin er úrslit av samráðingum millum Danmark og Føroyar, og at tað tessvegna er ein politisk skylda hjá ríkismyndugleikunum at samráðast av nýggjum, áðrenn broytingar verða skotnar upp.

Um samanleggingina av gjaldoyrunum, tá ið "3. fasa" byrjar, stendur (Grein 109 L) m. a.:

> *"På datoen for indledning af tredie fase vedtager Rådet, der træffer afgørelse med enstemmighed blandt medlemsstaterne uden dispensation på forslag af Kommissionen og efter høring af ECB, de omregningskurser, til hvilke deres valutaer fastlåses uigenkaldeligt, og til hvilken uigenkaldeligt fastlåst kurs ECUen træder i stedet for disse valutaer, og ECUen vil blive en selvstændig valuta. ..."*

Um peningaeindin í limalondunum til ta tíð við síðuna av ECU-heitinum kann hava okkurt tjóðskaparligt heiti (Lira, krone, Mark, Gulden, Franc etc.) skal varðveitast við síðuna av, er ikki greitt. Men hetta er so bert ein spurningur um heitið. Veruleikin verður so, at partarnir hava eitt - felags - gjaldoyra.

Skulu Føroyar tá framvegis vera í gjaldoyrissamgongu við Danmark, má harav fylgja, at føroyska peningaeindin, hvussu hon enn eitur (heitið "króna" rættiliga

nýtt. "Mørkin" ella "gyllinin" hava nógv sterkari heimarætt í føroyskari virðissøgu), má vera ájavnt við (í pari við) donsku peningaeindina, sum tá verður ájøvn við ein ECU.

Tá ið talað verður um "frælsið uttan fyri ECU-gjaldoyrisskipanina" í mun til núverandi "frælsi undir krónu-skipanini", er spurningurin, um ECU-skipanin á nakran hátt bevði sett størri krøv til føroyskar myndugleikar enn tann núverandi.

Núverandi skipan krevur, at føroyska peningaumfarið krónu fyri krónu er mótsvarað av eini føroyskari áognarkonto í Danmarks Nationalbank. Føroyskir myndugleikar hava tí sum er ongar møguleikar fyri "moneterari fígging" av sínum útreiðslum. Sagt á meira gerandisligum máli: "Landsstýrið kann ikki fíggja eitt møguligt hall við at seta seðlapressuna í gongd". Høvuðskravið í nýggju skipanini hjá EF er tað sama, nevniliga bann fyri "moneterari fígging", bæði fyri EF, landsstjórnirnar, landspartamyndugleikarnar og aðrar myndugleikar. Í so máta verður eingin broyting.

Krøvini í komandi búskaparsamgongum um loft yvir kassahall hjá tí almenna og í almennari skuld í mun til BTº, kunnu neyvan haldast at vera galdandi fyri landskassan, so leingi Føroyar eru uttanfyri EF. Heldur ikki um Føroyar vóru innanfyri sum partur av danska ríkinum, kann roknast við, at slík krøv vórðu ásett av EF fyri landskassan sum slíkan; men hevði landskassin tá verið roknaður uppí tann almenna sektorin í Danmark, tí slík krøv verða jú sett til allan almenna sektorin sum slíkan. Tað hevði so verið ein samráðingarspurningur millum ríkismyndugleikarnar og landsstýrið, hvussu stórur landskassans partur av samlaða almenna hallinum og samlaðu almennu skuldini átti at verið.

Størsta bindingin við at vera í eini gjaldoyrasamgongu er, at ein ikki kann broyta sítt gjaldoyravirði sjálvur. Tað er greitt, at tá ið tvey lond, sum eru so ólík sum Føroyar og Danmark, bæði til støddar og í búskapargongd, eru í gjaldoyrasamgongu, so kemur tann lítli parturin viðhvørt út fyri, at kursbroytingar henda, sum eru honum til bága, og kursbroytingar, sum hann kundi ynskt sær, verða ikki gjørdar. Hetta "stirvni" verður so neyðugt at royna at uppvega sum frægast við at vera so mikið liðiligari á øðrum økjum, einahelst viðvíkjandi lønarlagnum.

Vansin fyri Føroyar av at vera í gjaldoyrasamgongu júst við Danmark er, at minni enn fimtingurin av útflutningunum fer hagar, men tveir triðingar av innflutninginum koma baðani.

Verður mett, at eitt trygt peningavirði og støðugir prísir er av tí góða - og tað meta flestu búskaparfrøðingar í dag, men metingin av hesum spurningi er partvíst politisk, so er greitt, at jú størri eitt gjaldoyraøki er, jú lættari skuldi verið at nátt hesum máli, um politiski viljin er til tað. Í so máta er ein gjaldoyrasamgonga við EF sostatt betri enn bert við Danmark. Vóru Føroyar uttan gjaldoyrasam-

gongu við onnur lond, hevði verið torført at nátt hesum máli í so lítlum gjaldoyraøki, men sjálvsagt ikki heilt ómøguligt, um hetta mál hevði nóg stóran politiskan áhuga.

Handilsligi fyrimunurin við at vera í gjaldoyrasamgongu er, at ein sparir ein rættiliga stóran "transaktiónskostnað" tá ið ein handlar við aðrar partar av samgonguni, við at spara vekslingarkostnað og sleppa undan vandanum fyri kursbroytingum.

Jú størri part av útflutninginum, hin parturin av gjaldoyrasamgonguni keypir, jú størri verður sparingin í "transaktiónskostnaði" fyri føroyskar útflytarar. Tað er sostatt størri fyrimunur fyri Føroyar at vera partur av eini vesturevropeiskari gjaldoyrasamgongu enn bert at vera í samgongu við Danmark, sum nú.

Vansarnir verða sum sagt heldur ikki størri - helst minni - av tí at tey føri, har tað hevði verið til fyrimuns fyri Føroyar at broytt kursin í mun til restina av samgonguni, helst verða færri, jú størri part av føroyska samhandlinum við um heimin samgongan umfatar. Og EF fer helst at umfata meira enn tríggjar fjórðingar av bæði innflutningi og útflutningi Føroya, kanska meir, um flestu Norðurlond fara uppí.

100-11. Fyrispurningur til John Petersen, landsstýrismann, um fígging av alivinnuni

Ár 1991, 11. desember boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Leivur í Bið, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið fyri at útvega alivinnuni fígging fyri at halda fram, og nær kunnu vit vænta, at landsstýrið kemur við uppskoti hesum viðvíkjandi?

Viðmerkingar:

Kristiligi Fólkaflokkurin Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur legði tíðliga í heyst uppskot fram á ting um at heimila landsstýrinum at taka lán uttanlands upp á 200 mió. kr. fyri at útvega alivinnuni ta fígging, hon hevur so harðliga fyri neyðini, um vinnan skal kunna halda fram og menna seg, so at fleiri arbeiðspláss verða í hesum arbeiðsloysistíðum.

Tá skundaði landsstýrismaðurin í alimálum sær í sjónvarpið at siga frá, at landsstýrið arbeiddi við at útvega fígging til alivinnuna og í næstum fór at koma við einum uppskoti.

Nú er út við fjórðingsár liðið, síðan hetta varð sagt í sjónvarpinum, men eingi røkist fyri nøktum uppskoti frá landsstýrinum, og støðan hjá alivinnuni versnar bara alsamt meira. Uppskotið hjá Kristiliga fólkaflokkinum Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki liggur í fíggjarnevndini, og tað tykist sum flokkarnir í fíggjarnevndini hava ongan skund at fáa viðgjørt uppskotið og koma í tingið við áliti, so at tingið fær tikið støðu til hetta átrokandi mál.

Tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum

3. juni 1992 svaraði John Petersen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar:

Ásannandi at alivinnan hevur fígging fyri neyðini, og at nakað má gerast við trupulleikunar í stundini, hevur bæði undanfarna og sitandi landsstýrið viðgjørt spurningin um at fáa fígging til vega, soleiðis at alarin kann læna pening fyri eina bíligari rentu til at umfíggja verandi lán við. Hetta uppskotið hevur tó ongantíð fingið politiskan meirluta.

Alivinnan er í løtuni solciðis fyri, at trupulleikarnir verða ikki loystir, um tað almenna fer út at læna pening, sum skal lænast út aftur til alaran. Ta seinastu tíðina er farin ein ógvuslig sancring fram innan alivinnuna. Orsøkirnar til hetta eru fleiri - her kann nevnast vánaligur rakstur, sjúkutrupulleikar og alt ov lágir prísir - hetta eru teir størstu trupulleikarnir hjá vinnuni.

Í hesi støðu er tað, at vinnan hevur biðið um, at tað almenna kemur inn við einari fígging ella studningi, ella sum alarin nevnir tað, at endurrinda nakað av tí avgjaldi, ið hevur ligið á alivinnuni; hetta kundi verið rímiligt og rætt sæð frá alarans eygum.

Landsstýrið hevur ført tann politikk, at marknaðarkreftirnar skulu aftur fáa loyvi at virka meiri frítt innan alla vinnuna.

Tí metir landsstýrið tað ikki verða rætt at fara inn við eini fígging, sum støðan er; fíggingin einsamøll loysir jú ikki trupulleikarnar.

Ein av prógvgrundunum fyri fígging var, at roknað varð við ov lítlari smoltútsetan, men vísir hetta seg ikki at fara at henda; tað verða umleið 5 mió. smolt útsett, og er hetta væl á leið tað smolt, ið er í landinum.

Landsstýrið arbeiðir við at fáa gjørt eina heildarætlan fyri alivinnuna framyvir við teim broyttu fortreytunum. Í tí sambandi er ætlanin at hava íløgustuðul, tá nýggjar leiðir verða royndar.

Landsstýrið hevur sagt frá, at frá 1993 verða ongi avgjøld á alivinnuni. Djóralæknatænastan er nógv útbyggd hetta síðsta árið og er við at koma uppá plúss, so alarin eisini kann fáa fyribyrgjandi tænastur. Veita alarum tá ráðgeving og útbúgving teir hava tørv á. Syrgja fyri so góðum lívfiski sum til ber at fáa.

Eftir er so at vóna, at tann semja, ið er við at verða góðkend millum alarar í Føroyum, Noregi, Skotlandi og Shetlandi, kemur at gera, at vit fáa tann prísvøkstur í heyst, sum allir hava spátt um, og tað er at vóna, at so verður, tí tá vildu nógvir trupulleikar í hesi vinnu verið loystir.

Spurningurin um figging til alivinnuna hevur verið fleiri ferðir fyri á tingið í hesi setuni, men er fallin hvørtja ferð í tinginum.

100-12. Fyrispurningur til John Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi loyvi til royndarfiskiskap eftir laksi

Ár 1991, 18. desember boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Heina O. Heinesen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Hvussu ber tað til, at landsstýrið hevur givið einum báti loyvi at royndarfiska eftir laksi, uttan at málið er lagt fyri fiskivinnunevnd løgtingsins, sum tað skal sambært løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978?
2. Kunnu so aðrir bátar bara fara út at fiska og so aftaná fáa loyvi frá landsstýrinum?

Viðmerkingar:

Tá ið nú landsstýrið hevur givið einum laksabáti loyvi at royndarfiska undir Føroyum, tí hesin frammanundan var farin út at fiska, kunnu so aðrir bátar bara fara út at fiska og so aftaná fáa loyvi frá landsstýrinum?

Í veruleikanum eru hesi loyvi ólóglig av tí, at tey ikki hava verið løgd fyri fiskivinnunevnd løgtingsins, sum tey skulu sambært galdandi lóg.

4. februar 1992 svaraði John Petersen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar:

Víst verður til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 100-13/91.

Árini undan hevur Fiskirannsóknarstovan havt møguleikar at fáa sýnislutir og granskingartilfar frá vinnuligu veiðini eftir laksi.Tað hevur verið møguligt við hesum kanningum at fáa vitan um laksin í føroyskum sjógvi, hvaðani hann kemur, hvussu hann ferðast, aldursbýti, hvussu stórur partur er alilaksur o.s.fr.

Hetta tilfar hevur havt stóran týdning í arbeiðinum at verja rættindi føroyinga til at veiða laks, rættindi, sum altíð hava verið fyri sterkum ágangi frá áarlondunum.

Til tess at tryggja, at tílíkt tilfar eisini er tøkt í komandi tíð, samdust landsstýrið og Fiskirannsóknarstovan um, at rætt var at fáa til vega tilfar frá veiðitíðini 1991/92, og Fiskirannsóknarstovan leigaði ein bát til hetta endamál. Talað verður um meira víttfevandi samstarv millum fleiri lond til at kanna laksin í havinum, men enn er hetta ikki lagt til rættis.

Meðan vit bíða eftir hesum, mugu Føroyar tryggja sær, at neyðuga tilfarið er tøkt til at verja áhugamál okkara.

100-13. Fyrispurningur til John Petersen, landsstýrismann,viðvíkjandi loyvi til garnafiskiskap á djúpum vatni undir Føroyum

Ár 1991, 18. desember boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Heina O. Heinesen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

1. Undir hvørjum treytum er loyvi givið til garnafiskiskap á djúpum vatni undir Føroyum, uttan at málið hevur verið lagt fyri fiskivinnunevnd løgtingsins?

2. Kunnu nú aðrir eisini fara út at fiska við slíkum gørnum, av tí at eingin skipan er lýst við kunngerð fyri slíkan fiskiskap?

Viðmerkingar:

Vísandi til løgtingslóg nr. 8 frá 29. mars 1978 um veiði á landgrunninum.

Av tí, at landsstýrið hevur givið loyvi til garnafiskiskap á djúpum vatni undir Føroyum, fari eg at loyva mær at seta omanfyrinevnda fyrispurning, hvør vítt

landsstýrið kann geva loyvi til nýggjan veiðihátt, uttan at málið er lagt fyri fiskivinnunevnd løgtingsins fyrst.

Gørnini, sum brúkt verða til henda veiðihátt, eru í stríð við kunngerð um garnaveiði á landleiðini. Í hesi kunngerð stendur, at flotini á flotlínuni skulu verða áknýtt við tilfari, sum totnar soleiðis, at gørnini ikki blíva við at fiska, um ein missir tey.

Á hesum gørnum er flotið spunnið inn í eina nylonlínu.

Nú kundi verið ábugavert at fingið at vita, um hetta er royndarveiða, ella um hvør ið vil kann fara út og fiska við slíkum gørnum. Tí, sum samgongumenn siga: "Tað, sum ikki er nevnt í kunngerð, er heldur ikki forboðið."

Onnur dømi eru um royndarveiði eftir síld og makreli, sum als ikki hava verið til viðgerðar í fiskivinnunevndini.

Í verðuleikanum eru hesi loyvi ólóglig, av tí at tey ikki hava verið løgd fyri fiskivinnunevnd løgtingsins, sum tey skulu sambært galdandi lóg.

Svar:

4. februar 1992 svaraði John Petersen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Heini O. Heinesen, løgtingsmaður hevur sett mær fyrispurning um loyvi til garnafiskiskap á djúpum vatni undir Føroyum. Eg skilji høvuðsinnihaldið í fyrispurninginum at vera, at løgtingsmaðurin skuldsetir landsstýrið fyri at hava givið loyvi í heimildarloysi, tí fiskivinnunevnd løgtingsins ikki er eftirspurd. Løgtingsmaðurin vísir til løgtingslóg nr. 8. frá 29. mars 1978. Í løgtingsmáli nr. 100-12/1991 viðvíkjandi loyvi til royndarfiskiskap eftir laksi verður sama skuldseting sett fram.

Til hetta er at siga, at tað er rætt, at løgtingslóg nr. 8. frá 29. mars 1978 við seinni broytingum í § 4 ásetir, at fiskiskapurin á landleiðini við føroyskum skipum verður skipaður eftir reglum, sum eru ásettar av landsstýrinum í kunngerð, eftir samráð við løgtingsins fiskivinnunevnd.

Somuleiðis er greitt, at henda lóg viðvíkur vanligari vinnuligari veiði. Hetta er rættuliga klárt út frá sjálvum lógartekstinum og verður upp aftur klárari, tá hugt verður í viðmerkingarnar til lóg nr. 8. (bls. 143 í løgtingstíðindum fyri 1978 niðast).

Tað, sum talan er um, í teimum førum Heini O. Heinesen nevnir, er veiða við royndar- ella granskingarendamáli fyristílað av Fiskirannsóknarstovuni. Her hevur umsitingarlig siðvenja verið øll árini, eisini árini undan 1977 tá fiskimálaráðið danska hevði ábyrgdina av reguleringum í føroyskum sjógvi, at Fiskirannsóknarstovan hevur eitt standandi loyvi til at fiska uttanfyri vanligar reglur á landleiðini, um hetta tænir royndar- og granskingarendamálum. Hetta hevur

verið galdandi fyri skip, sum Fiskirannsóknarstovan rekur, og eisini fiskifør sum stovnurin leigar til somu endamál.

Um so er, at royndirnar við gørnum á djúpum vatni benda á, at grundarlag er fyri vinnuligari veiði, so verða reglurnar fyri hesum fiskiskapi ásettar í kunngerð, og sum vanligt verður henda kunngerð gjørd í samráð við fiskivinnunevnd løgtingsins.

100-14. Fyrispurningur til Jógvan Sundstein, landsstýrismann, um lógarheimild til kommunur at seta pening í skip og vinnufyritøkur

Ár 1992, 4. februar boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Við hvørji lógarheimild seta kommunurnar uttan loyvi frá landsstýrinum tøkan pening í skip og vinnufyritøkur?

Viðmerkingar:

Í sambandi við, at m/t "Skálafjall" varð keyptur til Havnar, er komið fram, at Tórshavnar kommuna hevur verið við til at fíggja keypið við fleiri miljónum úr einum íløgugrunni uttan at søkja landsstýrið um loyvi, sum annars er neyðugt hjá kommununum, tá ið tær veðhalda ella seta pening í.

Ein spurningur er, hvussu nógv hitt almenna, land og kommunur, eiga at fara inn í vinnulívið á sjógvi og landi, heldur enn at taka sær av teimum viðurskiftum, sum vanliga hoyra undir hitt almenna, so sum vegir, lendingar, skúlar og heilsuviðurskifti v.m., og hvussu langt, lógarheimild er fyri at fara.

Ein annar spurningur er, um kommuna yvirhøvur hevur heimild til at hjálpa til við skipakeypi uttan at spyrja kommunala eftirlitið í landsstýrinum um loyvi og t.d. bara vísa til eina innsenda fíggjarætlan, og tað sum har er lagt í grunn, tá ið eingin góðkenning fyriliggur.

Ir lógarheimild fyri hesi mannagongd, kann tað skjótt enda við, at tær "ríku" kommunurnar eiga meginpartin av flotanum og somuleiðis við virkjunum uppi á landi. Tað hevur neyvan verið ætlanin.

11. februar 1992 svaraði Jógvan Sundstein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Eftir løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972 um føroysku kommununar við seinni broytingum u 39 og 41 krevst loyvi frá landsstýrinum til lántøku, at veita veðhald fyri lánum ella at átaka sær regluligar veitingar, sum kommununar ikki eftir lógini hava skyldu til. Eisini krevst loyvi landsstýrisins til keyp og sølu av fastari ogn.

Um ein kommuna ætlar at seta pening í eina vinnufyritøku, uttan at tað er neyðugt at fíggja fløguna við lántøku, tí kommunan hevur kontantan pening tøkan, sum kann nýtast til endamálið, er ikki neyðugt við nøkrum loyvi frá landsstýrinum.

Nakað annað er, at eftir míni persónligu fatan eiga kommunur ikki at luttaka í vinnulívinum. Hesum spurningi verður m.a. eisini arbeitt við í fyrireikingunum til eina nýggja skipan av ábyrgdarøkjum hjá kommununum.

100-15. Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann viðvíkjandi røktarheimi í Norðstreymoy

Ár 1991, 11. februar boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Nær byrjar byggingin av ellis- og røktarheimi í Norðurstreymoy, og hvar verður bygt?

Viðmerkingar:

Eftir at byggingin av ellis- og røktarheimi í Sandoynni er farin í gongd, verður tað bara ein sýsla eftir, sum einki ellis- og røktarheim hevur. Tað er Norðstreymoy.

Nevndir hava sitið og gjørt tað fyrireikandi arbeiði, so at nú skuldi alt farið at verið klárt til at sett á.

Danir hava longu goldið føroyska samfelagnum stóran part av kostnaðinum við gjaldi teirra í røktarheimsgrunnin.

Eingin ivast um tørvin, sum er eyðsýniligur, bæði hvat ið umhetting og fast uppihald viðvíkur. Fólk í Norðstreymoy leingjast eftir at síggja spakan verða sett an í jørðina.

Tí verður hesin fyrispurningur settur.

20. februar 1992 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Álitið frá arbeiðsbólkinum viðvíkjandi røktarheimsviðurskiftunum í Norðstreymoy varð latið landsstýrinum í oktober 1990.

Á íløguætlanini fyri 1991 1996 eru avsettar 26 mió. kr., harav 1 mió. kr. í 1992.

Á fundi 11. februar 1992 samtykti landsstýrið, at røktarheim fyri 24 fólkum verður bygt í Kollafirði. Samtykt varð eisini, at áðrenn prosjektering og íløgur verða gjørdar, verður málið at leggja fyri landsstýrisfund.

Sostatt verður eisini mál viðvíkjandi at heita á kommununar í Norðstreymoy at seta byggjinevnd at leggja fyri landsstýrisfund seinni í ár.

100-16. Fyrispurningur til Jóannes Ejdesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi Norðoya røktarheimi

Ár 1992, 4. februar boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Leivur í Bø, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Nær verður byrjað at umvæla leikan á Norðoya Røktarheimi, og nær kann væntast, at deild 5 verður klár aftur at taka ímóti búfólki?

Viðmerkingar:

Norðoya Røktarheim varð tikið í nýtslu 1985 og rúmar 36 búfólkum.

Í fjør vóru fólk varug við leka, sum vísti seg at vera so mikið álvarsamur, at búfólkið í november mátti flytast av ovarstu hædd, deild 5.

Nøkur teirra sluppt inn á fysiurgisku deild at vera fyribils, onnur eru á deild 4, har tað er sera trongligt við tveimum sjúklingum á fleiri kømurum.

Norðoya Røktarheim hevur 4 umlættingarpláss, og í fjør vóru 35 fólk til umlættingar á Norðoya Røktarheimi. Men sum støðan er í løtuni, er eingin møguleiki fyri at taka fólk inn til umlættingar.

Tað hevur ljóðað, at lekin stavar frá takinum, og at uppskot er um at fara frá tí slætta takinum og skifta yvir til annað slag.

Tørvstið er stórt, og fólk ótolnast eftir, at loysn verður funnin beinanvegin.

Tí verður hesin fyrispurningur settur.

18. mars 1992 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fyrispurningin-um soleiðis:

Svar

Á Norðoyar Røktarheimi hevur tað likið sera illa tey seinastu árini. Roynt hevur verið á ymiskan hátt at bøta um hesi viðurskifti.

Fyrst í oktober mánaði 1991 varð gjørt av at steingja deild 5, deils vegna lekan og deils av arbeiðsumhvørvisligum orsøkum.

Loftsplátur vóru tá teir seinastu mánaðirnar dotnar niður. Sjúkratekin tóku seg upp millum starvs- og búfólkið.

Síðani hevur deild 5 verið stongd, og búfólkini hava havt tað sera óhóskandi og trongligt.

Arbeiðslæknalig meting av arbeiðsumhvørvinum hevur verið gjørd.

Landsverkfrøðingurin og landsarkitekturin hava gjørt tilmæli í málinum, og ráðgevandi verkfrøðingur hevur gjørt uppskot til ábøtur á verandi tekju ávikavist útskifting av tekjuni.

Stýrið fyri Norðoyar Røktarheim og Almannastovan hava mælt Almanna- og Heilsudeild landsstýrisins til at loysa trupulleikarnar við tekjuni á tann hátt, at tekjan verður skift út.

Almanna- og Heilsudeildin tekur undir við, at tekjan verður skift út, og fer stýrið og Almannastovan nú at seta í verk projektering av komandi arbeiðum.

Samstundis fara stýrið fyri røktarheimið og Almannastovan undir at kanna møguleikarnar fyri, nær búfólkini aftur kunnu flyta inn á deildina.

100-17. Fyrispurningur til Atla Dam, løgmann, um ognarviðurskiftini av ávísum stovnum í samband við blokkstuðulsskipanina

Ár 1992, 18. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Asbjørn Joensen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Kann løgmaður kunna um ognarviðurskiftini av ávísum stovnum eru vorðin øðrvísi skipað, grundað á tær broytingar, ið fóru fram um ársskiftið 1987/1988 við blokkstuðulsskipanini.

Viðmerkingar:

Sum kunnugt hevur statskassin byggifíggjað ein ikki so lítlan part av almennu bygningunum í samfelag okkara, t.v.s. tekniskar skúlar, handilsskúlar, maskinskúla, læraraskúla, heilsuverk v. m. Hesir bygningar eru flestir, um ikki allir, bygdir við beinleiðis gjaldi og lánum, sum goldin verða av dønum yvir rakstur stovnsins, tað veri seg við ávikavist 50% sum stuðul og 33% sum lán, tá talan er um skúlar. Tó eru veruligu tølini nakað broytt í seinastuni.

Pantlesing er sum rímiligt farin fram saman við treytum í samband við nýtslu av ognunum, sum fyriskrivað eru í umfarsskrivum til stovnarnar.

Líkt er fráboðað stovnunum um møguliga broyting í hesum viðurskiftum eftir blokkstuðulsskipanina, tað veri seg um vilíkahald, trygging v.m.

Ta einastu kunning hesir stovnar, sum áður høvdu beinleiðis tilknýti til danska fyristing og gjald úr Danmørkini, hava fingið av føroyskum myndugleikum, er ein niðurskurður av peningajáttanini fyri stovnsins viðkomandi. Upphæddir, ið nú verða lutaðar øðrum virksemi her heima.

Tá tað er avgerandi neyðugt at fáa greið boð um hesi viðurskifti, verður spurningur settur løgmanni, ið fyrisitur ognir landskassans.

3. juni 1992 svaraði Atli P. Dam, løgmaður, fyrisporninginum soleiðis:

Svar:

9. mars 1987 varð avtala gjørd millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri viðvíkjandi broyting í studulsskipanini.

Í staðin fyri ymisk sløg av studningum ella endurgjaldi, sum vóru goldin Føroyum frá fiskimálaráðnum, innanríkismálaráðnum, ídnaðarmálaráðnum, undirvísingarmálaráðnum og eftirlønarverkinum, vóru nú hesar útreiðslur fastlagdar í eina heildarveiting, sum skuldi stillast eftir ávísum reglum.

Í grein 4 í avtaluni verður sagt, at Føroyska heimastýrið innan karmarnar av galdandi lóggávu frítt kann ráða yvir heildarveitingini.

Heildarveitingin til tey ymisku økini er sostatt ikki markað.

Ognarviðurskiftini av ávísum stovnum eru eitt sindur øðrvísi.

T.d. eru tekniskir skúlar, handilsskúlar og maskinskúlar sjálvsognarstovnar, so eingin broyting er farin fram í hesum viðurskiftum í samband við heildarveitingina, og við donsku statsognunum, sum komu undir heildarveitingina, er ymiskt, hvussu viðurskiftini hava verið.

T.d. varð læraraskúlin, sum var donsk statsogn, lutur heimastýrinum í samband við heildarveitingarskipanina, meðan eingin broyting hendi við statshospitalinum í Tórshavn í samband við heildarveitingina, tí statshospitalið í Tórshavn longu við "Lov for Færøerne om sygehusvæsenet" frá 1976 er flutt heimastýrinum.

100-18. Fyrispurningur til Jóannes Ejdesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi sjúkraflutningi úr Nólsoy og Hestoy

Ár 1992, 26. februar boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Finnboga Arge og Lisbeth L. Petersen, løgtingslimum, sum var soljóðandi:

Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið við sjúkraflutninginum úr Nólsoy og Hestoy.

a) Nær fer "Ritan" aftur at røkja sjúkraflutningin úr Nólsoy og úr Hestoy?
b) Hvørjar ætlanir eru við sjúkraflutningi úr Hestoy, eftir at Gamlarætt er tikin í nýtslu?

Viðmerkingar:

Til fyri nøkrum árum síðani hevði landssjúkrahúsið sín egna læknabát "Reyði Krossur" til útoyggjarnar. Á fyrimyndarligan hátt tók "Doktarabáturin", sum hann var nevndur, sær av hesum týdningarmikla flutningi.

Sum vegakervið varð útbygt, og vit fingu tunnlar og brýr, minkaði siglingin hjá "Reyða Krossi", samstundis sum skipinum tørvaði stórar umvælingar.

Hesi viðurskifti medvirkaðu til, at sjúkrahúsmyndugleikarnir avgjørdu at selja "Reyða Kross" og at lata Strandferðaluna røkja skipaflutningin í staðin.

Fyrstu tíðina røkti strandfaraskipið "Ritan" hendan sjúkraflutning, ið nólsoyingar og hestmenn vóru fegnir um, tí skipið er sera væl egnað at røkja hesa sigling. Eisini liggur "Ritan" á Havnini um náttina.

Í 1990 avgjørdu sjúkrahúsmyndugleikarnir at lata annað strandfaraskip, "Tróndur", taka sær av sjúkraflutninginum til Nólsoyar og út í Hest í staðin fyri "Ritu-na".

Henda avgerð kom nósloyingum og hestmonnum sera illa við, tí "Tróndur" er bert egnaður til hesa sigling í besta veðri. Hann sleppur als ikki at landi í Nólsoy, tá vindur er av vestri, tí tann høgi yvirbygningurin tekur nógvan vind á seg. Eisini er havnin í Nósloy ov trong fyri so stórt skip.

Annar trupulleiki er tann, at "Tróndur" um náttina liggur í Skopun. Hann má tí fyrst norður á Havnina eftir lækna, áðrenn hann kann fara til Nólsoyar. Hesin umvegur ger, at long tíð gongur, áðrenn læknahjálp kemur fram, samstundis sum ivasamt kann vera, um "Tróndur" sleppur at landi.

Tí verður spurt, um landsstýrið hevur ætlanir at ganga ynski nólsoyinga og hestmanna á møti, og lata "Ritona" aftur røkja sjúkraflutningin til Nólsoyar og út í Hest.

17. mars 1992 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fyrispurning-inum soleiðis:

Svar:

Aftaná at "Reyðikrossur" varð lagdur 1. oktober 1986, yvirtók Strandferðslan sjúkraflutningin til Nólsoyar, út í Hest og til Sandoynna. Fyri at tryggja, at bátar-nir hjá Strandferðsluni vóru tilreiðar, eisini uttanfyri vanliga siglingstíð, kravdi Strandferðslan, at sjúkrahúsverkið veitti mannskapinum sáttmálabundna upp-hædd fyri reiðutænastu. Avtalan kom eisini at umfata rutuna yvir Vestmanna-sund. Henda rutan hevði annars higartil verið røkt uttan reiðugjald. Gjaldið, ið sjúkrahúsverkið skuldi gjalda, aftaná at "Reyðikrossur" varð lagdur, var sostatt reiðugjald til mannskap, umsitingargjald til Strandferðsluna og gjald fyri hvønn túrin sær.

Tá sjúkrahúsverkinum í 1990 varð álagt at spara, varð hetta gjørt m.a. við at minka um vaktirnar á Landssjúkrahúsinum, og stórir partar av Landssjúkrahúsinum vórðu stongdir um summarið. Sum eitt liður í sparingunum varð hildið, at tað var ikki rætt at gjalda reiðugjald til tvinni mannskap á skipum, ið sigldu í sama farvatni. Avgjørt varð so at siga avtaluna við Strandferðsluna upp viðvíkjandi stand-by av "Rituni". "Ritan" varð vald, tí útreiðslurnar til "Rituna" vóru nógv størri enn til "Trónda", og mett var, at "Tróndur" kundi røkja tær skyldur, sum "Ritan" annars hevði havt. Eisini varð hildið, at av tí at "Tróndur" lá í Skopun uttanfyri vanliga siglingstíð, var Sandoyggin betur tryggjað á henda hátt.

Avgjørt varð, at fyri at nøkta bráfeingishjálp til Nólsoyar og út í Hest skuldi tyrlan nýtast í hesum førum.

Henda skipan er fult forsvarlig, og eru Nólsoy og Hestoy væl betri fyri enn nógvar av hinum útoyggjum okkara, eitt nú Mykines og Fugloy, og tað kann upplýsast, at tað enn tekur nógv longri tíð hjá vágafólki at koma á Landssjúkrahúsið enn hjá nólsoyingum.

Tað eru sostatt ongar ætlanir um aftur at fara undir at gjalda reiðupening til "Rituna".

Í løtuni fyriliggja ongar ætlanir um, hvussu sjúkraflutningur úr Hestoy skal fara fram, aftaná at Gamalrætt er tikin í nýtslu, men nevnast skal, at leiðsla sjúkrahúsverksins er í holt við at gera eitt álit um sjúkraflutning í Føroyum. Ætlanin er at fáa ein rímuligan sjúkraflutning, sum er á sama støði fyri alt landið.

Álitið verður lagt fram á felags sjúkrahústýrisfundi til heystar.

100-19. Fyrispurningur til Svend Aage Ellefsen, landsstýrismann, um broyting av ferðaætlanini hjá "Dúgvuni" millum Havnina og Skálafjørðin

Ár 1992, 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Jógvan I. Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Ætlar landsstýrið at broyta ferðaætlanina hjá "Dúgvuni" millum Havnina og Skálafjørðin, so hon nøktar tørvin hjá brúkarunum rímuliga væl, eisini um vikuskiftini, og harvið fáa eitt betri fíggjarligt úrslit.

Viðmerkingar:

Ferðasambandið millum Skálafjørðin og Havnina eftir sjónum hevur altíð verið av stórum týdningi, og sum tíðin hevur liðið og menning er farin fram í samfelagnum, er tørvurin vaksin, og núverandi skip "Dúgvan" er fært fyri at flyta bæði fólk, akfør og farm, og hevur verið nógv brúkt.

Í fjør fór landsstýrið undir at spara útreiðslur innan strandferðsluna, og rutan við "Dúgvuni" millum Havnina og Skálafjørðin var eina dyggast rakt av hesi skerjing.

Tað hevði so ta avleiðing, at nógv fólk ikki kundu nýta hesa rutu, tí hon nøktaði ikki tann tørv, tey høvdu brúk fyri, og tí máttu tey annaðhvørt flyta til Havnar ella nýta privatbil, eisini helt siglingin heilt uppat um vikuskiftini.

20. apríl í ár er eitt ár, síðani henda stóra spariætlan var sett í verk av landsstýrinum, so fruktirnar av spariætlaini skuldu nú verið sjónligar.

Til samanberingar kunnu vit nýta januar mánað í 1991 við gomlu ferðaætlanini og januar mánað í 1992 við nýggju spariferðaætlanini, so vísir tað seg, at í januar 1991 flutti "Dúgvan" 4.009 akfør og 16.234 ferðafólk millum Havnina og Skálafjørðin. Í januar 1992 2.174 akfør og 9.027 ferðafólk. Av hesum sæst, at flutningurin er minkaður millum ein triðing og eina helvt, og harvið hevur rutan havt nógv minni inntøku enn áður, so einki er at ivast í, at sparingin í útreiðslum við skerjing av siglingini, er nógv minni enn missurin í inntøkuni, so henda beinskerjing av siglingini millum Havnina og Skálafjørðin hevur ikki bøtt um fíggjarstøðuna, men tvørturímóti hon hevur gjørt hana verri.

Tí loyvi eg mær at seta landsstýrismanninum í samferðslumálum henda spurning.

27. mai 1992 svaraði Svend Aage Ellefsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Jógvan I. Olsen hevur sett mær fyrispurning, hvørt landsstýrið ætlar at broyta ferðaætlanaina hjá "Dúgvuni", so hon betur nøktar tørvin hjá brúkarunum og harvið eisini fær eitt betri fíggjarligt úrslit.

Í sambandi við viðgerðina av fyrispurninginum havi eg havt fund við leiðsluna á Strandferðsluni og skiparan á Dúgvuni.

Sambært teimum hagtølum, ið tøk eru frá undanfarnum árum, er greitt, at vikuskiftissigling hjá Dúgvuni ikki ber seg fíggjarliga. Hetta ger seg galdandi bæði um veturin og serstakliga um summarið, tá fleiri ferðafólk helst nýta egnan bil til flutning.

Annars er at siga, at Strandferðslan í stóran mun kennir fallandi virksemið í samfelagnum aftur í inntøkutølum stovnsins, og er hetta galdandi fyri flestu farleiðirnar.

Lækkandi inntøkurnar skulu harafturat síggjast saman við, at takstirnir vóru hækkaðir við 20% í meðal pr. 1. juni í ljør.

Tað er sostatt einamest orsakað av munandi rationaliseringum og effektiviseringum, at tað hevur eyðnast at minka hallið úr kr. 64. mió. fyri 1990 til gíðar 50 mió. fyri 1991.

Sjálvsagt letur ein slík kostnaðarlækking seg ikki gera, uttan óheppin árin kennast her og har innan tænastuøki stovnsins.

M.a. er vikutúratalið hjá fleiri av strandfaraskipunum lækkað nakað. Soleiðis er eisini hjá "Dúgvuni", ið siglir inn á Skálafjørðin.

Kommunustýrini kring Skálafjørðin hava á fundi við undirritaða gjørt vart við tann stóra tørvin, fólkið á Skálafjørðinum hevur á "Dúgvuni", og róðu á fundinum uppundir, at kommununrnar yvirtóku raksturin av skipinum, og harvið fingu høvi at lata skipið sigla við tí títtleika, eysturoyingar halda vera hóskandi. Umboðini fyri kommununrnar fingu á fundinum váttan fyri, at landsstýrið vildi viðgera spurningin so skjótt ein skrivlig umsókn fyrilá um eina slíka yvirtøku. Enn er ongin umsókn kortini komin.

Við atliti til fíggjarligu støðuna í landinum og til tær stóru sparingarnar, ið gerast skulu á galdandi fíggjarlóg, serstakliga innan samferðsluøki, fer landsstýrið ikki at áleggja Strandferðsluni at økja vikutúratalið hjá "Dúgvuni" í hesum fíggjarárinum.

Hinvegin hevur undirritaði biðið Samferðslustovuna og Strandferðsluna kanna, um flytan av onkrum túri kundi komið ferðafólkunum til betri nyttu. Er tørvur á hesum, verða justeringarnar gjørdar samsvarandi.

100-20. Fyrispurningur til Jóannes Ejdesgaard, landsstýrismann viðvíkjandi flutningsskipan fyri brekað í Føroyum

Ár 1992, 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Lisbeth L. Petersen, løgtingslimi, sum var soljóðandi:

Hvussu langt er komið ætlanum landsstýrisins um eina serflutningsskipan fyri brekað í Føroyum.

Viðmerkingar:

MBF, Meginfelag teirra brekaðu, hevur í nógv ár arbeitt fyri, at flutningsmøguleikar hjá brekaðum fólki her á landi verða betraðir.

Fleiri almennir fundir hava verið um evnið, og áheitanir hava verið sendar bæði kommunum og landsstýri um tørvin.

Kvinnufelagssamskipan Føroya hevur eisini gjørt vart við spurningin og sent skriv til myndugleikarnar um, hvørjir trupulleikarnir eru runt um landið.

Í dag eru møguleikarnir hjá brekaðum at ferðast betri, enn teir vóru, men enn er langt á mál, til brekað á jøvnum føti kunnu nýta samfelagslig tilboð, ið standa øðrum í boði. Ein fyritreytin er tilboð um serflutning.

At málið eisini er ein fíggjarligur spurningur, kann ikki noktast, men ásannast má, at sjálvt í teim tíðum, har ivaleyst av peningi var í samfelagnum til nýmótans skip, tunlar, ferjur og onnur flutningstól, var ikki nóg nógv hugsað um tey rørslutarnaðu og teirra tørv. Nógv varð bert til fundir og prát, hóast tað fíggjarliga ikki tá var tann forðing, tað er í dag, bæði hjá tí almenna og tí privata.

Rørslutarnað eru ikki bert fólk í koyristóli, men eisini eldri og illagongd fólk, umframt tey, ið mugu hava hjálp av sáladigum orsøkum.

Á jóansøku 1990 var álit um flutningsskipan fyri brekað í Føroyum liðugt og undirskrivað av einum arbeiðsbólki við umboðum fyri Føroya landsstýri, Føroya Kommunufelag, Tórshavnar býráð og MBF.

Landsstýrið setti henda arbeiðsbólk í oktober 1989.

Álitið umfatar allan serflutning, harí eisini vardan flutning, t.v.s. flutning, ið ikki krevur onnur flutningstól enn tey, ið vanliga verða brúkt av øðrum.

Álitið fevnir um alt landið, tí allir borgarar í Føroyum eiga at hava somu rættindi.

Út frá hesum verður spurningurin settur.

10. apríl 1992 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fyrispurningunum solciðis:

Svar

Spurningurin viðvíkjandi flutningsskipan fyri brekað hevur verið viðgjørdur í skjótt nógv ár innan umsitingina (herundir Almannastovan og døgnstovnar innan almannaverkið). MBF hevur gjørt eitt stórt arbeiði fyri at fáa flutningstiltøk sett í verk, ið ikki vóru bundin at stovnum, men heldur skipað sum generel tiltøk.

Eitt úrslit var, at lyft kom í nakrar bussar í Havn og hjá Bygdaleiðum, tó við lítlum bata generelt sæð, tí tær eru fáar, og flest øll skip eru sera illa atkomulig hjá brekaðum og illa gongdum fólki. Tó er nýggi terminalbygningurin í Havn eitt stig á leiðini við góðum atgongumøguleikum til tey stóru skipini.

Eitt annað dømi er MBF-bussurin, sum kom í lag sum samstarv millum MBF og Tórshavnar býráð. Einstaklingar og stovnar hava, hóast brek, eisini í hesi skipan notið gott av hesum tiltaki.

Áargarður hevur í samstarvi við Almannastovuna eina flutningsskipan fyri fólk, ið búgva heima, men sum fara í dagtilhald.

Um pensiónslóggávuna eru møguleikar fyri at stuðla sertiltøkum fíggjarliga, og roynt hevur verið innan hesar karmar at víðka skipanina í Havn. Nevnd hevur verið sett at viðgera spurningin generelt fyri allar Føroyar, fevnandi bæði um brekað og illa gongd.

Eitt álit varð gjørt, men varð tað helst ikki nóg verkligt.

Síðani gjørdi Samferðslustovan eitt meira ítøkiligt uppskot (á ólavsøku 1991). Sigast kann tó, at ein ov stórur bólkur av fólki (illa gongd/gomul) fraumnanundan vóru tikin út úr skipanini.

Í loysn av málinum viðvíkjandi flutningsskipan fyri brekað fyri alt landið má verða skilt ímillum:

1) Almenn tiltøk til frama fyri brekað, har hugsað verður um broytingar í bygnaðinum, øllum bussum, skipum og viðvíkjandi atgonguvegnum. Hetta krevur langtíðarætlan og neyva stýring, og sjálvandi játtanir til útreiðslurnar í hesum sambandi.
2) Sertiltøk, har hugsað verður um tiltøk sum MBF-bussin í Havn, men eisini um ta samskipan, sum er skotið upp í m. a. uppskotinum hjá Samferðslustovuni.

Ásannast má tó helst, at lættast er at skipa fyri slíkum í tætt bygdum økjum, og tað er eisini bert her, at slíkt hevur verið skipað yvir longri tíðarskeið.

Aftrat kann nevnast, at einstaklingaskipanin við avlamis- og umlættingarbilum hevur lætt um hjá nógvum familjum, bæði viðvíkjandi brekaðum vaksnum og børnum.

100-21. Fyrispurningur til Jóannes Ejdesgaard, landsstýrismann, um Bústovnin fyri brekað suðuri í Vági

Ár 1992, 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Nær kann roknast við, at byggingin fer í gongd av bústovni fyri brekað suðuri í Vági?

Viðmerkingar:

Tað eydnaðist fyri 3 árum síðan í heyst at fáa varda verkstaðin inni á Bakka suðuri í Vági í gongd. 12 fólk gera í løtuni nýtslu av hesum tilboði til brekað.

Góðar 200 metrar frá varda verkstaðnum vesturi á Mýrunum er 1500 m^2 stórt grundstykki fingið til vega fyri bústovn. 1,5 mió. kr. vóru í 1991 settar av á løgtingsfíggjarlógini til bústovn fyri brekað í Suðuroy, og tann sama upphædd er aftur sett av á fíggjarlógini fyri 1992.

Tørvurin er stórur á hesum bústovni, sum bíðað hevur verið eftir í mong ár, og fólk vænta, at farið verður undir byggingina. Men naggatódn tykist vera komið í hetta sum so nógv annað her á landi.

Tí verður hesin fyrispurningur settur.

10. apríl 1992 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

Svar

Ásannandi at tørvur er á einum umlættingarheimi og bústovni fyri brekað í Suðuroynni setti landsstýrið 1,5 mió. kr. av á fíggjarlógini í fjør, t.v.s. fyri 1991. Men málið kom av ymsum orsøkum í drag. Tí varð játtanin mótroknað á eyka-fíggjarløgtingslógini fyri 1991.

Á galdandi fíggjarløgtingslóg eru 1 mió. kr. settar av til umlættingarheim og bústovn í Suðuroynni.

Landsstýrið hevur álagt Almannastovuni saman við Andveikraverndini at gera uppskot til byggineynd.

Jarðarráðið eigur uml. 1.500 m^2 í Vági, sum er eitt vælegnað grundøki til slíka bygging. Vágs býráð hevur áður mælt Jarðarráðnum til at lata stykkið til eitt skótahús, sum nú verður bygt aðrustaðni. Síðan hevur Vágs býráð boðið sær til at keypt grundøkið fyri uml. 45.000 kr., og síðan ætlar býráðið at lata grundøkið til umrøddu bygging. Býráðið hevur annars eisini mælt Jarðarráðnum til, at teir lata økið beinleiðis til ein bústovn fyri brekað.

Annars er ikki endalig støða tikin til, um byggjast skal í Vági, so sum spyrjarin sigur frá. Hinvegin er tað uttan iva skilagott, tá hugsað verður um verkstaðið á Bakka og møguleikar fyri starvsfólkasamstarvi, at stovnurin verður bygdur í Vági.

Í samband við uppskot landsstýrisins til sparingar á galdandi fíggjarløgtingslóg verður mælt til, at umrøddi stovnur ikki verður bygdur í ár.

100-22. Fyrispurningur til Svend Aage Ellefsen, landsstýrismann viðvíkjandi vatnorkuútbygging í Føroyum

Ár 1992, 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Helenu Dam á Neystabø, løgtingskvinnu, sum var soljóðandi:

Heitt verður á landsstýrismannin í orkumálum Svend Aage Ellefsen at greiða frá, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur í sambandi við framhaldandi vatnorkuútbygging í Føroyum.

Um so er, at landsstýrið metir, at útbygging skal fara fram, hvussu skal hon tá fíggjast ?

Viðmerkingar:

Landsstýrismaðurin í orkumálum hevur fleiri ferðir sagt í fjølmiðlunum, at tað hevði verið skilagott at fíggjað framhaldandi vatnorkuútbygging í Føroyum við uttanlandsláni. Hetta hevði hann m. a. á munni í sambandi við heimildina at læna 200 milliónir til undirsjóvartunnil.

Vatnorka hevur verið sera dýr íløga í Føroyum, og einki bendir á, at íløgan kemur at svara seg landsbúskaparliga. Vinnan venar seg undir dýrum orkuprísum.

Harafturat hava vit møguliga órógvað áir og vøtn við hesi útbygging og forkomið náttúrligu vatnveitingini, ið er neyðug til alla fiska- og matvørufraunleiðslu.

Tað hevði verið áhugavert at frætt nærri um hesar ætlanir, serliga tá vit um dagarnar frætta, at SEV noyðist at seta orkuprísin upp.

Hvør skal nýta streym, tá flotin er svínabundin?

Tí verður hesin fyrispurningur settur.

27. mai 1992 svaraði Svend Aage Ellefsen, landsstýrismaður, fyrispurningínum soleiðis:

Svar

Helena Dam á Neystabø hevur sett mær fyrispurning, um hvørjar ætlanir landsstýrið hevur í samband við framhaldandi vatnorkutúbygging, og hvussu ein møguleg útbygging skal fíggjast.

Sum kunnugt er elorkuframleiðsla úr vatnmegi her á landi givin felagsskapínum SEV uppí hendi.

Tað verður tí sjálvsagt fyrst og fremst upp til SEV at meta um, hvørjir útbyggingarmøguleikar eru teir skilabestu, og nær skilabest er at fremja hesar, meðan landsstýrisins leiklutur heldur verður at eftirkanna, hvørt tey ætlaðu framtøkini geva mestu orkuna, eru samfelagsbúskaparliga lønandi, og í minst møguligan mun skemma náttúruna ella órógva umhvørvið.

Sum interkommunalur stovnur hevur SEV skyldu at útvega sær loyvi frá landsstýrinum til upptøku av láni, og í sambandi við slíka játtan krevur landsstýrið sjálvsagt eisini, at nevndu fyritreytirnar eru loknar.

Í sambandi við ætlanirnar hjá SEV at halda fram við fløguni við Eiðisvatn, hevur felagið søkt landsstýrið um loyvi til lántøku.

Landsstýrið hevur latið Orkuráðið ummælt verkætlanina, og í stuttum kann sigast, at Orkuráðið metir, at fløgan undir ávísum fyritreytum ikki gevur hall sammett við framhaldandi elframleiðslu við dieselverkum. Niðurstøðan er, sum rímuligt er, tengd at tí vandleika, at SEV longu hevur gjørt fløgu í vatngoymsluna, framleiðsluverkið, eins og kostnaðarmiklu borútgerðina.

Landsstýrið hevur enn ikki viðgjørt ummælið frá Orkuráðnum til fullnar og hevur sostatt ikki tikið støðu til umsóknina frá SEV.

Í viðmerkingunum til fyrispurningin verður sagt, at vatnið er lutfalsliga dýr orkukelda í Føroyum, og at ætlaða útbyggingin í ov stóran mun fer at órógva náttúruna.

Landsstýrið fer at hava hesi viðurskiftini í huganum, tá støða skal takast, men fer eisini at gera sína niðurstøðu, við atliti til tey vandamiklu árin øll dálking frá termiskum verkum hevur á heimsumhvørvið.

Tað verður upp til SEV at finna útvegir fyri, hvussu møgulig vatnorkuútbygging verður líggjað.

Útlendskir peningastovnar eu helst sinnaðir at veita lán, og kemur lænta peninganøgdin í so fall gjaldførinumí samfelagnum sum heild til góðar. Hinvegin er eisini peningur tøkur í 60 - mió. grunninum til slíka íløgu. Men tá peningurin í hesum førinum verður tikin úr føroysku peningastovnunum, kann hetta treingja enn meira um tað frammanundan ov tronga gjaldføri, ið peningastovnarnir og samfelagið sum heild eru í.

Landsstýrið hevur sett nevnd at kanna hvørja ávirkan elorkuprísirnir hava á framleiðsluvinnuna, og so skjótt nevndarálitið fyriliggur, fer landsstýrið at taka støðu til, hvussu frægast kann hjálpast uppá kappingarføri vinnunar, við atliti til orkuprísirnar.

100-23. Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi sjúkrahúsbygging í Suðuroy

Ár 1992, 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Helenu Dam á Neystabø, løgtingskvinnu, sum var soljóðandi:

Heitt verður á landsstýrismannin í heilsumálum at greiða frá útbyggingini av sjúkrahúsinum í Suðuroy.

Hvussu nógv fer henda útbygging at kosta, tá hon er liðug?

Hvussu langt er komið við ætlanini, og hvussu nógv hevur ætlanin kostað nú?

Hvønn leiklut í samlaða heilsupolitikkinum hevur henda útbyggingin? Hvussu skal sjúkrahúsið rekast, tá tað er liðugt, og hvussu verður rakstrarkostnaðurin, tá so stór útbygging er framd, og seingjarplássini økt ?

Viðmerkingar:

Undirritaða hevur fyrr boðað frá, at øll íløguætlan landsins átti at verið endurskoðað, og tær dýrastu útbyggingarnar steðgaðar, til vit fóta okkum aftur. Tað gjørdi eg m.a, tá ið uppskot varð lagt á ting um at steðga ætlanini um fast samband um Vestmannasund í fýra ár.

Ein av teimum sera dýru almennu íløgtunum sýnist at vera sjúkrahúsbyggingin í Suðuroy. Tað má tí metast skilagott, at henda ætlan verður viðgjørd.

Sjúkrahúsið í Suðuroy hevur ábøtur fyri neyðini, tað vita øll. Men tað er neyðugt at vita, um vit fremja eina útbygging, ið dýrkar raksturin munandi. Tað er

neyðugt, at meta um tað ber til at reka eitt slíkt útbygt sjúkrahús effektivt. Tað er neyðugt at taka støðu til, um tað er rætt at byggja sjúkrahúsverkið út á henda hátt. Hava vit ráð, og er íbúgvaragrundarlag fyri hesum ?

Tí verður hesin fyrispurningur settur:

100-24. Fyrispurningur til Jógvan Sundstein, landsstýrismann, um javnvág í fíggjarlógini og langtíðarætlan

Ár 1992, 17. mars boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Nær fáa vit javnvág millum inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini, og hvørja langtíðarætlan hevur landsstýrið fyri lántøku, fígging v.m.

Viðmerkingar:

Tað órógvar fólk, at landshúsarhaldið koyrir við undirskoti, sum tíverri vísir seg størri enn mett verður um frammanundan.

Fíggjarløgtingslógin fyri 1991 varð samtykt á tingi við einum halli upp á 356 mió. kr., sum tá ið avtornaði vísti seg at vera millum 100 og 150 mió. kr. størri (500 mió.)

Fíggjarlógin fyri 1992 er samtykt við einum halli upp á 92 mió. kr., sum lættliga kann vísa seg at vera tað dupulta av tí og meira enn tað.

Einki húsarhald kann ár eftir ár bera eitt hall. Finanferð endar galið. Tað kann landshúsarhald okkara heldur ikki.

Tí er tað ikki burtur av leið at spyrja landsstýrið, nær ætlanin er, at vit fáa javnvág í fíggjarlógini. Hvat vil landsstýrið gera, fyri at so skal vera. Inntøkurnar, serliga av tolli, minkaðu meir enn roknað var við í 1991, samstundis sum útreiðslurnar vóru 54 mió. størri enn mett varð. Tað er einki, sum bendir á, at aðrar inntøkur sum skattur v. m. fara at vaksa í 1992, nú ið nógv fólk flytir av landinum, og onnur fara undir "skattafría" skipan sum FAS og DIS, samstundis sum lítið arbeiði og lítil fiskur er.

Uttanlandsskuldin upp á 8,8 mia. kr., sum landskassin eigur í minsta lagi triðingin av, ger tað, at landskassin eisini fær stórar rentuútreiðslur at dragast við. Í

1991 var henda rentan sett til 108 mió. kr., men vísti seg sinb. eykafíggjarlógina í veruleikanum at vera 126 mió. kr.

Á fíggjarlógini fyri 1992 eru rentuútreiðslurnar settar til 163 mió. kr. Landsstýrið heldur fram at taka uttanlandslán og hevur beint nú tikið 420 mió. kr., so at tað er einki at ivast í, at eisini fyri 1992 verða rentuútreiðslurnar størri enn mett, tá ið fíggjarlógin varð samtykt.

Hevur landsstýrið nakra langtíðarætlan, og hvussu sær hon út ?

100-25. Fyrispurningur til Svend Aage Ellefsen, landsstýrismann, um byrging um Haraldsund

Ár 1992, 17. mats boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Niels Paula Danielsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

Hvat ætlar landsstýrið at gera við byrgingina um Haraldsund, ið ódnirnar skola tvørturum og gera ónýtiliga?

Viðmerkingar:

Stutt eftir at landsstýrissamgongan var skipað í 1985, varð farið undir at fáa sambandið í lag millum Kunoynna og Borðoynna. Arbeiðið hevði tá ligið stilt eina tíð, men nýggja landsstýrið setti sær fyri ikki at fáa hetta samband í lag, men eisini at fara undir Kunoyarbergholið.

Byrgingin, ið gjørd varð um Haraldsund, kom at órógva útróðurin norðureftir og sketja vatnútskiftingina inni á vágni á Klaksvík og broyta lívið á botninum. Tí varð hin 29. mars 1986 samtykt at opna Haraldsund aftur og gera eina siglingarrennu, sum felag varð biðið um at fara undir at gera fyrireikingar til.

14 mió. kr. vóru játtaðar yvir 3 ár til hetta arbeiðið. Longur var ikki komið, og pengarnir eru brúktir til aðrar brýr og bergholsgerð.

Men byrgingin um Haraldssund varð gjørd sum ein fyribilsloysn, men kann ikki vera liggjandi, sum hon ger.

Hvørja ferð órógv er í sjónum, og lotið stendur innáa norðaneftir ella sunnaifrá, fyri ikki at tala um ódnirnar, so verður máað burtur av byrgingini, og hon gerst lættliga ónýtilig og krevur ábøtur, sum tilsamans ikki man kosta so lítið.

Tí verður spurt, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur við byrgingini um Haraldsund. Tað er ikki heilt vandaleyst at ferðast eftir byrgingini í ringum veðri.

54. Broytingar í løgtingslóg um manning av skipum

Uppskot

til

Løgtingslóg um broytingar í løglingslóg um manning av skipum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 5 frá 15. januar 1988 um manning av skipum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2 verður nr. 7) orðað soleiðis:
"“Tons”: Tonsatal brutto (GT) ella skrásett tons brutto (BRT), sum til eina og hvørja tíð tilskilað í skipsins málibrævi ella máliprógvi, men soleiðis at brotin tøl falla burtur, um nøkur eru. Hevur málibrævið ella máliprógvið 2 bruttoskrásetingartøl (BRT) geldur størra talið. Eru bæði tonsatal brutto (GT) og bruttoskrásetingartal (BRT) máld, verður "tons" at skilja sum tað minsta av hesum tonsatølum.

2) Í § 2 verður sum nýtt nr. 12) sett:
"Átekning eftir STCW- sáttmálanum:
Átekning á sjóvinnubrøv, sum verða útgivin samsvarandi grein VI í millumlanda sáttmálanum um útbúgving, um sjóvinnu og um vaktarhald á skipum frá 1978, (STCW-sáttmálin)."

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om bemanding af skibe.

§ 1.

I lagtingslov nr. 5 af 15. januar 1988 om bemanding af skibe foretages følgende ændringer:

1) I § 2 affattes nr. 7) således:
"“Tons”: Den til enhver tid i skibets målebrev angivne bruttotonnage (GT) eller bruttoregistertonnage (BRT), idet eventuelle decimaler kortkastes. Indeholder målebrevet 2 bruttoregistertonnager, da den største af disse. Er såvel et skibs bruttotonnage (GT) som dets bruttoregistertonnage (BRT) målt, forstås ved "tons" den mindste af disse tonnager.

2) I § 2 indsættes som nyt nr. 12):
"STCW-konventionspåtegning:
Påtegning på sønæringsbevis udfærdiget i overensstemmelse med bestemmelserne i artikel VI i den internationale konvention om uddannelse af søfarende, om sønæring og vagthold, 1978 (STCW-konventionen)."

3) Í § 4, stk. 3, verður orðingin "og somuleiðis til tørvin á útbúgvingarstørvum." strikað.

4) Í § 6, stk. 1 verður talvan fyri fiski- og handilsskip broytt soleiðis:
(Talva 1.)

5) § 6, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"Á skipum millum 500 og 799 tons er førleikakravið til heimaskipara og stýrimann á 4. stigi:
Heimaskipararoynd staðin seinni enn 1. juli 1982"

6) Sum nýggj § 6 a. verður sett:
"Skiparar, brúgva- og maskinyvirmenn á skipum, skrásett í Føroysku Altjóða skipaskránni (FAS), skulu hava sjóvinnubrøv við STCW-átekning sambært niðanfyristandandi talvum (talva 2).

3) I § 4, stk. 3 udgår ordene "samt til behovet for uddannelsesstillinger."

4) I § 6, stk. 1 ændres tavlen for fiske- og handelsskibe således:
(Tavle 1).

5) § 6, stk. 5 affattes således:
"I skibe mellem 500 og 799 tons er kvalifikationskravet til kystskipper og styrmand af 4. grad: Kystskippereksamen bestået senere end 1. juli 1982".

6) Som ny § 6 a indsættes:
"Skibsførere, navigations og maskinofficerer på skibe registreret i Færøske Internationale Skibsregister (FAS) skal have sønæringsbevis med STCW-konventionspåtegning i overensstemmelse med nedenstående tavler (tavle 2).

2. stk. Á skipum, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS), verður kravt, at avvarðandi hevur gilt sjóvinnubræv við STCW-átekning sambært stk. 1. Skipari skal hava heimarætt eftir sjóvinnulógini.

3. stk. Á Skipum, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS), verður loyvt at vera í starvi sum skipskokkur uttan sjóvinnubræv, um avvarðandi hevur havt lærutíð tilsamans 48 mánaðir í kokkayrkinum, av hesum í minsta lagi 24 mánaðir á havskipum.

Stk. 2. I skibe, registreret i Færøsk Internationalt Skibsregister (FAS) kræves, at vedkommende har gyldigt sønæringsbevis med STCW-konventionspåtegning i henhold til stk. 1. Skibsfører skal have indfødsret i henhold til sønæringsloven.

Stk. 3. I skibe registreret i Færøsk Internationalt Skibsregister (FAS) er tilladt at være i tjeneste som skibskok uden sønæringsbevis som sådan, såfremt vedkommende har haft en læretid i kokkefaget på 48 måneder, heraf mindst 24 måneder i søgående skibe."

7) Í § 12 verður sum nýtt stk. 4 sett:
"Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um vaktarhald á skipum".

7) I § 12 indsættes som nyt stk. 4:
"Færøernes Landsstyre kan fastsætte nærmere bestemmelser om vagthold i skibe."

8) § 14 verður orðað soljóðandi:

"Føroya Landsstýri kann eftir tilmæli frá reiðara- og sjómannafeløgunum broyta tey í hesi lóg ásettu tonsamørk til onnur mørk, sum sett eru í bruttotonsatølum ella aðrari málieind og broyta tey í hesi lóg ásettu mørk fyri framtøkumegi."

9) Í § 15 stk. 1 verður skoytt uppí eftir "manningarreglurnar" orðingin:

"og áseta serlig útbúgvingarkrøv".

10) Í § 18 stk. 1 verður skoytt uppí eftir "§ 6, 1., 3. og 4. stk", orðingin: "§ 6 a, 1., og 2. stk.". "§ 12, 1. og 3. stk." verður broytt til "§ 12, 1., 3. og 4. stk.".

8) § 14 affattes således:

"Færøernes Landsstyre kan efter henstilling fra rederes og de søfarendes organisationer ændre de i loven indeholdte tonnagegrænser til grænser fastsat i bruttotons eller anden måleenhed, samt ændre de i loven indeholdte grænser for fremdrivningseffekt."

9) I § 15, stk. 1 indsættes efter "besætningsregler":

"samt fastsætte særlige uddannelseskrav",

10) I § 18, stk. 1 indsættes efter "§ 6, 1., 3. og 4. stk.": "§ 6 a, 1. og 2. stk.". "§ 12. 1. og 3. stk." ændres til: "12, 1., 3. og 4. stk.".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur lagt fram uppskot um føroyska altjóða skipaskráseting at koma í gildi hin 1. januar 1992. Endamálið er at betra um kappingarførið hjá føroysku handils- og ferðamannavinnuni í uttanríkissigling, at skapa øktar vinnumøguleikar í handils- og ferðamannavinnuni á føroyskum kjøli, at varðveita flest møgulig handils- og ferðamannaskip og harvið arbeiðspláss í føroyska samfelagnum, at skapa neyðugar fortreytir fyri øking í valutainntøkuni av farmaskipavinnuni og at tryggja arbeiði og inntøkugrundarlag í øðrum vinnupørtum við tilknýti til sjóvinnuna. Til tess at røkka hesum máli verður somuleiðis sett fram uppskot um broytingar í teimum lógum, sum ávirka eina føroyska altjóða skipaskráseting. Hesar lógir eru: Skattalógin og sjóvinnulógirnar um sjómenn, um sjóvinnu og um manning av skipum.

Broytingarnar í løgtingslóg nr. 5 frá 15. januar 1988 um manning av skipum byggja á tær útbúgvingar, sum eru nevndar í uppskotinum um maskinskúlaútbúgvingar, sum er til viðgerðar í løgtinginum, jbr. løgtingsmál nr. 139/1989. Útbúgvingurskipanin eftir hesum uppskoti og verandi skipan eftir donsku

skipanini, sum varð broytt í 1988, lýkur nú treytirnar í millumlanda sáttmálanum um sjómansútbúgvingar, um sjóvinnu og um vaktarhald á sjónum frá 1978 (STCW-sáttmálin) fyri skip, ið hava framtøkumegi meira enn 750 kw. STCW-sáttmálin er lýstur at galda fyri Føroyar við gildi frá 18. september 1990.

Broytingin í manningarlógini fer at geva maskinisti (1 ára útbúgving og skeið í kølitøkni/hydraulik og simulatornýtslu) eftir 24 mðr. siglingartíð rættindi upp til 3000 kw. við sjóvinnubrævi á 1. stigi. Maskinistur á 2. stigi (2 ára útbúgving) gevur eftir 12 mðr. siglingartíð rættindi upp til 1500 kw.

Broytingarnar í verandi manningartalvu (talva 1) eru settar upp soleiðis sum verandi manningarásetan er framd, síðan lógin kom í gildi hin 1. juli 1989, eftir tilmæli frá Sjóvinnufyrisitingini og samsvarandi teimum broytingum, sum Sjóvinnuráðið hevur gjørt. Allar tær føroysku sjómansútbúgvingarnar eru nú á einum tílíkum støði, at tað verður hildið rætt at broyta rættindini samsvarandi.

Broytingin hevur eisini til endamáls at gera tað møguligt hjá skipum, skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS) at vera mannað eftir altjóða reglum til tess at vera kappingarfør við aðrar altjóða skipaskráir, har loyvt verður eisini at nýta útlendska manning. Við at nýta lagaligar manningartreytir, kann handilsskipaflotin økjast munandi, og verða tá skaptar neyðugar fortreytir fyri fleiri arbeiðsplássum í Føroyum.

Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:

ad. 1)
Skrásett tons brutto (BRT) falla burtur eftir 18. juli 1994. Sambært løgtingslóg nr. 90 frá 10. juni 1982 verða øll skip máld eftir 1969-reglunum, men kunnu framvegis fáa eitt máliprógv eftir 1954-reglunum.

ad. 2)
Sambært § 6 í STCW-sáttmálanum. Sáttmálin er lýstur at galda fyri Føroyar í Kunngerðarblaðnum B dagsett hin 17. januar 1991 við gildi frá 18. september 1990.

ad. 3)
Verður skotið upp at strikað, tá endamálið við manningarlógini er at áseta minsta krav um trygdarmanning (Minimum Safe Manning) umframt, at loyvt verður útlendingum at starvast á føroyskum skipum, skrásett í FAS.

ad. 4) og 5)
Broytingarnar eru gjørdar soleiðis sum galdandi manningaáseting er gjørd. Rættindini hjá heimaskipara í heimasigling eru upp til 800 tons og við heimaskip-

araroynd, staðin áðrenn juli 1982, upp til 500 tons. Samstundis verða rættindini fyri skiparar víðkað upp til 1600 tons. Fyri handilsskip verður hetta eisini víðkað, tá broytingin í pkt. 3) eisini verður gjørd. Fyri skipararoynd, staðin áðrenn juli 1982, verður við atliti til líkastilling av sjóvinnubrøvum kravt eitt vikuskeið í lærugreinini skipstøkni sum eftirútbúgvingarkrav. Heimildin er tikin við í pkt. 9).

Fyri maskinmeistara verður víst til viðmerkingarnar til lógina. Eftir hesum fer vinnubræv sum maskinistur á 1. stigi at geva rættindir upp til 3000 kw og vinnubræv sum maskinistur á 2. stigi rættindir upp til 1500 kw. Broytingarnar í vinnubrævaheitinum og rættindini hjá teimum, sum hava ta eldri maskinistútbúgvingina eru tikin við í broytingunum í sjóvinnulógini.

ad. 6)

Eftirsum uppskotið um føroyska altjóða skráseting ikki fevnir um fiskiskip verður ein nýggj grein innsett, sum bert fevnir um skip í hesi skrá. Førleikakrøvini verða ásett beinleiðis eftir STCW-sáttmálanum. Skiparaútbúgvingin lúkar hesi krøv um førararættindir upp til 1600 tons og sum stýrimaður á vakt á brúnni óavmarkað stødd á skipi. Fyri maskinmeistarar er broytingin tann sama sum í pkt. 4). Loyvt verður útlendskum stýrimonnum og maskinmeistarum at starvast á hesum skipum, treytað av gildugari átekning eftir STCW-sáttmálanum. Skipari skal harumframt hava heimarætt. Mælt verður frá at hava reglur um undantøk viðvíkjandi heimarætti skiparans. Kravið um heimarætt skal skiljast soleiðis, at loyvt er øllum ríkisborgarum at starvast á føroyskum skipum. Á skipum skrásett í FAS verður ikki krav sett um føroyskt sjóvinnubræv, men samsvarandi útbúgving.

ad. 7.

Heimilað verður landsstýrinum at áseta nærri reglur um vaktarhald á sjónum. STCW-sáttmálin er galdandi fyri Føroyar við gildi frá 18. september 1990. Sáttmálin fevnir um útbúgving um sjóvinnu og vaktarhald á sjónum. Sjómansútbúgving, sjóvinna og manningakrøv er sermál. Vaktarhaldið umborð eftir STCW-sáttmálanum eru reglur fyri yvirmenn, sum ganga vakt á brúnni og í maskinrúminum og mugu hesar soleiðis eisini koma undir sermál.

Til tess, at landsstýrið kann lúka treytirnar í grein 1 (2) í sáttmálanum, mugu neyðugar reglur setast í verk um vaktarhald. Heimildin hjá landsstýrinum eigur soleiðis at vera í manningarlógini. Reglurnar verða tær somu sum eru í fylgiskjølunum til STCW-sáttmálan.

ad. 8)

Galdandi lóggáva heimilar landsstýrinum, eftir at tað hevur fingið tilmæli frá øllum pørtum av vinnulívinum í Sjóvinnuráðnum, at broyta tonsamørk. Hesar

reglur eru galdandi í øllum londum, sum hava limaskap í IMO (Altjóða ST-felagsskapur á sjónum "International Maritime Organization"), sum leingi hevur arbeitt við málireglunum. Haraftrat inniheldur altjóða sáttmálin um tryggleikan á fiskiskipum (Torremolinus-sáttmálin) mørk grundaða longdina av skipinum. Tí verður skotið upp, at landsstýrið varðveitir rættin til at gera broytingar í tonsamørkum og frantøkumegi við atliti til galdandi máltreglur og altjóða viðurskiftir.

ad. 9)
Heimild stjórans eftir § 15 verður víðkað til eisini at fevna um serlig útbúgvingarkrøv. Hetta er neyðugt í galdandi manningaásetanini á serliga bygdum skipum (flúgvibátar og luftpútubátar v.m.) kann verða øðrvísi enn eftir vanligu áseting-ini.

ad. 10)
Avleiðingar av hesum broytingaruppskoti.

Felagsálit

í

Løgtingsmáli nr. 55/1991: Føroysk altjóða skipaskrá.
Løgtingsmáli nr. 52/1991: Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.
Løgtingsmáli nr. 54/1991: Broytingar í løgtingslóg um manning av skipum og løgtingsmáli nr. 56/1991: Broytingar í løgtingslóg um sjóvinnu.

Málini eru løgd fram av landsstýrinum tann 5. december 1991 og eftir 1. viðgerð 10. december 1991 beind í fiskimálanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt løgtingsmálini nr. 52, 53, 54, 55 og 56 undir einum, hvar málið nr. 55: Føroysk altjóða skipaskrá er høvuðsmálið, og verður eisini álitið í hesum máli høvuðsálitið.

Nevndin hevur havt fund við Kaj P. Mortensen, fulltrúa í landsstýrinum, sum hevur arbeitt við málinum og eisini hevur sjóvinnumál undir sær. Sam Hansen, fulltrúi á Líkningarráð Føroya, hevur eisini verið á fundi til at greiða frá teim skattligu viðurskiftunum.

Undir 1. viðgerð av málunum var nakað rætt um, hvørt málini skuldu fara í skattanevndina ella fiskimálanevndina. Fiskimálanevndin helt tað tí vera rætt at bjóða formanninum í skattanevndin á fund, so hann kundi verða kunnaður um, hvussu málini vórðu viðgjørd í fiskimálanevndini. Vilhelm Johannesen, formaður í skattanevndini, gjørdi so væl at koma á fund.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Olaf Olsen, Frank Davidsen, Jóannes Dalsgaard, Finnbogi Arge) er greiður yvir, at tað kann tykjast sum um, at landskassin missir pening við at seta hesar lógir í gildi, men meirilutin er eisini greiður yvir, at um hetta ikki verður gjørt, so koma farmaskip at fara úr føroyska flotanum, og tá er hesin peningur mistur kortini. Um skipini verða verandi undir føroyskum flaggi, liggur tó nakað av peningi eftir í landinum. Koma onnur skip undir føroyskt flagg, sum nakrir rokna við, so geva tey eyka inntøkur. Líknandi tiltøk eru roynd í okkara grannalondum, og hava tey roynst væl. Tí tekur meirilutin undir við uppskotum landsstýrisins og mælir løgtinginum til at samtykkja tey við undantak av løgtingsmáli nr. 53/1991: Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, har broytingaruppskot er sett fram.

Minnilutin (Asbjørn Joensen) finnur onga orsøk, ella fyrimunir í, at samtykkja uppskot landsstýrisins í fyriliggjandi líki. Talan er um so grundleggjandi broyting í okkara samfelagsbygnaði, tá hugsað verður um skyldur og krøv, at als einki grundalag er fyri, at vit skulu hava hesa fremmandu skipan, havandi í huga hetta veika og lítla samfelag.

Tað arbeiðið, ið gjørt er, og tað, ið komið er fram undir nevndarviðgerðini, gevur onga ábending um nakran fyrimun við skipanini.

Her verður fyri størsta partin talan um stuðul til ávís vinnurekandi her á oyggjunum, í kapping um føroyskan farmaflutning. Av 17 skipum í flotanum, eru tey 7 í utlanlandssigling burturav.

Tað hevur ikki verið møguligt undir nevndarviðgerðini, at fingið nakra kunning um, hvar og hvør kappingin er, ið grundar hesa stuðulsveiting.

Um neyðugt, er møguleiki fyri aðrari skipan enn tað, her verður mælt til. Talan er um eina fremmanda skipan við onkrari minni broyting, ið valla er umtalu verd, tá møguligur lítil samfelagsvinningur, um 4%, ið allur verður at fara til almenna fyrisiting av hesum virksemi.

Annar spurningurin er so, um hetta lítla samfelag, har so fá eru til at bera samfelagsraksturin, er fært fyri at missa hesa stóru samfelagsinntøkuna, ið roknast kann til 50 - 100 milj. kr., tá talan er um 600-700 mans, ið koma at sigla undir DAS og DIS skipanunum.

Tað eigur eisini at viðmerkjast, at hendan stóra upphædd verður tá at leggja á herðarnar á restina av skattgjaldarum, ið valla eru mentir at bera meiri skatt og elvir hetta tá rímiligt til størri lønarkrøv.

Tað er eisini ungfólk okkara, og tá eisini hesir siglandi, ið seta tey stóru krøvini til samfelagságóðan, munandi meiri enn pensjónisturin, ið á hendan hátt kemur at bera samfelagsbyrðar, ið kjarnin í samfelagnum, við lóggávu, verður frítikin fyri, ikki av egnum ávum, men grundað á eina fremmandu skipan.

At rokna við nakrari innflagging til Føroya, tað gevur onga meining, tí um hetta samfelagið er fíggjarliga ført fyri hesum tiltaki, tá er eitthvørt annað samfelag tað sjálvandi eisini.

Tað, at eitthvørt skip í innanlands sigling ikki kann verða við í teirra heimligu skipan, rættvísger ikki føroyska skipan til slíkt endamál.

Tað grundleggjandi má vera, at einhvør nýtari av samfelagságóðanum, hevur skyldu at vera við til at bera byrðarnar.

Helst verður ein broyting tann vegin, at ávirka eina ávísa flyting, men tná hetta tá takast sum rímiligt, og eins lík teim krøvum, sum danir seta fiskimonnum okkara við teirra skipum.

Verður hugsað um tær teknisku broytingarnar í uppskotinum, ella eisini manningarskipanina, er beinleiðis skipað eftir donskum viðurskiftum, so her er eingin orsøk til viðmerking.

Annar táttur er so hann, um ikki meira tørvur er á stuðli innan aðrar partar í samfelagnum, ikki minst tá talan er um rakstur av fiskiskipum. Verður so hugsað um politisku hálkubreytina, tá er tað ógrundað av samgonguni at viðmerkja, at fiskiskip undir ongum umstøðum koma undir hesa skipan.

Minnilutin metir, at alt tilfarið eigur at verða umhugsað av nýggjum, við tí fyri eyga, at møguligur stuðul til hendan føroyska farmaskiparakstur verður at viðgera skip fyri skip, og stuðul veittur, um grundalag er fyri hesum, tá er eisini møguligt at viðgera heilt aðra skattaskipan fyri býti millum skip og manning við atliti til hendan, sum bæði ýtara og nýtara av samfelagságóðanum.

Tí verður sett fram soljóðandi:

Uppskot

til

samtyktar

Landsstýrinum verður heimilað, saman við fíggjarnevnd løgtingsins, at veita stuðul til farmaskiparakstur, um grundarlag er fyri hesum.

103. Grannskoðan av almennum roknskapum

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Menningargrunni Ídnaðarins fyri fíggjarárini 1985 - 91.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:
Menningargrunnur Ídnaðarins varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973. Tað framgongur av áliti ídnaðarnevndarinnnar til lógaruppskotið, at ætlanin við stovnssetanini var at menna ídnað, handverk og tænastufyritøkur í Føroyum við beinleiðis fíggjarligum studningi, ella við lánveiting o.t. "har aðrir lánistovnar ongan stuðul veita". Í § 9 í kunngerðini eru tó ásettar ávísar reglur um m.a., at fløgulán ikki mega fara upp um 90% av fløguútreiðslunum.

Lógin heimilar grunninum at veita:

- uppbyggingar- /útflutningskreditt og - veðhald
- rentustudning
- studning til vørumenning og gransking v. m.
- hjálp til mennan á serligum støðum
- lán og/ella studning til fíggjan og rakstur av nýstovnaðum virkjum og umskipan av verandi.

Sambært viðtøkum grunnsins, eigur nevndin at býta veitingar úr grunninum best møguligt millum ymiskar vinnugreinir, og harumframt at hava í huga neyva samvinnu við landsstýrið og ymsar stovnar til tess at samskipa heildarveitingarnar best møguligt. Viðtøkurnar áseta víðari ávís hámørk fyri tær einstøku veitingarnar í mun til (fløgu) útreiðslurnar, og at øll lán uppá meira enn 1/2 mió. kr. og veðhald størri enn 1 mió. (síðani 1989 ávíkavist 2 og 3 mió. kr.), krevja góð kenning frá landsstýrinum.

Tað fíggjarliga grundarlagið fyri virki grunnsins varð ætlað at vera 1) játtan á fíggjarløgtingslógini, 2) 1 0/00 av árliga umsetninginum hjá øllum ídnaðarvirkjum, handverkara- og tænastufyritøkum og 3) lánsupptøka við landskassaveðhaldi - upprunaliga kr. 2 mió um árið í 5 ár

Tað sæst av omanfyristandandi, at endamál grunnsins frá byrjanini hevur verið sera breitt útgreinað, men viðtøkurnar áseta ongar nærri fyriskipanir viðvíkjandi innanvirkis mannagongd so sum:

- krøv til og viðgerð av umsóknum v.m. í samband við veiting av lánum, veðhaldi, stuðningi v.m.
- internt eftirlit, debitorrøkt, innkrevjing av lánum, risikometing v.m.
- roknakaparhættir / - uppseting o.s.fr.
- førleikakrøv til leiðslu

– – –

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar og grannskoðanarfrágreiðingarnar hjá Menningargrunni Ídnaðarins fyri árini 1985 - 1991 m.a. til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Roknskapargrannskoðanin hevur m.a. ávíst og átalað, at bókhald grunnsins eitt skifti ikki hevur verið nóg trygt, og ikki nýtiligt sum stýringsamboð hjá leiðsluni, at bókføringin hevur verið nóg trygg, og at skrásetingin av skyldum grunnsins ikki hevur verið nóg góð.

Í grannskoðanarfrágreiðingini fyri árið 1991 verður tó gjørt vart við, at hesi viðurskifti nú virka væl.

Løgtingsgrannskoðararnir meta tað vera óheppið, at ein stovnur, ið hevur eitt so breitt endamál, ikki hevur fingið álagt ávís krøv til innanvirkismannagongd. Hesir manglar eru óivað ein orsøk til vánaligu fíggjarviðurskifti grunnsins í dag.

Tað tykist ógreitt, hvussu mannagongdin fyrr hevur verið í samband við avskriving og avsetan til tap uppá skuldarar, og hvussu avsetingar í tiltaks- ella "trygdargrunnin" skulu skiljast.

Í roknskapinum fram til 1987 var trygdargrunnurin at rokna sum ein avseting ímóti tapum, og ikki roknað uppí eginognina.

Í 1988 verður roknskaparuppsetingin broytt, soleiðis at trygdargrunnurin verður roknaður uppí eginognina, so at avsetingar ímóti tapi hvørki ávirka rakstrarúrslit ella støddina á eginognini.

Í 1991 verður so roknskaparuppsetingin aftur broytt soleiðis, at avsetingar uppá tap nú bæði ávirka rakstur og eginogn, við tað at útlánini verða minkað svarandi til avsetingarnar. Somuleiðis verður avsett til effektivar veðhaldsskyldur.

Løgtingsgrannskoðararnir meta, at hesin roknskaparháttur gevur ta mest rættvísandi myndina av rakstri, aktivum, passivum og gjaldføri, og mæla landsstýrinum til at áseta nærri standardiseraðar roknskaparreglur fyri allar teir almennu útlánsgrunnarnar.

Grunnurin hevur í tíðarskeiðnum 1986 - 1991 mist umleið 225 mió. kr. sum avsetingar / tap uppá skuldarar.

Sambært ársroknskapunum hava avsetingar og tap tey 4 árini frá 1986 - 1989 verið umleið 40 mió. kr., meðan avsetingar og tap tey seinastu 2 árini hava verið umleið 185 mió. kr.

Løgtingsgrannskoðararnir meta, at fleiri avskrivingar og avsetingar áttu at verið gjørdar áðrenn 1990, um so var, at sami metingar- og roknskaparháttur sum í 1991 varð nýttur.

Samanumtikið hava løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar:

1. Sum nevnt omanfyri, var ásett í § 4 í lógini, at ein av fíggingarkeldum grunnsins skuldi vera eitt gjald uppá 1 0/00 av árliga umsetninginum hjá øllum fdnaðarvirkjum, handverkara- og tænastufyritøkum. Av praktiskum grundum hevur landsstýrið mett, at gjaldið ikki skuldi innkrevjast.
   Lógin og reglugerðin er tó ongantíð broytt hesum viðvíkjandi.
   Løgtingsgrannskoðararnir átala, at hetta ikki er gjørt, og mæla til, at álagt verður landsstýrinum at kann hesi viðurskifti aftur.
2. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at mannagongdin í samband við viðgerð av umsóknum, innanvirkis eftirlit, debitorrøkt, risikometing v.m. ikki hevur verið nóg væl skipað.
3. Løgtingsgrannskoðararnir heita á landsstýrið um at geva eina frágreiðing um, hvussu keyp, umbygging og fígging av bygninginum - uppá falt uml. 60 mió. kr. - har grunnurin eigur 1/3, er farin fram.
4. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at punkt 8.1 og 8.2 í kunngerðini, har ásett er at býta veitingarnar best møguligt ímillum ymsar vinnugreinir í neyvari samvinnu við landsstýrið, ikki hevur virkað nóg væl, m.a. við tað at avgerðargrundarlagið ikki hevur verið nóg gott.
5. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at virksemið hjá Menningargrunninum og samvinnan við Føroya Fdnaðargrunn, Búskaparráðið, Menningarstovuna og landsstýrið, til tess at tryggja ein skynsaman og samskipaðan stuðuls- og útlánspolitikk til frama fyri menning og umskipan av fdnaði, handverks- og tænastufyritøkum, ikki hevur verið nóg væl skipað øll árini.
6. Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, at lóg/viðtøkur verða broyttar, so at nærri krøv til viðgerð av umsóknum, innanvirkis eftirlit, debitorrøkt, risikometing v.m. verða ásett.
7. Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrinum til at áseta nærri krøv til uppsetan av roknskapinum og til roknskaparhættir fyri tilíkar stovnar/grunnar.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 103/2 1991: Grannskoðan av almennum roknskapum.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Føroya Ídnaðargrunni fyri fíggjarárini 1986- 90.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Roknskapirnir hjá Føroya Ídnaðargrunni eru ikki áður gjøgnumgingnir av løgtingsgrannskoðarunum, við tí grundgeving, at grunnurin ikki hevur fingið árligar játtanir á fíggjarlógini.

Eftirsum talan er um ein eksteman landskassagrunn við stórum útlánsvirksemi, og sum frá landskassanum hevur fingið stovnsfæ, lán og veðhald, hava løgtingsgrannskoðararnir mett, at rættast var at gjøgnumganga roknskapirnar hjá grunninum tey seinastu 5 árini og leggja hesar fyri tingið.

Føroya Ídnaðargrunnur varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 68 frá 24. september 1970.

Viðtøkurnar fyri grunnin vórðu ásettar av landsstýrinum við kunngerð nr. 7 frá 28. apríl 1971.

Endamálið við grunninum er at veita lán til fløgur í ídnaðar- og handilsfyritøkur við tí í hyggju at stuðla umskipan til broytt marknaðarviðurskifti.

Av viðmerkingunum sæst, at orsøkin upprunaliga var handilsligu viðurskifti Føroya við EFTA.

Ásettar eru fleiri reglur, ið hava til endamál at tryggja, at ansa verður eftir at tapini verða so lítil sum møguligt.

T.d. verður ásett í § 7: "at lánið ikkki má vera hægri enn neiðiligt og neyðugt er eftir eini meting av møguleikunum hjá virkinum at bera seg og lívføri tess", og í § 11 í kunngerðitu verður ásett, at virkir, sum fáa lán koma undir: "roknskaparligt og tekniskt eftirlit".

Lógin, reglugerðin og viðmerkingarnar leggja soleiðis upp til ein varnan og tryggan útlánspolitikk, soleiðis at vandin fyri tapi av høvuðsstólinum verður so lítil sum møguligt.

Grunnurin fekk upprunaliga eitt stovnsfæ uppá 4,5 mió. kr., og heimild at taka lán upp til 20 mió. kr. Landsstýrið hevur við kunngerðum hækkað hetta loft stigvíst til 300 mió. kr., til loftið varð avtikið í 1989, sama ár, sum ein lóg varð samtykt, ið heimilaði landsstýrinum at veðhalda upp til 40 mió. kr.

Burtursæð frá stovnsfænum hevur grunnurin ikki beinleiðis fingið játtað pening á fíggjarlógini.

Grunnurin hevur tó fingið "bilig" landskassalán ír:

Íløgugrunni Ídnaðarins
- Íleggingargrunninum fyri Føroyar
- Oljugrunninum

Hesi lán vóru 31/ 12 1990 falt uml. 125 mió. kr.

Harumframt hevur grunnurin upptikið uttanlandslán uppá ca. 100 mió. kr., sum landskassin veðheldur fyri.

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar og grannskoðanarfrágreiðingarnar hjá Føroya Ídnaðargrunni fyri árini 1986 - 1990 m.a. til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Roknskapargrannskoðanin hevur ikki gjørt vart við serlig átaluverd viðurskifti.

Í sambandi við gjøgnumgongdina av roknskapunum hava løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar:

1. Í ársroknskapunum verður nýttur ein roknskaparsiður viðvíkjandi avsetan av tapi uppá skuldarar, har avsetingarnar minka um eginognina, men ikki ávirka rakstrarúrslitið. T.d. vísir ársroknskapurin fyri 1990 eitt tap uppá 1,7 mió. kr. Um so var, at avsetingarnar vórðu førdar yvir raksturin, hevði tapið verið 16 - 17 mió. kr.

   Sambært § 16 í kunngerðini skal tiltaksgrunnur stovnast at standa ímóti tapum av útlánum eftir nærri reglur, sum landsstýrið ásetir.

   Landsstýrið hevur ikki ásett nærri reglur, og mælt verður til, at hetta verður gjørt í samband við, at landsstýrið ásetir nærri reglur fyri uppsetan av roknskapum, og til roknskaparhættir fyri tílíkar stovnar/grunnar.

2. Eisini verður mælt til, at lóg/viðtøkur verða endurskoðaðar, so at nærri krøv til viðgerð av umsóknum, innanvirkis eftirlit, debittorrøkt, risikometing v.m. verða ásett.

3. Eginognin er í 1990 minkað við umleið 17 mió. kr. til uml. 35 mió. kr. Henda lutfalsliga lítla eginogn, samanhildið við vaksandi eftirstøðum og tapum ger, at støðan hjá grunninum skjótt kann gerast ivasom.

4. Av roknskapunum framgongur, at morarenturnar í 1990 vóru umleið 5 mió. kr., dupult so nógv sum í 1988. Grunnurin hevur tó upplýst, at skeivt heiti er nýtt, og at tær veruligu morarenturnar í 1990 vóru ca. 6 - 700 t. kr.

5. Eftirstøðurnar viðvíkjandi falnum avdráttum og rentum eru vaksnar til knappar 50 mió. kr., nærum ein tvífalding síðani 1988. Grunnurin hevur í hesum sambandi nevnt, at ein trupulleiki er, at tántakararnir lata Ídnaðargrunnin koma í aðru røð, tá gjaldast skal, og at trupult er at fáa roknskaparligar upplýsingar.

6. Grunnurin hevur upplýst, at umleið 90% av útlánum eru tryggjað við 1. veðrætti. Serliga, har talan er um veðrætt í rakstrargøgnum, er veðrættarstøðan tó ivasom í lleiri førum.

7. Sambært likviditetsætlan hjá grunninum kann hesin skjótt koma í gjaldføristrupulleikar, um so er, at ein eins lítil partur og higartil av rentum og falnum avdráttum verður goldin framyvir.

8. Mælt verður til, at landsstýrið í samstarvi við grunnin tryggjar framtíðar gjaldføri, og at rentumarginalurin í hesum viðfangi eisini verður endurskoðaður.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 103/3 1991: Grannskoðan av almennum roknskapum.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Føroya Jarðarráð fyri fíggjarárini 1985-90 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgransknarunum:

Endamál:

Føroya Jarðarráð hevur 3 høvuðsendamál:
Fyrisiting av landsjørðini
Umsiting av jarðargrunninum
Umsiting av studningsskipanum

Lógargrundarlag:

Lógargrundarlagið fyri virki ráðsins eru tvær lógir:
- Løgtingslóg nr. 59 frá 9. mei 1988 um landsjørð.
- Ríkislóg nr. 174 frá 25. mei 1937 "om jordbrugets fremme", við tilhoyrandi "reglement nr. 120 for landbrugsrådet nedsat i henhold til lov nr. 174 af 24. mai 1937 om jordbrugets fremme."

Løgtingslógin ásetur ein karm um fyrisitingina av landsjørðini og var ætlað sum 1. partur av tillagingini av tí gomlu lógini frá 1937. Løgtingslógin umfatar ein part av ríkislógini, nevniliga §§ 1-7 og §§ 10-27. Sostatt eru §§ 8-9 og §§ 28-61 í ríkislógini framvegis í gildi.

Sambært løgtingslógini er álagt landsstýrinum við kunngerð at áseta nærri reglur fyri m.a.:

- Jarðaráðið sjálvt.
- Ásetan av leigu.
- Framleiðsluskyldu.
- Endurgjald til fráfarandi festara fyri egnar fløgur.

Uppskot um reglur eru gjørdar, men eru ikki liðugt viðgjørdar og samtyktar av landsstýrinum enn. Nevnast kann, at eini 40 festaraskifti úskil ikki eru avgreidd.

Í tí partinum av donsku lógini, sum framvegis er í gildi, eru ásettar reglur um umsiting av jarðargrunninum, herundir keyp av jørð og lánveiting úr grunninum og um studningsskipanir.

Fíggjarviðurskifti:

Fíggjarliga grundarlagið undir virki ráðsins eru játtanir á fíggjarlógini og søla av jørð:

- studningur til jarðargrunnin (fløgu- og rentustudningur),
- ymsir studningar, ið ráðið *umsitur* (játtanir og útgjaldingar vístar undir passivum/serkonti)
- søla av festijørð, har inntøkur og útgjaldingar framganga av einari serligari festikonti, ið er partur av eginognini.

Niðanfyri eru vístar tær samlaðu upphæddirnar, ið jarðarráðið hevur fingið ávíst úr landskassanum til jarðargrunnin og til ymsar studningsskipanir frá 1.4.1985 til 31.12.1990, og harumframt eru inntøkurnar fyri sølu av jørð vístar fyri sama tíðarskeið:

(mió. kr.)

Studningur	1985	1986	1987	1988	1989	1990	falt
Íløgustudn.	3,8	5,2	6,0	6,0	6,0	4,6	31,6
Rentustudn.	1,7	2,3	2,3	2,3	2,2	2,2	13,0
Til grunnin	5,5	7,5	8,3	8,3	8,2	6,8	44,6
Neytahald	6,8	10,2	11,5	13,0	13,0	13,0	67,5
Kjøt/egg	1,3	1,8	2,5	2,9	3,2	2,8	14,5
Stráfóður	0,7	0,8	0,8	0,8	0,9	0,7	4,7
Nýdyrkan	1,5	2,0	2,0	2,0	2,8	2,2	12,5
Húsdjóraaling	0,2	0,4	0,4	0,4	0,4	0,3	2,1
Súrhoyggjabrúk	0,4	0,4	0,4	0,4	0,4	0,3	2,3
Studn. falt	16,4	23,1	25,9	27,8	28,9	26,1	148,2
Søla av jørð v.m.	6,6	9,0	15,2	13,5	17,3	8,9	70,5
Samanlagt	23,0	32,1	41,1	41,3	46,2	35,0	218,7

Tær ymsu studningsskipanirnar úr landskassanum hetta tíðarskeiðið eru falt 148,2 mió. kr. Av hesum hevur jarðargrunnurin sjálvur fingið 44,6 mió. kr. meðan góðar 100 mió. kr. eru ymiskir studningar til bøndurnar, ið jarðarráðið umsitur.

Festijørð

Í sama tíðarskeiði er festijørð seld fyri umleið 70 mió. kr. Søla av festijørðini verður bókað á serliga festikonto. Í § 9 í ríkislógini stendur, at nærri reglur skulu ásetast um festikonti, men hesar reglur eru onguntíð ásettar. Til tey ymsu festini eru í tíðarskeiðnum nýttar knappar 31 mió. kr. av festikontoini, ið pr. 31.12.1990 var uppá uml. 74 mió. kr.

Útlánsvirksemi:

Jarðarráðið kann veita lán til ymisk endamál sambært kap. V í ríkislógini.

Í lógini og í reglement nr. 120 eru ásett krøv til lántakararnar, og til hvørji skjøl og tilfar, ið skulu fylgja við eini umsókn, m.a. kostnaðar- og fíggjarætlan.

Í ríkislógini og reglugerðini eru fleiri ótíðarhóskandi reglur og ásetingar. Nevnast kann, at jarðarráðið sambært lógini ikki uttan loyvi frá "ministeren for land-

brug og fiskeri" kan læna út meira enn 70.000 kr. í einum kalendarári, og í reglugerðini er ásett, at tey einstøku lánini skulu vera innanfyri eitt lánivirði uppá 15.000 kr. Hesar ásetingar verða tó ikki hildnar.

Burtursæð frá lánum til kommunur, har rentan er 8% p.a., er rentan á útlánum 3% p.a. Tey fyrstu 5 árini eru lánini til fjós, Mjólkarvirki og sethús avdráttarfrí, og afturgjaldstíðin er uml. 37 ár. Annars er avdráttartíðin úr 5 uppí 25 ár fyri tey ymisku lánini.

1. apríl 1985 vóru útlánini uml. 88 mió. kr. Pr. 31. desember 1990 vóru útlánini vaksin til uml. 149 mió. kr., t.v.s. ein nettovøkstur uppá góðar 60 mió. kr.

Útlánini pr. 31.12.1991 kunnu útgreinast til hesi endamál:

	(mió. kr.)
Fjós	85
Seyðahús	11
Mjólkarvirkið	11
Traktorar og maskinur	10
Sethús	6
Kommunur	6
Vakstrarhús	5
Rakstrarlán	4
Grísagarðurin	3
Onnur lán	8
Samanlagt	149

Eftirstøðurnar sambært átroknskapin 1990 vóru umleið 12 mió. kr. Lánini fella til gjaldingar 1.12., og fleiri lántakarar hava avtalur um mótrokning í útgoldnum studningi, so "veruligu" eftirstøðurnar eru væl minni. Mett verður tó, at einar 15 mió. kr. av útlánunum ikki koma innaftur. Talan er her um ikki rentablar fløgur, serliga til fjós/mjólkarframleiðslu.

Gjaldføri/lántøka

Til tess at tryggja gjaldførið viðvíkjandi útlánsvirksemi grunnsins, har talan ofta er um stórar einstakar fløgur, eru upptikin lán, m.a. eitt uttanlandslán og lán frá tryggingini. Pr. 31.12.1990 hevði grunnurin innistandandi uml. 28 mió. kr., meðan lánini vóru uml. 20 mió. kr.

Renta og kurstap av lánum vóru í 1990 uml. 14% p.a., meðan rentan á innistandandi peningi var góð 3% p.a.

Roknskapargrannskoðanin

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar og grannskoðanarfrágreiðingarnar hjá Føroya Jarðarráð fyri árini 1985 til 1990 m.a. til tess at vissa seg um at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Burtursæð frá, at heitt hevur verið á ráðið um at gera meira við at innkrevja eftirstøðurnar, hevur roknskapargrannskoðanin ikki gjørt vart við serlig átaluverd viðurskifti.

Viðmerkingar:

Í sambandi við gjøgnumgongdina av roknskapunum hava løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar:

1. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrið ikki enn hevur kunngjørt reglugerðirnar sambært løgtingslóg nr. 59 frá 9. mei 1988 um landsjørð.

2. Mælt verður til, at nærri reglur verða ásettar viðvíkjandi sølu av festijørð v.m. og nýtslu av festikonto.

3. Mælt verður til at lógararbeiðið viðvíkjandi landsjørðini verður gjørt liðugt, soleiðis at restin av fíkislógini og reglugerðini frá 1937 verður viðgjørd og tillagað nútíðar viðurskifti.

4. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at jarðarráðið ikki í øllum førum hevur víst neyðugt varsemi og tryggjað, at lán bert verða veitt til rentablar íløgur.

5. Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, at gjaldførið hjá grunninum verður tryggjað øðrvísi, so tað slepst undan lágtrentaðum innistandandi og høgtrentaðum útlánum.

6. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at ráðið, hóast tað er ásett í galdandi reglugerð, ikki gevur ársfrágreiðing um virki sítt.

7. Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrinum til, at áseta nærri reglur um roknskaparprinsippir fyri m.a. avskriving, avseting móti tapi uppá skuldarar og kurstap, og at hetta verður gjørt í samband við, at ásettar verða nærri reglur fyri uppsetan av ársroknskapi og til roknskaparhættir fyri tílíkar stovnar/grunnar.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 103/4 1991: Grannskoðan av almennum roknskapum.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Vakstrarhúsgrunninum fyri fíggjarárini 1987-90 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Endamál:
Vakstrarhúsgrunnurin hevur til endamáls at veita stuðul til:

a. lán og/ella studning til nýbygging og ískoytisløgu til vakstrarhús og grønmetisframleiðslu uttandura,
b. rakstur av nýstovnaðum vakstrarhúsum og grønmetisframleiðslu uttandura,
c. studning til orkusparandi tiltøk í vakstrarhúsum,
d. hjálp til marknaðarføring,
e. hjálp til gransking og vørumenning.

Lógargrundarlag
Virki grunnsins er ikki ásett við lóg, men landsstýrið hevur í november 1985 gjørt eina interna reglugerð fyri grunnin, og grunnurin verður fyrisitin av Føroya Jarðarráð.

Fíggjarviðurskifti
Fíggjarliga støði grunnsins eru játtanir á fíggjarlógini.

Síðani 1987 hevur grunnurin gjørt serstakan ársroknskap fyri virki sítt.

Grunnurin hevur sambært ársroknskapirnar fingið játtað falt 6,5 mió. kr. úr landskassanum. Av hesum hevur grunnurin játtað studning uppá góðar 0,5 mió. kr. Útlánini pr. 31.12.1990 eru uml. 4 mió. kr. og grunnurin hevur uml. 2,3 mió. kr. innistandandi í peningastovni.

Eftirstøður

Av tí samlaða útlænta peningi uppá 4 mió. kr. pr. 31.12.1990, eru eftirstøðurnar 635 t. kr. Størstiparturin av útlánunum eru til eitt vakstrarbús, ið ikki ber seg, og roknast má við, at grunnurin missir meginpartin av hesum útláni. Lán til hini vakstrarhúsini eru so at siga øll veitt beinleiðis úr jarðargrunninum, áðrenn vakstrarhúsgrunnurin varð stovnsettur.

Framtíðarútlit

Sum nú er, verður ikki roknað við, at fíggjarligt grundarlag er fyri fleiri vakstrarhúsum.

Roknskapargrannskoðanin

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar og grannskoðanar frágreiðingarnar hjá Vakstrarhúsgrunninum fyri árini 1987-1990 m.a. til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá grunninum.

Roknskapargrannskoðanin hevur ikki gjørt vart við serlig átaluverd viðurskifti.

Viðmerkingar

Í sambandi við gjøgnumgongdina av roknskapunum hava løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar:

1. Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrinum til at endurskoða reglugerðina fyri grunnin, og í tí sambandi serliga endurskoða endamálsorðingina og ásetta nærri reglur og krøv til viðgerð av lániumsóknum.

2. Í øðrum lagi mæla løgtingsgrannskoðararnir til, at umhugsað verður at avtaka grunnin vegna væntandi fíggjarligt grundarlag fyri fleiri vakstrarhúsum.

3. Løgtingsgrannskoðararnir mæla Jarðarráðnum til stórt fíggjarligt umhugsni og varsemi viðvíkjandi útlánsvirksemi grunnsins framyvir.

4. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at tøki peningur grunnsins verður ov lágt rentaður.

5. Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrinum til at ásetta nærri reglur um roknskaparprinsippir fyri m.a. avskriving og avseting móti tapi uppá skuldarar, og at hetta verður gjørt í sambandi við, at ásettar verða nærri reglur fyri uppsetan av ársroknskapi og til roknskaparhættir fyri tílíkar stovnar/grunnar.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 103/5 1991: Grannskoðan av almennum roknskapum.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Brandvenjingarstøðini við Áir fyri fíggjarárið 1987-91 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:
Í seinasta áliti mæltu løgtingsgrannskoðararnir til,at stovnurin fíggjarliga átti at hvíla í sær sjálvum, og at tryggingin átti at átaka sær tað gjald, sum landskassin hevði borið.

Samlaði árligi studningurin til stovnin er vaksin úr 339 t. kr. í 1987 til 961 t. kr. í 1991. Landskassin hevur í tíðarskeiðnum 1987-1991 veitt 1,9 mió. kr. í studningi, og tryggingin hevur síðani 1988 veitt 1,7 mió. kr.

Løgtingsgrannskoðararnir hefta seg við, at árligu inntøkurnar hjá stovninum sjálvum eru minkaðar úr 644 t. kr. í 1987 niður í 358 t. kr. í 1991.

Løgtingsgrannskoðararnir hava annars gjøgnumgingið roknskapirnar og grannskoðanarfrágreiðingarnar hjá Brandvenjingarstøðini við Áir fyri árini 1987 til 1991 m.a. til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 103/6 1991: Grannskoðan av almennum roknskapum.

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Føroyska Happadráttinum fyri fíggjarárini 1987-90 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:
Virksemið hjá Føroyska Happadráttinum hevur seinastu 3 árini verið á sama støði. Selt er árliga fyri umr. 4,5 mió. kr., rakstrarvinningurin hevur ligið um 450 t. kr. og fær ÍSF 1/3 og grunnurin ætlaður brekaðum 2/3.

Í seinasta áliti mæltu løgtingsgrannskoðararnir til eina nútímansgerð av eftirliti og roknskapi, soleiðis at umsitingin av happadráttinum kundi gerast bíligari.

Rakstrarútreiðslurnar í 1990 vóru falt uml. 950 t. kr. Rakstrarútreiðslurnar excl. 10% samsýning til seljarar vóru í 1986 366 t. kr. og í 1990 494 t. kr., so raksturin er lutfalsliga ikki vorðin bíligari.

Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at útreiðslurnar til *eftirlit og roknskaparhjálp* í 1986 vóru 237 t. kr. Hesar útreiðslur vóru í 1990 267 t. kr.

Løgtingsgrannskoðararnir hava annars gjøgnumgingið roknskapin hjá Føroyska Happadráttinum fyri árini 1987-1990 og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá happadráttinum eru kannað og í lagi.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 103/7 1991: Grannskoðan av almennum roknskapum.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Føroya Landskassa fyri fíggjarárini 1985-88 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Endamál við grannskoðanini:

Arbeiðsuppgávurnar hjá løgtingsgrannskoðarunum eru ásettar í løgtingslóg nr. 16. frá 26. apríl 1965. Samanbært lógini er ásett, at:

§ 3.

Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum hvørt ár roknskapir og ansa eftir, at allar inntøkur og útreiðslur eru komnar við inn í roknskapin, og harafturat ongin útreiðsla er hildin, sum ikki hevur heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

Løgtingsgrannskoðararnir skulu hava eygun eftir, at tað hevur verið forsvarliga húsað í fyrisitingini av miðlum landsins og virkjum tess.

Løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja roknskap landskassans, roknskapir hjá stovnum landskassans, ið hava sjálvstøðugan roknskap og roknskapir hjá stovn-

um landsins, ið landsstýrið annars fyrisitur, fyri løgtingið til avgerðar við frágreiðing og uppskotum.

Í reglugerðini fyri løgtingsgrannskoðararnar frá 27. mars 1985 er ásett, at í seinasta lagi 16 mánaðir aftaná, at løgtingsgrannskoðararnir hava fingið ein roknskap, verða teir at geva løgtinginum álit um hann.

Sum nevnt skulu løgtingsgrannskoðararnir sambært § 3 "hava eygunni eftir, at tað hevur verið forsvarliga húsað í fyrisitingini av landsins miðlum og virkjum tess".

Umframt játtanar- og heimildareftirlit er endamálið við grannskoðanini hjá løgtingsgrannskoðarunum sostatt eisini at meta um, í hvønn mun ein stovnur ella partar av fyrisitingini á ávísum økjum ella sum heild hava loyst sínar uppgávur á ein sparnan hátt, og um úrslitini svara til endamálið og fortreytirnar fyri játtanini á fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. – Hesin parturin av grannskoðanini verður vanliga nevndur *fyrisitingargrannskoðan*, og í hesum sambandi verða vanliga hugtøknini sparsemi, produktivitetur og effektivitetur havd í huga.

Samanumtikið kann sigast, at løgtingsgrannskoðarunum er álagt at grannskoða út frá sokallaðum *góðum almennum grannskoðanarsiði*.

2. Roknskapargrannskoðanin:

Sum grundarlag fyri arbeiðinum hjá løgtingsgrannskoðarunum er í lógini ásett:

§ 4.

Fyri beinleikan av tí sum í roknskapinum stendur, hava løgtingsgrannskoðararnir rætt til at taka váttanir o.t. frá roknskapargrannskoðanini sum nóg gott prógv.

Sambært § 8 í lógini stílar fíggjarnevndin fyri roknskapargrannskoðanini.

Roknskapargrannskoðanin av landskassans roknskapum er býtt upp soleiðis, at tann landskassabókføring, sum verður førd og umsitin av Føroya Gjaldstovu, verður grannskoðað av internu grannskoðanardeild landskassans, undir eftirliti av løgtingsins statsautoriseraða grannskoðara, sambært reglugerð ásett av Føroya Landsstýri 9/6 1976.

Viðvíkjandi grannskoðanini av teim sosialu útreiðslunum, har talan eru um ríkisendurgjald, er gjørd serlig avtala millum Socialministeriet og Fíggjarnevnd Føroya Løgtings dagfest 15/10 1991, ið áleggur grannskoðanardeild landskassans at grannskoða hetta øki eftir serligum reglum.

Teir stovnar, sum hava sjálvstøðuga bókføring og roknskap, koma ikki undir grannskoðan av grannskoðanardeildini, men verða grannskoðaðir av eksternum,

privatum grannskoðarum.

Reglugerð landsstýrisins frá 1976 fyri internu grannskoðanardeild landskassans ásetir ikki fyrisitingargrannskoðan/grannskoðan eftir góðum almennum grannskoðanarsiði.

Fyri ta eksternu privatu grannskoðanina av almennum stovnum annars, og fyri løgtingsins statsautoriseraða grannskoðara eru ikki fyriskipaðar serligar grannskoðanarreglur, og ikki áset, at grannskoðanin skal fara fram eftir góðum almennum grannskoðanarsiði.

Bert tá talan er um grannskoðan av tí partinum av teim sosialu útreiðslunum, har talan er um ríkisendurgjald, er ásett, at grannskoðanin skal fara fram eftir góðum almennum grannskoðanarsiði, og víst verður sum vanligt er í tí sambandinum til § 3 í tí donsku landsgrannskoðanarlógini.

Vísandi til omanfyristandandi má tað sigast at vera sera óheppið, at løgtingsgrannskoðararnir, sum grundarlag fyri virki teirra, mega byggja á eina roknskapargrannskoðan, har tað ikki í øllum førum eru ásett grannskoðanarkrøv, ið svara til tað støðið, tey krøv og ta ábyrgd, ið er áløgd løgtingsgrannskoðarunum mótvegis løgtinginum, sambært lógini.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt hesi viðurskifti, og við skrivi dagfest 4. februar 1992 heitt á løgtingsgrannskoðararnar um at viðgera hetta mál sum skjótast og innan 15. mars 1992 at lata álit til formansskap løgtingsins.

Løgtingsgrannskoðararnir arbeiða við einum lógaruppskoti, ið er ætlað at vera ein partur av álitinum. Roknað verður við, at arbeiðið verður liðugt til komandi tingsetu.

Eisini hevur tað verið darvandi fyri gjøgnumgongdina av teim almennu roknskapunum, at so at siga eingi krøv eru ásett til roknskaparuppsetan, roknskaparprinsippir, útgreiningar, frágreiðingar v.m.

2. Viðmerkingar í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum:

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum viðvíkjandi grannskoðan av roknskapum hjá Føroya Landskassa, dagfest 2/4 1987 varð gjørt vart við fleiri átaluverd viðurskifti:

– a: Ongin eykafíggjarlóg.

Átalað varð, at ongin eykafíggjarlóg fyriliggur síðani fíggjarárið 1982/83.

Í dag má ásannast, at ikki fyrr enn í 1991 legði landsstýrið fram eina eykafíggjarlóg.

– b: Meirnýutsla uttan heimild.

Gjørt varð vart við, at tað ikki ber til, at ein fíggjarlóg verður gjørd og at eyka-

útreiðslurnar verða bornar av óformaliseraðum yvirtrekkum. M.a. varð nevnt, at í hesum tíðarskeiði eru stór yvirtrekk framd viðvíkjandi um- og nýbygging á ymiskum økjum, og varð hetta harðliga átalað.

– c: Ov lítið avsett í grunnar.

Átalað varð, at alt ov lítið varð sett av til grunnin til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum og til grunnin fyri effektivum veðhaldum.

Í roknskapunum fyri 1987 og 1988 vóru partar av rakstraryvirskotinum avsettir í hesar grunnar.

– d: Veðhaldsútlegg.

Átalað varð harðliga, at lítið og einki hendi við teimum útleggum, sum landskassin hevur haft, og at fleiri av feløgunum vóru farin á húsagang fyri langt síðani. Heitt varð tí á landsstýrið at skunda undir eina upprudding í hesum útleggum og annars fáa kravt inn tað sum møguligt er at fáa inn.

Í dag má ásannast, at hóast hesa átalu og áheitan, er alt ov lítið gjørt á hesum øki.

– e: Onnur viðurskifti.

Av øðrum viðurskiftum, ið gjørt varð vart við kann nevnast, at mælt varð til eina samskipan av EDV-nýtsluni. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at hóast tað er settur ein EDV-ráðgevi, er als ikki nóg mikið gjørt á hesum øki.

3. Viðmerkingar frá roknskapargrannskoðanini.

Í sambandi við gjøgnumgongd av landskassaroknskapunum fyri fíggjarárini 1985-1988 hava løgtingsgrannskoðararnir viðgjørt revisiónsfrágreiðingarnar frá internu grannskoðanardeild landskassans og løgtingsins statsautoriseraða grannskoðara.

Generellar viðmerkingar:

Gjørt verður vart við, at spurningurin um heimild til at rinda út um játtaninar á fíggjarlógini ikki verður loystur, og at hetta er í stríð við § 21 í løgtingslóg nr. 1 frá 1948 um stýringsskipan Føroya í sermálum:

Áðrenn fíggjarlóg ella bráfeingis fíggjarlóg er samtykt á Løgtingi, má skattur ikki verða kravdur.

Eingin útreiðsla má verða goldin, ið ikki er heimlað í fíggjarlóg ella aðrari galdandi heimildarlóg. Tær játtanir, ið eru ásettar í fíggjarlóg ella aðrari heimildarlóg, mega bert verða goldnar í tí fíggjarári, sum fíggjarlógin er galdandi. Tó kann landsstýrið, í tíðarskeiði inntil 3 mánaðir aftaná fíggjarárið er endað, ávísa pening, ið er játtaður á fíggjarlógini fyri árið ið fór.

Viðvíkjandi virðismeting av aktivum verður gjørt vart við, at landsstýrið eigur

at taka støðu til og fáa bókført neyðturvuligar avskrivingar, har sum feløg eru farin á húsagang ella eru strikað í partafelagsskrásetingini, her er m.a. talan um veðhaldstillegg, virðisbrøv og tollkreditt.

Viðvíkjandi *skráseting av veðhaldsskyldum*, ger gjaldstovan øll árini vart við at landskassans roknskapur viðvíkjandi veðhaldsskyldum ikki er eftirfarandi á øllum økjum m.a. orsakað av at allar upplýsingar ikki koma gjaldstovuni í hendi.

Somuleiðis ger gjaldstovan hesi árini upp, hvussu stórur partur av hesum veðhaldsskyldum er fallin til gjaldingar, men ikki hókaður í roknskapinum. Ultimo hesi árini er her talan um uppbæddir ímillum 110 og 160 mió. kr., har landskassin sum sjálvskuldnarakautionistur hevur fingið áheitan frá peningastovni um at gjalda. Í flestu førum er sostatt reelt talan um stuttfreistaða skuld, ið verður høgt rentað, í nógvum førum við trotaprovisión.

Í nógvum førum svarar landsstýrið ikki fyrispurningum frá roknskapargrannskoðanini og tekur sær ikki tykni av viðmerkingum og áheitanum.

Serligar viðmerkingar tey einstøku árini:

Roknskapargrannskoðanin hevur herumframt í revisiónsfrágreiðingunum til landskassaroknskapirnar fyri tey einstøku árini, gjørt viðmerkingar um ymisk viðurskifti. Niðanfyristandandi verður gjørt vart við nakrar av hesum viðmerkingum fyri tey einstøku árini sær.

1985

Gjørt verður vart við, at bert fá havnaverk avrokna lestagjøld.

Átalað verður at Vaktar- og Bjargingartænastan, fíggjar keyp av "Spógvanum" yvir konto "ymiskar inntøkur". Upplýst varð fyri landsstýrinum, at kostnaðurin var 500 t. kr., og árligu rakstrarútreiðslurnar mettar til 200 t. kr. Landsstýrið samtykkir at geva loyvi at keypa bátin. Málið varð ikki lagt fyri fíggjarnevndina. Kostnaðurin bleiv næstan 1 mió. kr., og í 1986 bað stovnurin um 955 t. kr. til rakstur av bátinum fyri 1987.

Gjørt verður vart við, at tollvaldið hevur upplýst, at teir ikki hava manning til at kanna um kunngerðin um tollkredit verður fylgd, viðvíkjandi ásetingini um at vørumóttakarin ikki hevur loyvi at pakka vørurnar út, fyrr enn gjaldstovan hevur fingið øll skjølini.

1986

Hóast 2 áheitanir hevur grannskoðanin ikki fingið fullgott svar frá Líkningarráðnum um gjøldini til Elektron samsvara tí, ið er ásett í sáttmálanum millum

Elektron og landsstýrið.

Landsstýrið hevur ikki svarað uppá fyrispurning viðvíkjandi meirnýtslu til ítrótt.

Gjørt verður vart við, at útgoldnar vórðu 3,6 mió. kr. til P/F Harenga í Gøtu, áðrenn løgtingið samtykti lógina um endurgjald í sambandi við avtøku av sjúkum smolti og fyribyrging v.m., har landsstýrinum varð heimilað at nýta 4 mió. kr. til hetta endamál.

1987

Tá eykajáttanirnar frá fíggjarnevndini uppá 38 mió. kr. verða tiknar við, verða bruttomeirútreiðslurnar 92 mió. kr. viðvíkjandi rakstri.

Meirnýtslan úr grunninum til berghol og brúgvagerð var 28 mió. kr., og samlaða meirnýtslan hjá Landsverkfrøðinginum var í 1987 góðar 34 mió. kr.

Á almannaøkinum er meirnýtslan 40 mió. kr., og stavar frá broytingum í takstum, frá nýggjum lógum um m.a. barnastyrk, eykaviðbót til avlamispensionistar, serveiting til pensionistar v.fl., vøkstri í útreiðslunum til alkoholikaraviðgerð og stovnsetan av vardum verkstøðum.

Fyri 1/4 1986 til og við 1988 hevur verið innkravt kr. 100 ov lítið í sýnsgjøldum pr. bil, í alt mett til 4,7 mió. kr., vegna ov vánaligt samskifti millum gjaldstovuna og landsstýrið, ið broytir kunngerðirnar.

Roknskapargrannskoðanin undrast á, at Bileftirlitið, ið hevur havt henda miss, ikki hevur gjørt vart við seg.

Viðvíkjandi grunnum verður nevnt, at við verandi skipan eru játtanir í grunn ein heimild at brúka pening uttanum tær árligu fíggjarlógirnar. Gjørt verður vart við, at uppsetingin av grunnum í roknskapinum er torskild og bókað sum aktiv. passiv, byggiroknskapir og innistandandi í bankum, og at tað eru avsettar í alt 290 mió. kr. ov lítið til nýtslu úr grunnunum.

Viðvíkjandi landskassaveðhaldum eftir lóg nr. 13/67 um veðhald til prioritetslán til fiskiskip upp til 50 mió. kr., verður gjørt vart við, at við árslok 1986 veðhelt landskassin fyri 59,5 mió. kr. og við árslok 1987 fyri 90,7 mió. kr.

1988

Rakstrarroknskapurin vísir eitt yvirskot uppá 32,8 mió. kr. Um landskassagrunnarnir vóru tiknir við í raksturin broytist rakstraryvirskotið til eitt hall uppá 191 mió. kr. ella 212 mió. kr., um útreiðslurnar til tunnil undir Vestmannasund, uppá 21 mió. kr., vórðu lagdar aftrat.

Tá eykajáttanirnar verða tiknar við, verður bruttomeirnýtslan á rakstrinum 202 mió. kr. Við meirnýtsluni í grunnunum uppá 65 mió. kr. og bygging uttan heimild

verður samlaða bruttomeirnýtslan í 1988 272 mió. kr. Tá eru slíkar byggingar sum Royndarstøðin og Bileftirlitið í Havn, sum eru vorðnar væl dýrari enn upprunaliga mett, ikki tiknar við.

Saman við meirnýtsluni hjá grunnunum var samlaða bruttomeirnýtslan á grein 13, samferðslumál 102 mió. kr.

Á almannaøkinum er meirnýtslan 43 mió. kr.

Í grannskoðanarfrágreiningini fyri almannaøkið, verður gjørt vart við grundleggjandi trupulleikar í samband við grannskoðan av hesum øki, m.a. viðvíkjandi manning og arbeiðsbýti. Ein partur av hesum trupulleikum er loystur í samband við, at serlig grannskoðanaravtala er gjørd ímillum fíggjarnevndina og Socialministeriet, samstundis sum grannskoðanardeildin nú hevur fingið støtri játtan. Annars varð gjørt vart við, at rokniskapareftirlitið á Almannastovuni á fleiri økjum ikki var nóg trygt, og at fleiri feilir viðvíkjandi útrokning av ríkisendurgjaldi vóru ávístir.

Í eini frágreiðing til tingið dagfest 31. august 1988 siga løgtingsgrannskoðararnir, at hvørki landsgrannskoðanin ella gjaldstovan hava verið nøgd við ávísingar hjá landsstýrismanninum í almannamálum. Sagt varð, at talan var um tilvildarligar útgjaldingar av kontoini fyri alkoholmisnýtslu, menningarhjálp og landsstýrinum at ráða yvir, og mælt varð til, at útgjaldingar vegna nevndu konti vóru steðgaðar.

Stórt tal av ávísingum vóru farnar út av kontoini "landsstýrinum at ráða yvir", uttan umsókn var komin til landsstýrið, og stórar upphæddir vóru farnar út av grunninum fyri alkoholmisnýtslu til gjaldkomna skuld hjá vanligum viðskiftafólki á matstovu, eins og talið á sosialum veitingum úr landskassanum meira gekk eftir geografiskum enn sosialum tørvi.

Formansskapur løgtingsins heitti álvarsliga á landsstýrið, um at bera so í handi, at tað als ikki skuldi kunna lata seg gera, at brúka almennan pening í heimildarloysi og tilvildarliga, og at reglugerðir tí viðvíkjandi máttu fáast at virka sum skjótast.

Landsstýrið undirskrivaði 7/7-1988 sáttmála um keyp av ferðaseðlamaskinum frá BUSCOM uttan fíggjarheimild. Fíggjarnevndin játtaði á fundi 18/7-1989 landsstýrinum at gjalda frestandi 5 mió. kr.

Í tí sambandinum heitti fíggjarnevndin á løgtingsgrannskoðararnar um, saman við landsstýrinum, at gera greiðar reglur um og leggja fastar karmar fyri fylgjurnar av embætisførslu, og koma við uppskoti til løgtingslóg hesum viðvíkjandi til komandi ólavssøkutingsetu.

Hetta lógaruppskot er til viðgerðar í rattarnevndini saman við lógaruppskot-

unum um fyrisiting, almenn innlit og løgtingsins umboðsmann.

Viðvíkjandi fíggjarlógarviðgerðini verður viðmerkt, at bert rakstrarætlanin verður viðgjørd, meðan ognar- og kapitalkontoin verður tilvildarliga sett upp.

Gjørt verður vart við, at tríggjar umbyggingar eru farnar fram uttan fíggjarheimild, talan er um toll-, gjald- og almannastovuna, falt 7,4 mió. kr.

Gjørt verður vart við,at bókingarhátturin viðvíkjandi grunnunum, kurstapi og mótrokning ikki geva eina rættvísandi mynd av rentuinntøkum og -útreiðslum.

Víst verður á, at landskassin við árslok 1988 bevði lagt út 3 mió. kr. vegna kassakredit hjá Sjónvarpinum, sum landsstýrið við heimild í lóg nr. 77/1982 hevði veðhildið fyri, hóast lógin ikki gevur heimild at taka lán til rakstur.

Viðvíkjandi leiguinntøkum verður víst til skriv frá gjaldstovuni til landsstýrið, har nevnt verður at lítið skil er á innkrevjingini.

Viðvíkjandi millumrokningum, verður víst á, at talan er um nógvar konti, sum skuldu verið uppgjørdar fyri nógvum árum síðani.

Viðvíkjandi leasing hevur grannskoðanin, uttan at fáa svar, biðið um landsstýrisins støðu til, um leasing er at sammeta við lán.

Viðmerkingar:

Í samband við gjøgnumgongdina av roknskapunum hava løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar.

1. Løgtingsgrannskoðararnir ásanna, at teir sjálvir ikki hava verið nóg aktivir á grannskoðanarøkinum seinastu árini, og áttu at fylgt tí arbeiðnum betri upp í gjørt varð. Tískil liggur nógv arbeiði hjá nevndini niðurfyri.

2. Átalað verður, at øll sitandi landsstýri síðani fíggjarárið 1982/83 ikki hava yvirhildið grein 21 í stýrisskipanarlógini, og ikki tikið stig til at fáa hesi viðurskifti í rættlag, hóast nógvar átalur og áheitanir. Eisini verður átalað, at landsstýrið í nógvum førum als ikki svarar fyrispurningum ella tekur sær tykni av viðmerkingum og áheitanum frá roknskapargrannskoðanini og frá løgtingsgrannskoðarunum og harvið eisini frá løgtinginum.

3. Fegnast verður um tey stig, sum eru tikin til at bøta um mannagongdina viðvíkjandi fíggjarviðurskiftunum, so sum ger av eykafíggjarlóg í 1991 um heimild til lán/nýtslu (løgtingsmál nr. 39/1991).

4. Átalað verður, at landsstýrið ikki hevur sýnt neyðugt fíggjarligt umhugsni viðvíkjandi útláns- og veðhaldsvirksemi landsins. Í alt ov stóran mun hevur landsstýrið umsitið givin lán og veðhald, uttan at fylgja nóg væl við og taka neyðug stig mótvegis lántakarum, íð ikki halda sínar skyldur. Hetta hevur

munandi økt um landskassans tap og viðført stórar meirrentur, og verið til skaða fyri og forða eini menning av tí partinum av vinnuni, ið hevur roynt at hildið sínar skyldur og bygt á eitt meira umhugsað grundarlag.

5. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at ein stórur partur av aktivunum, ið standa í landskassaroknskapinum, einki virði hava, og áleggja landsstýrinum at taka stig til eina upprudding á hesum øki.

6. Viðvíkjandi landskassaroknskapinum verður álagt landsstýrinum at áseta grundleggjandi roknskaparprinsippir á týðandi økjum, so sum: avskrivingar/avsetingar móti tapi, virðismeting, veðbaldsskyldur, kurstap/-vinning, bólking av status o.s.fr., og at hetta verður gjørt í samband við, at tað eisini verða ásettar nærri reglur fyri uppsetan av ársroknskapi hjá teim almennu stovnunum/grunnunum.

7. Mælt verður landsstýrinum til, sum skjótast, at taka stig til ein samskipaðan edv-politikk, har hugsað verður fleiri ár fram, og at støða í tí sambandinum verður tikin til, hvussu framtíðar roknskaparhald og fíggjarstýring eigur at skipast, og hvussu bygnaðurin skal broytast.

8. Mælt verður landsstýrinum til, at endurskoða og broyta kunngerðina um tollkreditt, so tapini á hesum øki framyvir gerast minni. Í hesum sambandi verður mælt til, at heimild verður givin til at nokta at útflýggja vørur fyrr enn gjaldkomin skuld til tollvaldið er goldin. Í sambandi við komandi MVG-skipan, verður mælt til stórt varsemi og umhugsni viðvíkjandi kreditti og innkrevjing.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 103/8 1991: Grannskoðan av almennum roknskapum.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Menningarstovuni fyri fíggj-

arárini 1989, 1990 og 1991 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Endamál:

Menningarstovan, ið er ein sjálvstøðugur stovnur undir landsstýrinum, er sett á stovn sambært løgtingslóg nr. 46 frá 1987. Endamálið við Menningarstovuni er at menna føroyskan ídnað, handverk og tænastuvirksemi, m.a. við at ráðgeva innan løkni, búskap, útflutningi av vørum, skeiðvirksemi v.m.

Viðmerkingar:

Játtanin á fíggjarlógini til Menningarstovuna var í 1989 2,6 mió. kr., men í 1990 varð játtanin lækkað til 1,9 mió. kr. Í 1991 var játtanin 2,0 mió. kr. Rakstrarroknskapur Menningarstuvunar vísir í 1989 eitt yvirskot uppá 285 t. kr., í 1990 uppá 116,2 t. kr. og í 1991 vísir rakstrarroknskapurin eitt hall uppá 62,3 t. kr.

Í seinasta áliti varð mælt til, at landsstýrið avgjørdi, hvussu rentuinntøkan av innistandandi peningi viðvíkjandi projektum skuldi viðgerast. Hesar rentur verða sum er, bókaðar sum aðrar inntøkur hjá Menningarstovuni.

Eisini fýltust løgtingsgrannskoðararnir á, at Menningarstovan flytir játtanir sínar á fíggjarlógini á sjálvstøðugar konti, tí hetta kann gerast fordømi fyri aðrar stovnar, ið náttúrliga bóka sínar inntøkur og útreiðslur í landskassaroknskapin.

Landsstýrið verður biðið um at taka eina prinsippavgerð til henda spurning.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 103/9 1991: Grannskoðan av almennum roknskapum.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Mentunargrunni Føroya Løgtings fyri fíggjarárini 1987-90 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Endamál:

Mentunargrunnur Føroya Løgtings hevur til endamáls at styðja starv fyri føroy-

skum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum.
Viðmerkingar:

Løgtingsgrannskoðaradeildin hevur í skrivi til grunnin mælt til at gera ávísar broytingar í verandi roknskaparuppsetan. Í skrivi til landsstýrið hevur grannskoðanin sett spurningar viðvíkjandi samanhanginum millum grunnin og landskassaroknskapin, samanborið við upprunaligu løgtingssamtyktina frá 1947.

Í roknskaparárinum 1990 er tann broyting gjørd í mun til árini frammanundan, at virkispeningurin, sum áður lá uttanfyri, nú er lagdur inn í landskassaroknskapin.

Álit

í

Løgtingsmáli nr. 103/10 1991: Grannskoðan av almennum roknskapum.

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá *Íleggingargrunninum fyri Føroyar* fyri íggjarárini 1986-1990 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar og grannskoðanarfrágreiðingarnar frá roknskapargrannskoðanini, til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá grunninum.

Roknskapurin fyri Íleggingargrunnin hevur ikki fyrr verið lagdur fyri tingið. Talan er um tann fyrrverandi "Investeringsfond for Færøerne" (60-milliónagrunnin), sum varð stovnaður við ríkislóg nr. 28/1964.

Grunnurin bleiv yvirtikin av heimastýrinum í 1976. Umframt omanfyrinevndu ríkislóg við seinni broytingum, er ásett ein reglugerð um stýrið og virksemið hjá grunninum.

Stýrið verður samansett við 13 limum valdum av landsstýrinum og 2 limum valdum av løgtinginum. Avgerðir hjá stýrinum eru endaligar.

Um útlánsvirksemið hjá grunninum er í reglugerðini í § 5 ásett:

"Lán úr grunninum skulu einamest veitast til almennar fleggingar, sum út frá einum samfelagsligum sjónarmiði gagna framtøkumøguleikunum hjá føroyska

samfelagnum.

2. stk. Grunnurin kann geva lán til stovnar, sum veita lán ella annan stuðul til privatar, almennar og hálvalmennar vinnufyritøkur."

Sambært § 8 verður lánivirksemið umsitið av Landsbanka Føroya. Við tað at landsbankin ikki hevur virkað, hevur gjaldstovan, eftir áheitan frá landsstýrinum, havt roknskaparhald og lániumsitingina um hendi.

Sambært roknskapin fyri 1990 hevði grunnurin eina eginogn uppá 560 mió. kr. Grunnurin hevði innistandandi í peningastovnum slakar 200 mió. kr., og hevur veitt góðar 360 mió. kr. í lánum, har teir størstu lántakaramir eru SEV, Føroya Ídnaðargrunnur og Telefonverkið við ávíkavist 229, 83 og 47 mió. kr.

Viðmerkingar:


1. Átalað verður at landsstýrið ikki hevur valt sínar limir í stýrið, sum ikki hevur verið saman í 1991.

2. Átalað verður, at innistandandi peningur bert er vorðin rentaður 6%, síðani 1991 tó 7% p.a. Mælt verður til, at funnið verður fram til eina skipan, so grunnurin í størri mun fær rentuágóða av yvirskotsgjaldførinum.

3. Mælt verður til, at endamálið við grunninum verður endurskoðað, út frá verandi búskaparligu støðu Føroya.

4. Mælt verður til, at reglugerðin verður endurskoðað.

RED: 10 X



Nasjonalbibliote


Nasjonalbiblioteket

National Library of Norway

Rana Division

N-8607 Mo i Rana

Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 1



LØGTINGS-TIDINDI

1991

Innihaldsyvirlit

Bind B

Skjol til logtingstíðindi 1991

SKJAL	LØGTINGS MÁLS NR.		Bls.
Skjal I :	2	Uppskot til logtingsfiggjarlóg 1992 og álit figgjarnevndarinnar í málinum	2
Skjal II:	3	Miðnám	69
Skjal III:	5	Tilmæli frá Útnorðurráðnum	86
Skjal IV:	26	Kapitaleftirlon domi 1-3	110
Skjal V	31	Tilfar í samband við uppskot til logtingslóg um minstulon, dagstudning og minstaforvinning	114
Skjal VI:	38	Eykafiggjarlogtingslóg 1991	128
Skjal VII:	39	Orðalisti viðv. altjóða lánimarknaðinum	160
Skjal VIII:	44	Væntandi útreiðslur til almannamál í 1992 býtt á kommunur	180
Skjal IX:	45	Væntandi útreiðslur til almannamál og landsvegagjald í 1992 býtt á kommunur	182
Skjal X:	57	Yvirlit yvirlandskassagrunnar og roknskaparyvirlit v.v. landskassagrunnum 21.11.1991	184
Skjal XI:	61	Stactis – fundur í NAFO 17-20. februar 1992. Schedule I. Quota table for 1992.	209
Skjal XII:	63	Tilmæli frá Útnorðurráðnum	215
Skjal XIII:	66	Agreed record of conclusions of licence arrangements between the Faroe Islands and the European economic comunity in 1992.	224
Skjal XIV:	67	Uppskot til lóg um fólkanovn	230
Skjal XV:	68	Protokoll mellem Norske og Færøyske myndighedter i Bergen den 12.- 13. desember 1991 om gjensidige fiskerettigheder i 1992.	246
Skjal XVI:	76	Kortsskjal	252
Skjal XVII:	77	Álit um arbeiðsloysistrygging, dagfest 18. des 1991.	254
Skjal XVIII	84	Álit viðkaðu rættarnevndarinnar í málinum	314
Skjal XIX:	85	Viðmerkingar landslæknans 31.03.1992 til uppskot um broyting í lógini um fosturtoku.	426
Skjal XX:	87	Ymisk ummæli viðvikjandi lógini um framleiðsluábyrgd	431
Skjal XXI:	91	Forslag til lov om folketingsvalg på Færoerne	437
Skjal XXII:	92	Ummæli frá Kommunufelagnum og Sjúkrahússtjóranum	501
Skjal XXIII:	93	Ummæli frá Blaðmannafelagnum, Sjónvarpi Foroya, Útvarpi Foroya, Foroya Kommunufelag og Sjúkrahússtjóranum	504
Skjal XXIV:	99	Roknskapir fyri trygdargrunning fyri avreiðingar og lonir 1988 og 1990	517
Skjal XXV:	109	Viðmerkingar til "Uppskot til lóg um maskinskúlaútbúgvingar" dagfestar 3. februar 1992, og aftale mellem Landsskúlafyrisitingin og Sofartsstyrelsen	520
Skjal XXVI:	123	Avtala millum Estonia og Danmark/ Foroyar um fiskirættindi	523
Skjal XXVII:	124	Avtala millum Letland og Danmark/ Foroyar um fiskirættindi	533
Skjal XXVIII:	125	Avtala millum Litavia og Danmark/ Foroyar um fiskirættindi	540
Skjal XXIX:	134	Frágreiðing frá nevnd sett at gera uppskot til nýggja lóg um Foroya Landsskjalasavn	552
Skjal XXX:	140	Skjol til fuglaveiðulógaruppskot	600
Skjal XXXI:	164	Memorandum of understanding of Agreement on Cooperation in Research, Conservation an Management of Marine Mammals in the North Atlantic	605

Skjal I

Tórshavn 29.08.91
J. Nr.

Tygara skriv

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 002/1991: Fíggjarløgtingslóg 1992.

POSTRÚM 64 - FR 110 TÓRSHAVN - TLF. 11080 - TELEX 81310 - FAX 14942

UPPSKOT TIL FIGGJARLØGTINGSLØG 1992

RAKSTRAR- OG ILØGUVIRLIT		RAKSTUR	ILØGUR
1 Inntøkuskattir	Indkomstskatter	1090000	
2 Toll-, nýtslu- og framleiðslugjøld	Told-, forbrugs- og prod.afg.	831000	
3 Onnur gjøld	Andre afgifter	2450	
4 Inntøkur av spæli	Indtægter ved spil	600	
5 Rentur vm.	Renter m.v.	-163000	
6 Landsfyritøkur	Landsvirksomheder	19523	
7 Partur av avlopi tjóðbankans	Andel af nat.bankens overskud	20000	
8 Gjøld frá donskum ríkiskassanum	Overførsler fra den danske stat	789000	
9 Ymsar inntøkur	Diverse indtægter	1205	
INNTØKUR TILSAMANS	IALT	2590778	
10 Løgtingið	Lagtinget	15970	
					25367	19523
	NÝÚTLÁN OG AVDRÁTTIR	NYUDLÅN				
333025	St. lán t. fiski- og farmaskip	Tilsk. lån t. fiske- og fragtskibe			10000	5000
323103	Lánagr. til íbróttaranlegg	Lånefond til idrætsanlæg			0	0
14953 313152	Gr. til útbúgving, nettoútlán	Uddannelsesfond, nettoudlån			8000	8000
	Lán til heilsumiðstøðir	Lån til sundhedscentre				3000
363693	Kommunalur lánsgrunnur	Kommunal lånefond			0	0
	NÝÚTLÁN TILSAMANS	NYUDLÅN IALT			18000	16000
	AVDRÁTTIR AV UTTANLANDA LÁNI	AFDRAG PÅ UDENLANDSKE LÅN			31400	105500

AFTURGJ. AV BUNDNARI UPPSP.	TILBAGEBET. AF BUNDEN OPSPARING	0	95000
AFTURGJ. VEKSILSSKULD TJÓÐB.			100000
AVDRÁTTIR AV FØR. LÁNUM			29000
NÝÚTLÁN OG AVDR. GJALDF. FRÁ(	NYUDLÅN OG AFDRAG, LIKV. TRÆK	49400	328500
INNGJ. AV AVDR. GJALDF.TILG.	INDB. PÅ LÅN, FORØG. AF LIKV.	30800	39000
KAPITALPOSTAR TILSAMANS	KAPITALPOSTER IALT	-43987	-309023
BRT. Í GJALDF., BRUTTOLÁNITØR.	ÆNDR. I LIKV., LÅNEBEHOV	-396410	-400644

Minnilutin (Flemming Mikkelsen og Finnbogi Arge) førir fram:

Við 1. viðgerð av tingmáli nr. 002/1991: Figgjarløgtingslóg 1992 segði framsøgumaður Sambandsfloksins hesi orð:

"Ynski Sambandsfloksins er, at inntøkusiðan á figgjarlógini verður varisligari mett, at tær almennu útreiðslurnar lækka og at fiskivinnan ikki skal bera byrðarnar einsamøll. Teir almennu stovnarnir skulu taka lut í sparingunum á sama støði sum fiskivinnan.Hetta skal ikki skiljast á tann hátt ,at Sambandsflokkurin gongur ímóti niðurskurði av studninginum til fiskivinnuna, studningurin má minka, men tað er ikki annað enn rimuligt, at tað almenna, sum ongantíð fer at verða fært fyri at seta gongd á nakað samfelag, í minsta lagi verður skorið niður í sama mun sum fiskivinnan.Sambandsflokkurin metir tað harumframt vera neyðugt at minka um iløgurnar, sum fyri ein stóran part eru óproduktivar.

Tað finnast góðar kreftir í samgonguni, sum hava forstáilsi fyri okkara sjónarmiðum, men sum av partapolitiskum- og samgonguorsøkum eru læstar fastar. Sambandsflokkurin fer igjøgnum figgjarnevndina at royna at fáa ein dialog við hesar kreftir. Kunnu vit ávirka figgjarlógaruppskotið soleiðis sum her er lýst, er tað ikki óhugsandi, at vit kunnu ganga saman um eitt felags álit. Hetta hevði verið eitt sera positivt signal til teir, sum skulu figgja okkum igjøgnum kreppuna. Tað hevði samstundis eisini verið eitt prógv fyri, at innbjóðingin frá løgmanni um samstarv við andstøðuna ikki bert vóru tóm orð."

Minnilutin hevur í figgjarnevndini roynt at ávirka meirilutan til at smíða eitt álit, sum broytti upprunahallið á figgjarlógaruppskotinum hjá landsstýrinum (88 mió kr) til at javnviga uttan halli og sostatt uttan tørv fyri øktari lántøku. Meirilutin hevur ikki latið seg ávirkað av sjónarmiðum minnilutans, men meirilutin hevur ístaðin økt um hallið á figgjarlógini við 2 miliónum til 90 mió kr. Meirilutin tók ikki av tilboðnum, tá minnilutin bjóðaði seg til at møta meirilutanum á hálvari leið.

Hóast samgongan í meirilutaálitinum ásannar, hvussu bráneyðugt tað er, at figgjarlógin kemur at hanga saman uttan lántøku, so hevur samgongan ikki styrki ella vilja til at taka hetta stig nú, hóast vitanina um, at tað verður truplari at fáa figgjarlógina fyri 1993 at klára seg uttan lántøku vegna økjandi rentubyrðu. Um toll- og skattainntøkurnar verða minni í komandi ári enn meirilutin metir (hóast eykafiggjarlógin júst hevur staðfest, at inntøkurnar verða 52,8 mió kr minni enn ætlað í 1991, so hækkar meirilutin inntøkurnar við 12 mió kr í mun til tað, sum upprunaliga varð budgeterað í 1991) so verður í 1993 neyðugt við sera ógvusligum niðurskurðum á figgjarlógini. Minnilutin harmast

um, at meirilutin í fíggjarnevndini velur at skjóta trupulleikarnar út í framtíðina ístaðin fyri at royna at loysa trupulleikarnar her og nú meðan tað enn ber til at loysa teir á ein sømiligan hátt.

Minnilutin setti sær fyri at smíða eitt broytingaruppskot til fíggjarløgtingslógina fyri 1992. Hesar treytir vórðu settar:

1) Fíggjarlógin skal geva eitt avlop, eisini aftaná iløguútreiðslur, sostatt verður ikki neyðugt við øktari lántøku.
2) Fíggjarlógin skal meta inntøkur landskassans lægri enn landsstýrið ger
3) Fíggjarlógin skal seta rentuútreiðslurnar hægri enn landsstýrið ger
4) Fiskivinnan skal ikki bera byrðarnar einsamøll og skal tí ikki skerast so nógv niður sum landsstýrið ætlar.

Uppskot minnilutans hevur við sær, at íløgurnar lækka við 60,2 mió kr. Tær størstu lækkingarnar eru innan samferðsluna: 31,3 mió kr. Íløgurnar í infrastrukturin eru stórt sæð óproduktivar og bøta lítið og einki um evni samfelagsins at rinda aftur uttanlandsskuldina. Íløgurnar mugu ikki steðga heilt upp, men tær mugu framyvir serliga gerast innan fiskivinnu, alivinnu og útflutningsfremjandi ídnað.

Raksturin verður skorin niður við 57 mió kr. Hetta hóast fiskivinnan fær 13,300 mió kr meira enn landsstýrið hevur tillutað henni. Grein 10 verður óbroytt, somuleiðis grein14 (Útbúgving og gransking) og grein 19 (Almannamál). Samferðslan fær 11 mió kr minni til raksturin , íroknað raksturin hjá Landsverkfrøðinginum.Á grein 18 er serliga skorið niður á rentustudning, tollendurgjald og farmaflutningsendurgjald til skipabygging, við núverandi útliti tykjast kontoirnar at vera høgt settar. Tann triðja høvuðsbroytingin er tann, at Húsalánsgrunnurin ikki fær tær 10 mió kr, sum landsstýrið ætlar. Annars eru aðrar smærri broytingar: konto fyri politisk upplýsing verður tikin av, bíðilønin hjá teim fólkavaldu verður lækkað osfr.

Minnilutin (Finnbogi Arge og Flemming Mikkelsen) setir fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot meirilutans

RAKSTRAR - OG ÍLØGUYVIRLIT

1. Inntøkuskattir	Indtægtsskat	1.079.000	
2. Toll-, nýtslu og framl. g.	Told-, forbrugs- og prod. afg.	824.000	
3. Onnur gjøld	Andre afgifter	2.450	
4. Inntøkur av spæli	Indtægter ved spil	600	
5.Rentur v.m.	Renter m.v.	-170.000	
6. Landsfyritøkur	Landsvirksomheder	19.523	
7 Partur av avlopi tjóðb.	Andel af nat. bankens overskuld	20.000	
8. Gjøld frá danska ríkisk.	Betaling fra den danske stat	789.000	
9. Ymsar inntøkur	Diverse indtægter	2.205	
INNTØKUR TILSAMANS	I ALT	2.566.778	
10. Løgtingið	Lagtinget	16.470	
11. Meginfyrisiting	Centraladministration	143.380	1000
Uttanríkismál	Udenrigsanliggender	2.809	
12. Heilsumál	Sundhedsvæsen	340.276	24.300
13. Samferðsla	Kommunikation	134.250	150.500
14. Útbúgving og gransking	Uddannelses og Forskning	366.655	23.000
15. Mentan	Kultur	41.430	10.800
16. Fiskivinna, sigling o.t.	Fiskeri, søfart m.v.	338.077	6.000
17. Landbúnaður	Landbrug	31.871	
18. Vinnulív og arbeiðs. a.	Erhverv og arbejdsmarked i.øvr.	68.287	200
19. Almannamál v.m.	Socialvæsen m.v.	758.349	13.300
Íbúðarmál	Boligpolitiske anliggender	2.200	
20. Pensiónsútreiðlur	Pensionsudgifter	10.740	
21. Effektivar veðhaldsb.	Effektive garantiforpligtelser	70.000	
22. Aðrar útreiðslur	Andre Udgifter	2.035	
26. Ymsar ognarútreiðslur	Diveres ejendomsudgifter	700	
27. Óvissar útreiðslur	Uvisse udgifter	10.000	

ÚTREIÐSLUR TILSAMANSUDGIFTER I ALT		2.375.749	229.100

SAMANDRÁTTUR	SAMMENDRAG	
Inntøkur tilsamans	Indtægter ialt	2.566.778
Rakstrarútreiðslur	Driftsudgifter ialt	2.337.529
Rakstrarúrslit	Driftsresultat	229.249
Íløgur/iløgustudningar	Investeringer/investeringstilskud	229.100
Úrslit aftaná íløguútr.	Resultat efter investeringer	+ 149

INNTØKUR:

§ 1. Inntøkuskattir

1201 Vanligur Skattur

Verður lækkað við 11.000.000 kr. til 1.044.000.000 kr. 5-0.

Greinin verður sett til 1.079.000.000 kr.

§ 2. Toll, nýtslu og framl. gjøld

2017 Tollgjøld

Verður lækkað við 7.000.000 kr. til 638.000.000 kr. 5-0

Greinin verður sett til 824.000.000 kr.

§ 5. Rentur v.m.

5105 Rentuinntøkur

Verður lækkað við 2.000.000 kr. til 58.000.000 kr.

5207 Renturútreiðslur 5-0.

Verður sett upp við 5.000.000 kr. til 225.000.000 kr.

Greinin verður sett til 170.000.000 kr.

§ 11 Landsfyrisitingin

11015 Løgmaður og landsstýri

Verður lækkað við 250.000 kr. til 3.500.000 kr.

11053 Landsskrivstovan

Verður lækkað við 300.000 kr. til 14.500.000 kr.

11072 Fyrireiking av umhvørvisfyrisiting

Verður lækkað við 400.000 kr. til 0 kr.

11086 Sjóvinnuráð

Verður lækkað við 200.000 kr. til 700.000 kr.

Norðurl. sam. ráðharraráð v.m.

Verður lækkað við 300.000 kr. og sett til 500.000 kr.

11257 Líkningarráðið
Verður lækkað við 300.000 kr. til 32.711.000 kr.
11276 Skrásetingareftirlit
Verður lækkað við 100.000 kr. til 200.000 kr.
11307 Landsfólkayvirlit
Verður lækkað við 100.000 kr. til 891.000 kr.
11359 Almannastovan
Verður lækkað við 200.000 kr. til 15.195.000 kr.
11409 Landsskúlafyrisitingin:
Verður lækkað við 200.000 kr. til 10.500.000 kr.
11414 Stuðulsstovan
Verður lækkað við kr. 100.000 til 907.000 kr.
11433 Fyrireiking av nýggjari avgjaldsskipan:
Verður lækkað við 200.000 kr. til 4.500.000 kr.
11447 Føroya Tollstova:
Verður lækkað við 200.000 kr. til 14.105.000 kr.
11604 Valuta og prísráð
Verður lækkað við 200.000 kr. til 1.154.000 kr.
11709 Hagstovan:
Verður lækkað við 200.000 kr. til 4.249.000 kr.
11758 Ferða- og dagpen. innan- og uttanlanda
Verður lækkað við 500.000 kr. til 3.600.000 kr.
11851 Ognin Tinganes
Verður lækkað við 200.000 kr. til 2.270.000 kr.
11898 Útskifting og matrikulstova
Verður lækkað við 200.000 kr. til 6.237.000 kr.
11901 Landsverkfrøðingsskrivstovan
Verður lækkað við 820.000 kr. til 8.600.000 kr.

5.0

Viðmerkingar til § 11, rakstur:

Landsverkfrøðingurin eigur at minka um fyrisitingina. Partar av stovninum kunnu privatiserast.

§ 11 Íløgur

11953 Umbygging, Tinganes
Verður lækkað við 500.000 kr. til 1.000.000 kr.

§ 11. Uttanríkismál
11948 Menningarhjálp

Verður lækkað við 2.000.000 kr. til 1.000.000 kr.

Samanumtikið um § 11:

Raksturin: verður lækkaður við 4.970.000 kr. til 143.380.000 kr.

Íløgurnar: verða lækkaðar við 500.000 kr. til 1.000.000 kr.

Uttanríkismál: verður lækkað við 2.000.000 kr. til 2.809.000 kr.

Greinin verður lækkað við 7.470.000 kr. og sett til 147.189.000 kr. íroknað uttanríkismál.

§ 12 Heilsumál:

12012 Hjálpitólarmiðstøð

Verður lækkað við 100.000 kr. til 2.342.000 kr.

12109 Landssjúkrahúsið

Verður lækkað við 2.000.000 kr. til 209.500.000kr.

12202 Klaksvíkar Sjúkrahús

Verður lækkað við 200.000 kr. til 39.500.000 kr.

12304 Suðuroyar Sjúkrahús

Verður lækkað við 200.000 kr. til 24.300.000 kr.

§ 12 Íløgur

12983-303808: Klaksvíkar Sjúkrahús, umb./nýb.

Verður lækkað við 200.000 kr. til 800.000 kr.

12983-303816: Suðuroyar Sjúkrahús, nýbygging

Verður lækkað við 4.000.000 kr. til 16.000.000 kr

12983: Landssjúkrahúsið, umvæling

Verður lækkað við 2.000.000 kr. til 4.000.000 kr.

12983: Landssjúkrahúsið, umbygging

Verður lækkað við 800.000 kr. til 1.200.000 kr.

12983 Sjúkrasystraskúlin

Verður lækkað við 500.000 kr. til 500.000 kr.

12983-303911 Heilsumiðstøðir

Verður lækkað við kr. 600.000 til 1.200.000 kr.

4 - 0.

Samanumtikið um § 12:

Raksturin: verður skerdur við	2.500.000 kr.
og verður settur til	340.276.000 kr.
Íløgurnar: verður minkaður við	8.100.000 kr.
og settar til	24.300.000 kr.
Greinin verður sett til	364.576.000 kr.

§13 Samferðsla og samskifti:

13251 Tyrlutænastan
Verður minkað við 500.000 kr. til 4.500.000 kr.
13265: Strandfaraskip Landsins
Verður lækkað við 1.500.000 kr. til 35.500.000 kr.
13279 Bygdaleiðir
Verður lækkað við 1.000.000 kr. til 19.000.000 kr.

13089: Postverkið
Verður minkað við 1.000.000 kr. til 12.000.000 kr.
13094: Rakstur av veganeti v.m.
Verður minkað við 2.000.000 kr. til 21.500.000 kr.
13056: Fyritøkur og útgerð v.m.
Verður minkað við 5.000.00 kr. til 40.000.000 kr.

§13 Íløgur
13018: Nýggir vegir og brýr v.m.
Verður minkað við 10.000.000 kr. til 30.000.000 kr.
13061: Berghol og brýr
Verður lækkað við 7.000.000 kr. til 23.000.000 kr.
13023: Havnagerð
Verður minkað við 10.000.000 kr. til 60.000.000 kr.
13037: Lendingar
Verður minkað við 3.300.000 kr. til 23.000.000 kr.
13042: Flogferðsla
Verður minkað við 500.000 kr. til 2.000.000 kr.
13075 Stuðul til komm. asfalt.
Verður lækkað við 500.000 kr. til 5.000.000 kr.
Samanumtikið um § 13:

Raksturin: verður minkaður við	11.000.000 kr.
og settur til	134.250.000 kr.
Íløgumar verða minkaðar við	31.300.000 kr.
og settar til	150.500.000 kr.
Greinin verður sett til	284.750.000 kr.

§ 14 Útbúgving og gransking
Íløgur:
313302 Fólkaskúlin, nýb.
Verður lækkað við 1.500.000 kr. til 7.500.000 kr.
313319 Studentaskúli í Hoydølum, umb.
Verður lækkað við 200.000 kr. til 1.800.000 kr.

313343 Studentaskúli og HF á Kambsdali
Verður lækkað við 1.500.000 kr. til 7.500.000 kr.
313567 Maskinskúli, nýb.
Verður lækkað við 1.000.000 kr. til 5.000.000 kr.
313804 Miðnámsskúli í Suðuroy
Verður lækkað við 500.000 kr. til 1.000.000 kr.
Samanumtikið um § 14:
Ìløgurnar verða minkaðar við 4.700.000 kr. til 23.000.000 kr.
Greinin: verður sett til 389.655.000 kr.

5-0

§ 15 Mentan
15615 Sjónvarp Føroya
Verður minkað við 500.000 kr. til 3.000.000 kr.
15629 Mentunnargrunnur
Verður minkað við 300.000 kr. til 1.500.000 kr.
15703 Náttúrugripasavnið
Verður minkað við 200.000 kr. til 3.300.000 kr.
15895 Tónleikur og sangur
Verður minkað við 100.000 kr. til 400.000 kr.
15907-323037 Leikpallur Føroya
Verður minkað við kr. 200.000 til 1.500.000 kr.
§ 15 Íløgur
Tjóðsavn, Náttúrugripasavn nýb.
Verður tikið burtur 400.000 kr. og sett til 0 kr.
323236 Listasavn Føroya
Verður lækkað við 500.000 kr. til 1.000 000 kr.
333181 Studn. til bygdahús
Verður lækkað við 1.000.000 kr. til 3.000.000 kr.
Savn í Hoyvík
Verður lækkað við 100.000 kr. til 300.000 kr.
323348 Landsskjalasavnið, nýb.
Verður lækkað við 1.000.000 kr. og sett til 0 kr.
Sjónvarp Føroya, nýb./umb.
Verður lækkað við 500.000 kr. til 500.000 kr.
Studningur til íbróttarbygging
Verður lækkað við 1.000.000 kr. til 3.000.000 kr.
323937 Graslíkisvøllir
Verður lækkað við 900.000 kr. til 900.000 kr.

5-0

Samanumtikið um § 15:
Raksturin: Er lækkaður við 1.300.000 kr. til 41.430 .000 kr.

Íløgumar: Eru minkaðar við 5.400.000 til 10.800.000 kr.
Greinin: Verður sett til 52.230.000 kr.

§ 16 Fiskivinna

16403: Royndir innan havbúnað
Verður minkað við 600.000 kr til 3.000.000.kr.

16488: Praktiskar fiskiroyndir
Verður lækkað við 1.100.000 kr. til 4.000.000 kr.
16904-333408 Trydargrunnur alivinnunnar
Verður lækkað við 2.000.000 kr. til 0 kr.
16436 Felagskonto sí álit
Verður sett upp við 17.000.000 kr. til 290.000.000 kr.

§ 16 Íløgur:
16994-333909 Fiskaaling við Áir nýb.
Verður lækkað við 3.000.000 kr. til 6.000.000 kr.
Samanumtikið um § 16:
Raksturin: Verður settur upp við 13.300.000 til 338.077.000kr.
Íløgumar: Verða minkaðar við 3.000.000 kr. til 6.000.000 kr.
Greinin: Verður sett upp við 10.300.000 kr. til 344.077.000 kr.

5-0

§ 17 Landbúnaður
17502 Stuðul til ullavasking
Verður minkað við 800.000 kr. og sett til 0 kr.
17901 333021 Nýdyrking v.m.
Verður lækkað við 500.000 kr. og sett til 2.000.000 kr
17901-343038 Rentustudn. til landbúnaðarlán
Verður minkað við 300.000 kr. til 700.000 kr.
17901-343046 Studningur til flegging til lanbúnaðirn
Verður lækkað við 500.000 kr. til kr. 3.000.000 kr.
17901-343054 Studningur til mjólkafr.l.:
Verður lækkað við 500.000 kr. til 11.300.000 kr.
17901-343125 Studningur til stráfóður
Verður lækkað við 1.000.000 kr. til 1.000.000 kr.
17901-343133 Studningur til kjøt
Verður lækkað við 500.000 kr. til 2.000.000 kr.
Samanumtikið um § 17:

5-0

§ verður minkað við 4.100.000 kr.
og sett til 31.871.000 kr.

§ 18 Vinnulív og arbeiðsmarknaður annars

18356 Ferðamannamiðstøðin

Verður lækkað við 300.000 kr. til 2.684.000 kr.

18361 Menningarstovan

Verður lækkað við 400.000 kr. til 2.303.000 kr.

Farmaendurgjald

Verður lækkað við 1.700.000 kr. til 3.000.000 kr.

Tollendurgjald

Verður lækkað við 5.000.000 kr. til 10.000.000 kr.

Rentustudningur

Verður lækkað við 4.500.000 kr. til 10.000.000 kr.

18601 Heilsufrøðilig starvsstova

Verður minkað við 200.000 kr. til 5.250.000 kr.

18653 Orkuráðið

Verður lækkað við 50.000 kr. til 400.000 kr.

18667 Orkuráðið, kanningarvirksemi

Verður lækkað við 150.000 kr. til 400.000 kr.

Stuðul til gistingarhúsgrunn

Verður lækkað við 300.000 kr. til 700.000 kr.

Stuðul til umhvørvisverndartiltøk

Verður lækkað við 300.000 kr. til 0 kr.

§ 18 Íløgur

18983 Hálkubreyt

Verður minkað við 1.500.000 kr. og sett til 0 kr.

353806 Ferðam. miðstøð Kristnastova umb.

Verður lækkað við 200.000 kr. til 200.000 kr.

353814 Heilsufrøðilig starvsstova nýb

Verður minkað við 1.000.000 kr. til 0 kr.

Samanumtikið um § 18:

Raksturin: Verður minkaður við 12.900.000 kr. til 68.287.000 kr.

Íløgurinar: Verða minkaðar við 2.700.000 og sett til 200.000 kr.

Greinin: Verður minkað við 15.600.000 kr. og sett til 68.467.000 kr.

5 - 0.

§ 19 Almannamál v.m.

Íløgur

19994 Bústovnar, serforsorg

Verður lækkað við 1.500.000 kr. til 1.500.000 kr.

19994-363532 Dagheim á Berhabrekku, nýb.
Verður lækkað við 1.000.000 kr. til 3.500.000 kr.
19994-363549 Uml. heim og bústovnur, Suðuroy
Verður lækkað við 500.000 kr. til 1.000.000 kr.
19994-363693 røktarheim í Norðstreymoy, nýb.
Verður lækkað við 500.000 kr. til 500.000 kr.
19994 Sandoyar Ellis- og røktarheim
Verður lækkað við 1.000.000 kr. til 6.800.000 kr.

5 - 0.

Íbúðarmál
19956 Húsalánsgrunnurin
Verður lækkað við 10.000.000 kr. til 0 kr.
19961 Íbúðargrunnurin
Lækkar við 500.000 kr. til 500.000 kr.
Samanumtikið um § 19:
Iløgur: Lækkar við 4.500.000 kr. til 13.300.000 kr.
Greinin: Lækkað við 4.500.000 kr. til 771.649 kr.
Íbúðarmál: Lækkar við 10.500.000 kr. til 2.200.000 kr.

§ 20
103612 Bíðipeningur
Lækkar við 1.400.000 kr. til 3.000.000 kr.
Greinin: Lækkar við 1.400.000 kr. til 10.740.000 kr.

7 - 0.

§ 21
Effektivar veðhaldsbindingar
Lækkar við 10.000.000 kr. til 70.000.000 kr.

5 - 0.

§ 22 Aðrar útreiðslur
22104-203507 Umboðan
Lækkar við 200.000 kr. til 900.000 kr.
22104-253808 Studningur til politiska upplýsing
Lækkar við 3.500.000 kr. til 0 kr.
22104-373305 Landsstýrinum at ráða yvir
Verður lækkað við 500.000 kr. til 1.000.000 kr.
Greinin: Lækkar við 4.200.000 kr. til 2.035.000 kr.

5 - 0
5 - 0.
5 - 0.

§ 27 Óvissar útreiðslur
Verður lækkað við 4.000.000 kr. til 10.000.000 kr.
Greinin lækkar 4.000.000 kt. til 10.000.000 kr.

5 - 0

Ein annar minniluti (Finnbogi Ísakson) minnir á, at í røðu síni á Ólavsøku 1991 mælti løgmaður til, at størri samvinna fekst í lag millum samgongu og andstøðu á tingi. Eins og undanfarna ár hevur Tjóðveldisflokkurin á fíggjarnevndini sagt seg til reiðar at samstarva við meirilutan um fíggjarlógina, soleiðis at skilja, at um flokkurin fekk nakrar broytingr við í tilmælini frá meirilutanum, kundi flokkurin vera við til at tilmælini frá meirilutanum, kundi flokkurin vera við til at mæla tinginum til at samtykkja uppskoti og at atkvøða fyri teimum einstøku greinunum.

Men orð løgmans á Ólavsøku vóru eftir øllum at døma ikki meint í álvara. Í fíggjarnevndi hevur Tjóðveldisflokkurin fingið tvørt nei fyri samvinnu við meirilutan.

Samgongan hevur eftir øllum at døma framvegis meiriluta í tinginum einsamøll og kann sostatt samtykkja sítt egna uppskot, meðan møgulig uppskot frá minnilutanum verða feld. Minnilutin heldur tað tí ikki hava nakað endamál at seta fram greina broytingaruppskot, men ger í staðin nakrar heildarviðmerkingar.

Onki í fíggjarlógaruppsktinum kann sigast at vera nýskapandi, og onki í fíggjarlógini bendir á, at nakað arbeiðsskapandi verður sett í verk. Minnilutin heldur, at í fyrsta lagi átti meira peningur at verið settur av til landsverkfrøðingin til ymisk smærri arbeiði, ið geva nógvum hondum arbeiði.

Í øðrum lagi átti peningur at verið settur av til arbeiðsskapandi umbótararbeiði í viðalundunum, sum Skógrøkt Landsins hevur sagt vera ein møguleika fyri at fáa fleiri hendur í arbeiði.

Í triðja lagi átti munandi meira peningur at verið settur av til nýdyrking. Hetta kundi givið mongum hondum arbeiði, samstundis sum almenn tól, sum standa

eins og møguligt hevði verið at dyrka meira av rótum, eplum og øðrum.

Minnilutin heldur eisini, at ein upphædd eigur at verða sett av á fíggjarlógini, sum krevst til at reka millumbylgjusendaran hjá útvarpinum, so at føroyskir fiskimenn og útisetar kunnu hoyra útvarpið so frægt sum gjørligt. Tað er lítð høpi í at byggja ein sendara fyri 70 mió. kr. og síðani ikki at seta neyðugan pening av til raksturin, Skal Útvarpið sjálvt bera kostnaðin av rakstrinum heilt ella partvíst, verður neyðugt at skerja sindingarnar, og tað er ikki ráðiligt.

Játtanin til kolagrevstur í Suðuroynni er minkaður. Kol er av ávísum týdningi sum arbeiðsskapandi tiltak og sum orkukelda. Játtanin átti tí at verið hækkað heldur enn lækkað. Eisini hetta hevði givið nakað av arbeiði aftrat.

Tjóðveldisflokkurin skjeyt upp at seta nakað av peningi á fíggjarlógina fyri 1991 til Kvinnufelags Samskipanina at nýta til nýggj virki, sum mangar kvinnur er hugaðar at fara undir. Hetta varð ikki játtað tá, men flokkurin heldur, at ein upphædd til hetta endamál átti at verið sett á fíggjarlógina fyri 1992.

Tað er neyvan neyðugt at hækka tær samlaðu útreiðslurnar á fíggjarlógini fyri at játta pening til oman fyri nevndu endamál. Gjørligt er at spara pening á fleiri konti og kunnu nevnast hesar (sparingar eru gjørdar út frá áliti meirilutans):

Gr. 11 Landsfyrisiting

11433 Fyrireiking av avgjaldsskipan 4.7 mió. kr.

Viðm. Arbeiðið at gera ein skipan við meirvirðisgjaldi eigur at verða steðgað.

11948 Menningarhjálp 3.0 mió. kr.

Viðm. Bíðað verður at nýta pening til menningarhjálp í øðrum londum , til føroyska samfelagið verður fíggjað uttan menningarhjálp.

Gr. 16 Fiskivinna, sigling o.t.

16436 Felagskonto 24 mió. kr.

Viðm. Játtanir til fiskiroyndir uttan fyri landleiðina (14 mió. kr.) og til varðveiting av fjølbroyttum flota (10 mió. kr.) verða stroknar. Minnilutin heldur ikki, at hesar játtanir geva nakað gagnligt úrslit. Annars er minnilutin illa nøgdur við, at meirlutin í fíggjarnevndini nú hevur lagt fýra játtanir - til Lønjavningargrunnin, studningar, fiskiroyndir uttan fyri landleiðina og játtan til varðveiting av verandi flota - saman í eina konto. Tað var eitt framstig, tá játtanirnar vórðu býttar sundur í fleiri konti fyri trimum árum síðani. Samanleggingin til eina konto gevur landsstýrinum ov stórar møguleikar at nýta nógvar mió. kr. uttan at nøkur lógaráseting er um, hvat peningurin skal brúkast til.

Gr. 18 Vinnulív og arbeiðsmarknaður annars

18532 Stuðul til ídnaðarfremj. endam. 8.1 mió.kr.

Viðm. Hesin grunnur, ið nú skal broyta navn til Grunnurin til vinnufremjandi endamál, er ein politisk stýrdur grunnurm t.v.s. at landsstýrið og fíggjarnevndin hava játtanirnar um hendi. Minnilutin heldur, at ein óheftur stovnur - og ikki tveir politiskir instansir - eiga at heva slíkar játtanir. T.d. kundi hesin grunnur ligið undir Ídnaðargrunninum ella Menningargrunninum. Mælt verður tí til at strika grunnin á fíggjarlógini.

- - -

Sum tað sæst kunnu 39,2 mió.kr. sparast í uppskoti meirilutans, og ivaleyst eru eisini aðrar konti, ið kundu verið skerdar.

Minnilutin heldur, at hesin peningur kundi verið brúktur betur, um hann fór til arbeiðsskapandi tiltøk av ymiskum slagi.

Við hesum viðmerkingum setir minnilutin onki uppskot fram, men landið skal jú hava eina fíggjarlóg, og Tjóðveldisflokkurin fer tí at atkvøða fyri tí samlaða uppskotinum frá meirilutanum, um tær einstøku greinarnar verða samtyktar.

FÍGGJARNEVNDIN, 16. desember 1991

Jørgin Thomsen Vilhelm Johannesen Anfinn Kallsberg

Birgir Dánielsen Finnbogi Arge Flemming Mikkelsen

Finnbogi Ísakson

Skjal II

M I Ð N Á M 9 1

Upprit um miðnámsútbúgvingar.

Vit hava ein góðan fólkaskúla, og í mun til fólkagrundarlagið og fíggjarorkuna hava vit nógv góð útbúgvingartilboð her í landinum. Men hóast hetta verður ofta fært fram, at í Føroyum er ongantíð rikin ein veruligur, miðvísur útbúgvingar- og skúlapolitikkur.

Her skal ikki takast støða til um so er, men ásannast má, at flestu skúla- og útbúgvingartilboðini eftir fólkaskúlan ikki eru komin sum úrslit av miðvísum útbúgvingarpolitikki. Heldur hava framskygd fólk við áræði skumpað undir ella hava sjálvi skipað fyri nýggjum útbúgvingum.

Tað er gott, at vit hava havt og hava slík fólk, tí tey hava verið við til at givið okkara ungdómi fleiri og størri møguleikar, og tey hava ríkað samfelag okkara.

Men tað óhepna í hesum er, at ikki verður hugsað um heildina ella um samskipan av útbúgvingum. Tí hevur føroyskur skúlapolitikkur oftast snúð seg um ta einstøku útbúgvinga ella tann einstaka skúlan leysan av heildini, og tí hevur mest verið tosað um, hvar skúlar skulu liggja heldur enn um slag av útbúgvingum, innihald, samstarv og samskipan.

Eisini má viðgangast, at vit ógvuliga sjáldan hava havt eitt politiskt orðaskifti um skúlaskap, og helst ongantíð hevur verið orðaskifti í tinginum um allan tann føroyska skúlan. Ásannast má, at hetta er stórt mál, sum tað kann vera trupult at viðgera undir einum, men tað er neyðugt, at vit eisini taka eina heildarviðgerð av øllum skúla- og útbúgvingarpolitikki.

Skúla- og útbúgvingarskipan okkara kann býtast upp í triggjar høvuðspartar. 1) Fólkaskúlin. 2) Miðnámsútbúgvingarnar. 3) Víðari/hægri útbúgvingarnar.

Ætlanin er seinri í hesi tingsetu at viðgera fólkaskúlan og tær hægru og víðari útbúgvingarnar. Men landsstýrið hevur valt at

taka miðnámsútbúgvingarnar fyrst, ti tað er her, tað troðkar mest á at fáa greiðar linjur fyri, hvørjar útbúgvingar vit skulu hava í framtíðini.

Tað sum í hesum uppriti verður ført fram, er í stóran mun grundað á tey álit, sum til eru um ungdómsútbúgvingarnar.

Hjálagdur er tilfarslisti, sum sigur frá, hvørjar lógir vit hava og hvørji álit og tilmæli, ið til eru um hesar útbúgvingar. Í hesum sambandi skal verða mint á, at fleiri av hesum álitum ikki eru heilt nýggj.

Hetta uppritið, sum her verður lagt fyri løgtingið, viðgerð miðnámsútbúgvingarnar og er ætlað sum grundarlag undir einum tjaki um útbúgvingar- og skúlapolitikk á hesum økinum.

Her verður stutt greitt frá hesum álitum, støðan hjá skúlunum og útbúgvingunum verður lýst nærri. Sagt skal verða frá, hvørji tilboð vit hava, og hvar tey eru. Víst verður á, hvørjar fortreytir og aðalmál, útbúgvingarnar mugu byggja á og arbeiða fram ímóti. Greitt verður nærri frá umstøðunum í teimum ymsu økjunum, og komið verður við ábendingum um, hvussu vit kunnu skipa okkum við miðnámsdeplum, samstarvi millum útbúgvingar, nýggjum útbúgvingum og skiftandi útbúgvingum.

Víst verður eisini á, at um væl skal verða, so mugu vit nú taka yrkisútbúgvingarnar upp til viðgerðar og skipa tær av nýggjum.

Ikki ber til at tosa um útbúgvingar uttan at hugsa um figgjarliga grundarlagið. Tí verður neyðugt at fáa lýst, hvussu nógv tær ymsu útbúgvingarnar kosta, og neyðugt verður at útvega stýringsamboð, so vit tryggja okkum, at vit fáa tað besta burturúr tí peningi, vit hava.

Tær ábendingar, sum vístar verða á, hava í huga búsetingarmynstur okkara og næmingagrundarlagið fyri miðnámsútbúgvingunum.

1) ÁLIT OG TILMÆLI

Stutt umrøða av álitum og tilmælum, sum eru gjørd síðan fyrst í 80-árunum um miðmámsútbúgingarnar:

F H S.
Fyrst í áttatiárunum gjørdi arbeiðsbólkur uppskot til ta FHS-útbúgving, sum varð sett í verk við løgtingslóg nr. 69, 30/6-1983. FHS-skipanin líkist í rættiliga stóran mun táverandi donsku EFG-skipanini.

Miðnámsútbúgvingar.
Oktober 1985 gav landsskúlafyrisitingin út álit nevnt "Miðnámsútbúgvingar". Í høvuðsheitinum ber til at siga, at nevndin, sum legði álitið út hondum, mælti til at skipa fyri 5 ymiskum støðisárum fyri allar miðnámsútbúgvingar við framhaldi í sonevndum 2 og 3 ára miðnámi.

Føroya Yrkisskúli fyri Fiskaidnað og Havbúnað.
September 83 kom álit um fiskivinnuútbúgving. Mælt varð til, at fiskivinnuskúli varð settur á stovn í Føroyum. Álitið má metast sum partur av grundarlagnum undir fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Skúlin er settur á stovn í Vestmanna samb. løgtingslóg.

Studentaskúlar og HF-skeið.
Viðvíkjandi studentaskúla- og hf-undirvísingini varð álit lagt fram í apríl 1990, nevnt "Álit um ástøðisútbúgving". Nevndin legði fram 2 uppskot um bygnað. Bygnaður 1: deildir og val. Bygnaður 2: støðisár og val. Í báðum uppskotunum hava næmingarnir størri valfrælsi enn í verandi skipan.

Várið 1990 læt ein arbeiðsbólkur, settur av landsskúlastjóranum, úr hondum "Álit um føroyskt mál og støðu tess í HF og studentaskúlanum". Støðan hjá føroyska málinum verður lýst bæði viðvíkjandi undirvísingartilfari og nýtslu av málinum innan skúlagátt.

Útbúgvingar innan tøkni.

"Álit um útbúgvingarskipan innan tøkni", sum Landsskúlafyrisitingin í summar sendi Landsstýrinum, leggur upp til dagføring av yrkisútbúgvingum, og gjørt verður í álitinum vart við, at tað er av stórum týdningi, at okkara tøkniútbúgving er á hædd við útbúgvingarstøðið í londunum kring okkum.

2) FORTREYTIR OG AÐALMÁL:

Búsetingarmynstrið og tey geografisku viðurskiftini gera, at bert Havnin (og lutvís Eysturoy) hevur nóg stórt fólkagrundarlag undir miðnámsútbúgvingum við traditionellum útbúgvingartilboðum - eitt nú handilsskúla og studentaskúla. Um vit skulu hava útbúgvingartilboð innan miðnámsútbúgvingarnar kring landið verður neyðugt í heilt stóran mun at samskipa tær, fyri at:

1) tryggja fjølbroytt undirvísingartilboð
2) tryggja framhaldandi undirvísing á høgum støði
3) bygningar kunnu verða nýttir til fulnar

Ein lokin miðnámsútbúgving skal geva førleika til at fara undir framhaldandi útbúgvingar í Føroyum og øðrum londum.

Londini rundan um okkum hava flestøll broytt sínar útbúgvingar, og tey gera nú skipaða avtalur um góðkenning og "merit-yvirflyting" av serstakliga yrkisútbúgvingunum. Okkara yrkisútbúgvingar hava verið tær somu sum yrkisútbúgvingar í Danmark. Men nú útbúgvingarnar í Danmark eru broyttar, ber ikki í øllum føri til sum fyrr at fáa okkara góðkendar har. Vit mugu koma okkum upp í hetta samstarv, og útbúgvingar okkara mugu, umframt at skulu nýtast í Føroyum, vera á sama støði sum tær í øðrum londum.

Í sambandi við viðgerð av studentaskúla og HF-skeið eigur ein prinsippavgerð at verða tikin um, vit skulu hava eina ella fleiri ástøðiligar miðnámsútbúgvingar.

Um tað veruliga skal vera gjørligt hjá føroyskum ungdómi at fara undir útbúgving uttanfyri norðurlond, má innihald og støði í undirvisingini í miðnámsútbúgvingunum geva teim førleika til tess.

Áðrenn vit fara undir at viðgera einstøku skúlaøkini er neyðugt at gera sær greitt, at hesi aðalmál mugu havast fyri eyga:

a) útbúgvingar verða skipaðar fyri alt landið, og ikki bert fyri tað lokala økið, har ávísir skúlabygningar liggja/eru lagdir
b) hvør skúli sær má mynda seg soleiðis, at hann dregur at sær teir næmingar, sum vilja hava eina ávísa útbúgving í einum ávísum umhvørvi. Ein skúli, sum megnar hetta, skapar samstundis eisini eitt betri fakligt umhvørvi
c) lýsing av, hvussu nógv ein næmingur kostar í teimum ymisku skúlunum og í teimum ymisku útbúgvingunum
d) útvegan av stýrisamboði, so at skúlunum/útbúgvingunum kann verða tillutaður peningur sambært næmingatali og virksemi (taxameturprinsipp)

3) <u>YVIRLIT YVIR VERANDI ÚTBÚGVINGARTILBOÐ OG STOVNAR:</u>

<u>Norðuroyggjar</u>

Tekniski skúlin í Klaksvík
Sjóvinnuskúlin (fyribilsskipan frá aug. 91)
HF-skeiðið í Klaksvík
Tekniski Skúlin í Klaksvík heldur til í nýggjum og góðum bygningi.

HF-skeiðið hevur egin hús.

Sjóvinnuskúlin heldur til í Klaksvíkar Sjómansskúla.

Eysturoy

Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy
Føroya Handilsskúli á Kambsdali

Føroya Handilsskúli á Kambsdali er í nýggjum bygningi, meðan Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy húsast í gomlum og út av lagi óhóskandi hølum við Gøtugjógv.

Ætlanir hava leingi verið frammi um at byggja studentaskúla á Kambsdali.

Norðurstreymoy

Føroya Yrkisskúli fyri Fiskaídnað og Havbúnað (royndarskipan)

Útbúgvingin varð sett á stovn fyri 2 árum síðani og heldur til í egnum hølum í Vestmanna.

Suðurstreymoy

Føroya Handilsskúli
Føroya Studentaskúli og HF-skeið
Tekniski Skúlin í Tórshavn

Skúlabygningurin í Hoydølum er nærum 30 ára gamal, lutvís niðurslitin, alt ov lítil og krevur ábøtur.

Føroya Handilsskúli eigur nýggjan skúlabygning. Tó er hesin bygningur ov lítil í mun til næmingatilgongdina.

Tekniski Skúlin í Havn heldur til í ymiskum bygningum og hølum kring býin. At skúlin ikki hevur egnan skúlabygning, sum kann vera karmur um virksemi skúlans, darvar bæði undirvísing og samstarvi.

Suðuroy

Suðuroyar HF-skeið
FHS-útbúgving (royndarskipan)
Fiskaídnað- og Havbúnaðaskúli (royndarskipan)

Suðuroyar HF-skeið heldur til í leigaðum hølum á Tvøroyri og í Vági. Skeiðið á Tvøroyri heldur til í skúlabygninginum úti á Tvøroyri. Sjálvt um hølisviðurskiftini ikki eru vánalig, er hølistørvur. Í Vági heldur HF-skeiðið til í umbygdum sethúsum, og eru hølini ikki góð til undirvísing.

Í felagslærugreinum fer frálæran fram bæði á Tvøroyri og í Vági. Í vallærugreinunum verða næmingarnir undirvístir á einum staði. Ferðaútreiðslurnar, sum standast av, at skeiðið ikki er á einum staði, fara upp um kr. 400.000 um árið.

FHS-útbúgvingin fer fram á Tvøroyri, og fiskivinnuútbúgvingin fer fram í Vági.

4) STØÐAN HJÁ MIÐNÁMSÚTBÚGVINGUNUM

Yrkisútbúgvingar og teknisku skúlarnir

Heimildin hjá teknisku skúlunum í Føroyum hevur verið í danskari lóg frá 1964, sum í 1965 við fyriskipan varð sett í gildi í Føroyum.

Í 1979 varð nýggj fólkatingslóg (rammulóg) um handilsskúlar, tekniskar skúlar og maskinmeistara- og maskinistskúlar sett í gildi í Føroyum.

Henda lóg hevði ta broyting við sær, at góðkenningin av skúlunum og heimildin at áseta reglur um innihaldið og vavið í undirvísingini og skipan av henni, varð løgd til føroyskar myndugleikar.

Verandi lærlingaskipan er grundað á løgtingslóg frá 1954 um lærlingaviðurskifti og kunngerð frá 1961 (mest sum óbroytt). Nevnda lóg frá 1954 byggir á danska lærlingalóg frá 1930-árunum.

Í dag er lærusáttmáli fortreyt fyri, at lærlingur verður tikin inn á tekniska skúlan. Sum støðan er í løtuni, verða so fáir sáttmálar gjørdir, at vandi er fyri, at virksemið á teimum teknisku skúlunum lækkar so mikið nógv, at trupult verður at halda eitt fakligt støði, og at vit um nøkur ár ikki fara at hava nóg mikið av føroyskum handverkarum, men noyðast at flyta inn fremmanda arbeiðsmegi.

Landsskúlafyrisitingin hevur arbeitt við uppskoti til nýggjan bygnað fyri yrkisútbúgvingarnar við tí fyri eyga at gera eina føroyska skipan, sum:

1) nøktar yrkisførleikan til føroyska vinnulívið
2) nøktar krøvini til eina alment mennandi ungdómsútbúgving
3) samsvarar við útbúgvingarstøði í londunum uttan um okkum
4) er ein skipan við møguleikum fyri ástøðiligum tøkniútbúgvingum

Studentaskúlar og HF-skeið

Neyðugt er at gera vart við, at tann studentaskúla- og HF-skipan, sum vit hava í Føroyum, í høvuðsheitum er ein donsk skipan. Studentaskúlaskipanin í Danmark er tó broytt 1. august 1988, og HF-skipanin er broytt 1. august 1991. Hetta merkir, at vit í løtuni, viðvíkjandi innihaldinum í undirvísingini, fylgja einari lóggávu, sum er avtikin í Danmark. Føroyska lóggávan fyri studentaskúlar og HF-skeið ásetur bert karmar fyri stýring, fakbýti og prógvtøku. Viðvíkjandi

HF-skipanini er tó føroysk kunngerð um lærugreinarnar føroyskt og danskt.

Á sumri 1992 noyðast vit enn meira enn higartil at fáa til vega serligar uppgávur til studentsprógvtøkuna í Føroyum. Hetta er nakað, sum skal keypast - annaðhvørt í Føroyum ella úr Danmark. Hetta er kostnaðarmikið.

HF-skipanin er broytt pr. 1. aug. 91 í Danmark. Upptøkutreytirnar eru eitt sindur strangari, tá umsøkjarin kemur beinleiðis úr 10. flokki. Broytingin merkir eisini, at HF-skipanin hevur eitt víðkað faktilboð á ymiskum støði. Hægsta støðið kann samanberast við fakliga støðið á studentsprógvi.

Handilsskúlin

FHS-útbúgvingin tekur 1 ár og síðan kann næmingurin fáa læruplass í fyrisiting, handli ella skrivstovu, ella halda fram á HH.

Yrkisskúlin fyri Fiskaídnað og Havbúnað

Fyrsta holdið varð liðugt í summar. Útbúgvingin, sum enn er á royndarstigi, er í ár víðkað við einum triðja ári.

5) ÁBENDINGAR UM OG UPPSKOT TIL BROYTINGAR

Frammanfyri er sagt frá teimum útbúgvingum, vit hava, og hvar tær eru. Eisini er víst á støðuna hjá teim ymsu útbúgvingunum, og hvussu hølisviðurskiftini eru.

Her skal verða komið við ábendigum um og einstøkum uppskotum til, hvat vit kunnu gera innan miðnámsútbúgvingarnar, bæði við skipan av miðnámsdeplum, samstarvi millum útbúgvingar,

nýggjum útbúgvingum og við skiftandi útbúgvingartilboðum í ymsu økjunum í landinum.

Á teknisku skúlunum í Havn og Klaksvík hava vit parallellar tekniskar útbúgvingar, ið eru sera íløgukrevjandi. Samstarv má fáast í lag millum teknisku skúlarnar, so undirvísingin í teimum ymsu fakgreinum bert fer fram annað staði.

Landsstýrið hevur nú sett arbeiðsbólk at viðgera spurningarnar: tørvin á læruplássum, nýtsluna av teknisku skúlunum og skipan av yrkisútbúgvingum innan tøkni.

HF-skeiðini í Klaksvík og í Suðuroy eru stakgreina HF-skeið. Hetta er ein smidlig skipan, sum kann samskipast við øðrum útbúgvingartilboðum. Hetta kann gerast á ein hátt, sum gevur næmingum bæði lestrarførleika og yrkisførleika.

Um skipað verður fyri miðnámsdeplum, ber til at nýta lærarakreftir, útgerð og bygningar rationelt.

Í Klaksvík kundi Norðoyar Miðnámsdepil, har undirvist verður í HF-lærugreinum og yrkislærugreinum, verið skipaður. Á Norðara Miðnámsdepli eigur møguleiki at vera fyri at skapa nýggjar útbúgvingar, sum miða ímóti, at næmingar fáa teoretiskan og praktiskan førleika at halda fram eitt nú á maskinskúla, teknikum ella á øðrum hægri lærustovni.

Eisini í Havn kann gymnasial-teknisk útbúgving verða sett á stovn.

Sum áður nevnt er uppskot frá Landsskúlafyrisitingini sent landsstýrinum viðvíkjandi broyting av yrkisútbúgvingum.

Fiskivinnuútbúgvingin er ikki komin í fasta legu. Talan er um royndarútbúgving, ið framhaldandi verður lagað eftir teimum royndum, sum gjørdar eru.

Útbúgving innan fiskiidnað og havbúnað kundi eisini hugsast at farið fram á einum og hvørjum av miðnámsmiðdeplunum. Samstarv kann eisini hugsast millum útbúgving innan fiskaidnað og havbúnað og útbúgving innan landbúnað við at gera felags ástøðisligar lærugreinir.

Viðvíkjandi studentaskúlaskipanini er at siga, at hon má broytast, og broytingin setast í verk skjótt. Í hesum sambandi má støða takast til, um vit skulu gera okkara egnu studentaskúlaskipan fyri tey 16-19 ára gomlu. Sum fyrr nevnt má ein prinsippavgerð at verða tikin, um vit skulu hava eina ella fleiri ástøðiligar miðnámsútbúgvingar (HF/studentaskúlaútbúgving).

Á Handilsskúlanum er FHS-útbúgving, sum er gjørd eftir danskari fyrimynd, men skipað eftir løgtingslóg. Allar aðrar útbúgvingar á Handilsskúlanum eru sambært donskum lógum, eisini hægri handilsprógv. Bert smábroytingar kunnu væntast at henda á hesum undirvísingarøki komandi árið. Hetta er serliga galdandi fyri HH-útbúgvingina.

Á Kambsdali kann Eysturoyar Miðnámsdepil skipast. Ein samanbygging millum studentaskúlan í Eysturoy og handilsskúlan á Kambsdali merkir, at í Eysturoyar Miðnámsdepli ber til at samstarva um lærarar, útgerð og høli, og tryggjast kann eitt fruktargott pedagogiskt umhvørvi, samstundis sum møguleikar fyri menningartiltøkum eru til staðar.

Í Vágum hevur verið stakgreina HF um kvøldið. Hugsast kann, at ein tílík skipan kann takast uppaftur og útbyggjast. Skipast kundi verið fyri miðnámsútbúgvingartilboðum við ávísum millumbilum.

Eisini kann hugsast samstarv millum Vágar og Norðurstreymoy.

Í Sandoynni eru, undantikið einstøk læruplass, eingi skúla- og útbúgvingartilboð til ung fólk. Eins og í Vágum kundi verið skipað fyri miðnámsútbúgvingartilboðum við ávísum millumbili.

Fiskivinnuútbúgvingin og FHS-útbúgvingin í Suðuroy eru royndartiltøk. Undirvísingin skal fara fram í samstarvi við verandi HF-skeið í oynni.

HF-skeiðið í Suðuroy er partur av Føroya Studentaskúla og HF-skeiði. Neyðugt verður at gera HF-skeiðið í Suðuroy leyst av skúlanum í Hoydølum, og í staðin skipa miðnámsútbúgvingarnar í Suðuroya Miðnámsdepli við egnari leiðslu, og útvegast mugu tíðarhóskandi undirvísingarhølir.

Á Suðuroyar Miðnámsdepli verða góðir møguleikar fyri menningartiltøkum og samskipan av útbúgvingum.

At enda skal verða víst á, at lógargrundarlagið fyri útbúgvingum á hesum øki er fløkjaligt og harafturat ótíðarhóskandi.

Hetta viðvíkur bæði sjálvum útbúgvingunum - innihaldi og skipan - og skúlabygningum.

Hesi viðurskifti eru ógvuliga darvandi fyri at menna útbúgvingartilboðini til okkara ungdóm og foðrar eisini fyri skilagóðari nýtslu av bæði fakkunnleika, hølum og útgerð.

Her skal verða sagt frá, at Landsskúlafyrisitingin arbeiðir í løtuni við at gera álit um samskipan av miðnámsútbúgvingunum út frá tí sjónarmiði, at miðnámsskúlin skal:

- fyrireika næmingar okkara til at liva og virka í einum demokratiskum samfelag til virki at luttaka í samfelagsligum orðaskifti, sum er eyðkenni fyri eina framkomna og kappingarføra tjóð,

- verða útbúgvandi til tey ymsu yrkini í vinnulívinum her á landi, og

- verða fyrireikandi til framhaldandi útbúgving her og í øðrum londum.

Marita Petersen
landsstýriskona

T I L F A R S L I S T I

FHS:
Løgtingslóg nr. 69, 30/6-1983 "Løgtingslóg um grundútbúgingar innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið".

Miðnámsútbúgvingar:
"Miðnámsútbúgvingar". Landsskúlafyrisitingin, oktober 1985.

Fiskivinnuútbúgving:
Løgtingslóg nr. 62 frá 9. juni 1988 um ávísar skúlar. Sí "Skúlapakkin".
Løgtingslóg nr. 43 frá 5. mai 1987 um "Føroyan yrkisskúla fyri fiskaidnað og havbúnað".
"Tilmæli um útbúgvingar og støð hjá skúlum hesum viðvíkjandi". Landsskúlafyrisitingin, mars 1987.

Studentaskúlar og HF-skeið:
Løgtingslóg nr. 20 frá 23. apríl 1976 um "Føroya Studentaskúla og HF-skeið".
Løgtingslóg nr. 21 frá 23. apríl 1976 um "Studentsprógvtøku".
Løgtingslóg nr. 22 frá 23. apríl 1976 um "Hægri fyrireikingar-prógvtøku".
Løgtingslóg nr. 76 frá 21. mai 1982 um "Studentaskúla og HF-skeið í Eysturoy".
"Álit um ástøðisútbúgving", Landsskúlafyrisitingin, apríl 1990.
"Álit um føroyskt mál og støðu tess í HF og studentaskúlunum", Landsskúlafyrisitingin, 1990.

Yrkisútbúgvingar:
Løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 um lærlingaviðurskifti.
Løgtingslóg nr. 36 frá 1. juni 1961 um lærlingaviðurskifti.
Kunngerð nr. 56 frá 15. august 1961 um lærlingaviðurskifti.
"Álit um útbúgingarskipan innan tøkni", Landsskúlafyrisitingin 1991.

Rammulóg frá 14.02.1979, l. for for Færøerne om handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler. B. 363, 09.08.1979 Ikrafttræden.

Skjal III

Tórshavn 16.09.1991
J. Nr. 21-3-1-20
JH/or
Tygara skriv

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 5/1991: Tilráðingar frá Tingmannaráð Útnorðurs.

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið tekur støðu til, hvørjar tilráðingar frá Tingmannaráð Útnorðurs frá árunum 1985-1990 landsstýrið skal fyrireika til framløgu í tinginum sum serstøk mál.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur frá Løgtingsskrivstovuni fingið tær "rekommandatiónir", sum Tingmannaráð Útnorðurs hevur gjørt í tíðarskeiðinum 1985 til og við 1990.

"Rekommandatiónirnar" heita á landsstýrini í Grønlandi og í Føroyum og íelsndsku stjórnina um at taka ávís stig í ávísum málum. "Rekommandatiónirnar" eru sum vanligt orðaðar sum áheitanir, men av tí, at flest allar "rekommandatiónirnar" - um tær verða framdar - kosta pening og, at einki er nevnt um kostnað ella um fígging, kann tað ikki haldast at vera rætt, at landsstýrið við støði í "rekommandatiónunum" fyrireikar málini og leggur tey fyri løgtingið sum síni egnu.

Tí verður mælt til, at Løgtingið tekur støðu til, hvørjar

"rekommandatiónir" landsstýrið skal fyrireika til framløgu í tinginum sum serstøk mál.
+ skjøl

Jógvan Sundstein
landsstýrismaður

/ Jalgrim Hilduberg

LØGTINGSSKRIVSTOVAN

VESTNORDENS PARLAMENTARISKE SAMARBEJDSRÅD

Rekommandation nr. 1/1990.

I overensstemmelse med charterens kapitel 1, art. 2 har Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd vedtaget følgende rekommandation:

Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands Regering at undersøge om der kan føres fælles forhandlinger med export af fiskeriprodukter til EF landene.

Tórshavn 5. september 1990

Karin Kjølbro

Karin Kjølbro
Formand.

Kristoffur Thomassen
Rådssekretær.

LØGTINGSSKRIVSTOVAN

VESTNORDENS PARLAMENTARISKE SAMARBEJDSRAD

Rekommandation nr. 2/1990.

I overensstemmelse med charterens kapitel 1, art. 2 har Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd vedtaget følgende rekommandation:

Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands Regering, at arbejde for, at der indføres en organiseret lærer- og elevudveksling årligt mellum grund- og fortsætteisesskoler i alle medlemslandene.

Tórshavn 5. september 1990

Karin Kjølbro

Karin Kjølbro
Formand.

Kristoffur Thomassen
Rådssekretær.

LØGTINGSSKRIVSTOVAN

VESTNORDENS PARLAMENTARISKE SAMARBEJDSRÅD

Rekommandation nr. 3/1990.

I overensstemmelse med charterens kapitel 1, art. 2 har Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd vedtaget følgende rekommandation:

Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands Regering, at de tager initiativet til udarbejdelsen af undervisningsmateriale om samfundsforhold, kultur og levevilkår på Færøerne, i Grønland og på Island til brug i disse landes skoler med det til formål at fremme oplysning og præsentation blandt de nationer, som bebygger disse lande.

Tórshavn 5. september 1990

Karin Kjølbro

Karin Kjølbro
Formand.

Kristoffur Thomassen
Rådssekretær.

LØGTINGSSKRIVSTOVAN

VESTNORDENS PARLAMENTARISKE SAMARBEJDSRAD

Rekommandation nr. 4/1990.

I overensstemmelse med charterens kapitel 1, art. 2 har Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd vedtaget følgende rekommandation:

Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands Regering, om vurdering af afgiftsfri landingsaftaler mellem de vestnordiske lande, således at fiskeskibene kan frit sælge deres fangst i de tre vestnordiske lande.

Tórshavn 5. september 1990

Karin Kjølbro
Karin Kjølbro
Formand.

Kristoffur Thomassen
Rådssekretær.

LØGTINGSSKRIVSTOVAN

VESTNORDENS PARLAMENTARISKE SAMARBEJDSRAD

Rekommandation nr. 5/1990.

I overensstemmelse med charterens kapitel 1, art. 2 har Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd vedtaget følgende rekommandation:

Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands Regering, om snarest at igangsætte drøftelserne om, hvordan vi i fællesskab kan prøve at begrænse sælbestanden således, at vi igen kan opnå den økologiske balance i havet.

Tórshavn 5. september 1990

Karin Kjølbro
Karin Kjølbro
Formand.

Kristoffur Thomassen
Kristoffur Thomassen
Rådssekretær.

LØGTINGSSKRIVSTOVAN

VESTNORDENS PARLAMENTARISKE SAMARBEJDSRÅD

Rekommandation nr. 6/1990.

I overensstemmelse med charterens kapitel 1, art. 2 har Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd vedtaget følgende rekommandation:

Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands Regering, om at optage diskussion for, at tele-, radio- og fjernsynskommunikationsforbindelserne udbygges således, at alle kan få samme komminikationsfaciliteter i de tre lande.

Tórshavn 5. september 1990

Karin Kjølbro

Karin Kjølbro
Formand.

Kristoffur Thomassen
Rådssekretær.

LØGTINGSSKRIVSTOVAN
VESTNORDENS PARLAMENTARISKE SAMARBEJDSRÅD

Udtalelsen nr. 1/1990.

Udvalget for miljø og umgivelser fastholder under sit møde, at vi i de Vestnordiske lande bor under de reneste omgivelser i forhold til mange andre dele af verden. Vi fastholder i udvalget, at vi i vore tre lande må forsvare bevarelsen af dette miljø, men vore omgivelser er meget sårbare områder, og det må vi holde fast ved.

Vi tre nationer, som hele tiden bliver anklaget og angrebet udefra for vores livsnødvendige erhvervsforhold i form af udnyttelse af vore havområders resourcer. Samtidig går vi ind for og arbejder ihærdigt hen imod pleje af vore naturområder, det være sig at være havet, landjorden og luften.

Men disse områder er i øjeblikket stærkt truet af affald fra de industrialiserde lande.

Udvalget ser spørgsmålet om bevarelse af miljøet som en af de største politiske sager nu og i fremtiden. Udvalget finder dog ingen grund til at lave nye rekommandationer, men udvalget vil henvise til de tidligere rekommandationer, som stadigvæk i høj grad er aktuelle og vil indtrængende opfordre det færøske landsstyre, den islandske regering og det grønlandske landsstyre om at tage disse rekommandationer mere seriøst og bruge dem som forhandlingsgrundlag i fælles videre forhandlinger med andre nationer.

Tórshavn 5. september 1990

Karin Kjølbro
Karin Kjølbro
Formand.

Kristoffur Thomassen
Kristoffur Thomassen
Rådssekretær.

LØGTINGSSKRIVSTOVAN
VESTNORDENS PARLAMENTARISKE SAMARBEJDSRÅD

Udtalese nr. 2/1990.

UTALELSE

fra det samlede

VESTNORDENS PARLAMENTARISKE SAMARBEJDSRÅD

vedrørende optagelse af forhandlinger om oprettelse af en vestnordisk kulturfond.

Vestnordens parlamentariske samarbejdsråd henstiller endnu engang til Færøernes og Grønlands landsstyrer og til Islands regering at der oprettes en vestnordisk kulturfond. Der henvises til vedlagde specifikation vedrørende rekommandationer fra kulturudvalget for årene 1985 - 1989. Fondens indtægter skal være årlige tilskud som fastsættes ved bevillinger på hvert af de tre landes bugetter, samt tilskud fra private resourcer.

Fondens midler skal kunne bruges til at støtte fælles kulturbegivenheder, udvekslingsrejser for kunstnere, tilskud til rejser for idrætsfolk, samt støtte til kunstnere. Særlig vægt må lægges på støtte til børne- og ungdomsliteratur, bl. a. også i form af en årlig literaturpris på dette område.

Fondens vedtægter udarbejdes af landsstyrerne og regeringen i samråd med kunstnernes organisationer i de respektive lande.

Det er en forudsætning af bevillingsspørgsmålene er blevet bragt på plads ved det kommende finansårs begyndelse.

Tórshavn 5. september 1990

Karin Kjølbro
Karin Kjølbro
Formand.

Kristoffur Thomassen
Rådssekretær.

LØGTINGSSKRIVSTOVAN

11901	Landsverkfrøðingsskrivstova	Landsingeniørens kontor	9420	0	9420
RAKSTUR			147947	7343	155290
11953	Umbygging, Tinganes	Ombygning, Tinganes	1500	0	1500
	Fyrisitingarhús,Tinganes,nýb.	Adm.hus ,Tinganes, nyb.	0	2000	2000
	Tollstovubygn.í Kl.,keyp og umb.		0	5000	5000
ILØGUR			1500	7000	8500
			149447	14343	163790

UTTANRÍKISMÁL		UDENRIGSVÆSEN			
11948	Menningarhjálp	Udviklingsbistand	3500	0	3500
11967	Før.viðsk.st. Keypmannahavn	Færøske repræsentationsk. Kbh.	1070	0	1070
11972	Uttanríkistæn. í Aberdeen	Udenrigstjeneste i Aberdeen	739	0	739
			5309	0	5309

GREIN 12	HEILSUMÁL	SUNDHEDSVÆSEN	J 1991	Eyka-játtan 91.	Samlað játtan 1991.
12007	Sjúkrakassar	Sygekasser	14000	2112	16112
12012	Hjálpitólamiðstøð	Central for hjælpeudstyr	2442	0	2442
12026	Útr. viðv. Ríkissjúkrahúsinum	Udg. vedr. Rigshospitalet	25000	500	25500
12109	Landssjúkrahúsið	Landssygehuset	207500	0	207500
12202	Klaksvíkar Sjúkrahús	Klaksvik sygehus	39500	0	39500
12304	Suðuroyar Sjúkrahús	Suðuroyar sygehus	23300	0	23300
12508	Laknar	Læger	2100	200	2300
12513	Amanuensis	Amanuensis	84	0	84
12653	Heilsu-og heimasj.systraskipan	Sundheds-,hjemmesygeplejeordn.	11500	3800	15300
12672	Skúlalæknaskipan	Skolelægeordning	264	0	264
12769	Arbeiðsmedisinsk klinikk	Arbejdsmedicinsk klinik	793	0	793
12774	Upplýsing um eyðkvæmi	Oplysning om AIDS	340	-200	140
12907	Ymiskar útreiðslur	Diverse udgifter		0	0
303011	Farsóttir	Epidemiske sygdomme	70	0	70
303044	Hvíldarheimið Naina	Hvilehjemmet Naina	1537	0	1537
303077	Vaksinatiónir	Vaccinationer	450	0	450
303107	Uppl. um gitnaðarfyribyrging	Opl. om svangerskabsforebygg.	265	0	265
303115	Tubbaksráð	Tobaksskaderådet	100	0	100
	Rúsevnisráð	Narkotikabekæmpelsesrådet	100	0	100
303148	Heilsukanningar av barnakonum	Sundhedskontrol for gravide	400	0	400
303156	Læknakanningar av børnum	Lægeundersøgelser af børn	450	0	450
303164	Kanning og viðg. av kynssjúkum	Behandl. af veneriske sygd.	65	0	65
303243	Blákrossheimið	Blåkrosshjemmet	4000	0	4000
373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	100	0	100
RAKSTUR			334360	6412	340772
	Klaksvíkar Sjúkrahús,umv./umb.	Klaksvik sygehus, omb./nyb.	500	755 x)	1255
	Klaksvíkar Sjúkrahús, nýb.	Klaksvik sygehus, nyb.		0	0
	Suðuroyar Sjúkrahús, nýb	Suðuroyar sygehus, nyb.	9000	0	9000
	Suðuroyar Sjúkrahús, umb.	Suðuroyar sygehus, omb.		0	0
	Landssjúkrahúsið, umvæling	Landssygehuset, reparation		0	0
	Landssjúkrahúsið, umbygging	Landssygehuset, omb.		0	0
	Landssjúkrahúsið, nýb.	Landssygehuset, nyb.	3000	0	3000
	Sjúkrasystraskúlin	Sygeplejeskolen		0	0

	Hotel Tórshavn, Keypmh.	Hotel Torshavn, København	800	-400	400
	Heilsumiðstøðir	Sundhedscentre	1200	0	1200
	Landslæknahúsini	Landslægehuset	400	0	400
ÍLØGUR			14900	355	15255
			349260	6767	356027

GREIN 13	SAMFERÐSLA OG SAMSKIFTI	KOMMUNIKATION	J 1991	Eyka-játtan 91.	Samlað játtan 1991.
13251	Tyrlutænastan	Helikoptertjenesten	7000	0	7000
13265	Strandferaskip Landsins	Lagtingets kystfart	35000	7900	42900
13279	Bygdaleiðir	Busruter	20800	4200	25000
13089	Postverkið	Postvæsen, bygge-og driftsfond	15000	0	15000
13125	Útvarpssendistøð, rakstur	Radiosender, drift	2500	0	2500
13106	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	350	0	350
					0
13094	Rakstur av veganeti: 34 Vanligt hald, 36 Vetrarhald, 38 Ferjulegur, 39 Asfaltering:	Drift og vedligehold af vejnet	25000	0	0 0 0 25000
					0
13056	Fyritøkur og útgerð hjá LV: 56 Mobil, amboð, nýkeyp og rakstur, 57 Smiðjur, 58 Skervverk, 59 Asfaltverk:	Landsingeniørens virksomheder og redskaber	49500	0	0 0 0 49500
RAKSTUR			155150	12100	167250
13018	Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm størri ábøtur v.m.: 30 nýggir vegir og brýr, 31 Trygdartiltøk, 33 Størri ábøtur, 35 vegastokkur, 37 studningsvegir:	Nye veje og broer, udvidelse af broer m.v.	37750	0	0 0 0 0 0 37750
13227	Vegagerð í s. v. brennistøð	Vej til forbrænd.anlæg	1500	0	1500
13061	Berghols- og brúgvagerð	Tunnel- og brobygning	30000	0	30000
13023	Havnagerð	Havnebygning	90000	0	90000
13037	Lendingar	Landingspladser	30000	0	30000
13042	Flogferðsla	Flyvetrafik	4800	0	4800
13075	Stuðul t. komm. t. asfaltering	Tilsk.t. komm. til asfaltering	5500	0	5500
	Útvarpssendistøð	Radiostation	21000	-5000	16000
	Keyp av tyrlu		0	663 x)	663
ÍLØGUR			220550	-4337	216213
			375700	7763	383463

GREIN 14	ÚTBÚGVING OG GRANSKING	UDDANNELSE OG FORSKNING	J 1991	Eyka-játtan 91.	Samlað játtan 1991.
14053	Felagsútr. f. skúlaverkið	Fællesudg. for skolevæsenet	1750	-250	1500
14067	Endurgjald til rithøvundar	Refusion til forfattere	250	90	340
14103	Fólkaskúlin	Folkeskolen	140470	4500	144970
14117	Skúlabarnaflutningur	Transport af skolebørn	3000	0	3000
14122	Lærarapeftirlønir	Lærerpensioner	11000	-250	10750
14155	HF-skeið í Suðuroy	HF-kursus på Suðuroy	3500	1092	4592
14169	HF-skeið í Klaksvík	HF-kursus i Klaksvík	2600	0	2600
14174	Eysturoyar stud.sk.og HF-skeið	Eysturoy gymnasium/HF-kursus	11400	0	11400
14205	Stud.sk.og HF-skeið í Hoydølum	Hoydalar gymnasium/HF-kursus	19320	1000	20320
14257	Kostdeild studentaskúlans	Gymnasiets kostafdeling	1900	200	2100
14307	Føroya Sjómansskúli	Færøernes Navigationsskole	5600	700	6300
14397	Tekniski skúlin í Klaksvík	Teknisk skole i Klaksvik	4000	0	4000
14409	Klaksvíkar Sjómansskúli	Klaksvik Navigationsskole	2200	0	2200
14414	Føroya Maskinskúli	Færøernes Maskinskole	7000	0	7000
14433	Maskinútbúgving í Klaksvík	Maskinuddannelse i Klaksvik	180	0	180
14447	Tekniskur skúli í Tórshavn	Teknisk skole i Tórshavn	9800	1800	11600
14452	Skúlaheim í Tórshavn	Kollegium i Torshavn	2400	0	2400
14466	Skúlaheim í Klaksvík	Kollegium i Klaksvik	1230	0	1230

14471		Útgerð Tekn./Handilsk./aðr.sk.	Udstyr Tekn./Handelssk./andr.s	700	0	700
14485		Føroya Handilsskúli	Færøernes Handelsskole	14000	0	14000
14499		Føroya Lærareskúli	Færøernes Seminarium	10500	0	10500
14502		Føroya Fólkaháskúli	Færøernes Folkehøjskole	2288	0	2288
14516		Privatir skúlar	Private skoler	1139	0	1139
14554		Húsarhaldsskúlar	Husholdningsskoler	950	0	950
14604		Fritíðarundirvísing	Fritidsundervisning	6000	0	6000
14618		Stuðul til musikkskúlar	Tilskud til musikskoler	4500	550	5050
14656		Landsmiðstøð f. undirv.amboð	Landscentr. for undervisn.matr	2800	0	2800
14661		Fiskiidn.og havb.sk. í N.str.	Fiskeind. og havbr.sk i N.str.	3100	0	3100
14675		Sjóvinnuskúli	Søfartsskole	500	-250	250
14725		Stórahús við Áir	Storehus vid Åir	500	0	500
14739		Seismiskar kanningar	Seismiske undersøgelser	0	0	0
14744		Samarb. DGU/Føroya Jarðfr.savn	Samarb. DGU/F. Jarðfrøðissavn	845	0	845
14758		Fróðskaparsetur Føroya	Færøernes Akademi	11500	1000 x)	12500
14763		Stovn.á Debesartrøð,felagsútr.	Instit.på Debesart., fællesudg	1350	0	1350
14777		Biofar-projektið	Biofar-projektet	490	0	490
14796		Sernámsfrøðilig ráðgeving	Specialundervisning	25487	650	26137
14808		Skúlabókaútgáva	Udg. af skolebøger	4500	0	4500
14851		Útbúgvingarstuðul	Uddannelsesstøtte	38000	-400	37600
14879		Skúlaverkið, prøvtøkur	Udarb. av eksamensmateriale	2300	900	3200
14953		Ymiskir studningar	Diverse tilskud		0	0
	313264	Skúlabarnaferðir uttanlands	Skolebørns rejser udenlands	0	0	0
	313272	Skúlabarnaferðir innanoyggja	Skolebørns rejser indenlands	0	0	0
	313351	Hæmingastudningur t. listamenn	Tilsk. t. kunstner. uddannelse	40	0	40
	313376	MFS og MFÚ	MFS og MFÚ	200	0	200
	313406	St.t.fremm. íð lesa í Føroyum	Tilskud til ikke-færinger	35	0	35
	313439	Læruráðið (eftirútb.av yrkisl.)	Læreråd. (efterudd. af håndv.)	350	0	350
	313471	Eftirútb. av sjómonnum	Efteruddannelse af sømænd	100	0	100
	313613	Dieselmotorsimulator	Dieselmotorsimulator	548	0	548
	323165	Rakstur av bókamiðsøluni	Driftstilsk. t. bókamiðsølan	388	0	388
	373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	400	0	400
		Bústovnur Føroyinga í Útbúgving.		0	403	403
RAKSTUR				361110	11735	372845
		L.miðst.Bókamiðs.Sk.b.gr. keyp	Lands-,Bogcentr.Sk.b.fond køb	1500	0	1500
		Fólkaskúlin, nýbyggingar	Folkeskolen, nybyggelser	9500	0	9500
		Sjómansskúli, umb./nýb.	Navigationsskole, omb./nyb.	500	0	500
		Studentaskúli í Hoydølum, umb.	Gymnasium i Hoydølum byg.			0
		Studentask. og HF á Kambsdali	Gymnasium og HF á Kambsdali	2000	-500	1500
		Handilsskúli á Kambsdali	Handelsskole á Kambsdali	0	0	0
		Lærara- og venjingarskúli	Lærara- og Venjingarskúli	600	0	600
		Maskinskúli, nýb.	Maskinskole, nyb.	2500	0	2500
		Brandskúlin	Brandskolen	190	0	190
		Miðnámsskúli í Suðuroy	Skole, Suðuroy	0	0	0
ÍLØGUR				16790	-500	16290
				377900	11235	389135

GREIN 15 MENTAN		KULTUR	J 1991	Eyka-játtan 91.	Samlað játtan 1991.
15109	Landsbókasavn	Landsbibliotek	4119	0	4119
15202	Fólkabókasøvn	Folkebiblioteker	5960	350	6310
15304	Landsskjalasavn	Landsarkiv	2132	150	2282
15406	Føroya Fornminnissavn	Færøernes museum	4961	0	4961
15508	Bygdasøvn	Bygdemuseer	1600	400	2000
15601	Útvarpið	Færøernes Radio	0	0	0
15615	Sjónvarp Føroya	TV	3500	0	3500
15629	Mentunargrunnur	Kulturfond	1800	0	1800
15634	Føroyahús í Keypmannahavn	Færøernes hus i København	850	0	850
15703	Náttúrugripasavn	Naturhistorisk samling	3500	0	3500
15857	Náttúrufriðingarnevndir	Naturfredningsudvalg	250	0	250
15881	Føroyska málnevndin	Færøsk sprognævn	250	0	250
15895	Tónleikur og sangur	Musik og sang	500	0	500
15907	Ymiskir studningar	Diverse tilskud		0	0
323012	Barnablað	Børneblade	100	0	100
323037	Leikpallur Føroya	Teater	1700	0	1700
323053	Barnabókaútgáva	Børnebogsudgave	1100	0	1100
323086	Samdarp. t. skald og listafólk	Hædersg. t. digt- og kunstnere	225	0	225
323108	Lán og studn.gr. t.bókaútgávu	Låne-og tilskudsf.t.udg. bøger	0	0	0
323124	Norðurlandahús	Nordens hus	688	0	688

	323173	Orðabókaútgáva	Udgivelser af ordbøger	250	0	250
	323236	Listasavn	Kunstsamlinger	340	0	340
	323269	Før-ísl-grønl.mentanarsamstarv	Før.-ísl.-grønl. kultur.samarb	130	0	130
	373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	220	0	220
	313384	Norrøna felagið	Nordisk forening	190	0	190
	313455	Ungmannafelag og skótarørsla	Ungdomsfor. og spejderbevæg.	600	0	600
15931		Studningur til kirkjugrunnin	Tilskud til kirkefonden	1700	0	1700
		Kirkja í Keypm.h. leiga av eki	Kirke i København., leje av grund	300	0	300
15959		Ítróttur	Idræt			0
		Studningur til ÍSF	Tilskud til ÍSF	3200	0	3200
		Studn. til ferðir innanoyggja	Tilskud til rejser	1500	0	1500
RAKSTUR				41665	900	42565
		Tjóðsavn,Náttúrugripasavn,nýb.	Nationalmuseum/Naturh.mus.nyb.	0	0	0
		Prestagarður í Sandágerði,savn	Præstegård i Sandágerði	1000	0	1000
		Listasavn Føroya	Færøernes Kunstsamling	1500	0	1500
		St.t. bygdarhús, nýb.	Tilskud til bygdehus, nyb.	5000	0	5000
		Leguhús, Nesvík	Lejrsted i Nesvík			0
		Savn í Hoyvík, umv.	Museum i Hoyvik, nyb.	0	0	0
		Landsskjalasavn, nýb.	Landsarkiv, nyb.	1000	-1000	0
		Kirkjubønúrurin, umv.	Huren i Kirkjubø, rep.	500	0	500
		Kirkjur, nyb.	Kirker, nyb.	1000		1000
		Náttúrugripasavn, umb.	Naturhistorisk samling, rep.	300	-300	0
		Sjónvarp Føroya, nýb./umb.	TV, nyb./omb.	0	0	0
		Studningur t. ítróttarbygging	Byggetilskud til idræt	1578	1900	3478
		Grasvøllur á Toftum	Fodboldbane, Toftir	2667	0	2667
		Grasvøllur í Hvalbø	Fodboldbane, Hvalba	0	225	225
		Graslíkisvøllir	Kunstgræsbaner	2700	0	2700
		Fróðskaparsetur Føroya	Færøernes Akademi	0	1130	1130
ÍLØGUR				17245	1955	19200
				58910	2855	61765

GREIN 16 FISKIVINNA, SIGLING OT.		FISKERI, SØFART O.L.	J 1991	Eyka-játtan 91.	Samlað játtan 1991.
16018		Góðskueftirlit	Fiskekvalitetskontrollen	2145	0	2145
16301		Vaktar- og bjargingartænastan	Vagt- og bjærgningstjeneste	17179	0	17179
16367		Bjargingarfeløg	Redningsforeninger	180	0	180
16372		Skipaskrá og -uppmáting	Skibsregistrering og -opmåling	700	0	700
1639		Havbit á Føroya Banka	Opdrætsforsøg på Føroya Banki			0
16403		Royndir innan havbúnað	Fiskeopdrætsforsøg	2443	0	2443
		Minstaløn oa. stuðul t.fiskiv.	Mindstel. oa. s.t. fiskerierh.			0
16422		Lønjavningargrunnurin	Løngarantifonden	5200	0	5200
16436		Lógb.útr.(dagstudn.minstal.oa)	Lovb. udg. (dagt.s.,mindstel.	70000	0	70000
16441		Studningar	Tilskud	280000	5500	285500
16455		Fiskiv.royndir u.f. før.landi.	Fiskeriforsøg i fremmed farvan	10000	-5500	4500
16469		Varðveiting av fjølbr. flota	Bibeh. af differ.fiskeflåde	13000	0	13000
16474		Endurgj.upphegging gl.fiskisk.	Ers.f.kondemn. gamle fiskefart	90000	0	90000
16488		Praktiskar fiskiroyndir	Praktiske fiskeriforsøg	4000	-300 x)	3700
16493		Hvalastøðin	Hvalstationen	160	0	160
16505		Prísásetingarnevndin fyri fisk	Udv.til fasts. af fiskepriser	21	0	21
16519		Fiskirannsóknarstovan	Fiskeribiologisk laboratorium	6500	0	6500
16607		Fiskivinnuráð	Fiskeriråd	250	0	250
16626		Magnus Heinason	Magnus Heinason	8938	0	8938
16645		Sáttmálaeftirlit	Konsulenter, vurd. af fartøjer	400	0	400
		Veðurfrøðingur	Meteorolog	500	0	500
16904		Aðrir studningar	Andre tilskud			0
	333199	Upplýsing um grind	Oplysning om grindehvalfangst	250	200 x)	450
	333208	Limagjald í fleirtj.felagssk.	Medlems. i intern. fællessk.	500	0	500
	333408	Trygdargrunnur alivinnunar	Garantifond for fiskeopdræt	0	11600 x)	11600
	373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	1000	-300	700
RAKSTUR				513366	11200	524566
		Fiskaaling við Áir, nýb.	Fiskeopdræt við Áir, nyb.	8500	0	8500
ÍLØGUR				8500	0	8500
				521866	11200	533066

Samlað

GREIN 17	LANDBÚNAÐUR	LANDBRUG	Á 1991	Eyka- játtan 91.	Játtan 1991.
17015	Landsdjóralæknaembættið	Landsdyrlægeembedet	3351	0	3351
17029	Djóralæknatænastan	Dyrelægetjeneste		0	0
17034	Fiskasjúkutænastan	Fiskesygetjeneste		0	0
17048	Landbúnaðarráðgevari	Landbrugskonsulent	417	0	417
17205	Royndarstøðin	Forsøgsstationen	4697	0	4697
17219	Avloys.sk.f.mjólkaframl.	Ferieordn. for malkeprod.	580	0	580
17307	Skógrækt landsins	Landets skovvæsen	1492	0	1492
17409	Fuglakanningarstøð vm.	Ornitologisk station m.v.	100	100 x)	200
17901	Aðrir studningar	Andre tilskud		0	0
343013	Húsdjóraaling	Husdyreopdræt	154	0	154
343021	Nýdyrking vm.	Nyopdyrkning m.v.	2500	0	2500
343038	Rentustudn. t. landbúnaðarlán	Rentetilskud til landbrugslån	1000	0	1000
343046	Studn.t.ilegging í landbúnaðin	Financieringstils.til landbrug	3500	0	3500
343054	Studn. til mjólkaframleiðslu	Tilskud til malkeproduktion	12500	0	12500
343062	Studningur til súrhoyggjbrunnar	Tilskud til græssiloer	300	0	300
343087	Skeiðvirksemi	Kursusvirksomhed	50	0	50
343117	Vekstrarhús, studningur	Drivhuse, tilskud	800	0	800
343125	Studn. til stráfóður	Tilskud til stråfoder	1295	0	1295
343133	Studningur til kjøt	Tilskud til kød	2800	0	2800
343308	Bjargarækt	Pasning af fuglefjelde	100	0	100
	Stuðul til ull/ullarúrdráttir	Projekt vedr.bearbejdn. af uld	200	0	200
373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	80	0	80
RAKSTUR			35916	100	36016

GREIN 18	VINNULÍV OG ARBEIDSMARKNAÐUR ANNARS		Á 1991	Eyka- játtan 91.	Samlað játtan 1991.
18109	Arbeiðseftirlit	Arbejdstilsyn	3643	0	3643
18152	Brandvenjingarstøð við Áir	Brandtræningsstationen við Åir	250	0	250
18166	Brunaumsjón Landsins	Brandsikkerhedstilsyn	500	0	500
18202	Bileftirlit	Biltilsyn	1250	0	1250
18216	Radioeftirlit	Radiotilsyn	255	0	255
18235	Ráðið fyri ferðslutrygd	Rådet for færdselssikkerhed	961	0	961
18268	Filmseftirlitið	Filmtilsynet	330	0	330
18318	Semingsmannaskipan	Forligsinstitution	60	80 x)	140
18323	Studningur til kolagrevstur	Tilskud til kulminedrift	500	200	700
18337	Læruráðið	Lærerådet	1066	200 x)	1266
18342	Skeiðvirksemi	Kursusvirksomhed	50	0	50
18353	Ferðamannastovan "Aldan"	Turistcentralen "Aldan"	0	0	0
18356	Ferðamannamiðstøðin	Turistcentralen	2984	75	3059
18361	Menningarstovan	Kontor for industriel udvikl.	1903	0	1903
18406	Sjómansheim	Sømandshjem	300	0	300
18508	Vestnordenprosjektið	Vestnordensprojektet	100	0	100
18513	Menningargrunnur Útnorðurs	Vestnordenfonden	45	0	45
18527	Menningargrunnur Iðnaðarins	Til Udviklingsfond	15000	0	15000
18532	Stuðul til iðnaðarfr. endamál	Støtte til industrifr. formål	5100	0	5100
	Farmaflutningsendurgjald	Fragtrefusion		0	0
	Tollendurgjald	Toldrefusion		0	0
	Rentustudningur	Rentetilskud		0	0
18601	Heilsufrøðilig starvsstova	Hygiejnisk laboratorium	5253	0	5253
				0	
18653	Orkuráðið	Energirådet	400	0	400
18667	Orkuráðið, kanningarvirksemi	Energirådet, undersøgelser	400	0	400
18365	Javnstøðunevndin	Ligestillingsudvalget	200	0	200
18	Stuðul t. Gistingarhúsgrunnin	Tilskud t. Hotellånefond	1000	0	1000
	Oljuvinna, kanningar	Oljeudvinding, undersøgelser		0	0
	Stuð.t. umhvørvisverndartiltøk	Tilskud t. miljøbesk.projekter		0	0
18907	Aðrir studningar	Diverse tilskud		0	0
353067	Studningur til læruplóss	Tilskud til lærepladser	1700	1400	3100
353121	Skeiðvirksemi til vinnufelag	Kursusvirksomhed	50	0	50
353146	Ferðaendurgjald til læruplóss	Refusion t. lærepl. for rejser	200	0	200
353162	Endurgj. furunkolosusmitting	Erst. for smittede opdrætsfisk	0	0	0
373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	130	0	130
RAKSTUR			43630	1955	45585
	Hálkubreyt, Bileftirlit, nýb.	Øvelseskørebane, Biltilsyn, ny	1000	0	1000
	Bileftiriitið, sýningarhøll	Biltilsyn, kontrolstation	200	0	200
	Ferðam.miðst.Kristnastova,umb.	Turistcentralen, Kristnastova,	500	0	500
15806	Heilsufr. Starvsstova, nýb.	Hygiejnisk laboratorium, nyb.	3000	-2000	1000

ILØGUR	4700	-2000	2700
	48330	-45	48285

GREIN 19	ALMANNAMÁL VM.	SOCIALVÆSEN M.V.	J 1991	Eyka-játtan 91.	Samlað játtan 1991.
19042	Andveikraverndin, bústovnar	Åndsvageforsorgen, boliger	33059	0	33059
19056	Fólkapensjón	Folkepension	224600	0	224600
19075	Røktarheim	Plejehjem	81000	-981	80019
19089	Vistarheim fyri pensionistar	Boliger for pensionister	5949	0	5949
19094	Serviðb.t.ávísar pensiónistar	Særtillæg til pensionister			0
19106	Avlamispensión	Invalidepension	88900	3000	91900
19208	Einkjubarnastyrkur	Børnebid. til enlige forsørg.	4300	0	4300
19301	Einkjupensjón	Enkepension	1380	-375	1005
19403	Vanlig forsorg	Almindelig forsorg	54000	21000	75000
19407	Ymiskir forsorgarstovnar	Forsk. forsorgsinstitutioner	14606	-500	14106
19519	Uppfiskoytisveiting	Tillægssydelse	720	0	720
19557	Barnaforsorg	Børneforsorg	15198	0	15198
19607	Heimahjálparskipanin	Hjemmehjælperordningen	47643	-1600	46043
	Vardar íbúðir, stuð.t. rakstur	Beskyttede boliger, dr.tilskud			0
19631	Dagstovnar	Daginstitutioner	52347	0	52347
19659	Dagpeningaskipanin	Dagpengeordning	72000	-7500	64500
19664	Bjálv., hús hjá pensionistum	Isolering af pensionistboliger	2000	0	2000
19678	Brennistudn. til pensionistar	Brændselstilskud til pensionis	6500	0	6500
19683	Barnastyrkur	Børnetilskud	40000	-28500	11500
19697	Sams.f. ans.eldri og óhj.heima	Vederl.for at passe ældre hj.	9900	-1900	8000
19868	Andveikraverndin, før.í Danm.	Åndsvageforsorgen, før. i Danm	14600	0	14600
19892	Vanlukkutryggingarráðið	Ulykkeforsikringsrådet	500	0	500
19904	Ymsir studningar	Forskellige tilskud			0
363382	Mæðrahjálp	Mødrehjælp	300	-300	0
363399	Kreppumiðstøð	Krisecenter	100	0	100
363557	Hús hjá deyvafelagnum	Døves foreningshus	560	0	560
363565	Blindaheimið	Blindehjemmet	3800	0	3800
363598	Fráhaldsfelag Blákrossstuvan	Afholdningsforening Blåkross	120	0	120
363603	Styrkveiting	Understøttelse	150	0	150
363628	ALV	ALV	350	0	350
363636	Fráhaldsfeløg	Afholdsforeninger	450	0	450
363644	Reyði Krossur	Røde Kors	30	0	30
363652	Hjálpargr.f.óarb.førar fiskim.	Fonden f. uarbejdsd. fiskere	400	0	400
363669	Feløg teirra brekaðu	Foren. handikappede	880	0	880
363707	Arbeiðsl.gr. arbeiðarafelaga	Arbejderfore. arbejdsløshedsf.	500	0	500
363797	Ráðg.f.føroyingar í Danmark	Rådg. for færinger i Danmark	445	0	445
363819	Bústovnar fyri sinnisbrekað	Institutioner for sindslidende	0	0	0
363827	Hjálpargr.móti alkoh.misnýtslu	Hjælpefond mod alkoholmisbrug	1000	0	1000
363851	Landsfelag pensionistanna	Pensionisternes landsforening	150	0	150
333104	Trygdargr. f. avreið. og lønir	Lønmodtagerens garantifond	700	108 x)	808
373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	1600	-800	800
RAKSTUR			780737	-18348	762389
	Vardar íbúðir, Tórshavn	Beskyttede pensionistb.,Torsh.	1601	0	1601
	Bústovnar, serforsorg	Døgninstit., særforsorg	0	0	0
	Dagheim á Berjabrekku, nýb.	Daginst., Berjabrekka	4000	-2000	2000
	Uml.heim og bústovnur, Suðuroy	Døgninst., Suðuroy	1500	-1500	0
	Bústovnur, Eysturoy, nýb.	Døgninstit. Eysturoy, nyb.	2000	0	2000
	Røktarheim í Norðstreymoy,nýb.	Plejehjem, Norðsteymoy, nyb.	1000	-1000	0
	Ellisheim í Havn, umb.	Alderdomshjem, Tórshavn, omb.	400	0	400
	Sandoyar Ellis- og røktarheim	Sandoy alderd. og plejehjem	12450	0	12450
	Eystuoyar Ellis- og røktarheim	Eysturoyar alderd. og plejehje	0	981	981
ÍLØGUR			22951	-3519	19432
			803688	-21867	781821

	ÍBÚÐARMÁL		J 1991	Eyka-játtan 91.	Samlað játtan 1991.
19956	Húsalánsgrunnurin	Boliglånefondet	0	0	0
19961	Íbúðargrunnur	Boligfond	1000	0	1000
19975	Rentustudn. til húsabygging	Rentetilskud til husopsparing	1700	0	1700
RAKSTUR			2700	0	2700

GREIN 20 PENSIÓNSÚTREIÐSLUR		PENSIONSUDGIFTER	Í 1991	Eyka játtan 91.	Samlað játtan 1991.
20013	Pensiónsútreiðslur	Pensionsudgifter			0
103558	Pensiónir	Pensioner	730	40	770
103612	Bíðipeningur	Ventepenge	3600	500	4100
103629	Tænastumannaeftirlønir	Tjenestemandspensioner	6000	350	6350
RAKSTUR			10330	890	11220

GREIN 21 EFFEKTIVAR VEÐHALDSBINDINGAR		EFFEKTIVE GARANTIFORPLIGTELSER	Í 1991	Eyka-játtan 91.	Samlað játtan 1991.
21019	Effektivar veðhaldsbindingar	Effektive garantiforpligtelser	170000	0	170000

GREIN 22 ADRAR ÚTREIÐSLUR		ANDRE UDGIFTER			
22104	Aðrar óvissar útreiðslur	Andre uvisse udgifter			0
203507	Umboðan	Repræsentation	1200	0	1200
253704	Útreiðslur av vali	Udgifter vedrørende valg	100	0	100
253753	Dóms- og løgreglumál	Retsvæsen og politi	35	0	35
253808	Studn.t. politiska upplýsing	Tils.t. politisk oplysningsarb	3500	0	3500
373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	2200	-400	1800
RAKSTUR			7035	-400	6635

GREIN 26 YMSAR OGNARÚTREIÐSLUR		DIVERSE EJENDOMSUDGIFTER			
26305	Ymsar ognarútreiðslur	Diverse ejendomsudgifter	700	0	700

GREIN 27 ÓVISSAR ÚTREIÐSLUR		UVISSE UDGIFTER			
27005	Óvissar útreiðslur	Uvisse udgifter	0	20000	20000

RAKSTRARROKNSKAPUR	DRIFTSREGNSKAB	Í 1991	Eyka-játtan 91.	Samlað játtan 1991.
INNTØKUR TILSAMANS	INDTÆGTER IALT	2576755	-52800	2523955
RAKSTRARÚTREIÐSLUR, VEÐHALD OG UPPHØGGING FRÁR.	DR.UDG.EXCL.GAR.FORPL.OG KOND.	2365250	54787	2420037
UPPHØGGING OG EFF. VEÐHALDSÚTR.	GARANTIFORPL. OG KONDEMN.	260000	0	260000
ÍLØGUÚTREIÐSLUR TILSAMANS	INVESTERINGSUDGIFTER IALT	307136	-1046	306090
ÚTREIÐSLUR TILSAMANS	UDGIFTER IALT	2932386	53741	2986127
ÚRSLIT AV RAKSTRI OG ÍLØGUM	RESULTAT E.DRIFT OG INVEST.	-355631	-106541	-462172

GJALDFØRISROKNSKAPUR	LIKVIDITETSBUDGET		
LANDSFYRITØKUR	LANDSVIRKSOMHEDER		
Telefonverkið	Telefonvæsenet	21000	21000
Tjaldurs Apotek	Tjaldurs Apotek	6000	6000
Postverkið	Postvæsenet	-4800	-4800
		22200	22200

NÝÚTLÁN					
	333025	Endurnýggj.fiski- og farmaskip	Forn. af fiske- og fragtskibe	10000	10000
14953	313152	Grunnur til útbúgving, lán	Uddannelsesfond, lån	8000	8000
	363693	Kommunalur lánsgrunnur	Kommunal lånefond	485	485
NÝÚTLÁN TILSAMANS			NYUDLÅN IALT	18485	18485
AVDRÁTTIR AV UPPTIKNUM LÁNUM			AFDRAG PÅ LÅN	31400	31400
AFTURGJALD AV BUNDNARI UPPSPARING			TILBAGEBET. AF BUNDEN OPSPARIN	0	0
NÝÚTLÁN OG AVDRÁTTIR, GJALDFØRISFRÁGONGD			NYUDLÅN OG AFDRAG, LIKV.TRÆK	49885	49885
INNGJALDING AV AVDRÁTTUM, GJALDFØRISTILGONGD			INDB. PÅ LÅN, FORØG. AF LIKV.	30800	30800
KAPITALPOSTAR TILSAMANS			KAPITALPOSTER IALT	-41285	-41285
GJALDFØRISHALL			LIKVIDITETSUNDERSKUD	-396916	-106541 -503457

Viðmerkingar.

Við hesum verður lagt fyri Løgtingið uppskot um eykafíggjarløgtingslóg 1991.

Landsstýrið metir, at tað er rætt og av stórum týdningi, at slíkt lógaruppskot verður framlagt, áðrenn fíggjarárið, sum viðkomandi fíggjarlóg fevnir um, er liðugt.

Høvuðsorsøkirnar til slíka framløgu eru:

1) Eykajáttanir og rættingar til galdandi fíggjarlóg eiga at verða samtyktar av Løgtinginum, meðan lógin enn er galdandi. Hetta er eftir landsstýrisins áskoðan í samsvari við stýrisskipanarlógina.

2) Við at gera eina eykafíggjarlóg verður játtanareftirlit útint áðrenn ov seint er, og ein neyðug viðgerð av møguligum meirnýtslum (og minninýtslum) fer fram, og politiskar avgerðir verða tiknar.

3) Landsstýrið og Løgtingið verða kunnað um gongdina av inntøkum og útreiðslum landskassans og lógin kann sostatt nýtast sum yvirordnað stýringsamboð.

Lógaruppskotið er uppsett við byrjunarstøði í fíggjarlógini fyri 1991. Við roknskaparupplýsingum fyri fyrstu 10 mánaðirnar av árinum og upplýsingum frá teim ymisku deildunum og stovnunum sum grundarlag, eru uppsettar væntaðu upphæddirnar fyri

1. Meirinntøkum
2. Minniinntøkum
3. Meirútreiðslum
4. Minniútreiðslum.

Sum seinasta rað er uppsett væntaðu roknskapartølini, sum svara til samlaðu fíggjarlógartølini fyri 1991. Høvuðstølini í eykajáttanini 1991 eru hesi:

Minni inntøka	34.600.000
Meirnýtsla, rentur	18.200.000

Meirnýtsla rakstur		73.535.000
		126.335.000
Minninýtsla, rakstur	18.748.000	
Minninýtsla, íløgur	1.046.000	19.794.000
Samlaður meirtørvur		106.541.000

Hesar upphæddir skulu sjálvandi skoðast í mun til upprunaligu fíggjarlógarupphæddirnar, sum vóru:

Inntøkur	2.684.355.000
Útreiðslur + íløgur	3.039.986.000

Inntøkuminkingin svarar sostatt til 1,3% og meirútreiðslurnar svara til 2,37%.

Tær meirnýtslur, sum verið hava, eru fyri tað mesta lógarfestar. Nakrar eykajáttanir eru givnar av fíggjarnevndini í árinum og eru tær merktar við x) í lógaruppskotinum.

Tað, at eykajáttanir eru í hesum lógaruppskoti, er ikki tað sama sum, at slíkar kunnu útvegast aftur komandi ár. Har, sum meirnýtsla er, verður henda kannað gjølla av viðkomandi deild innan landsfyrisitingina og viðkomandi stovnur má greiða umsitingina betur í framtíðini.

Tað, at ein minninýtsla verður staðfest á hesi eykafíggjarlógini, vil ikki siga tað sama sum, at játtanin komandi ár, av sær sjálvum verður niðurskorin.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar eru hesar:

§ 1. Skattur

Eftir teim upplýsingum, sum pr. 1. november 1991 fyriliggja um inngoldnan A og B skatt er hesin . . . . . 807 mió. kr.
Partafelagsskattur fyri árið er . . . . . 50 mió. kr.

Umroknað til 12 mánaðir svarar hetta til 1.020 mió., sum er upphæddin á fíggjarlógini 1991.

Upphæddirnar fyri avlopsskatt og írestandi skatt 1990 kunnu broyta hettá tal nakað niðureftir, men samstundis kann skyldugur, men enn ikki goldin B skattur 1991 økja um upphæddina. Hesi tøl eru ikki enn uppgjørd, men plaga nøkulunda at útjavna hvørt annað. Tí er eingin broyting gjørd í skattaupphæddini.

§ 2. Tollur, nýtslu- og framleiðslugjøld

Tollur er mettur at geva 595 mió. kr., tá ið 1991 er liðugt. Hetta tal er uppgjørt soleiðis:

Tollinntøka higartil		457 mió. kr.
Mett tollinntøka nov./des.:		
Tollur nov. 1991	58 mió. kr.	
Tollur des. 1990	80 mió. kr. . . .	138 mió. kr.
		595 mió. kr.

Brennioljugjøld eru mett soleiðis:

Higartil innkomið	58 mió. kr.
Kom inn í nov./des. 1990	16 mió. kr.
	74 mió. kr.
Mett inntøka tilsamans 1991	71 mió. kr.

Virðis- og vektargjøld eru ætlað til 30 mió. kr. á fíggjarlógini. Fyrstu 10 mánaðirnar eru innkomnar umleið 26 mió. kr. og gjøldini eru nú í vøkstri, so varisliga er mett, at talið verður 30 mió. kr., tá árið er liðugt.

§ 5 Rentur v.m.

5105 Rentuinntøkur:

Rentuinntøkurnar eru munandi størri enn væntað, tí ikki var roknað við rentuinntøkunum hjá ymsum grunnum.

Landsstýrið leggur fram uppskot í næstum um avtøku av flestu landskassagrunnunum, og harvið verður rentuinntøkan á hesum grunnum flutt til landskassan.

5207 Rentuútreiðslur:

Tvær høvuðsorsøkir eru til, at rentuútreiðslurnar eru undirmettar. Onnur er, at inntøkur landskassans eru yvirmettar og ávísar útreiðslur eru undirmettar og at ymisk óavgreidd mál hava ligið m.a. upphøgging og at hetta tilsamans hevur gjørt, at

gjaldføri landskassans er gingið skjótari undan enn væntað. Harvið er skuld landskassans vaksin skjótari enn væntað, og eru sostatt rentuútreiðslurnar størri. Hin orsøkin er kursbroytingar, serliga í samband við upptøku av lánum. Hesar kursbroytingar verða taldar við í rentuútreiðslurnar.

§ 10 Løgtingið

10018 Løgtingsmenn:
Meirnýtslan á hesum rakstrarstað verður í 1991 kr. 100.000,-.

10158 Løgtingsskrivstovan:
Útreiðslurnar til løgtingsskrivstovuna verða í 1991 kr.600.000,- meira enn játtanin á fíggjarlógini. Hetta stavar frá ógjølligari budgettering.

11991 Norðurlandaráð:
Meirnýtslan á hesum rakstrarstað verður í 1991 kr. 200.000,-.

§ 11 Landsfyrisiting

11015 Løgmaður og landsstýri:
Orsøkin til meirnýtsluna í 1991 uppá kr. 460.000,- er, at hædd ikki var tikin fyri 7. landsstýrismanninum á verandi fíggjarlóg.

11053 Landsskrivstovan:
Í 1991 verða útreiðslurnar kr. 300.000,- minni enn játtað á fíggjarlógini. Men tað eru 2 ósett stjórastørv á landsskrivstovuni. Høvdu størvini verið sett, hevði tað knípt við at hildið játtanina.

11072 Fyrireiking av umhvørvisfyrisiting:
Tað eru játtaðar kr. 400.000 til endamálið á fíggjarlógini 1991, men kr. 150.000 verða ikki brúktar í ár.

11086 Sjóvinnuráð, fyrireiking av sjóvinnufyrisiting:
Tað verða brúktar kr. 292.000,- minni enn játtað í 1991.

11409 Landsskúlafyrisitingin:
Landsskúlafyrisitingin hevur skotið upp, at flyta kr. 200.000,- av hesum rakstrarstað til 14879 Skúlaverkið, prógtøkur.

11433 Fyrireiking av nýggjari avgjaldsskipan:
Landsstýrið og fíggjarnevndin hava játtað kr. 4.500.000,00- eyka í 1991 til arbeiðið við nýggjari avgjaldsskipan.

11452 Føroya Gjaldstova:
Meirútreiðslurnar á Føroya Gjaldstovu í 1991 verða kr. 1.500.000,- . Burtursæð frá kr. 600.000,- í porto, sum gjaldstovan ikki heldur eigur at gjaldast av gjaldstovuni einsamallari, skuldi raksturin nú verið tillagaður játtanina, men orsaka av uppsagnarfreistum fóru fleiri av starvsfólkunum ikki úr starvi fyrr enn miðskeiðis í árinum.

11554 Tolleftirlit:
Í 1991 verður meirnýtslan kr. 442.000,- á tolleftirlitinum. Stovnurin hevur ikki møguleika at broyta so mikið í 1991 at játtanin kann halda, av tí at starvsfólkið eru tænastumenn.

11661 Heilsu- og heimasjúkrasystra fyrisitingin:
Grundað á neyðugar uppsagnarfreistir var so langt útliðið á árið, at tørvur verður á kr. 175.000,- eyka í 1991.

11703 Búskaparráð:
Meirnýtslan til búskaparráðið verður í 1991 kr. 40.000,- av tí at gamla búskaparráðið varð avtikið seinni enn ætlað.

11709 Hagstovan:
Í samband við keyp av nýggjum e.d.v. tólum hevur landsstýrið og fíggjarnevndin játtað hagstovuni kr. 1.000.000,- eyka í 1991.

11808 Innheintingarútreiðslur:
Tað er sera torført at rokna samlaðu útreiðslurnar til hetta rakstrarstað, bæði tí tað er ógvuliga ymiskt, hvussu nógvar rættarsakir koma fyri tey einstøku árini, og tí tað eru fleiri stovnar, ið fáa sínar rættarsakir goldnar av hesum rakstrarstað.

Eftirstøðurnar eru alsamt vaksandi og roknast má við størri útreiðslum til innkrevjing næstu tvey til trý árini.
Setanin av einum innkrevjingarfulltrúa skuldi tó sum frálíður gjørt, at kostnaðurin minkar nakað, av tí at færri sakir fara til inkasso hjá sakførara.
Meirnýtslan til innheintinarútreiðslur verður í 1991 kr. 168.000,-.

11953 Fyrisitingarhús í Tinganesi, nýb.:
Grunnarnir til bygging av landsfyrisitingarhúsum og løgtingshúsi eru nú við rentutilskriving og teim kr. 700.000,-, sum umsitingar kontoin fyri Tinganesognirnar hevur goldið á conto fyri arbeiði uttan fyri byggimálið viðv. Sjó- og Vektarbúðini, komnir upp á kr. 28.300.000,- tilsamans.
Tilsamans verða útreiðslurnar av arbeiðinum, sum bygginevndin fyri Sjó- og Vektarbúðini hevur staðið fyri, kr. 30.300.000,-. Tað er 2 milj. kr. meiri enn til er í grunnunum.
Bygginevndin hevur tí heitt á landsstýrið um á uppskotinum til eykaløgtingsfíggjarlóg fyri 1991 at seta 2 milj. kr. til nevnda endamál.

Tollstovubygningur í Klaksvík, keyp og umbygging.
Løgtingið hevur samtykt at keypa og umbyggja eini hús í Klaksvík til tollstovu.
Kostnaðurin er kr. 5.000.000,- tilsamans.

§ 12 Heilsumál.

12007 Sjúkrakassar:
Meirnýtslan til sjúkrakassar verður í 1991 kr. 2.112.000,-.
Hettar eru lógarbundnar útreiðslur.

12026 Útreiðslur viðvíkjandi Ríkissjúkrahúsinum.
Upphæddin, sum verður sett á fíggjarlógina, er eitt mett tal, og tað vísir seg nú, at útreiðslurnar til hetta endamál vera í 1991 kr. 500.000,00 meira enn upprunaliga mett.

12508 Læknar:
Lógarbundnar útreiðslur, sum eru mettar kr. 200.000,- ov lágt.

12653 Heilsu- og heimasjúkrasystraskipan:
Fyri at halda verandi tænastustøði er neyðugt við kr. 3.800.000,- til heilsurøktina afturat í 1991. Nýtslan er longu nú farin uppum játtanina. Almanna- og heilsudeildin hjá landsstýrinum arbeiðir saman við stovninum at minka um útreiðslurnar, so hetta ikki endurtekur seg í 1992.

12774 Upplýsing um eyðkvæmi:
Tað eru játtaðar kr. 340.000,- á fíggjarlógini í 1991, men kr. 200.000,- verða ikki brúktar í ár.

Íløgur.
Klaksvíkar Sjúkrahús, umvæling/umbygging:
Landsstýrið og fíggjarnevnd hava játtað kr. 755.000,- eyka í 1991 til umvælingar og umbyggingar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Hotel Tórshavn, Keypmannahavn:
Orsakað av ógreiðum ognarviðurskiftum er man enn ikki sloppin í gongd við arbeiðið á Hotel Tórshavn, so bert helvtin av játtanini uppá kr. 800.000,- verður brúkt í 1991.

§ 13 Samferðsla og Samskifti.
13265 Strandfaraskip Landsins:
Játtanin til Strandfaraskip Landsins var í 1990 kr. 42 milj., men tá avtornaði vísti tað seg, at neyðugt var við eini eykajáttan uppá góðar kr. 17 milj., hóast stovnsins metingar í juni 1990 søgdu, at stórvegis meirnýtsla ikki fór at verða og so seint sum í november, bað stovnurin um eina eykajáttan uppá góðar kr. 10 milj.

Út frá hesum hevur landsstýrið saman við Strandfaraskipum Landsins hugt at roknskapinum pr. 30.september 1991, og hóast tað hevur eydnast at skerja útreiðslurnar við nærum kr. 10 milj. fyri 1991 í mun til 1990 (20%), verður neyðugt við eini eykajáttan uppá kr. 7.900.000,-. Hetta kemst lutvíst av, at Smyril ikki er útleigaður longur, og lutvís fóru sparitiltøkini ikki at virka heilt, fyrr enn miðskeiðis í árinum tá nýggj ferðaætlan varð løgd, eins og takstirnir hækkaðu nakað.

13279 Bygdaleiðir:
Játtanin í 1990 var kr. 20,8 milj., men tá tað ikki eydnaðist at fáa sett sparitiltøk í verk, var neyðugt við eini eykajáttan uppá góðar kr. 10 milj. Ferðaseðlaprísirnir eru í 1991 hækkaðir, eins og ferðaætlanin er skerd, og av hesum eru 7 bussar farnir úr skipanini. Hetta hevur hjálpt munandi til at fáa útreiðslurnar niður, men av tí at sparingin ikki fór at virka fyrrenn miðskeiðis í árinum, verða útreiðslurnar um 20% lægri og ikki 30% sum upprunaliga ætlað, t.v.s. tilsamans eini kr. 25 milj. Sostatt verður tørvur á eini eykajáttan uppá kr. 4,2 milj.

Nærum allar útreiðslur hjá Strandfaraskipum Landsins og Bygdaleiðum eru sáttmálabundnar og er landskassin tí bundin at gjalda hesar.

Íløgur.
Útvarpssendistøð:
Játtanin á fíggjarlógini í 1991 til Útvarpssendistøð er kr. 21.000.000,-. Men landsstýrið hevur gjørt avtalu við telefonverkið um, at kr. 16.ooo.ooo,- vera goldnar í 1991 og restin yvir 3 ár.
Minninýtslan á hesi konto verður tí kr. 5.000.000,-.

Keyp av tyrlu:
Sambært løgtingslóg nr. 51 frá 8. mei 1991 var landsstýrinum heimilað at keypa tyrluna, sum Strandfaraskip Landsins higartil hevði langtíðarleigað (leasað). Í langtíðar leiguavtaluni var henda søluupphæddin ásett til kr. 663.ooo,-. Dagsprísurin varð mettur at verða kr. 10-12 milj..

§ 14. Útbúgving og gransking.
14053 Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið:
Ætlanin er, at nýtslan á hesum rakstrarstað verður kr. 250.000,- minni enn játtanin og skjýtur skúlafyrisitingin upp, at peningurin kann nýtast á rakstrarstað 14879 prógvtøkur.

14067 Endurgjald til rithøvundar:
Roknað verður við at rakstrarstaðið verður yvirtrekt við kr. 90.000,-.

Orsøkirnar til yvirtrekkið eru, at ljósritanýtslan økist nógv ár undan ári og landsstýrið hevur samtykt at gjaldið/ljósrit verður hækkað úr 10 oyru til 12,5 oyru.
Tað er ikki fyrr enn í ár t.v.s. skúlaárið 1991/92, at landsskúlafyrisitingin hevur funnið fram til eina mannagongd at stýra nýtsluni úti á skúlunum. Hetta tiltakið slær ikki gjøgnum fyrr enn næsta ár. Seinkingin skyldast, at skúlaárið 1991/92 ikki verður avroknað fyrr enn í 1992.

14103 Fólkaskúlin:
Roknað verður við, at yvirtrekkið verður kr. 4.500.000,-.
Orsøkin er, at játtanin, kr. 140.470.000,-, er sett ov lágt.
Sáttmálin millum Føroya Landsstýri og Føroya Lærarafelag er ikki endaliga avgreiddur enn, men lagt er upp fyri eftir meting.
Viðvíkjandi frágreiðing til yvirtrekkið, verður víst til ráðleggingarálitið 1991/92, ið er sent landsstýrinum.

14122 Læraraeftirlønir:
Landsskúlafyrisitingin hevur skotið upp, at flyta kr. 250.000,- til rakstrarstað 14879 Skúlaverkið, prógvtøkur.

14155 HF-skeið í Suðuroy:
Skúlin hevði eina nýtslu í 1990 uppá kr. 4.300.000,- við einum ársnæmingatali uppá 70 næmingar. Skúlin í ár sama flokkatal, men hevur nú eitt ársnæmingatal uppá 77,5 næmingar.
Næmingatalið spælir ein stóran leiklut, tí næmingatalið avger støddina á rættiniðurskurði, so tað er eyðsæð, at nýtslan ikki kann vera minni enn í 1990.
Væntandi fer nýtslan í 1991 at vera kr. 4.592.000,-, heruppií kr. 192.000,- eyka fyri húsaleigu.
Yvirtrekkið verður sostatt kr. 1.092.000,-.

14205 Føroya Studentaskúli:
Væntandi kemur yvirtrekkið á Føroya Studentaskúla at verða kr. 1.000.000,- í 1991.
Roknskapurin hjá Føroya Studentaskúla var í 1990 góðar kr. 20 milj.

Studentaskúlin hevur í ár fingið játtað kr. 19.320.000,-, samstundis sum hesar broytingar eru farnar fram skúlaárið 1991/92 í mun til skúlaárið 1990/91:
- valbólkarnir eru hækkaðir við 3
- næmingatalið er hækkað við 70
- flokstalið er hækkað við 1
- læraraannciniteturin kostar kr. 250.000,- meira í ár.

Skúlin kann tí ikki klára seg við minni í fíggjarárinum 1991 enn skúlin kláraði seg við í 1990.
Roknað verður við, at útreiðslurnar koma at verða kr. 20.300.000,- hetta fíggjarárið.

14257 Kostdeild studentaskúlans:
Væntaða yvirtrekkið á hesi konto kemur at verða umleið kr. 200.000,-.
Arbeitt verður við at broyta bygnaðin á kostdeildini við sparing fyri eyga.

14307 Føroya Sjómansskúli:
Sjómansskúlin kemur væntandi at yvirtrekkja kr. 700.000,- í 1991. Útreiðslur skúlans í 1990 vóru kr. 6,2 milj. Játtanin er kr. 5.600.000,- í 1991 og í ár er nakað tað sama virksemi og roknað verður við at útreiðslurnar koma at liggja á nøkunlunda sama støði.

14397 Tekniski skúli í Tórshavn.
Tekniski skúlin fer væntandi at yvirtrekkja kr. 1.800.000,- í 1991.

14618 Studningur til musikkskúlar:
Musikkskúlin kemur væntandi at yvirtrekkja við kr. 550.000,- í 1991.
Orsøkin til hetta er, at ov nógvir lærarar vóru í skipanini skúlaárið 1990/91. Skuldi læraratalið verið skorið, soleiðis at játtanin ikki varð yvirtrekt í ár, so skuldi læraratalið verið skorið niður til umleið 16-18 lærarar. Læraratalið er í

skúlaárinum 1991/92 skorið niður til 28, soleiðis at uppskot landsstýrisins til fíggjarløgtingslóg 1992 fer at halda.

14675 Sjóvinnuskúlin:
Roknað verður við, at nýttar verða kr. 250.000,- til útgerð.

14758 Fróðskaparsetur Føroya:
Her er eykajáttan áður veitt av landsstýrinum og fíggjarnevndini.

14796 Sernámsfrøðilig ráðgeving:
Sum fyrr boðað landsstýrinum frá, verður yvirtrekkið væntandi kr. 650.000,-.

14851 Stuðul til lesandi:
Stuðulin til lesandi verður umleið kr. 400.000,- minni enn játtanin á fíggjarlógini 1991.

14879 Skúlaverkið, prógtøkur:
Landsskúlafyrisitingin hevur arbeitt við at lækka kostnaðin av uppgávugerð, men striltið hevur gingið, tí stórur partur av uppgávugerð er sáttmálabundin.
Landsskúlafyrisitingin roknar við, at prógtøkukontoin kemur at verða yvirtrekt við umleið kr. 900.000,-.
Landsskúlafyrisitingin mælir til, at fluttar verða hesar upphæddir á rakstrarstað 14879:

frá rakstrarstað 11409	kr. 200.000,-
frá rakstrarstað 14053	kr. 250.000,-
frá rakstrarstað 14122	kr. 250.000,-

Nýtt rakstrarstað.
Bústovnur Føroyinga í útbúgving:
Við heimild í § 6 í løgtingslóg nr. 63 frá 23. juni 1983 um bústaðarhús til fólk í útbúgving við seinni broytingum hevur BFÚ í skrivi dagfestum 19. september 1991 søkt landsstýrið um kr. 403.196,14 í rakstrarstudningi til útreiðslur av rentum og avdráttum av upprunaligu prioritetslánunum fyri árini 1987-1990.

Av tí, at BFÚ ikki hevur fingið 50% í rakstrarstudningi av útreiðslunum til rentur og avdráttir hesi árini, hevur BFÚ eina eftirstøðu í Føroya Sparikassa uppá kr. 233.095,14. Føroya Sparikassi hevur í skrivi dagfestum 2. oktober 1991 boðað BFÚ frá, at verður eftirstøðan ikki goldin innan 16. oktober 1991, verður úttøka gjørd.
Tørvurin á eykajáttan til rakstrarstudning til Bústovn Føroyinga í Útbúgving er sostatt kr. 403.196,14.

Íløgur
Studentaskúli og HF-skeið á Kambsdali.
Av teimum kr. 2.000.000, sum játtaðar eru í 1991, verða bert kr. 1.500.000 brúktar í árinum.

§ 15 Mentan
15202 Fólkabókasavn:
Meirnýtslan í 1991 verður kr. 350.000. Hetta eru lógarbundnar útreiðslur.

15304 Landsskjalasavn:
Nýtslan á hesum rakstrarstað verður kr. 150.000,- hægri enn játtanin í 1991.
Tað restar nakað í til lønir og so til rakstur annars.

15508 Bygdasøvn:
Rakstrartilskotið verður kr. 400.000,- hægri enn játtanin í 1991.
Hetta eru lógarbundnar útreiðslur.

Íløgur.
Skjalasavn nýbygging:
Játtaðar eru kr. 1.000.000,- á fíggjarlógini 1991, men arbeiðið kemur ikki í gongd í ár, so peningurin verður ikki brúktur í ár.

Náttúrugripasavn:
Tær 300.000,- krónurnar, sum eru játtaðar á fíggjarlógini í 1991, verða ikki brúktar í ár.

Studningur til Ítróttarbygging:
Eykajáttanin kr. 1.900.000 svarar til áður givnar studningsjáttanir, sum ætlanin í síni tíð var, skuldu rindast úr grunninum til ítróttarbygging. Grunnurin verður nú avtikin og upphæddin sett á fíggjarlógina.

Grasvøllur í Hvalba:
Grasvøllurin er liðugt gjørdur. Peningurin, kr.225.000, fellur til gjaldingar í ár.

Fróðskaparsetrið, nýbygging:
Tørvurin á eykajáttan uppá kr. 1.130.000,- stendst av umbyggingini av setursh úsunum, tá Fiskirannsóknarstovan flutti út.

Fiskivinna, sigling o.t.

16488 Praktiskar fiskiroyndir:
Landsstýrið og fíggjarnevndin hava játtað at flyta kr. 300.000 av hesum rakstrarstað. Kr. 200.000 skulu flytast til 16904/33199 Upplýsing um grund og kr. 100.000 til 17409 Fuglakanningarstøð v.m.

16904/333199 Upplýsing um grind:
Sí viðm. til 16488 Praktiskar fiskiroyndir.

16904/333408 Trygdargrunnur alivinnunar:
Í 1991 verður tørvur á eini eykajáttan uppá kr. 11.600.000,- til trygdargrunn alivinnurnar. Heruppí eru kr. 4.800.000,- sum landsstýrið og fíggjarnevnd hava játtað eyka fyrr í ár til furunkulosusmittað smolt. Restin er ætlað til sama endamál.

16904/373305 Landsstýrinum at ráða yvir:
Tað eru játtaðar kr. 1.000.000 á fíggjarlógini 1991, men kr. 300.000 verða ikki brúktar í ár.

§ 17. Landbúnaður

17409 Fuglakanningarstøð v.m.:
Sí viðm. til 16488 Praktiskar fiskiroyndir.

§ 18 Vinnulív og arbeiðsmarknaður annars.

18318 Semingsmannaskipan:
Landsstýrið og fíggjarnevnd hava játtað seminingsstovninum kr. 80.000,- eyka í 1991.

18323 Studningur til kolagrevstur:
Landsstýrið hevur samtykt at seta á eykafíggjarlógina fyri 1991 kr. 200.000 til kolagrevstur.

18337 Læruráðið:
Landsstýrið og fíggjarnevndin hava játtað 200.000 kr. í árinum.

18356 Ferðamannamiðstøðin:
Ferðaráð Føroya hevur biðið Peder Aderhold, doktara á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn, um at gera eina professionella kanning av føroyskari ferðavinnu við serligum atliti til "vørumenning" og marknað.
Hann hevur sagt seg vilja gera fyrsta stigið fyri kr. 150.000,-. Av hesum falla kr. 75.000,- í ár. Og tað eru hesar kr. 75.000,- talan er um at játta eyka í ár.

18907/353067 Studningur til lærupláss:
Talan er um lógarfestar útreiðslur. Sambært løgtingslóg nr. 88 frá 18. september 1980 endurrindar landskassin lærumeistarunum 50% av lógarásettu lærlingalønini, meðan lærlingarnir ganga á tekniskum skúla.
Játtanin á fíggjarlógini 1991 er kr. 1.700.000,-. Men játtanin samsvarar ikki við veruligu útreiðslurnar. Nýtslan í 1990 var kr. 3.912.228,-.
Játtanin í 1991 er uppi nú, og út frá lærlingatilgongdini higartil í ár metir Føroya Læruráð útreiðslurnar verða umleið kr. 3.100.000,- í ár ella umleið 20% minni enn í 1990.
Meirnýtslan í 1991 verður sostatt kr. 1.400.000,-.

Íløgur.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan:

Av játtanini uppá kr. 3.000.000 verða bert kr. 1.000.000 brúktar í ár.

§ 19 Almannamál v.m..

19075 Røktarheim:

Á fundi 27. august 1991 samtykti landsstýrið at loyva Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi at upptaka lán uppá kr. 1.000.000 til liðugtgerð av útbygningi. Góðkenningin var treytað av, at kommunurnar veðhalda fyri láninum, og at rentur og avdráttir uppá lánið verða hildin uttanfyri vanliga raksturin, soleiðis at kommunurnar í felag rinda Røktar- og Ellisheiminum ein árligan studning, ið svarar til rentur og avdrátt uppá lánið.

Eysturoyar Røktar- og Ellisheim hevur søkt um, at tann írestandi peningurin av útbyggingini verður fíggjaður av rakstraravlopi í 1991, ið kemur av, at tann nýggja deildin ikki verður tikin í nýtslu fyrr enn umleið 1. januar 1991.

Landsstýrið mælir í staðin til, at játtaðar verða heiminum á eykafíggjarlógini fyri 1991 kr. 981.000 í íløgum (landskassans partur), og at játtanin til ellisheim, rakstrarstað 19075, samstundis verður lækkað við somu upphædd.

19106 Avlamispensión:

Meirnýtslan á hesum rakstrarstað verður væntandi kr. 3.000.000,- í 1991. Hetta kemst av hækkandi tali av avlamispensionistum. Útreiðslurnar eru lógarbundnar.

19301 Einkjupensión:

Hetta eru lógarbundnar útreiðslur. Talið av einkjupensionistum er munandi minkað. Tí verða eisini brúktar kr. 375.000,- minni í 1991 enn játtað.

19403 Vanlig forsorg:

Meirnýtslan á hesum rakstrarstað verður væntandi kr. 21.000.000,- í 1991. Hetta eru eisini lógarbundnar útreiðslur. Meirnýtslan er orsakað av stuðlinum, ið útgoldin verður vegna arbeiðsloysi.

19407 Ymiskir forsorgarstovnar:
Minninýtslan uppá kr. 500.000,- í 1991 er úrslitið av sparitiltøkunum innan økið.

19607 Heimahjálparaskipanin:
Minninýtslan uppá kr. 1.600.000,- í 1991 er úrslitið av sparingum, íð eru farnar fram innan hetta økið.

19659 Dagpeningaskipanin:
Hetta eru lógarbundnar útreiðslur. Minninýtslan uppá kr. 7.500.000,- í 1991 er úrslit av framdum lógarbroytingum viðvíkjandi dagpeningarætti við barnsburð, og sum óbeinleiðis úrslit av arbeiðsloysi.

19683 Barnastyrkur:
Hetta eru lógarbundnar útreiðslur. Játtanin er ikki lagað eftir framfarnu lógarbroytingunum. Sambært Líkningarráðnum verður útreiðslustøðið kr. 11.500.000,- í 1991. Barnastyrkur, sum verður frádrigin í skattinum, verður bókaður yvir skattakonto.

19697 Samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima:
Hetta eru lógarbundnar útreiðslur. Tað verða væntandi brúktar kr. 1.900.000,- minni í 1991, enn játtað er á fíggjarlógini. Sparingarnar eru úrslit av broyttari siðvenju.

19904/363382 Møðrahjálp:
Tær 300.000,- kr., sum játtaðar eru á fíggjarlógini 1991 verða ikki brúktar í ár.

19904/333104 Trygdargrunnur fyri avreiðingar og lønir:
Landsstýrið og fíggjarnevnd hava játtað Trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir kr. 108.404,- eyka í 1991.

19904/373305 Landsstýrinum at ráða yvir:
Av játtaða peninginum í 1991 til landsstýrið at ráða yvir verða tær 800.000,- krónurnar ikki brúktar í ár.

Íløgur.
Dagheim á Berjabrekku, nýbygging:
Av kr. 4.000.000, sum játtaðar eru í 1991, verða bert kr. 2.000.000 brúktar í árinum.

Umlættingarheim og bústovnur, Suðuroy:
Tað eru settar kr. 1.000.000,- av til endamálið í 1991. Men hesin peningur verður ikki brúktur í ár.

Røktarheim í Norðstreymoy, nýbygging:
Tað eru settar kr. 1.000.000,- av til endamálið í 1991. Men hesin peningur verður ikki brúktur í ár.

§ 20 Pensiónsútreiðslur.
20013/103558 Pensiónir:
Her verða brúktar kr. 40.000,- meira enn játtað. Orsøkin er, at tað kom ein óvæntað eftirlønarsamsýning aftrat seinasta summar.

20013/103612 Bíðipeningur:
Tað er torført at meta neyvt um útreiðslurnar til bíðipening, serliga tá nýtt landsstýrið er skipað og óvissa er um og nær landsstýrismenn leggja tingsessin frá sær.
Útreiðslurnar á hesum rakstrarstað vera í 1991 kr. 500.000,- meira enn játtanin.

20013/103629 Tænastumannaeftirlønir:
Á hesum rakstrarstað verður meirnýtslan í 1991 kr. 350.000,- . Orsøkin er, at 4 tænastumenn eru farnir frá í árinum harav tveir, sum eru undir 67 ár, og harumframt hevur einkjan eftir ein tænastumann fingið einkjupensión.

§ 21 Aðrar útreiðslur.
22104/373305 Landsstýrinum at ráða yvir:
Í 1991 verða brúktar kr. 400.000,- minni enn játtað á fíggjarlógini 1991.

§ 27 Óvissar útreiðslur.

27005 Óvissar útreiðslur:

20 milj. kr til arbeiðsloysisgrunn. Hendan upphædd er sett á eykafíggjarlógina 1991 sum ein heilt serligur postur. Upphæddin er ætlað til innskotspening til komandi arbeiðsloysistryggingargrunn. Upphæddin verður goldin eina ferð sum grundfæ grunsins og kemur landskassin ikki at rinda meir til hetta endamál burtursæð frá arbeiðsgevaragjaldi.

Jógvan Sundstein
landsstýrismaður

/ Kári Petersen

Skjal VII

ORÐALISTI

tikin úr

STATENS LÅNTAGNING
OG GÆLD
1989

FINANSMINISTERIET
BUDGETMINISTERIET
1990

Orðalistin lýsir fyribrigdi, sum verða brúkt í bókini.

Ordliste over finansielle betegnelser

Ordlisten indeholder forklaringer på en række fagudtryk på det finansielle område. Sidst i ordlisten er en fortegnelse over den internationale *møntkode-standard* (ISO) samt en beskrivelse af *kreditvurderingsbetegnelser* fra de 2 førende amerikanske selskaber. Med hensyn til forklaring på mere gængse *statistiske udtryk* mv. henvises til Danmarks Statistiks publikationer, specielt ordforklaringen i Statistisk tiårsoversigt, og årsberetninger fra Danmarks Nationalbank.

Amerikansk option:

Se option.

Annuitetslån:

Lån hvor ydelsen pr. termin (rente og afdrag) er konstant gennem lånets løbetid.

Arbitrage:

Ved handlen med varer og finansielle aktiver på forskellige markeder bliver priserne ikke nødvendigvis ens. Hvis der er tale om ens eller næsten ens aktiver (fx valuta, værdipapirer og nogle råvarer), er der fortjenstmuligheder ved at købe, hvor aktiverne er billigst, og straks sælge dem, hvor de er dyrere, så længe prisforskellen er større end omkostningerne ved køb og transport.

80665			UNGDÓMS- & BYGDAHÚS		5.245.414,19
82668	953296	202	Ungdóms-&Bygdah.Sjvb. 702979.0	1.973.562,19	
			Í landskassanum	3.271.852,00	
				5.245.414,19	5.245.414,19
80679			SAVN Í HOYVÍK		834.504,18
			Í landskassanum	834.504,18	
				834.504,18	834.504,18
80684			NÆMINGAHEIM		26.236.911,10
82687	943831	202	Lærlingaheim, Sjvb.7950871	459.236,12	
82687	943848	301	Lærlingaheim, F.S.4952865	355.538,17	
82687	953301	202	Næmingaheim, Sjvb. 702.980.4	5.640.082,87	
82687	953318	920	íbúðir til ung undir útbúgving	8.437.434,00	

Rakstrarst.	Konto	Koda	Navn	Debet	Kredit
82687	953326	921	Bústaður Føroyinga í Útbúgving	1.633.500,00	
82687	953391	922	Studentaskúlaheimið	4.725.775,00	
			í landskassanum	4.985.344,94	
				26.236.911,10	26.236.911,10
80698			UMVÆLINGASTUDN.TIL FRIÐA HÚS		415.830,67
			í landskassanum	415.830,67	
				415.830,67	415.830,67
80701			LÆRARASKÚLI		14.522.864,11
61309		710	FØROYA LÆRARSKÚLI, BYGGING	14.515.970,52	
			í landskassanum	6.893,59	
				14.522.864,11	14.522.864,11
80715			MASKINSKÚLI		2.590.526,15
61264		710	MASKINSKÚLI Í TÓRSHAVN	4.473.577,71	
			Skuld til landskassan		1.883.051,56
				4.473.577,71	4.473.577,71
80729			TEKNISKIR SKÚLAR		8.000.000,00
			í landskassanum	8.000.000,00	
				8.000.000,00	8.000.000,00
80734			SJÓVINNUSKÚLI		3.500.000,00

Bakstrarst.	Konto	Koda	Navn	Debet	Kredit
			Í landskassanum	3.500.000,00	
				3.500.000,00	3.500.000,00
80748			FISKIÍDNAÐARSKÚLI	2.262,99	
			Skuld til landskassan		2.262,99
				2.262,99	2.262,99
80753			STUDENTASKÚLAHEIM		600.000,00
			Í landskassanum	600.000,00	
				600.000,00	600.000,00
80767			GRUNN.TIL HEILSUMIÐSTØÐIR		10.203.034,64
82761	953255	700	Gr.til heilsumiðstøðir, útlán	7.062.535,84	
			Í landskassanum	3.140.498,80	
				10.203.034,64	10.203.034,64
80772			ÍBÚÐARGRUNNUR		14.607.500,00
			Í landskassanum	14.607.500,00	
				14.607.500,00	14.607.500,00
80786			GRUNNUR TIL ÍDNAÐARFR.ENDAMÁL		14.256.690,38
82789	953359	700	Gr.t.idnaðarfr.endamál,útlán	9.355.222,21	
			Í landskassanum	4.901.468,17	

:akstrarst.	Konto	Koda	Navn	Debet	Kredit
				14.256.690,38	14.256.690,38
80791			STUDENTAS.,HF-SKEIÐ,EYST.Í GR.		2.179.287,05
82794	953342	830	Studentaskúli, Gøtugjógv Skuld til landskassan	3.623.531,50	1.444.244,45
				3.623.531,50	3.623.531,50
80803			STUDENTASKÚLI Í HOYDØLUM		4.881.170,00
			Í landskassanum	4.881.170,00	
				4.881.170,00	4.881.170,00
80817			GOMLU PRESTAHÚSINI Á NESI		315.759,47
82811	953375	830	Gomlu prestahúsini á Nesi Í landskassanum	100.000,00 215.759,47	
				315.759,47	315.759,47
80822			FISKIRANNSÓKNARSTOVAN		21.500.000,00
61069		710	FISKIRANNSÓKNARST-BYGGIROKNSK. Skuld til landskassan	40.029.849,45	18.529.849,45
				40.029.849,45	40.029.849,45
80836			BÓKASAVN Í KLAKSVÍK		500.000,00
			Í landskassanum	500.000,00	

PARYVIRLIT V.V. LANDSKASSANS .UNNUM 1991 Síða.. 19

	Debet	Kredit
	500.000,00	500.000,00
.OG AÐRAR SØGULIG.KELD.		300.027,95
arb.o.a.F.Spk.495.596.1	300.227,95	
il landskassan		200,00
	300.227,95	300.227,95
AVN		7.845.347,11
avn, F.B. 795.297.4	7.373.495,19	
kassanum	471.851,92	
	7.845.347,11	7.845.347,11
NURIN		435.173.840,08
nurin,Sjvb. 708.982.3	27.785.546,23	
nurin, F.B. 730.144.2	25.104.593,04	
nurin, F.S.795.361.7	19.794.145,66	
nurin, N.S.795.168.4	3.494.676,55	
nurin, S.S.795.011.0	3.500.336,42	
nurin, Fossb.745.013.4	3.492.591,39	
nurin, útlán	129.500.000,00	
assanum	222.501.950,79	
	435.173.840,08	435.173.840,08
BURTURBEIN.AV AKFØRUM		979.000,00
assanum	979.000,00	

Rakstrarst.	Konto	Koda	Navn	Debet	Kredit
				979.000,00	979.000,00
80888			BYGGIGRUNNUR TIL SERFORSORG		16.872.336,87
61041		710	ANDVEIKRABÚÐSTOVNUR, RUNAVÍK	3.557.001,65	
61138		710	BYGGING "DÁIN"GR.44018-663917	5.182.448,92	
82882	953119	830	Byggigr.serfors.matr.nr.1365AQ	2.983.326,24	
82882	953127	830	Byggigr.serfors.matr.nr.1463	725.000,00	
82882	953517	402	Serfors.N.Spk.795.132.3(Dáin)	962.250,37	
82882	953525	830	Byggigr.serfors.matr.56Ø,Argir	1.513.001,18	
			Í landskassanum	1.949.308,51	
				16.872.336,87	16.872.336,87
80893			KIRKJAN Í KEYPMANNAHAVN		1.977.205,35
			Í landskassanum	1.977.205,35	
				1.977.205,35	1.977.205,35
80905			HJÁLPIGR.MÓTI ALKOHOLMISNÝTSLU	200.834,66	
			Skuld til landskassan		200.834,66
				200.834,66	200.834,66
80919			ADRIR STUDENT.-&HF.-SKÚL.Í GR.		18.850.000,00
61259		710	STUDENTA- & HF-SK.Í KAMBSDALI	2.355.788,00	
			Í landskassanum	16.494.212,00	
				18.850.000,00	18.850.000,00

Konto	Koda	Navn	Debet	Kredit
		GRUNNUR TIL ÆTLAÐUR BREKAÐUM		766.926,36
		í landskassanum	766.926,36	
			766.926,36	766.926,36
		MENNINGARHJÁLP		14.047.184,45
		í landskassanum	14.047.184,45	
			14.047.184,45	14.047.184,45
		GRUN.TIL FISKISKIPAUPPHØGGING	47.497.027,23	
		Skuld til landskassan		47.497.027,23
			47.497.027,23	47.497.027,23
		TRYGDARGRUNNUR ALIVINNURNAR		2.000.000,00
		í landskassanum	2.000.000,00	
			2.000.000,00	2.000.000,00

Rakstrarst.	Konto	Koda	Navn	Debet	Kredit
			Grunnar í alt		2.337.275.946,02

		101	FØROYA BANKI UTTAN UPPSØGN	2.448.999,37	
		102	FØROYA BANKI VIÐ UPPSØGN	45.121.562,18	
		201	SJÓVINNUBANKIN UTTAN UPPSØGN	672.601,07	
		202	SJÓVINNUBANKIN VIÐ UPPSØGN	72.830.724,31	
		301	FØROYA SPARIKAS.UTTAN UPPSØGN	9.689.277,91	
		302	FØROYA SPARIKASSI VIÐ UPPSØGN	29.267.233,36	
		402	NORÐOYA SPARIKASSI VIÐ UPPSØGN	8.890.421,01	
		502	SUÐUROY.SPARIKASSI VIÐ UPPSØGN	12.216.053,73	
		600	VIRÐISBRØV	598.700,00	
		602	FOSSBANKIN	3.492.591,39	
		700	ÚTLÁN	585.380.352,47	
		701	VEÐHALDSÚTLEGG	872.976.237,68	
		710	BYGGIROKNISKAPIR	219.662.831,83	
		810	INNISTANDANDI Í POSTVERKINUM	28.530.106,35	
		820	INNISTANDANDI Í APOTEKINUM	27.895.492,15	
		830	FASTAR OGNIR	28.217.842,13	
		840	ELLIS- & RØKTARHEIM, VÁGOY	7.157.213,27	
		850	ELLIS- & RØKTARHEIM, SUÐUROY	13.153.475,89	
		860	ELLIS- & RØKTARHEIM, TÓRSHAVN	1.620.000,00	
		870	ELLIS- & RØKTARHEIM, EYSTUROY	45.086.367,35	
		880	ELLIS- & RØKTARHEIM, KLAKSVÍK	37.463.190,79	
		890	RØKTARHEIM, SUÐURSTREYMOY	62.494.520,85	
		900	SANDOYAR RØKTAR- & ELLISHEIM	10.996.000,00	
		920	ÍBÚÐIR TIL UNG UNDIR ÚTBÚGVING	8.437.434,00	
		921	BÚSTAÐUR FØROYINGA Í ÚTBÚGVING	1.633.500,00	
		922	STUDENTASKÚLAHEIMIÐ	4.725.775,00	
		990	YMISKT	24.824.029,30	
			Í landskassanum	171.793.412,63	
				2.337.275.946,02	2.337.275.946,02

Skjal XI

STACTIC - fundur í NAFO.

Fundarstað: Uttanríkismálaráðið í Keypmannahavn.
Fundartíð: 17. - 20. februar 1992.
Á fundi: Smb. skjal (luttakaralistin)
Fundarskrá: smb. skjal (annex 1 - GF/91-421-16/12-91)
Frá fundinum: Formaðurin E. Lemche (vegna Danmark, Føroyar og Grønland) setti fundin.

Mr. R. J. Prior (Kanada) var valdur til skrivara.
Fundarskráin var samtykt við broytingum í raðfylgjuni. Formaðurin vísti á, at Stactic var álagt at arbeiða fyri eini betri eftirlitsskipan á NAFO-økinum og viðgera tiltøk, sum skuldu setast í verk beinanvegin og tiltøk, sum skuldu setast í verk yvir eitt longri tíðarbil. Arbeiðsuppgávan hjá Stactic er soleiðis ásett í NAFO FC DOC 90/9 og samtykt á 12 ársfundi í NAFO. Nøkur av hesum tiltøkum eru longu sett í verk og samtykt á 13 ársfundi í NAFO í 1991. Nevnast kann, at øll eftirlitsskipanin er endurskoðað og samtykt, herundir ein nýggj fráboðanarskipan, samstarv millum eftirlitsskipini á NAFO-økinum og merking av ymiskum reiðskapi.

Fráboðanar skipanin (Hail Reports): Fundurin viðgjørdi royndirnar við fráboðanarskipanini higartil. NAFO hevur fingið fráboðanir frá EEC, Japan og Føroyum, sum síðani eru sendar til Kanada, sum er tað einasta landið, sum higartil hevur havt eftirlitsskip á økinum í 1992.

Fundurin viðgjørdi uppskot frá Kanada um at "hail rapportin" eisini skal innihalda fráboðan um veiðu. Veiðan skal uppgevast við komu og fráferð og eina ferð um vikuna. EEC er ímóti hesum, meðan hini londini kunnu taka undir við uppskotinum eftir nakrar broytingar. Arbeitt verður víðari við hesum spurningi. Spurningurin um kostnaðin við eftirlitsskipanini var viðgjørdur sambært frágreiðing frá høvuðsskrivstovuni. Í hvønn mun hetta ávirkar kostnaðin fyri NAFO verður kannað nærri og samstundis lagt fyri STACFAC.

Langtíðar tiltøk: Kanada legði fram uppskot um eina **avgleiðaraskipan**, sum áleggur øllum limalondunum at dekka í

minsta lagi 10 % av egnum fiskidøgum í 1992, 15 % í 1993 og 20 % í 1994. Eygleiðarnir skulu ikki hava status sum NAFO-inspektørar, men verða óheftir av vaktarskipunum og verða um borð á fiskiskipunum. Eygleiðarar skulu vegleiða skipini í at halda veiðireglurnar á NAFO-økinum og skulu fráboða til heimlandi, samstundis sum teimum stendur frítt at boða frá til høvuðsskrivstovuna. Eygleiðarnir skulu eisini savna saman vísundarligt tilfar sambært vegleiðingunum frá Scientific Council. Eitt uppskot til fráboðanir frá eygleiðarum var framlagt og ynskti Kanada, at hetta verður tikið við í eftirlitsskipanina Conservation on Enforcement Measures.

Sjónarmiðini hjá londunum vóru ymisk. Tey flestu kundu tó taka undir við eini slíkari skipan, men fleiri lond, harímillum Føroyar, boðaðu frá, at tey ikki vóru før fyri at fara undir hesa skipan longu í 1992. Annars var upplýst, at Kanada, Grønland, Noreg og partvíst Japan longu hava eina eygleiðaraskipan fyri egnan sjógv. Føroyar mugu sostatt taka støðu til, um vit skulu fara undir eina tílíka skipan á NAFO-økinum, sum kemur at telja frá 1 - 5 eygleiðarar nakað skjótt og spurningin um kostnaðin av hesi skipan.
Uppskot um eina royndarskipan í 12 mør. kom frá formanninum til støðutakan (WP. 92/18).

<u>Elektronic Tracking (monitoring system):</u>
Fundurin viðgjørdi spurningin út frá tøkum upplýsingum frá EEC og frá Danmark. Tað finnast í dag skipanir yvir satelitt, sum kunnu nýtast á tann hátt, at skipini verða plottað samstundis sum tey senda út knøttstøðuna. Aðrar fráboðanir kunnu eisini gerast um somu skipan.

Ein arbeiðsbólkur skipaði seg, sum viðgjørdi nýggju Inmarsat C-skipanina og eina kanning, sum EEC legði fram. Niðurstøðan var, at Stactic mælir til, at øll limalondini velja eitt umboð til ein lítlan bólk av serfrøðingum, sum skal finna eina tekniska loysn á skipanini og verður málið lagt fyri á næsta ársfundi.

<u>NAFO-loyvisskipan:</u>
Kanada legði fram uppskot um eina skipan við fiskiloyvum á NAFO-

økinum. Kanada vísri á í W P. 92/13, at samsvar eigur at vera millum samlaða veiðiloyvistalið og mest loyvda veiðutrýst á NAFO-økinum eftir vísundaligu tilráðingini. Veiðiloyvisskipanin skal somuleiðis betra um eftirlitið. Skipanin eigur at innibera, at loyvistalið kann avmarkast eftir ávísum fiskasløgum og ávísar veiðihættir. Kanada vísti á, at skipatalið á NAFO-økinum er vanliga nógv størri, enn limalondini hava fráboðað frammanundan. Á fundinum vóru ymiskar áskoðanir um hesa ætlan, sum stavar frá samtyktini á NAFO-ársfundinum í 1990 (FC. DOC. 90/9) sum langtíðar mál. Semja var tó um, at tað eru limalondini, sum skulu útgeva veiðuloyvini og áseta avmarkingar í loyvinum. NAFO-høvuðsskrivstovan fær so avrit/fráboðan um givin loyvir.
Niðurstøðan gjørdist, at øll limalondini innan 15. juli 1992 skulu siga sína áskoðan um, hvat eigur at vera lagt í veiðiloyvisskipanina.

Fundurin viðgjørdi <u>broytingar til eftirlitsskipanina</u> (Conservation and Enforcement Measures). Broytingaruppskot eru um hjáveiðureglurnar, dagføring um veiðu, samskifti millum skip og tyrlur, veiðifráboðanir hvønn mánað, eftirlitsfráboðanir (STACTIC FORM 1 2A og 2B), hægst loyvda tal av eftirlitsmonnum um borð á einum fiskiskipi samstundis, eftirlitið við flogførum og fráboðan frá flogførum og umrokningarfaktorar. Á fundinum vóru ymiskar áskoðanir og verða uppskotini víðari viðgjørd í Stactic.
Fundurin viðgjørdi eisini spurningin um <u>minstamát á toski</u> fyri alt Regulatory Area. Í løtuni er minstamát á toski í 3 M og 3NO sett til 40 cm. Fundurin viðgjørdi, hvat skuldi gerast við undirmátsfisk, sum er komin um borð. Eisini var viðgjørt, hvussu fiskur skal mátast, Flestu londini vóru samd um, at undirmátsfiskur eigur ikki at vera um borð og mátingin skal verða "total length".

Endalig fundarfrásøgn var samtykt sambært niðurstøðuni og við tilmælum um broytingar at leggja fyri Fishery Commission á komandi ársfundi.

frásøgn 25. februar 1992.
K. P. M.


SCHEDULE I

Quota Table[1] for 1992

Column I	II	III	IV	V	VI	VII	VIII	IX	X	XI
Contracting Party	Cod	Cod	Redfish	Redfish	American plaice	American plaice	Yellowtail	Witch	Capelin	Squid[3,4] (Illex)
	Div. 3M	Div. 3NO	Div. 3M	Div. 3LN	Div. 3M	Div. 3LNO	Div. 3LNO	Div. 3NO	Div. 3NO	Subareas 3+4
1. Bulgaria	-	-	645	-	-	-	-	-	-	500
2. Canada	100	6,484	1,075	5,964	150	25,425	6,825	3,000	800	N.S.[5]
3. Cuba	480	-	3,762	1,372	-	-	-	-	750	2,250
4. Denmark (Faroes & Greenland)	2,900	-	-	-	-	-	-	-	-	-
5. European Economic Community	6,465	5,016	6,665	476	350	328	140	-	750	N.S.[5]
6. Iceland	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-
7. Japan	-	-	860	-	-	-	-	-	2,800	2,250
8. Norway	1,200	-	-	-	-	-	-	-	9,000	-
9. Poland	500	-	-	-	-	-	-	-	900	1,000
10. USSR	1,270	1,624	29,777	6,104	1,000	-	-	1,950	15,000	5,000
11. Others	50	476	216	84	500	47	35	50	-	5,000
12. Special Reservation[2]	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-
13. Total Allowable Catch	12,965	13,600	43,000	14,000	2,000	25,800	7,000	5,000	30,000	150,000[6]

[1]Quotas are in metric tons.
[2]There are no Special Reservations for 1992.
[3]The opening date for the suiqd (Illex) fishery is 1 July.
[4]Any quota listed for squid may be increased by a transfer from any "coastal state" as defined in Article 1, para 3 of the NAFO Convention; provided that the TAC for squid is not exceeded. Transfers made to Contracting Parties conducting fisheries for squid in the Regulatory Area shall be reported to the Executive Secretary, and the report shall be made as promptly as possible.
[5]Not specified because the allocation to these Contracting Parties are as yet undetermined, although their sum shall not exceed the difference between the total of allocations to other Contracting Parties and the TAC.
[6]The TAC would remain at 150,000 tons subject to adjustment where warranted by scientific advice.

MAP ILLUSTRATING NAFO'S CONVENTION AREA AND 200-MILE FISHING ZONE BOUNDARIES



Skjal XII

2 H.

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd

Sekretariat: Nordisk Råd, Alþingi, 150 Reykjavík. Tlf.: +354 1 11560 Telefax: +354 1 623226

Rekommandation nr. 1/1991

I overensstemmelse med chartarets kapitel 1, art. 2 har Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd vedtaget følgende rekommandation med 16 stemmer. Ingen stemte imod, ingen afstod, og ingen var fraværende.

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands regering at virke for, at vedtægterne for Vestnordenfonden revideres bl.a. med henblik på at muliggøre risikolån til bedrifter i Færøerne, Grønland og Island.

Qaqortoq, 7. august 1991.

Jonathan Motzfeldt
formand

Atibak Steenholdt
rådssekretær

29 NOV. 1991
F. L. i. nr. 21-3-1-20 2

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd

Sekretariat: Nordisk Råd, Althingi, 150 Reykjavík. Tlf.: *354 1 11560 Telefax: *354 1 623226

Udtalelse nr. 1/1991

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd har på sit årsmøde i Qaqortoq vedtaget følgende udtalelse:

> Det bør være den myndighed eller virksomhed, der har givet anledning til forureningen af naturen og miljøet i øvrigt, der skal betale prisen og ikke den skadelidte.

Qaqortog, 7. august 1991

Jonathan Motzfeldt
formand

Ámbak Steenholdt
rådssekretær

2 9 NOV. 1991
F. : 21-3-1-20
3

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd

Sekretariat: Nordisk Råd, Alþingi, 150 Reykjavík. Tlf.: *354 1 11560 Telefax: *354 1 623226

Rekommandation nr. 2/1991

I overensstemmelse med charterets kapitel 1, art. 2 har Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd vedtaget følgende rekommandation med 16 stemmer. Ingen stemte imod, ingen afstod, og ingen var fraværende.

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands regering at virke for, at Vestnordens turistkomités fortsatte virksomhed sikres gennem nordisk og national finansiering.

Qaqortoq, 7. august 1991.

Jonathan Motzfeldt
formand

Alibak Steenholdt
rådssekretær

29 NOV. 1991

F. L. i. -. 21-3-1-20

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd

Sekretariat: Nordisk Råd, Althingi, 150 Reykjavik. Tlf.: *354 1 11560 Telefax: *354 1 623226

Udtalelse nr. 2/1991

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd har på sit årsmøde i Qaqortoq drøftet forhandlingerne mellem EFTA og EF.

Efter drøftelserne konkluderede deltagerne i en klar tilkendegivelse, at der er behov for en mere direkte dialog mellem de vestnordiske lande vedrørende løsningen af fiskerispørgsmålet, som er et livsvigtigt emne i landene bag Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd, Island, Grønland og Færøerne.

På baggrund af det almindelige behov for mere åben dialog imellem de berørte landes regeringer og parlamentarikere, vil Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd anbefale sit sekretariat, at der gennemføres en undersøgelse af mulighederne for et seminar om "Det indre markeds" betydning og konsekvenser for Vestnordens lande - specielt hvad angår fiskerianliggender.

Deltagerne i det anbefalede seminar skal omfatte såvel udenrigs- som fiskeriministre samt repræsentanter for markedsudvalg - evt. andre, der specielt har indsigt i og meninger om dette emne - såvel for som imod direkte engagement i EF-relationer.

Qaqortog, 7. august 1991

Jonathan Motzfeldt
formand

Aljbuk Steenholdt
rådssekretær

29 NOV. 1991
21.3/20

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd

Sekretariat: Nordisk Råd, Althingi, 150 Reykjavík. Tlf.: *354 1 11560 Telefax: *354 1 623226

Rekommandation nr. 3/1991

I overensstemmelse med charterets kapitel 1, art. 2 har Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd vedtaget følgende rekommandation med 16 stemmer. Ingen stemte imod, ingen afstod, og ingen var fraværende.

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands regering at virke for, at Vestnordenkomitéens placering i den nordiske samarbejdsstruktur evalueres med henblik på, at den bliver så velegnet som mulig til at gennemføre de arbejdsopgaver, som forstærket samarbejde i Vestnorden nødvendiggør.

Qaqortoq, 7. august 1991

Jonathan Motzfeldt
formand

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd

Sekretariat: Nordisk Råd, Althingi, 150 Reykjavík. Tlf.: *354 1 11560 Telefax: *354 1 623226

Rekommandation nr. 4/1991

I overensstemmelse med charterets kapitel 1, art. 2 har Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd vedtaget følgende rekommandation med 16 stemmer. Ingen stemte imod, ingen afstod, og ingen var fraværende.

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands regering at give de ministre, som i de respektive lande er nordiske samarbejdsministre, ansvaret for koordineringen af det vestnordiske samarbejde på regeringsniveau og for gennemførelsen af de rekommandationer, som Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd vedtager.

Qaqortoq, 7. august 1991

Jonathan Motzfeldt
formand

'Alibak Steenholdt
rådssekretær

29 NOV. 1991

F. L. [illegible] 21-3-1-20

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd

Sekretariat: Nordisk Råd, Althingi, 150 Reykjavík. Tlf.: *354 1 11560 Telefax: *354 1 623226

Rekommandation nr. 5/1991

I overensstemmelse med charterets kapitel 1, art. 2 har Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd vedtaget følgende rekommandation med 16 stemmer. Ingen stemte imod, ingen afstod, og ingen var fraværende.

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd henviser til rådets rekommandation nr. 4/1989 om at gøre år 1992 til et vestnordisk år og henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands regering snarest at sikre nødvendig finansiering af de tre konferencer, som rådet foreslog skulle holdes i 1992; om ligestilling i Island, om miljø i Grønland og en ungdomskonference på Færøerne.

Qaqortoq, 7. august 1991

Jonathan Motzfeldt
formand

Aliibak Stœnholdt
rådssekretær

29 NOV. 1991

F. L. nr. 21-3-1-20 8

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd

Sekretariat: Nordisk Råd, Alþingi, 150 Reykjavík. Tlf.: *354 1 11560 Telefax: *354 1 623226

Rekommandation nr. 6/1991

I overensstemmelse med charterets kapitel 1, art. 2 har Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd vedtaget følgende rekommandation med 16 stemmer. Ingen stemte imod, ingen afstod, og ingen var fraværende.

Vestnordens parlamentariske Samarbejdsråd henstiller til Færøernes Landsstyre, Grønlands Landsstyre og Islands regering straks at realisere den overenskomst om samarbejde på trafikområdet i Vestnorden, som Færøernes, Grønlands og Islands trafikministre indgik i december 1990.

Qaqortoq, 7. august 1991

Jonathan Motzfeldt
formand

Aljoux Siboldt
rådssekretær

29 NOV. 1991
F. [illegible] 21-3.1-20 9

Skjal XIII

AGREED RECORD OF CONCLUSIONS OF LICENCE ARRANGEMENTS BETWEEN THE FAROE ISLANDS AND THE EUROPEAN ECONOMIC COMMUNITY IN 1992 TÓRSHAVN 14-15 OCTOBER 1991.

---

1. A delegation representing the Home Government of the Faroe Islands, headed by Mr. Kjartan Hoydal and a delegation of the European Economic Community headed by Mr. Henrik Schmiegelow met in Tórshavn 14-15 October 1991 to discuss the mutual licensing arrangements for 1992.

2. With reference to the agreed record of conclusions between the Faroe Islands and the European Economic Community in Tórshavn, signed on 15 October 1991, the following arrangements for 1992 have been decided:

2.1 <u>EEC fishing in Faroese waters</u>

2.1.1. Fishing with trawlers of not more than 180 feet in the area between 12 miles and 21 miles from the base lines:

- number on basic list: 26
- number of vessels present at any time : 13

2.1.1.1. Directed fishing for cod and haddock in the period 1 January to 31 December with a minimum mesh size of 135 mm and with access to an area south of 62°28'N and east of 6°30'W

- number on basic list: 8
- number of vessels present at any time: 4

The figures in 2.1.1.1 are included in the total number of vessels and in the number of vessels present at any time.

2.1.2. **Fishing with trawl outside of 21 miles from the base lines [1]**

- number on basic list: 70
- number of vessels present at any time: 26

2.1.2.1. **Vessels conducting fishing for blue ling with a minimum mesh size of 100 mm in the cod end and main part of the trawl in the area south of 61°30'N and west of 9°00'W and in the area between 7°00 and 9°00'W and south of 60°30'N and in the area south-west of a line between 60°30'N, 7°00'W and 60°00'N, 6°00'W, in the period 1 January to 31 December,**

- total number of vessels present at any time: 20

2.1.2.2 **Directed fishing for saithe in the period 1 January to 31 December with a minimum mesh size of 120 mm in the cod end and main part of the trawl and with the possibility of using round-straps around the cod-end,**

- total number of vessels present at any time: 22

The figures in 2.1.2.1. and 2.1.2.2 are included in the total number of vessels and in the number of vessels present at any time.

---

[1] Community vessels may fish between 24 and 21 miles in the area 240° true from Trøllhøvdi (61°55'04"N and 06°57'05"W) and 320° true from Barðið (62°08'30"N and 07°27'00"W), and in the area between 28 miles and 21 miles 150° true from the Akraberg Lighthouse (61°23'38"N and 06°40'15"W) and 195° true from the Akraberg Lighthouse (61°23'38"N and 06°40'15"W).

2.1.2.3. In the period 1 March to 31 May and 1 October to 31 December, the vessels mentioned under 2.1.2. have access to fishing in the area between the 12 miles and 21 miles from the base lines between 61°20'N and 62°00'.

2.1.2.3 In the period 1 March to 31 May and 1 October to 31 December, the vessels mentioned under 2.1.2. have access to fishing in the area between the 12 miles and 21 miles from the baselines between 61°20'N and 62°00'N

2.2 Faroese fishing in EEC waters

2.2.1 Fishing in ICES fishing areas III, IV, VI, VII

2.2.1.1 Number of licences for the fishing of mackerel in ICES VIa (North of 56°30'N) and VIIe, f, h, and horse mackerel in ICES IV and VIa (North of 56°30'N) and VIIe, f, h; sprat in ICES IV and VIa) (North of 56°30'N); herring in VIa (North of 56°30'N): 14; herring in IIIa: 4

2.2.1.2 Number of licences for industrial fishing for Norway pout and sandeel (including unavoidable by-catches of blue whiting): 15

2.2.1.3. Number of licences for fishing ling and tusk: 20

- number of vessels present at any time: 10

The Faroese authorities will send before the 25th of each month the relevant list.

2.2.1.4. Number of licences for directed blue whiting fishery in VIa (North of 56°30'), VIb and VII (West of 12°W): 20

2.2.1.5 Number of licences for fishing blue ling: 16

2.2.3 Fishing in the entire Community zone, except NAFO

Islands.

3. General rules

3.1 The Parties shall, upon request, inform each other of measures which might be taken in order to monitor the catch of their vessels under quotas in the fishery zone of the other Party.

3.2 Vessels authorized to fish on 31 December 1991 may continue their activities in 1992 on the basis of this authorization until the new lists of vessels for 1992 have been approved.

Tórshavn, 15 October 1991.

Mr. Kjartan Hoydal

Mr. Henrik Schmiegelow

Delegation of the Faroe Islands

Delegation of the Community

Skjal XIV

UPPSKOT TIL LÓG UM FÓLKANØVN

Fornøvn

1. gr.
Hvørt barn skal fáa navn, áðrenn tað er 6 mánaða gamalt.
Eingin skal hava fleiri enn tvey fornøvn.
Foreldur ella verjar skulu boða sóknarpresti í prestagjaldinum, har ið móðirin býr, frá navninum, áðrenn barnið er 6 mánaða gamalt.
Er fráboðaða navnið ikki á navnalistanum, verður málið skotið til navnanevndina, ið landsstýrið setur. Í slíkum føri kann verða vikið frá 6 mánaða freistini.

2. gr.
Navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur. Gjørdur verður listi við viðurkendum nøvnum. Undantak kann í serføri verða veitt fólki úr øðrum londum.
Sum fornøvn verða ikki viðurkend nøvn, sum ikki av røttum eru fornøvn og onnur nøvn, ið kunnu haldast at verða fólki til ampa.
Sóknarprestur skal síggja til, at gjørt verður eftir tí, ið ásett er í hesi grein.
Navnanevndin, sb. # 10, gevur tilmæli í ivamálum.

3. gr.
Navn kann eftir umsókn til landsstýrið verða broytt ella umskift við annað navn. Tann, sum hevur fleiri nøvn, kann eftir umsókn fáa eitt ella fleiri teirra strikað. Fyri tann, ið ikki hevur lógaldur, søkja

annað afturat.

Eftirnøvn

4. gr.
Aftur at fornavni skal hvørt barn fáa eftirnavn. Eftirnavn kann annaðhvørt vera ættarnavn faðirs ella móður, so sum foreldur barnsins koma á samt um, ella navn faðirs ella móður í hvørsfalli við -son ella -dóttir afturat í samsvari við kyn barnsins. Er navn faðirs ella móður tvínevni, verður bert annað navnið nýtt í hesum føri.
Ættarnavn skal vera í samljóði við føroyskar málreglur.

5. gr.
Ættleitt barn fær barn fær eftirnavn eftir somu reglum sum í

6. gr.
Eftirnavn verður fráboðað sóknarpresti í tí prestagjaldi, har sum móðirin býr, saman við fornavni.

7. gr.
Við giftu kann hvørt av hjúnunum varðveita sítt ættarnavn ella taka ættarnavnið hjá hinum. Faðirsnavn og móðurnavn (t.e. nøvn, ið enda við -son ella -dóttir) verða ikki umskift við giftu.

8. gr.
Tann, ið vil broyta ættarnavn sítt ella fáa sær nýtt, skal søkja til landsstýrið um tað.
Ikki er loyvt at taka ættarnavn, sum onnur longu hava, uttan við loyvi teirra, sum navnið bera.
Bústaðarnøvn, sum ikki eru einnevnd her á landi, eru undantikin. Navn á virki, vøru, felagi og tílíkum, sum skrásett, er ikki loyvt at taka til ættarnavn.
Ikki er hereftir loyvt at taka navn á landi, býi, bygd og býlingi til ættarnavn.
Loyvt er uttan umsókn at nevnast -son ella -dóttir faðirs ella móður, men tann, ið broytir til hetta

navnalag, skal boða sóknarpresti frá, áðrenn mánaður er umliðin.

9. gr.
Eittans eftirnavn kann verða givið sum millumnavn.
Millumnavn kann ikki verða bundið at eftirnavni við bindistriku.

Navnanevnd

10. gr.
Landsstýrið setur 3-mannanevnd, ið skal geva ráð um fólkanøvn, stavseting teirra, bending o.a. í iva-

hava vunnið hevd sum fornøvn.

Fátt er so sárt sum at verða argaður við løgnum ella frábregðandi navni. Tí eigur at verða ansað serliga eftir, at óhóskandi nøvn ikki verða givin, fyri barnsins skuld. Her eigur at verða mett um í hvørjum føri fyri seg.

3. gr.

Tað er regla, sum er vanlig í øllum Norðurlondum, at ein, ið hevur ampa av navni, kann fáa tað umskift við annað eftir umsókn, ella lagt nýtt navn aftur at navni sínum.

Greinin skal eisini geva útlendingum, ið her eru búsettir, møguleika at fáa sær føroyskt navn ella at føroyska navn sítt (t.d. Thomas til Tummas, John til Jógvan el. Jóan).

4. gr.

Eftirnavn kann eftir uppskotinum vera annaðhvørt ættarnavn, eins og [illegible]

givið sum millumnavn. Eisini kann navn við -son ella -dóttir verða givið sum millumnavn. Tó er vert at hava í huga, at long nøvn mangan kunnu vera ósmidlig í nýtslu.

10. gr.

Í navnanevndini eigur ein limurin at vera málfrøðingur og ein løgfrøðingur.

Landsstýrið setur málfrøðingin eftir tilmæli frá Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya, løgfrøðingin eftir tilmæli frá Advokatfelagi Føroya og triðja limin eftir tilmæli frá Prestafelagi Føroya.

GREINARGERÐ

So langt vit vita aftur í søguna um øll heimsins lond, hevur verið siður at geva nýføddum børnum nøvn. Við navnagávuni fylgir ofta einhvør halgigerð. Forfedrar okkara oystu børnini vatni, tá ið navnið varð sett á tey, og eftir kristnitøkuna kom navnagávan at vera saman við skírnini.

Vanligt var at velja børnunum nøvn, ið vónandi fóru at bera teimum eydnu. Tá ið drongur varð nevndur t.d. Úlvur, lá í tí ynski um, at hann skuldi fáa tað dirvi og ta styrki, ið eyðkendi hetta dýr; og við gentunavni sum t.d. Lív (eldri Hlíf) fylgdi vón um, at hon tilkomin skuldi vera børnum sínum og húsi "lív", t.e. lívd, vernd. Seinni hevur tilvitið um merking navnanna kámast nógv, og flest nøvn eru meira ella minni merkingartóm frámerki til at eyðkenna ein einstakling. Tó eru mong, ið fegin vilja vita, hvat nøvnini upprunaliga merktu, og leggja dent á at finna vøkur og bærilig nøvn til børn sín.

Fólkanøvn - eins og staðanøvn og onnur nøvn - eru partur av málinum, tey líkjast í ljóðsamanseting øðrum orðum og verða yvirhøvur bend eins og tey. Eins og orð fara um landamark, verða innlænt, koma fólkanøvn eisini uttaneftir við ymsum mentanarrákum, t.d. við kristindóminum á sinni og nú úr fremmandum málum við t.d. skaldsøgum, bløðum, filmum o.ø.

Sum stundir líðu, megnaði málið ofta at laga fremmandu nøvnini at sær, so tey í ljóði og bending líktust ikki so nógv frá heimligum nøvnum. Tann fyrimunur var í miðøld, at nøvnini komu gjøgnum nærskyld mál. Nú á døgum liggur tann stóri heimur opnari fyri, og navnatilfarið, sum er í boði, er tíðum so frálíkt tí heimliga, at tað tykist eingin leið at laga tað at ljóði og bending í heimamálinum, og kortini er alt vanligari at leita langt burtur eftir nøvnum til børnini.

Tey, sum hugsa um at varðveita samanhangið í navnatilfarinum við mál og gamlan navnasið, eru sum vera man illa við, og tí eru av og á at hoyra og siggja ynski um at fáa fastari reglur at ganga eftir í navnagávuni. Í flestum grannalondum okkara hava leingi verið lógir um fólkanøvn. Vit hava onga havt, men hava miðað okkum eftir gomlum siði og teim donsku reglum, sum her hava verið settar í gildi. So mikil munur er á donskum máli og føroyskum, at einki skil er í, at lógir um donsk fólkanøvn skulu galda í Føroyum. Her mega vit hava egnar reglur, sum samtykkja við føroyskt mál og føroyskan arvsið.

Mong eru dømini um, at donsk nøvn hava trokað føroysk nøvn burtur; eftir danskari fyrimynd hevur verið vanligt t.d. at lata mannfólkanøvn vera endingarleys í hvørfalli, sum t.d. Finn í staðin fyri Finnur.

Í fornøld høvdu føroyingar flest nøvn sín í felag við grannar sínar í Noregi og Íslandi og øðrum (vestur)norrønum londum. Tað ber eitt nú Føroyingasøga boð um, tí tó at hon er skrivað í Íslandi, man hon yvirhøvur vera bygd á føroyskar sagnir, og við teimum munnu m.a. nøvnini hava fylgt. Í Føroyingasøgu eru einstøk nøvn, ið ikki

eru at finna í øðrum londum, tað gamlar heimildir vita frá at siga, t.d. Heri, Brestir. Góðan vitnisburð um upprunalig føroysk nøvn finna vit í mongum staðanøvnum, t.d. Eiriksfiall, Bessavatn, Atlavatn, Ragnhildargyllin.

Við kristnitøkuni kom stórt innsig av halgimennanøvnum og bibliunøvnum, men mong norrøn nøvn livdu framvegis saman við teimum. Fremmandu nøvnini lagaðust sum nevnt mong at heimamálinum, tó summi kendust fremmand í sniði og vórðu heldur ikki langlívað, t.d. Briksius; onnur broyttust, eitt nú við stytting, t.d. Tiburtius verður Bursi. Úr bibliuni kemur tað mannfólkanavn, sum til okkara dagar hevur verið tað vanligasta av øllum, tað er navnið Jóan, seinni Jógvan, ið kemur av ápostulsnavninum Jóannes.

Í norrøna tíðarskeiðinum vóru nøvn eins og annað skrivað á heimamálinum, fornføroyskum, sbr. Diplomatarium Færoense, men við trúbótini kemur tann broyting, ið var lagnutung fyri føroyskt mál: danskt gjørdist skriftmál okkara í øllum førum. Tí eru øll nøvn í skrivligum heimildum frá siðaskiftinum og tætt at okkara døgum í donskum hami: í tingbókum og kirkjubókum, tá tær taka við, og øllum øðrum. Á tann hátt kom upp tann løgni og rangvørgi háttur, at maður varð skrivaður eitt, men æt annað í dagligum viðurskiftum millum manna. Enn anir eftir av hesum øvuta lag, hóast nú er ráðandi siður at skrivast tað, ein í royndum eitur.

Í 17. og 18. øld og langt inn í 19. gjørdist navnatilfarið sera fábroytt. Tað vóru bert nøkur fá nøvn, flest av bibliuuppruna, ið vórðu nýtt. Tann strangi uppkallingarsiðurin gjørdi, at ikki varð leitað út um ættina eftir nøvnum. Úrslitið var, at tøvt varð í sama stampi, og lítið kom afturat av nøvnum. Tey gomlu norrønu nøvnini doyðu út at kalla, bert nøkur fá vórðu varðveitt óslitið til okkara dagar, teirra millum Tróndur, Óli, Høgni og Guðrun - tó øll í donskum skriftsniði. Annað kom ikki til tals.

Í 18. øld fer so smátt at taka seg upp tann siður at geva fleiri enn eitt navn, í fyrstuni oftast bert tvey. Gamalt var, at eingin fekk fleiri enn eitt navn. Tá ið siðurin at geva tvey nøvn vant upp á seg, varð ofta annað navnið funnið uttaneftir, t.d. uppkallað eftir føðingardegi, um hann var fríggjadagur ella seinni eisini sunnudagur, nøvn sum Frederik og Sofie. Eisini varð leitað í álmanakkanum, og vanligt gjørdist at kalla barn upp eftir navni føðingardagsins. Soleiðis er t.d. navnið Pauli komið í við at kalla upp pálsmessudag, 25. januar, sum í danska álmanakkanum nevndist Pauli omvendelse, latínskt Paulus, í hvørsfalli.

Við tvínevnissiðinum komu ofta útlendsk nøvn at troka burtur samsvarandi føroysk, tí tey útlendsku fullu betur at hesum nýggja fremmanda nevningarlagnum. Tað tóktist fínari at eita t.d. Óli Mikal enn Óli Mikkjal, ella Anna Kristina enn Anna Kristin. Soleiðis komu hesi longru fremmandu nøvn við herðing á 2. stavilsi so líðandi at vinna á teimum føroysku formunum í ójavnari kapping.

Við sprettandi tjóðskaparkenslu og sigrandi tjóðskaparrørslu í 19. og 20. øld gjørdust líkindi til at vekja upp aftur burturdeyð gomul føroysk og norrøn nøvn. Leitað varð til kvæði, sagnir, staðanøvn og norrønar fornsøgur eftir nøvnum. Í fyrstuni var óvissa um rætt føroyskt snið, tí nøvn í útlendskum bókmentum vórðu høvd til fyrimyndar. Tí komu fram endingarleys mannfólkanøvn sum Sigmund í staðin fyri Sigmundur og óføroysk navnasnið sum Sigurd í staðin fyri Siúrður, Bodil í staðin fyri Bóthild.

Men saman við føroyskum og norrønum nøvnum treivst eisini ørgrynni av útlendskum nøvnum úr øllum ættum, meir og minni óhóskandi á føroyskari tungu. Tvínevni nærdust til fleirnevni, ja, vanligt gjørdist at kalla upp heilar bátsmanningar, ið vóru burturgingnar, eyðvitað við góðari meining, men átta nøvn kundu vera tung byrði at knógva undir, hóast øll vórðu ikki nýtt dagliga. Vóru tað gentur, ið soleiðis vórðu skírdar, kundi úrslitið vera nøvn av slagnum Olina, Simona, Hansina, Petrina o.s.fr.

Frá navnafátæktini eru vit nú komin inn í eina tíð við so fjølbroyttum navnatilfari, at torført kann vera at fáa greiði á, hvaðan alt er komið. Allar dyr standa opnar á víðan vegg, og nøvn koma úr øllum ættum. Ilt er hjá prestum og øðrum ábyrgdarfólki at halda skil á. Eisini er lyndi til nýskapan á heimligum støði, helst við samanseting av ymsum navnapørtum; viðhvørt eydnast væl, men ofta illa. Ov lítið hevur verið av leiðbeining frá kønum fólki, navnalisti teirra Chr. Matras og M. A. Jacobsen frá 1930 er longu alt ov lítil. Kemur til skarpskeringar um navn, er leiðin, sum kæran gongur, til kirkjumálaráðið danska, sum leitar sær ráð hjá Institut for navneforskning í Keypmannahavn. Mangur úrskurður hevur tíverri ikki verið til bata fyri føroyskan navnasið. Seinastu árini hevur tíbetur verið gjørt minni av at lata navnatrætur fara av landinum, men roynt hevur verið at greiða tær innanlands.

Í føroyskari navnalóg og fylgjandi reglum verður neyðugt at finna á ein hátt at beina navnagávuna á føroyska leið uttan tó at gera karmarnar so trongar, at teir kennast fólki sum tvingsil. Góð og holl leiðbeining eigur at verða givin við navnalistum og beinleiðis ráðgeving í ivamálum. Eyðvitað verður loyvt at nýta fjøld av nøvnum av fremmandum uppruna, men roynt eigur at verða at geva teimum snið og form, ið fáa tey at samtykkja føroyskari tungu so væl, sum gjørligt er. Skotið verður upp at seta nevnd ella ráð av serkønum at gera úrskurð, um trætumál stinga seg upp. Ikki eigur at verða loyvt at geva nøvn, ið bróta meginreglur í føroyskari málføru.

Eftir lógaruppskotinum her frammanfyri eigur at vera heimilt teimum, ið bera føroysk nøvn, at fáa tey broytt til rættan form. Tó her eigur eingin noyðsla at vera, bert ein opin møguleiki. Navnið er eitt so persónligt og viðbrekið mál, at største varsemi og fyrilit eigur at verða sýnt í øllum førum. Vert er at hava í huga tiltakið "navnið spillir ongan". Tað er ivaleyst sprottið av ynski um at ugga tey, ið bera óheppið navn, men er samtíðis ein ásannan av, at alt er ikki, sum tað eigur, í navnagávuni. Lóg um fólkanøvn eigur at vera eitt amboð til at beina á rætta leið tað, sum avleiðis er farið, og at forða fyri skeivari gongd framvegis.

Fornavnið ella skírnarnavnið, sum tað fyrr varð nevnt, er ikki nóg mikið at eyðkenna ein einstakling, at skilja hann frá øðrum, tí mong eru tey, ið bera sama navn. Navnatilfarið er ikki so ríkt, at ráð eru til at hava eitt navn í part - fá eru einnevnd. Eitt seinni navn er neyðugt afturat til eyðkennis. Her velja vit, eins og vanligur málburður er nú, at kalla tað eftirnavn.

Frá gamlari tíð hevur tað verið siður hjá germonskum tjóðum at eyðkenna einstakling við at skoyta -son ella -dóttir upp í faðirs navn og við hvørt eisini móður navn. Hetta var tað almenna lagið,

men annars vórðu - og verða enn - ymsir aðrir hættir nýttir í dagligum samskifti millum manna. Maður ella kona kann fáa viðurnevni ella kenningarnavn, ið sipar t.d. til yrki, heimstað ella ættarstað, útsjónd og ymiss likamseyðkenni, annaðhvørt prýði ella lýti, andligar eginleikar, klædnaburð, lutir ella amboð, ið persónurin ofta er sæddur at nýta. Eisini kann okkurt, ið maður hevur sagt, verða hangandi við hann sum viðurnevni. Úr Føroyingasøgu kunnu vit taka nøkur dømi um nakrar av omanfyri nevndu flokkum av kenningarnøvnum: Hákun iallur, Gilli løgmaður - sipar til støðu í samfelagnum ella yrki. Mong hava uppruna í heimstað ella bústað: Bjarni í Svínoy, Tróndur í Gøtu, ella eisini: Svínoyar-Bjarni, Gøtu-Tróndur; síðan úr sama flokki: Einar Suðuroyingur (úr Suðuroyggjum ella Hebridum), Karl mørski (staðarlýsingarorð - Karl var av Møri í Noregi), Tollakur Gøtuskeggi. Nøvn, ið skipa til útsjónd og limaseyðkenni yvirhøvur: Geyti reyði, Tórður lági, Ketil flatnevur, Steingrímur halti, Búi digri. Til andligar eginleikar: Torgrímur illi, Magnus góði. Til klædnabúna: Eldjarn kambhøttur, Haraldur gráfeldur. Til serstaka hending sipar viðurnevnið hjá Tórálvi smør. Tílík viðurnevni vóru persónlig, doyðu vanliga burtur við teimum, ið bóru tey.

Tað, sum vit nú skilja við ættarnavn ella eftirnavn, var ikki til í Norðurlondum í fornøld. Men tá ið tað kom út í 16. øld, fór aðalin í Danmørk so smátt at fáa sær føst viðurnevni eftir europiskari fyrimynd, og í 1526 heitti Friðrikur kongur 1. á aðalsstættina um at fáa sær føst ættarnøvn. Ofta vóru hesi nøvn viðurnevni, sum teir høvdu fingið eftir útsjóndini á skjaldarmerki sínum, t.d. Hvidtfeldt (hvítur flati), Gyldenstjerne (gylt stjørna), Rosenørn (rósa og ørn), Trolle (trøll). Múgvandi borgarar fór skjótt at taka eftir hesum nýggja navnasiði. Ofta høvdu hesi nýggju ættarnøvn uppruna í yrkisheiti, t.d. Smed, Bager, Møller (sbr. ensku nøvnini Smith, Baker, Miller). Prestar og studentar fingu sær tíðum navn eftir yrki faðirs ella ættarfaðirs ella eftir heimstaðnum, ofta í latínskum sniði: Faber (smiður), Pontoppidanus (Broby), Vellejus (Vedel, nú Vejle). Føroyingar, ið lósu á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, høvdu fyri at skoyta Færoe ella Faroensis upp í navn sítt, men tað løgdu teir sum vera man burtur aftur, tá ið teir komu heim aftur til lands.

Men í Danmørk eins og hinum Norðurlondum helt fjøldin kortini fast við gamlan niðurarvaðan sið við faðirsnavninum. Soleiðis var eisini her á landi. Almenningurin læt seg ikki ørkymla av, at prestar og aðrir embætismenn tíðliga í tíðini høvdu føst ættarnøvn - tey flestu av teimum gomlu ættarnøvnunum sum Weihe, Debes, Svabo, Matras, Djurhuus, Hammershaimb, Winther, Hentze o. o. eru soleiðis komin til Føroya. Men tað sýntist, sum hesi bæði navnaløg kundu liva saman í sátt og semju. Tað var eisini vanligt, at faðirsnavn varð nýtt saman við ættarnavni, t.d. Lucas Jacobssøn Debes.

Alkunnugt er, at eitt nú Pætur Jógvansson og Elin Tróndardóttir altíð skrivaðust Peter Joensen og Ellen Trondedatter - og dugdu tey at skriva, skrivaðu tey seg sjálv soleiðis; hetta var nú einaferð lagið. Og mong eru tey enn, sum trúliga skriva skírnarnavn sítt á donskum.

Soleiðis gekk alt til við navnalagnum, sum verið hevði frá landnámstíð, tá ið frá er tikið, at nøvnini sjálv broyttust eftir skiftandi ákum, sum natúrligt er, og at tey høvdu fremmandan ham

á pappírinum - tó ikki á manna munni. Sum nevnt tóktust fremmand ættarnøvn at kunna liva saman við gamla lagnum uttan at gera tí stórvegis mun. Tó vil so vera, at føroyingar, sum fóru uttanlands - teir vóru fáir - numu nýggjan sið. Kendasta dømið man vera, at Páll Pálsson úr Nólsoy tók sær navnið á heimbygdini til eftirnavn - í donskum sniði, tí annað var ikki hugsandi tá, men á føroyskari tungu varð hann nevndur Nólsoyar-Páll (smbr. Svínoyar-Bjarni, Gøtu-Tróndur).

Frammanfyri varð nomið við ta navnafátækt, sum her var á landi í 17. og 18. øld. Sama var í royndum lagið í Danmørk. Ein avleiðing av hesum var, at fleiri og fleiri komu at bera sama navn, og sama var við faðirnøvnum við -sen og -datter. So hvørt sum fólkið nørdist, var torført at halda skil á, tí nøvnini vóru so lík. Frá hægsta stað kom fram ynski um at fáa í lag føst ættarnøvn fyri fólkið alt, tað sum longu var vorðið siður hjá aðals-, presta- og borgarastætt. Longu á Struense døgum høvdu hertugadømini Slesvík-Holstein fingið skipan um føst ættarnøvn í staðin fyri faðirsnøvn við -sen og -datter, men í Danmørk hendi einki fyrr enn gott og væl hálvthundrað ár seinni.

30.5.1828 varð útgivin konglig fyriskipan "om Adskilligt, som i Henseende til Daaben bliver at iagttage". Í endanum á 18. og síðstu grein í hesi fyriskipan standa hesi orð: "Iøvrigt bør hvert Barn ved Daaben benævnes ei alene med Fornavn, men og med det Familie- eller Stamnavn, som det i Fremtiden bør bære". Hesi fáu orð høvdu stórar og djúptøkar avleiðingar fyri navnalagið, ikki bert í Danmørk, men eisini her hjá okkum - fyriskipanin kom í gildi her árið 1832. Tá var sum kunnugt einki løgting - tað var avtikið 16 ár frammanundan - ella nakar annar føroyskur stovnur, sum kundi vera við í ráðum, annaðhvørt tað var at mæla til ella frá.

Fyrr var ikki siður at nevna annað navn enn sjálvt skírnar-navnið ("fornavnið"), tá ið barn varð hildið undir skírn. Hvørs son ella dóttir tað var, kom av sær sjálvum, ella hvat ættarnavn tað skuldi bera, um foreldrini nýttu tað.

Prestarnir hava vist ikki fingið gjølla at vita, hvussu teir skuldu fara fram, tí næstu 8-10 árini hendir ikki annað enn tað, at teir umframt skírnarnavnið doypa barnið við faðirnavni + -sen ella -datter. Hvat meintist við "familie- eller stamnavn", hevur ikki verið teimum fullgreitt. Tað fyrsta, sum hendi - tað er eitt sindur ójavnt eftir prestagjøldum, her verða dømi tikin úr Suðuroyar kirkjubók 1832-52 og nøkur úr Vága og Eysturoyar kirkjubókum somu tíð - ið veik frá gomlum siði, var, at um 1838 varð farið at geva gentum eftirnavn við -sen eins og dreingjum, men tó eftir pápanum. Fyrsta dømið úr Suðuroy er 23. nov, 1838, tá ið genta í Trongisvági verður doypt Elsebeth Susanne Malene Johnsen, faðirin er skrivaður at eita John Jacobsen, t.e. Jógvan. Men longu árið eftir verður genta í somu bygd skírd Ellen Cathrine Jespersen, faðirin er Óli Jespersen, skúlameistari. Soleiðis verður so lagið hereftir. Í fyrstuni vórðu dreingir skírdir sum synir pápa sín, men seinni, eftir 1840, fara at siggjast dømi um, at teir fáa abbanavnið + -sen til eftirnavn, t.d. í Vági 1844: Thomas Jacob Joensen, pápin skrivaðist Hans Julius Joensen. Hetta hevur verið fólki heilt ófatiligt og eisini órímiligt, og long og drúgv var toganin, áðrenn henda kollvelting í navnalagnum var fullførd. Tey kundu ikki semjast við, at børn teirra, eisini gentur, skuldu verða kallað

"synir" abba sín. "Pápi vil eg vera", skuldi Pól Zachariassen á Sondum á Sandi siga. Hann vildi, at sonurin skuldi skrivast Poulsen, men prestur helt fast um Zachariassen, faðirsnavn Póls. Leikur endaði við, at teir møttust á miðjari leið, og barnið varð doypt: Zacharias Poulsen Zachariassen. So seiglivað hevur tað gamla navnalagið verið, at stakdømi eru enn um, at menn bera faðirsnavn sum eftirnavn. Maður í Skopun føddur í 1914 eitur Andrias Thomsen (d. 198) - faðir hansara æt Tummas Clementsen. Annar føddur í 1919 eitur Vilhjálmur Jakobsen - faðirin æt Jakob Johannesen.

Tað, sum var høvuðsúrslitið av kgl. dópsfyriskipanini frá 1828, var, at -sen-nøvn, sum tá vóru, gjørdust føst eftirnøvn. Tey skirnarnøvn, sum tá vóru, komu tískil at vera fyrri liður í eftirnøvnum hjá komandi ættum. Faðirsnøvnini festust sum ættarnøvn. Tí kom hópur av óskyldum fólki at bera sama ættarnavn bæði í Danmørk og Føroyum. Telefonbókin (1988/89) vísir, at í Tórshavn eru 153 felagar, sum hava ættarnavnið Jacobsen, næstfjølmentasta navnið er Hansen (142), síðan Joensen (141), Poulsen (106), Olsen (97), Pedersen/Petersen (74), Johannesen (60), Jensen (58), Thomasen/Thomsen (47), Andreas(s)en (46), Danielsen (46), Mortensen (46), Nielsen (45), Johansen (44), Simonsen (43), Samuelsen (38), Michelsen/Mikkelsen (33), Sørensen (30), Rasmussen (29), Niclasen (25), Rubeksen (20), Zachariasen (17).

Nakað tað sama man býtið vera um alt landið, tó er Joensen vanligasta eftirnavnið í Klaksvík eftir telefonbókini at døma. Fyrru liðir í hesum -sen-nøvnum vóru vanligastu skírnarnøvnini í Føroyum um og fyri miðjuna á 19. øld.

Men um síðir hava prestarnir fingið skil fyri, at ætlanin við kgl. fyriskipanini var, at fólk helst skuldu fáa ættarnøvn av øðrum slag enn -sen-nøvn. Ójavnt er, sum teir hava verið ídnir til at fremja hetta í verki. Men um endan á 1830-árunum fara at síggjast í kirkjubókunum eftirnøvn av ymsum slag, øll sjálvandi í donskum málsniði, tey flestu við stoði í bygda- og býlinganøvnum ella øðrum nøvnum, sum barnið hevði tilknýti at. Teir prestar, sum fóru undir hesa nýnevning av størstum eldhuga, vóru 3 suðuroyarprestar: Niels Lund Andersen (1832-38), Otto Fr. Chr. Jørgensen (1838-43) og Andrias Djurhuus (1843-50). Her skulu verða upproknað nøkur av hesum nøvnum, sum seta serligan dám á ættarnavnatilfar okkara enn dagin í dag.

Fyrsta navnið av hesum slag er Holm, sum sunnbiardrongur f. 28. mai 1837 verður doyptur: Johan Frederik Holm - eftir Sunnbiarhólmi, sigst. Í øllum førum er ikki fingin uppspurningur um upprunan at nøvnunum. Hesi koma afturat í sama ári: Strøm, Trongisvági, Øster, Porkeri (eftir býlinginum í Eystrum), Dahl, Lopra (eftir Lopransdali), Smith, Øravík, Gaard, Fámjin (vist eftir Sjúrðargarði), Splidt, Porkeri.

1838: West, Hvalbø, Berg, Sunnbø og Hvalbø, Vinther og Beder, Vági, Birk, Sunnbø (tann drongurin doyr 11 ára gamal, so navnið er tí burturdottið), Lisberg og Mørch, Fámjin, Øllgaard, Hvalbø (navnið horvið, gentan ið bar tað, giftist til Skúvoyar), Salmony, Trongisvági, og Luid, Hovi (navnið skal vera eftir húsanavninum á Liða í Sunnbø!).

1839: Hammer, Hvalbø, Kjerbo, Sunnbø, Taimann, Fámjin (helst av húsanavninum á Teigum; drongurin, ið fekk navnið, doyði lítil, og tað hvarv tí), Bech, Hovi (helst eftir eini á).

1840: Ludvig, Fámjin, Skaarup, Froðbø (kundi verið eftir býlinginum undir Skorum).
1841: Leo, Vági, Olivinius, Tvøroyri, Langgaard, Sunnbø (eftir Laðangarði).
1842: Mørch, Nesi í Hvalbø, (sbr. Fámjin 1838), Kjærgaard, Hamrabyrgi, Hielm, Vági.
1843: Vestergaard, Sunnbø, Søberg, Lopra, Salberg, Fámjin, Smith, Hovi, Gotfred, Porkeri.
1844: Hvidtfeldt, Trongisvági, Steenberg, Sunnbø, Hammershøi, Sunnbø (foreldrini búðu undir Hamri!).

Soleiðis heldur henda sermerkta navnagáva fram næstu árini - ikki bert í Suðuroy, men um alt landið. Í Vágum byrjar hon heldur seinni enn í Suðuroy, 1844 sæst tað fyrsta, Gaasedal, 1845 Vigum og Næs, 1846 Slettenes, 1851 Norden á Slættanesi - men ikki er so tætt við tílíkum nøvnum har sum í Suðuroy.

Í Eysturoynni byrjar tað 1838. Stílurin er tann sami sum í Suðuroy: Hammer á Eiði og á Toftum, Dahl, Eiði, Klein, við Gjógv, Gioveraa og Toftegaard, Fuglafirði, Lervig, Leirvík, Frederiksberg, Strondum (eftir Friðriksmørk), Solmunde, Søldarfirði, o.s.fr.

Presturin Lund Andersen, ið setti sjøtul á í Suðuroy, kom í 1838 til Suðurstreymoyar, men har sæst ikki so nógv av tílíkum nýgjørdum ættarnøvnum: Drongur føddur úti á Bø (sunnan fyri Kirkjubø) fekk navnið Udbøe í 1842, og á Hvítanesi, sum tá var nýggj bygd, kemur navnið Nyboe. Um sama mundið Bø, úti á Bø, og Eide í Nólsoy.

Fóru vit um allar Føroyar, funnu vit helst allastaðni eftirnavnagávu av sama slag.

Men hetta vóru hóast alt undantøkini, -sen-nøvnini vóru tey, sum fjøldin mátti hjálpast við. Tjóðskaparhugaðir menn sóu tað rangvørga í hesum lag, og í Føringatíðindum sæst, at summir teirra hava givið nøvnum sínum føroyskt snið, t.d. Jóannes Patursson, Absalon Jógvansson, Andras Sámalsson, men í royndum vóru tað -sen-nøvnini, ið høvdu rættargildi, tey vóru teir doyptir, og fleiri duttu aftur á tey seinni.

Í Danmørk gjørdist alt ein ruðuleiki av øllum -sen-ættarnøvnunum. Ein nevnd sett av løgmálaráðnum at viðgera spurningin gav eitt forvitnisligt álit í 1899. Nevndin fekk sær upplýsingar um navnasið frá fólki í ymsum landspørtum í Danmørk, og eisini úr Føroyum. Heimildarmenn um føroysk viðurskifti vóru V. U. Hammershaimb, Jakob Jakobsen og Fríðrikur Petersen.

Her skal verða endurgivið tað, sum nevndin skrivar í álitinum um føroyskar navnasiðir (Dansk navneskik, 1899, bls. 93):

> På Færøerne er det landgængs Skik at betegne Personer ved deres Fornavn med tilfjøjet Bosted eller Fødested: Povl í Hodni, Djóni í Geil, Andrias við Stein, Jústa á Húsun, Jóanis í Funningsstovu. Alle disse Eksempler ere fra Torshavn, men de enkelte Navne ere sædvanlig indførte med Folk fra Landsbygden. Øernes spredte Bebyggelse og overordentlige Rigdom paa Stednavne gør det let at betegne Folk paa denne Maade. - Lige siden 1832 (da Daabsforordningen af 1828 sattes i Kraft paa Færøerne) ere ikke saa faa Personer blevne døbte med disse Stednavne, ofte omdannede i mere dansk Form: Arge, Hammer, Udbø (úti á Bø).

Stednavnene blive ikke saa sjælden satte foran: Klett-óli (:undir Klinten), Króks-óli (i Krogen), Vága-Heini (fra Vaagø), Kolturs-Niklas. Er det længere Navne, maa de, ligesom i Dansk, helst afkortes: Boyggja-Palli (= Palle i Boyggja-stuen), Skrivara-Jens (Jens i Skriverstuen). - Folkenavne bruges derimod kun i Omtale: Sudringen, Sumbingen (fra Suderø, fra Sundbø); de knyttes ikke til Navnet, og de arves ikke.

Forældres Navn, enten Faders eller Moders, sættes ofte foran: Suðrings-Johan (Søn af en Suderømand), Sáru-Jóanis, Hendriks-Lena; men endnu hyppigere betegner man Slægtskabet med "hos" (kjá), dette bruges baade om Ægtefæller indbyrdes og om Børn i Forhold til Fader eller Moder.

Det er sjældent, at Standsbetegnelser ere arvelige; Tilnavnet Bóndi føjes saaledes kun til den, der er Kongsbonde. En Slægt har dog i længere Tid haft Ordet "Prest" sat foran Navnene til Minde om en Stamfader, der var Præst. I højere Grad arvelige ere visse Tilnavne af ukendt Betydning, der menes en Gang at have været Øgenavne: Stubbi, Toka, Skulv. De to første bruges foransatte (Stubba-Jens), det sidste fritstaaende; dog skriver Navnets Bærer sig Thomas Skylv.

Alle Tilnavne ere godkendte af Bærerne; derimod "skrive de sig altid med de Efternavne, hvormed de ere døbte, og tilføje kun den gængse Benævnelse, hvor en Navneforveksling ellers vilde kunne finde Sted". Flertallet af Befolkningen er døbt med -sen-Navne; disse omfatte paa de fleste Øer 80-95% af Befolkningen. Men de bruges aldrig i daglig Tale: "Danskerne kalde ham Jon Jonsen, men han hedder Jon paa Klett," kan der høres sagt; en ældre Mand kunde for vor Meddeler ikke engang opgive sit Kirkebogsnavn. "Ere disse Slægtsnavne paa -sen uheldige og vildledende her i Riget, have de været end mere stødende for den Del af Befolkningen, som bor paa Færøerne"; der fandtes hos denne ikke nogensomhelst Forudsætning for at gøre -sen-Navnene til Slægtsnavne.

Í 1904 kom í Danmørk lóg um navnabroyting. Hon gav heimild til at skifta ættarnavn: Nýggja navnið skuldi verða vart so, at eingin annar kundi ogna sær tað uttan loyvi frá teimum, ið fyrst høvdu fingið sær tað.

Í fyrstuni varð ikki gjørt nógv av at skifta eftirnavn í Føroyum. Umsókn varð latin um fútan til løgmálaráðið í Danmørk. Tað rangvørga var, at Føroyar vórðu fult og heilt roknaðar upp í Danmørk á hesum øki: Var navn, sum føroyingur søkti um, ov líkt donskum ættarnavni, varð honum sýtt fyri at fáa sær tað.

Tey ættarnøvn, sum fólk fór at fáa sær - ella "keypa" sær, sum vanliga varð sagt - eftir hesi lóg, vóru ógvuliga ymisháttað. Fleiri fingu sær nøvn av sama slag sum tey, ið prestarnir høvdu doypt, t.e. donsk ella hálvdonsk, t.d. Gaardlykke, Syderbø, Olvhøi, Neystved. Men flest fingu sær føroysk nøvn, aloftast eftir staðarnøvnum, annaðhvørt við fyriseting: av Skarði, úr Konoy, á Ryggi, ella við ongari fyriseting, t.d. Ryggstein, Frýdal, men í hvørjumfalli við ongari fyriseting koma eisini fyri, t.d. Jagre, (t.e. Jaðri), Hellu, Sondum, sjáldan í hvørfalli: Herdalur. Summi fáa sær navn, ið endar við -son, sum ættarnavn, t.d. Patursson, Jóannesarson, Jógvansson, Jákupsson.

Seinni hevur verið vanligari at taka staðarnøvn við fyriseting til ættarnøvn, men eitt skifti vóru tílík nøvn ikki veitt - tað var, meðan Svenning Rytter var løgmálaráðharri. Kent er málið hjá Pouli í Geil. Johs. Brøndum Nielsen professari skrivaði stuttliga grein um hetta í Politiken; hon varð uppafturprentað í Tingakrossi nr. 7 og 8, 1930: Poul Isaksen, vanliga nevndur Poul í Geil, hevði í 1918 søkt um at fáa í Geil til eftirnavn, men tað var honum ikki játtað, tí løgmálaráðið hevði gjøgnum amtið sagt frá, at tílík nøvn, staðarnøvn við fyriseting frammanfyri, hóskaðu ikki við føroyskan máltóna(!). Hóast ummæli varð fingið frá málkønum fólki, munti tað einki. Ferð eftir ferð søkti hann um at fáa hetta navn góðkent sum ættarnavn, men tað segði alt tað sama. Ikki fyrr enn í 1929 bar til. Sum Brøndum-Nielsen tekur til í greinini: "Aaret 1929 bragte Købmand Isaksen af Thorshavn en søn og Danmark et nyt Ministerium." Poul søkti aftur um at fáa loyvi til at geva syni sínum eftirnavnið í Geil, og nú varð tað um síðir játtað - helst tí at annar løgmálaráðharri var komin í Rytters stað. Frá 1920-árunum eru eftirnøvnini Viðstein og Frástein - helst royndir at ganga uttan um óvilja løgmálaráðharrans at veita nøvn av hesum slag.

Eitt, sum er óheppið við ættarnavnaskiftum, sum tey nú fara fram, er, at tá ið navn verður "keypt", verður band lagt á tað, so eingin annar kann fáa tað. Nógvar kunnu t.d. Jógvansstovurnar vera í Føroyum, men tann, ið fyrstur hevur fingið sær navnið í Jógvansstovu, eigur einarætt til navnið; hini, sum áttu at havt eins góðan rætt til navnið, tí tey búgva í Jógvansstovu, sleppa ikki at kalla seg so alment, uttan so er, at hin gevur loyvi.

Stríðsárini 1940-45 vóru eingi navnaskifti játtað, tí sambandið við navnavaldið í Danmørk var slitið. Aftan á at stríðið var av, vóru navnaskiftini fleiri enn nakrantíð áður; øll, sum høvdu bíðað hesi fimm á, sluppu nú framat.

Í Noregi eru reglur um, at ein kann sleppa at kalla seg eftir heimstaðnum, t.d. tí garði har ein býr, men tað kemur valla fyri, at fólk taka sær navn eftir býum, fjøllum ella landspørtum. Tað er kanska heldur enn ikki ósmæðið at fáa sær bygdarnavn ella oyggjarnavn t.d. til sítt egið ættarnavn - tað búgva jú onnur í bygdini ella oynni. Ein, sum einaferð ætlaði at fáa sær Tórshavn til eftirnavn, fekk nei kortini.

Í 1961 kom nýggj donsk lóg um fólkanøvn, og í 1969 skuldi løgtingið taka støðu til, um hon skuldi koma í gildi í Føroyum við nøkrum fáum broytingum, sum nevnd sett av landsstýrinum hevði mælt til. Men lógin varð ikki samtykt á tingi. Tíðskil er einasta skorðan undir so týðandi tjóðskaparligum tátti, sum fólkanøvn okkara eru, gamla danska lógin frá 1904.

Tann broyting, sum ímóti - ella heldur uttan - okkara vilja varð trokað inn á okkum við kgl. fyriskipanini frá 1828, hevur eftir tí, nevndin dugir at meta, verið til ómetaligan skaða fyri føroyskan navnasið. Nevndini tykir, at ein gongd leið út úr óførinum er at loyva aftur hitt forna navnalagið við -son og -dóttir, sum er góður háttur at eyðkenna fólk í lítlum samfelag. Tað er eisini ein natúrligur háttur, tí millum manna verður eftirnavn sjáldan nýtt, men persónur verður vanliga kendur sum sonur ella dóttir faðirs síns ella móður við fyrisetingini hjá, t.d. Jógvan hjá Niklasi, sum í royndum er einki annað enn eitt avbrigdi av Jógvan Niklasson. Nevndin vil ikki við hesum siga, at hetta skal

vera eitt krav, men heldur eitt tilboð, ein møguleiki, sum ein kann velja á jøvnum føti við hin. Tað er móti øllum skili, at tað einasta, sum er bannað, er tað navnalag, sum forfedrar okkara hava livað við longri aftur í tíðina, enn søgur ganga frá.

Við einum dømi skal verða sýnt, at hetta er góður eyðkenningarháttur. Í eini bygd býr maður, sum eitur Tummas Olsen. Hann eigur sjey synir, sum eita Óli, Jógvan, Eirikur, Hanus, Pætur, Niklas og Ragnar. Teir giftast og fáa børn. Trúgvir sum teir eru við gamlan uppkallingarsið, skal elsti sonur eita eftir abbanum. Nú hevur bygdin fingið 7 Tummasar Olsen aftur at hinum gamla. Teir verða noyddir til at keypa sær nýggj eftirnøvn, tá teir koma til, tí brøvini fara skeivt. Vóru teir harafturímóti skrivaðir Tummas Ólason, Jógvansson, Eiriksson o.s.frv., var einki brævabland. Og millum manna eita teir einki uttan Tummas hjá Óla, Jógvani, Eiriki o.s.frv.

Vitanin hjá foreldrunum um, at tað navn, sum tey velja børnum sínum, einaferð skal vera kenningarnavn ella eftirnavn hjá barnabørnunum, mundi eisini gjørt sítt til, at tey vandaðu sær betur um, tá ið tey góvu børnum sínum nøvn.

Skjal XV

P R O T O K O L L

fra

DRØFTELSER MELLOM NORSKE OG FÆRØYSKE MYNDIGHETER

I BERGEN DEN 12.-13. DESEMBER 1991

OM GJENSIDIGE FISKERETTIGHETER I 1992

Den 12.-13. desember 1991 drøftet en norsk delegasjon ledet av assisterende fiskeridirektør Hallstein Rasmussen og en færøysk delegasjon ledet av lagmann Atli Dam, færøysk fiske i Norges fiskerisoner og norsk fiske i færøysk fiskerisone i 1992. Drøftelsene var basert på avtalen om gjensidige fiskerettigheter undertegnet 7. februar 1979.

De to parters delegasjoner fremgår av vedlegg 1.

Partene ble enige om:

I. FÆRØYSK FISKE I NORGES FISKERISONER.

A. I NORGES ØKONOMISKE SONE NORD FOR 62°N.BR.

1. a) 1.445 tonn torsk
   b) 200 tonn hyse (kuller)
   c) 300 tonn andre arter, uer (rødfisk), sei, blåkveite (hellefisk)

2. Overført fra de færøyske kvoter i USSR's økonomiske sone[1]
   a) 900 tonn torsk
   b) 100 tonn hyse (kuller) og
   c) 50 tonn andre arter, uer (rødfisk), sei, blåkveite (hellefisk)

Av det totale kvantum av andre arter nevnt under punkt 1(c) er det kun tillatt å fiske inntil 150 tonn av hver av artene uer (rødfisk) og sei. Blåkveite (hellefisk) kan bare fiskes som bifangst og må ikke overstige 10% av den samlede vekt i hver enkelt fangst i fiske etter andre fiskeslag.

De kvanta hyse (kuller), som er nevnt under 1(b) og 2(b) skal dekke bifangsten i fiske etter torsk. Uunngåelige bifangster av andre arter inngår i totalkvanta av andre arter.

---

[1] Gir ikke grunnlag for fiske i fiskevernsonen ved Svalbard.

3. 7.000 tonn makrell. Dette kvantum kan ogsa fiskes i omradet mellom 62°N og 57°30'N

4. Inntil 5.000 tonn kolmule (blahvilling) som forsøksfiske i et nærmere avgrenset omrade.

5. 15.000 tonn lodde i tiden 1. januar - 30. april 1992.

Færøyene forplikter seg til å begrense sitt fiske i Barentshavet til de kvoter Færøyene er tildelt av kyststatene. Denne forpliktelse omfatter ikke fisket etter reker og haneskjell, jfr. dog punkt D, annet avsnitt.

50% av de enkelte færøyske torske- og loddefangster i det tilstøtende område i Barentshavet, som grenser opp til Norges og USSR's fastlandskyster, skal avregnes på de færøyske kvoter, tildelt av Norge.

Den færøyske part anmodet om å få overført loddekvoten tildelt i Sovjetisk økonomisk sone til Norges økonomiske sone. Den norske part ønsket at dette spørsmålet kunne taes opp mellom partene dersom det skulle vise seg nødvendig for at Færøyene skulle kunne ta sin loddekvote tildelt av Sovjet.

Fiske av lodde kan ikke finne sted i de omrader og de perioder hvor slikt fiske er forbudt for norske fiskere.

B. I NORGES ØKONOMISKE SONE SYD FOR 62°N BR.

1. 20.000 tonn øyepål (sperling), tobis, kolmule (blåhvilling) og brisling, hvorav inntil 2.000 tonn brisling. Kvoten omfatter også bifangst av andre arter, dog ikke av sei og sild.

2. 3.800 tonn sei, inklusive bifangst i andre fiskerier.

3. 1.100 tonn sild, inklusive bifangst i andre fiskerier.

4. 300 tonn håbrand, kan også fiskes nord for 62° nordlig bredde.

Dersom tobisfisket i henhold til anbefaling fra ACFM av bestandsmessige hensyn begrenses for norsk fiske, skal samme begrensning også gjelde for færøysk fiske.

C. I FISKERISONEN VED JAN MAYEN.

5.000 tonn kolmule (blåhvilling).

D. I FISKEVERNSONEN VED SVALBARD.

Fra færøysk side erklærer man seg villig til å begrense sitt

fiske i fiskevernsonen ved Svalbard til maksimum 410 tonn torsk og inntil 100 tonn andre arter, vesentlig uer (rødfisk) og blåkveite (hellefisk), innen for den tredjelandskvote, som er avtalt mellom Norge og Sovjetunionen for fiskevernsonen ved Svalbard. Blåkveite (hellefisk) kan bare fiskes som bifangst og må ikke overstige 10% av den samlede vekt i hver fangst i fiske etter reker og i fiske etter andre fiskeslag.

De færøyske myndigheter påtar seg å begrense det færøyske rekefiske i fiskevernsonen ved Svalbard til 11 fartøyer, gjennomsnittlig 7 fartøyer i fiske samtidig.

Den norske part kan med kort varsel etablere områder i fiskevernsonen ved Svalbard, hvor det av hensyn til bevaring av yngel skal være forbudt å drive fiske.

II. NORSK FISKE I FÆRØYSK SONE.

1. 6.300 tonn bunnfisk (lange, brosme, sei, blålange).

   Innenfor denne kvote må seifangsten ikke overstige 1.150 tonn. Kvoten omfatter også bifangst av andre bunnfiskarter, opp til 1.200 tonn tilsammen. Herav må bifangsten på den enkelte tur ikke overstige 35%. Fiske forutsettes drevet med henholdsvis seigarn og bankline. Dog kan sei fiskes med trål. Maksimalt 12 fartøyer kan delta i fisket samtidig. Utover dette kan et fartøy drive forsøksfiske med teiner.

2. 300 tonn pigghå som et forsøksfiske.

3. 17.000 tonn makrell.

4. 5.000 tonn hestmakrell.

5. 28.000 tonn kolmule (blåhvilling). Kolmule kan fiskes med trål eller not. Antall fartøy med lisens til trålfiske: 55. Antall trålfartøyer samtidig: 20, dessuten 15 på forsøksfiske (fiskeleting) utenfor det hovedfelt, som til enhver tid defineres av den færøyske fiskeriinspeksjon.

6. 100 tonn brugdelever.

Fra norsk side ble det anmodet om tillatelse til et prøvefiske på dypt vann (dypere enn 700) meter. Dette spørsmål vil bli fulgt opp av de respektive fiskerimyndigheter.

III. TEKNISKE REGULERINGSTILTAK.

a. Fra norsk side ble det orientert om at det fra 1.januar 1993 vil bli påbudt bruk av sorteringsrist i havrekefisket. Det ble anmodet om at færøyske reketrålere allerede i 1992 begynner å bruke slik rist.

b. Det ble også fra norsk side gitt en orientering om regelverket for loddefisket, herunder kriterier for stenging av felt.

c. Norge ga også en orientering om de nye omregningsfaktorene for torsk.

d. Fra færøysk side ble det opplyst om at det var foretatt utvidelser av de felt som er stengt for fiske.

IV. LISENSSPØRSMÅL.

Partene var enige om at de fartøyer som hadde lisens til å fiske i den andre parts sone i 1991, også har lisens til å fiske i 1992. Det vil være mulig å etteranmelde fartøyer.

Bergen, 13. desember 1991

Hallstein Rasmussen

Atli Dam

VEDLEGG 1.

NORGES DELEGASJON:

Ass. fiskeridirektør Hallstein Rasmussen, delegasjonsleder, Fiskeridirektoratet

Spesialrådgiver Egil Kvammen, Fiskeridepartementet

Seksjonsleder Terje Løbach, Fiskeridirektoratet

Førstekonsulent Thorbjørn Thorvik, Fiskeridirektoratet

Konsulent Truls Konow, Fiskeridirektoratet

Fiskebåtreder Inge Halsteinsen, Norges Fiskarlag

Fiskebåtreder Nils Olsen, Norges Fiskarlag

FÆRØYENES DELEGASJON:

Lagmann Atli Dam, delegasjonsleder, Færøyenes landsstyre

Fiskeriminister John Petersen, Færøyenes landstyre

Reder Henrik Old, Formann i Færøyenes Lagting's fiskeriutvalg

Fiskeridirektør Kjartan Hoydal, Færøyenes landstyre


Fullmektig Ulla S.Wang, Færøyenes landsstyre

Konsulent Arni Olafsson, Utenriksministeriet

Reder Eiler Jacobsen, Færøyenes Rederiforening

Underdirektør Jakup Solstein, Færøyenes Rederiforening

Skjal XVI



ÖKİNİ A - D - F - K - L - P (S.) OG T (?)

ERİBAB ALT ĀRİD FYRİ TROL

Skjal XVII

ÁLIT

um

ARBEIÐSLOYSISTRYGGING

18. desember 1991

INNIHALDSYVIRLIT

FORMÆLI

ARBEIÐSLOYSISTRYGGING OG ARBEIÐSÁVÍSING

INNGANGUR

MEGINREGLUR

INNGJALD AV LIMAGJALDI

TRYGGINGARÚTGJALD

HUGTAKSLÝSING AV ARBEIÐSLOYSI

ARBEIÐSÁVÍSING

NIÐURSTØÐA

FYLGISKJØL

1. Lógaruppskot
2. Arbeiðsmarknaðarkanning
3. Arbeiðsloysistrygging fyri fiskiframleiðsluvirkir
4. Inngjaldingarskipan
5. Uppgávur í samband við stovnseting av arbeiðsloysistrygging
6. Arbeiðsloysistrygging í EF-londum

FORMÆLI

Í samgonguskjalinum hjá landsstýrinum, sum skipað varð millum javnaðarflokkin og fólkaflokkin 15. januar í ár, varð avgjørt at seta eina nevnd við umboðum fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum og tað almenna at kanna spurningin um arbeiðsloysistrygging.

12. mars 1991 samtykti landsstýrið at seta eina nevnd, hvørs arbeiðssetningur skuldi vera at gera kanningar viðvíkjandi eini møguligari arbeiðsloysistrygging í Føroyum. Í nevndina vórðu vald Petur Alberg Lamhauge, formaður, Ingeborg Winther, Føroya Arbeiðarafelag, fastur limur, Hartvig Hansen, Starvsmannafelagið, varalimur, Oddfríður Gregersen, Føroya Arbeiðsgevarafelag, fastur limur og Arne Poulsen, Føroya Arbeiðsgevarafelag, varalimur. Jákup Nielsen, fulltrúi á Landsskrivstovuni, varð valdur til skrivara. Semja var í nevndini beinanvegin um at varalimirnir skuldu luttaka í nevndararbeiðinum. Umframt at hava gjørt kanningar viðvíkjandi eini møguligari arbeiðsloysistrygging í Føroyum, hevur nevndin eisini tilevnað eitt ítøkiligt uppskot til løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Nevndin metir við hesum arbeiði sítt at vera at enda komið og loyvir sær at leggja fram álit við uppskoti um løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Mælt verður til, at landsstýrið sendir feløgunum á arbeiðsmarknaðinum álitið til ummælis.

Tórshavn, tann 18. desember 1991

Petur Alberg Lamhauge, form.

Ingeborg Winther

Oddfríður Gregersen

Hartvig Hansen

Arne Poulsen

Jákup Nielsen, skr.

INNGANGUR

Nevndin er samd um, at tørvur er á arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing í Føroyum, og rætt er tí at skipa fyri, at hesar verða settar á stovn.

Nevndin grundar hesa støðu á, at arbeiðsloysi er eitt fyribrygdi í nútíðarsamfelagnum, ið tann einstaki borgarin ikki kann vara seg fyri, og tí er rætt at skapa borgarunum ein møguleika at tryggja seg móti arbeiðsloysi.

Staðfestast kann í hesum sambandi, at arbeiðsloysistrygd fyri langari tíð síðani er sett í verk fyri øll lond á okkara leiðum. Nevnast kunnu t.d. øll norðurlond og EF-lond.

Funnist verður ofta at arbeiðsloysistryggingarskipanum, og fært verður fram, at hesar verða misbrúktar, at tær taka hugin frá fólki at arbeiða og ofta hava skeiva ávirkan á landsins búskap, at tær eru fløktar og truplar hjá borgarunum at skilja, og at tær kosta nógv at umsita.

Nevndin metir tað vera umráðandi, at vit í Føroyum ikki gera somu mistøk, sum eru gjørd aðrastaðni, og fer tí at skjóta upp eina skipan:

- ið veitir teimum borgarum, ið gerast arbeiðsleysir, best møguligu trygging uttan tó samstundis at virka sum ein minstulønarskipan.
- ið er løtt hjá borgarunum at skilja og løtt at umsita.
- ið verður bygd upp soleiðis, at tað altíð skal loysa seg at arbeiða, um nakað arbeiði er at fáa, heldur enn at ganga arbeiðsleysur.
- Skipanin skal vera í samsvar við altjóða krøv til arbeiðsloysistryggingar.

MEGINREGLUR

Ábyrgd

Skotið verður upp, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum fáa fullu ábyrgdina av skipanini. Hetta merkir, at partarnir ikki bert hava ábyrgdina av at umsita skipanina, men eisini at útvega neyðuga peningin til skipanina. Um tíðirnar versna, og peningur kemur at vænta í, verður tað upp til partarnar á arbeiðsmarknaðinum sjálvar at krevja inn tann pening, sum restar í.

Tá tann, ið stendur fyri útgjaldingini, eisini skal fíggja skipanina má roknast við, at tað verður ansað væl eftir, at misnýtsla ikki fer fram, soleiðis at arbeiðsloysisstuðul einans verður goldin persónum, ið veruliga eru arbeiðsleysir.

Á henda hátt fæst ein arbeiðsloysistrygdarskipan, ið er bíligari, enn hon hevði verið, um uppgávan lá hjá tí almenna.

Skipanin verður ikki bert bíligari fyri samfelagið sum so, men eisini fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum, ið, um skipanin var almenn, eisini høvdu verið noyddir at goldið hana um skatt og toll.

Tað hevur eisini týdning, at ein misnýtsla hevði minkað um álitið á skipanina millum manna.

Ein tílík skipan, har ábyrgdin liggur hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, fer at eggja til, at krøv til lønarhækkingar verða lagað eftir tíðini, so tey vera minni í ringum tíðum og størri í góðum tíðum.

Valfrælsi

Skotið verður upp, at tað verður upp til tann einstaka borgaran at avgera, um hann letur

seg tryggja ella ikki. Henda regla forðar tó ikki fyri, at fakfeløg tryggja sínar limir í felag.

Ásannast má, at ikki allir borgarar hava tørv, ella av eini ella aðrari grund ikki ynskja at lata seg tryggja móti arbeiðsloysi. Nevndin heldur ikki, at tað er rætt at noyða hesar persónar inn í eina trygging.

Ásannast má eisini, at tað eru ávísir bólkar í samfelagnum, ið eru mest útsettir fyri arbeiðsloysi, og nevndin er tí av teirri áskoðan, at ein arbeiðsloysistrygging eisini eigur at vera sjálvboðin og solidarisk, og skjýtur tí upp, at arbeiðsgevarar, bæði almennir og privatir, skulu gjalda inn til tryggingina ein prosentpart av allari A-inntøku, teir gjalda út, og harvið eisini A-inntøku hjá persónum, ið velja ikki at lata seg tryggja (tá ið A-inntøkur verða umrøddar í hesum áliti, skal tað skiljast sum allar A-inntøkur uttan almannaveitingar).

Hetta, at arbeiðsgevarar gjalda av allari útgoldnari A-inntøku, merkir, at óvissan um inntøkusíðuna hjá tryggingini minkar munandi.

<u>Føroyar ein arbeiðsmarknaður</u>

Skotið verður eisini upp, at rætt er at skipa Føroyar sum ein arbeiðsmarknað.

Hetta merkir, at um einki arbeiði er at fáa á tí staði, ein persónur býr, skal honum verða ávíst arbeiði, har tað møguliga er at fáa, men sjálvsagt eigur tó at verða ansað eftir, at arbeiði altíð verður ávíst so nær bústaðnum sum møguligt.

Í serligum førum kunnu tó undantøk gerast, sum t.d. vánaligir ferðamøguleikar til og frá arbeiði og bústaðarviðurskifti. Somuleiðis eiga eisini undantøk at verða gjørd fyri familjur við børnum í og undir skúlaaldur og fyri einlig við børnum.

Tryggingin eigur skjótast til ber at gera arbeiðsreglur á hesum øki.

Tað, at Føroyar verða skipaðar sum ein arbeiðsmarknaður, og at sett verður á stovn ein arbeiðsávísing, fer at hjálpa til at minka um økisbundna arbeiðsloysið.

Fakmørk

Semja er eisini um, at burtursæð frá neyðugum førleikum skulu eingi fakmørk vera.

Tað, at eingi fakmørk vera, fer at forða fyri, at tað kann vera arbeiðsloysi í summum vinnugreinum, samstundis sum arbeiðsmegi manglar í øðrum vinnugreinum. Hetta er ein trupulleiki, sum grannalond okkara dragast við, og sum í hesum londum skapar illvilja móti arbeiðsloysistrygdarskipanunum. Eisini her eigur tryggingin beinanvegin at gera arbeiðsreglur.

Nevndin metir, at bæði tað, at Føroyar verða skipaðar sum ein arbeiðsmarknaður, og tað at eingi fakmørk vera, fer at minka um vandan fyri, at persónar gerast langtíðararbeiðsleysir.

Nevnast skal eisini, at førleikakrøvini gera, at trýstið á arbeiðsmarknaðin verður móti teimum ófaklærdu, og verður tað tí hjá teimum, tað største arbeiðsloysið fer at verða staðfest. Her er tó eingin broyting í mun til støðuna í dag.

Einfaldar reglur

Nevndin er eisini samd um, at reglurnar fyri ávísing, inngjalding og útgjalding skulu gerast so einfaldar sum til ber.

Fyrimunurin við einføldum reglum er, at skipanin verður løtt at skilja hjá borgarunum og møguleikarnir fyri misnýtslu blíva færri. Eisini verður ein tílík skipan munandi bíligari at umsita. Hinvegin verður ikki strembað ímóti tí millimeturrættvísi, ið gjørt

verður í summum londum. Praktisku royndirnar frá hesum londum vísa, at millimeturrættvísi ofta bert er til á pappírinum. Fyrimunirnar við fløktum reglum hvørva aftur í øktum umsitingarútreiðslum og misnýtslu.

Mælt verður til eina skipan, har persónar kunnu tryggja sær eitt rímiligt dagligt endurgjald, um teir gerast arbeiðsleysir, men møguligt verður tó, í hvussu so er ikki í fyrsta umfari, at gera fleiri valmøguleikar, alt eftir, um ein er høgt løntur ella um ein er lágt løntur, ella eftir hvørjum tørvi, ein annars hevur.

INNGJALD AV LIMAGJALDI

Skotið verður upp:

a. at inngjaldið skal vera ein prosentpartur av A- og/ella B-inntøkuni hjá tí tryggjaða, og ein prosentpartur av útgoldnari A-inntøku hjá arbeiðsgevara,
b. at prosentið, ið tann tryggjaði skal gjalda av síni A-inntøku ella B-inntøku og prosentið, ið arbeiðsgevarin skal gjalda av útgoldnari A-inntøku, skulu vera eins stór,
c. at meðan bert teir løntakarar, ið lata seg tryggja, skulu gjalda inn, skulu arbeiðsgevarar gjalda inn av allari útgoldnari A-inntøku,
d. at allir arbeiðsgevarar skulu gjalda inn, eisini lands- og kommunalir myndugleikar og danski staturin sum arbeiðsgevari í Føroyum,
e. at inngjøld verða kravd í samband við hvørja einstaka lønarflyting. Inngjøld, roknað av B-inntøku verða, tó kravd inn við rokning,
f. at persónur, ið um somu tíð er vinnurekandi og løntakari, kann velja, um hann vil tryggja seg sum vinnurekandi, løntakari ella sum bæði vinnurekandi og løntakari.

Prosentgjald mótvegis føstum gjaldi

Ávísur ivi hevur verið í nevndini, um inngjaldið til tryggingina skuldi vera eitt fast árligt gjald ella eitt prosentgjald av inntøkuni. Nevndin er komin til ta niðurstøðu at mæla til eitt prosentgjald. Eitt prosentgjald er rættvísari enn eitt fast gjald. Um ein persónur er so óheppin, at t.d. inntøka hansara eitt ár minkar munandi, minkar inngjaldið samsvarandi. Eisini út frá einum gjaldførisligum sjónarmiði hevur prosentgjaldið fyrimun. Eitt prosentgjald verður eisini munandi bfligari at umsita enn eitt fast gjald.

Ein vansi við prosentgjaldi er, at tað kann fáa persónar við høgari inntøku til at lata vera við at lata seg tryggja móti arbeiðsloysi. Sum eina roynd eisini at fáa fólk við hægri inntøku at lata seg tryggja fer nevndin at skjóta upp, at eitt loft verður sett fyri inngjaldið.

Støddin á prosentgjaldinum

Nevndin hevur gjørt kanningar av arbeiðsloysinum í Føroyum í dag og vísa hesar kanningar, at fyri at kunna nøkta tann útgjaldstørv, ið nevndin mælir til (fylgiskjøl), verður neyðugt at seta inngjaldsprosentið til 2 frá hvørjum partinum.

Nevndin mælir til, at tað í lógini fyri arbeiðsloysistryggingina verður ásett eitt inngjaldingarprosent uppá 2 og at tað í lógini eisini verður ásett, at stýrið fyri tryggingini hevur skyldu til at broyta inngjaldingarprosentið, tá ið tørvur er á tí. Landsstýrið hevur skyldu til at kunngerða broytingarnar av inngjaldingarprosentinum.

Inngjaldingarloft

Skotið verður upp, at ein persónur ongantíð skal gjalda meira árliga enn eina upphædd, ið svarar til 2% av eini arbeiðaraársløn, hækkað við 15%.

Útrokningargrundarlagið

Útrokningargrundarlagið verður tann einstaka A-lønarflytingin íroknað frítíðarløn.

Viðvíkjandi B-inntøku verður útrokningargrundarlagið meðal B-inntøkan fyri 3 tey seinastu árini.

Almenna luttøkan

Sum omanfyri nevnt metir nevndin, at tað skulu vera partarnir á arbeiðsmarknaðinum, ið skulu hava ábyrgdina og herundir eisini fíggjarligu ábyrgdina av tryggingini. Hetta

merkir, at tað almenna ikki fer at luttaka beinleiðis í rakstrinum av tryggingini, men óbeinleiðis sum arbeiðsgevari.

Byrjunargjald (stovnsfæ)

Sum kunnugt er eingin arbeiðsloysistrygging í Føroyum og hevur nevndin tí sjálv, sum greitt frá aðrastaðni, gjørt eina kanning, sum er brúkt sum grundarlag fyri útrokning av inngjaldingarprosenti.

Hóast nevndin metir hesa kanning vera á so góðari leið, sum til ber, vil altíð ein ávís óvissa vera.

Eisini kann tað, at ein arbeiðsávísing og ein arbeiðsloysistrygging verður sett á stovn, í sær sjálvum merkja, at fleiri fólk leita út á arbeiðsmarknaðin.

Eisini broytist arbeiðsloysið frá tíð til aðra.

Hesi omanfyri nevndu viðurskifti merkja, at neyðugt verður við einum munagóðum byrjunarstovnsfæi og fer nevndin at skjóta upp, at hetta verður fingið til vega við:

a. at tað ikki verður byrjað at gjalda úr tryggingini fyrr enn 6 mánaðir eftir at inngjaldingin byrjar,
b. at tað almenna hjálpir til við einum byrjunargjaldi.

Skattaviðurskifti

Nevndin mælir til, at inngjaldið kann dragast frá í skattskyldugu inntøkuni. Hetta merkir, at eitt inngjald uppá 2% fer at merkjast sum 1% hjá tí tryggjaða.

TRYGGINGARÚTGJALD

Nevndin mælir til, at niðanfyri nevndu treytir skulu lúkast fyri at kunna fáa tryggingarútgjald útgoldið frá Arbeiðsloysistryggingini.

Treytir:

Limaskapur

Fyri at fáa limaskap í Arbeiðsloysistryggingini skal ein hava fylt 16 ár.

Rætt til tryggingarútgjald fær ein persónur, tá ið hann hevur verið limur í arbeiðsloysistryggingini í eitt ár umframt ta uppsagnartíð, hann hevði í tí starvi, hann var í frammanundan.

Fram til tann dag, tá ið tryggingin hevur verið í gildi í 1 ár, verður tó bert kravdur limaskapur fyri tað tíðarskeið, tryggingin hevur verið í gildi.

Persónar, ið fara úr arbeiði í skúla, læru ella í arbeiði uttanlands missa ikki vunna limatíð.

Tøkur á arbeiðsmarknaðinum

Ein avgjørd treyt fyri, at ein persónur kann fáa tryggingarútgjald er, at hann er tøkur fyri arbeiðsmarknaðin tað tíðarskeið, ið arbeiðsloysið varar.

Ein persónur er t.d. ikki tøkur, um hann

a. er sjúkur,
b. er raktur av verkfalli ella verkbanni,
c. er í varðhaldi,
d. er undir útbúgving,

e. noktar at taka ímóti tí arbeiði, ið ávísingin vísir honum á,

f. uttan haldgóða grund heldur uppat við arbeiði sínum,

g. verður uppsagdur av grundum, ið kunnu roknast honum sjálvum.

Tryggingartakari, sum uttan serliga orsøk noktar at taka arbeiði, ið honum er ávíst, uttan haldgóða grund heldur uppat við arbeiði sínum ella verður uppsagdur av grundum, ið kunnu roknast honum sjálvum, missir rætt til tryggingarútgjald í 4 vikur.

Tryggingarútgjald

Nevndin metir, at tað er neyðugt, at tryggingarútgjaldið verður sett so mikið høgt, at tað kann loysa seg at tryggja seg móti arbeiðsloysi.

Tá eitt útgjaldingarprosent er ásett, og persónar hava tryggjað seg undir nevndu fyritreytum, er umráðandi, at prosentið ikki verður lækkað aftur, og tá óvissa er um støddina á arbeiðsloysinum og um gongdina framyvir, eigur útgjaldingarprosentið hin vegin heldur ikki at verða sett ov høgt.

Nevndin fer á hesum grundarlagi at mæla til, at tryggingarútgjaldið pr. dag hjá løntakarum verður 70% av vunnari A-inntøku seinastu 12 mánaðirnar, býttur við 227 døgum.

Hjá vinnurekandi verður tryggingarútgjaldið pr. dag 70% av meðal skattskyldugu inntøkuni seinastu 3 árini býtt við 227 døgum.

Er talan um persónar, ið um somu tíð eru bæði vinnurekandi og løntakarar, verður tryggingarútgjaldið pr. dag 70% av lønarinntøkuni seinastu 12 mánaðirnar, býtt við 227 døgum + 70% av meðal skattskyldugu inntøkuni seinastu 3 árini, býtt við 227 døgum.

Eitt ovasta mark eigur tó at vera, og verður mælt til, at hetta verður sett til 70% av einari arbeiðaraløn við 40 tíma viku sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag

og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Eftir galdandi sáttmála verður markið 476 kr. pr. dag við 5 daga viku.

Møguliga útgoldin arbeiðsloysistrygging í undanfarna 12 mánaða skeiði skal teljast við í útrokningargrundarlagnum.

Frítíðarpeningur fyri undanfarna 12 mánaða skeið skal somuleiðis teljast við í útrokningargrundarlagið.

Sjálvstøðugt vinnurekandi og løntakari um somu tíð

Hugsast kann tann støða, at ein persónur, ið um somu tíð bæði er sjálvstøðugur vinnurekandi og løntakari, verður arbeiðsleysur í øðrum virksemi sínum, men at hitt virksemi hansara er so stórt, at ikki er rætt at viðgera hann sum arbeiðsleysan.

Skotið verður tí upp, at tryggingarútgjaldið hægst kann ásetast til eina upphædd ið løgd saman við vunnari løn/skattskyldugum avlopi av virki verður ájøvn við 70% av eini arbeiðaraløn.

Skiftisreglur

Reglan um útgjalding, ið er grundað á inntøkuviðurskiftini seinastu 12 mánaðirnar, fer at verða órættvís móti teimum persónum, ið hava verið arbeiðsleysir seinastu 12 mánaðirnar og ikki fingið nakran arbeiðsloysisstuðul.

Til tess at bøta um henda trupulleika fer nevndin at skjóta upp, at gjørdar verða skiftisreglur galdandi í 1 ár frá tí degi at rokna, tá arbeiðsloysistryggingin byrjar at gjalda út.

Skiftisreglurnar skulu geva møguleika hjá løntakarum ístaðin fyri inntøkuna seinastu 12

mánaðirnar at velja meðalinntøkuna seinastu 3 árini sum grundarlag fyri útrokning av tryggingarútgjaldi. Í hesi útrokning eigur tí einki ár at telja við meira enn eini ársinntøku hjá einum arbeiðara, ið arbeiðir 40 tíma viku íroknað frítíðarløn.

Skattaviðurskifti

Nevndin mælir til, at útgoldið tryggingarútgjald verður roknað sum vanlig skattskyldug inntøka.

Sum frammanfyri nevnt, kann inngjald til tryggingina dragast frá, tá ið skattskylduga inntøkan verður gjørd upp. Hetta merkir, at skipanin ikki fer at hava nakra ávirkan á inntøkuviðurskiftini hjá landskassa og kommunukassum, tó fær skipanin eina ávísa gjaldførisliga ávirkan á almennu kassarnar.

HUGTAKSLÝSING AV ARBEIÐSLOYSI

(herundir bíðidagar)

Høvuðsregla

Høvuðsreglan er, at ein persónur er arbeiðsleysur frá tí degi, hann av arbeiðsgevara sínum er sagdur úr starvi. Hetta skal skrivliga váttast yvir fyri Arbeiðsloysistryggingini.

Skotið verður upp:

- at fyri tímalønt skal tryggingargjald útgjaldast frá og við øðrum degi, aftaná at arbeiðsloysið er byrjað,
- at fyri fastlønt og onnur skal tryggingarútgjald gjaldast frá og við 5. degi, aftaná at arbeiðsloysið er byrjað.

Fyri ávísar vinnugreinir verður tó neyðugt at gera nærri útgreiningar.

Fiskimenn

Tað ber ikki til at nýta sama hátt at hugtakslýsa arbeiðsloysi hjá fiskimonnum og hjá fólki á landi orsakað av, at fyrsta tíðarskeiðið, aftaná at ein persónur er mynstraður av, má roknast sum frítíð.

Nevndin fer tí at skjóta upp hesar reglur:
Fyri fiskimenn, ið verða sagdir úr starvi, verður høvuðsreglan, at ein persónur verður roknaður sum arbeiðsleysur, tá eitt tíðarskeið er gingið, ið svarar til 70% av túrinum frammanundan uppsøgnini. Er talan um langfaratúrar, kann prosentið uppá 70 lækkast. Hetta verður gjørt á tann hátt, at stýrið ásetir eitt inntøkumark fyri undanfarna túr, frá hvørjum lækkingin skal byrja, og hvussu nógv prosentið skal lækkast, til komið verður niður á eina inntøku svarandi til minstuløna.

Til tess at sleppa undan misnýtslu verður rætturin til tryggingarútgjald í omanfyri nevndu førum treytaður av, at ikki verður farið við skipi hjá sama reiðara áðrenn ein

ávís tíð er gingin. Verður hetta kortini gjørt, skal útgoldna tryggingarútgjaldið gjaldast inn aftur.

Fiskimenn vinna eisini rætt til tryggingarútgjald, tá tað ella tey skip, teir hava verið við seinastu 12 mánaðirnar, hava havt færri enn 170 mynstringardagar, herí íroknaðir inntøkutapstryggingardagar.

Útróðrarmenn

Eins og fyri fiskimenn er tað trupult at siga, nær ein útróðrarmaður er arbeiðsleysur. Nevndin fer tó niðanfyri at seta nakrar høvuðsreglur upp og mæla til, at stýrið í samráð við Meginfelag Útróðrarmanna gera nærri útgreiningar.

Nevndin heldur, at útróðrarmenn, ið eiga bát ella part í báti, sum er undir 20 brt., kunnu bert tryggja seg sum sjálvstøðugar vinnurekandi. Útróðrarmenn, ið eiga bát ella part í báti, sum er størri enn 20 brt., kunnu bert tryggja seg sum løntakarar.

Útróðrarmaður, ið ikki sjálvur eigur bát, ella part í báti, ið er størri enn 20 brt., og sum verður sagdur úr starvi, vinnur rætt til tryggingarútgjald 5. dagin eftir uppsøgnina. Til tess at sleppa undan misnýtslu, verður rætturin til dagpening í hesum føri treytaður av, at ikki verður farið við báti hjá sama eigara, áðrenn ein ávís tíð er gingin. Verður hetta kortini gjørt, skal útgoldna tryggingarútgjaldið gjaldast inn aftur.

Útróðrarmenn vinna eisini rætt til dagpening, tá tann ella teir útróðrarbátar, teir hava verið við í eitt ávíst tíðarskeið, t.d. seinastu 30 gerandisdagarnar, hava havt færri enn eitt ávíst tal av útróðrardøgum, íroknaðir arbeiðsdagar í landi. Møguliga skulu ymiskar reglur gerast fyri ávikavist summar og vetrarhálvár.

Fiskatilvirkingarvirkir

Innan fiskatilvirking eru tey serligu viðurskifti galdandi, at fólk javnan verða send heim vegna tørvandi rávøru. Tað eru sjálvsagt nøkur fólk, ið ikki ynskja at arbeiða fulla tíð, og tí eru nøgd við hesa skipan, men roknast má tó við, at flestu flakafólk ynskja fulla arbeiðstíð, og nevndin er tí samd um at hugtakslýsa heimsending á fiskatilvirkingarvirkjum sum arbeiðsloysi.

Nevndin ásannar tó, at tað ikki er fíggjarliga møguligt at gjalda tryggingarútgjald fyri alla ta tíð, fólk verða heimsend, og fer tí at skjóta upp eina skipan, har gjørt verður upp við endan á hvørjari viku (einki verður flutt fram til komandi viku). Í nevndu uppgerð verða arbeiðstímarnir fyri vikuna upptaldir, og tryggingarútgjald verður roknað frá og við 9. tíma, ein persónur hevur verið heimsendur í vikuni. Er talan um persónar, ið ikki arbeiða fulla tíð, verður tryggingarútgjald roknað frá einum lutfalsliga lægri tímatali, t.d. um ein persónur arbeiðir hálva tíð, verður tryggingarútgjald roknað frá og við 5. tíma ein persónur hevur verið heimseindur í vikuni.

Skotið verður eisini upp, at umsitingin av hesi útgjalding av tryggingarútgjaldi skal liggja hjá fiskatilvirkingarvirkinum, og at hetta í fyrsta umfari skal leggja tryggingarútgjaldið út, og síðani fáa tað endurgoldið frá Arbeiðsloysistryggingini.

Sjálvstøðugt vinnurekandi

Ein sjálvstøðugur vinnurekandi verður roknaður at vera arbeiðsleysur, tá hann skjalprógvar, at virksemi hansara er hildið uppat.

Sum dømi kunnu nevnast skjalprógv, ið vísa konkurs, likvidatión, gjaldssteðg og tvangsakkord, men eisini onnur prógv eiga at kunna góðtakast sum t.d. prógv, ið vísa, at vinnutólini eru seld, ella vinnuloyvið er tikið aftur.

Aðrar vinnugreinir

Umboðini fyri løntakarafeløgini í nevndini hava víst á, at tað eru aðrar vinnugreinir, har tað hava verið meira føst setanarviðurskifti millum løntakara og arbeiðsgevara, har arbeiðsgevararnir seinastu tíðina, móti ynski løntakaranna, hava sett arbeiðstíðirnar niður fyri at sleppa undan at siga fólki upp.

Nevndin er samd um, at persónar, ið siga sítt starv upp orsakað av, at arbeiðsgevararnir hava sett arbeiðstíðina niður um normaltíðina, skulu hava rætt til tryggingarútgjald.

Hetta kann í nøkrum førum hugsast at føra við sær, at persónar, ið eru farnir niður í arbeiðstíð, siga størv síni upp fyri at fáa tryggingarútgjald.

Nevndin ásannar, at hetta er ein sera óheppin støða, ið ikki er í tráð við andan í uppskotinum annars.

Til tess at sleppa undan tílíkum vilja umboðini fyri arbeiðsgevararnar kunna limir sínar um, at skipanin ikki eigur at brúkast soleiðis, at ov nógvir persónar verða hildnir óneyðugt inni í skipanini.

Nær rætturin til tryggingarútgjald heldur uppat

Skotið verður upp, at rætturin til tryggingarútgjald heldur uppat, tá ein persónur í undanfarna 2 ára skeiði hevur fingið tryggingarútgjald í 227 dagar.

Viðvíkjandi misnýtslu

Hevur tryggingartakari givið skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum kunnu hava týdning fyri tryggingarútgjald, skulu hesi gjaldast innaftur til arbeiðsloysistriggingina.
Hevur arbeiðsgevari luttikið í misnýtsluni, skal hann gjalda tryggingini somu upphædd.

ARBEIÐSÁVÍSING

Til tess at lætta um hjá fólki at finna arbeiði og til tess at staðfesta, at ein persónur er arbeiðsleysur, skjýtur nevndin upp, at sett verður á stovn ein arbeiðsávísing saman við arbeiðsloysistryggingini. Talan verður um eina sentrala ávísing. Tey lokalu fakfeløgini skulu tó taka sær av tí primeru ávísingini.

Allir borgarar í Føroyum kunnu venda sær til sentralu ávísingina fyri at sóknast eftir arbeiði.

Skotið verður eisini upp at hava eina felags umsiting fyri ávísing og trygging.

At sita fyri og hava ábyrgdina av arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini verður stýri valt. Skotið verður upp, at hetta skal hava 7 limir, 3 umboða løntakarafeløgini, 2 umboða privata arbeiðsgevaran, meðan 1 umboðar hitt almenna sum arbeiðsgevara. Hinir limirnir í stýrinum skulu velja 7. umboðið, sum er formaður.

Umboðini hjá løntakarafeløgunum verða vald soleiðis, at tímalønt velja eitt umboð, starvsfólk velja eitt umboð og fiski- og útróðrarmenn velja eitt umboð.

Limirnir verða valdir fyri 4 ár í senn.

Stýrið ger sjálvt starvsskipan sína.

Innan 1. desember hvørt ár skal stýrið gera fíggjarætlan fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina at galda fyri árið eftir.

Arbeiðsloysistryggingin og ávísingin verða umsitin av eini avgreiðsluskrivstovu. Stýrið setur neyðugt tal av fólki og leiðara á avgreiðsluskrivstovuni.

Útreiðslur av umsitingini verða fíggjaðar burtur av inngjaldinum.

Norðurlendsk avtala

Sáttmálin um Felags Norðurlendskan Arbeiðsmarknað saman við føroysku arbeiðsávísingini koma at skapa møguleika hjá føroyingum at finna sær arbeiði í grannalondum okkara. Roknast kann við, at hesin møguleiki serliga fer at verða troyttur av ungum fólki.

Nevndin metir henda møguleikan sum nakað positivt, at serliga ung fólk kunnu koma til grannalondini og læra, hvussu arbeitt verður har; men ásannast má eisini, at vandi er fyri, at ein partur av hesum fólkum ikki kemur heimaftur, um møguleikar ikki verða skaptir í føroyska samfelagnum fyri teimum.

Skotið verður eisini upp at ávísingin kemur at taka sær av samarbeiðinum við hinar norðurlendsku arbeiðsávísingarnar.

NIÐURSTØÐA

Nevndin hevur frammanfyri skotið upp eina arbeiðsloysistryggingarskipan, ið gevur øllum borgarum í Føroyum millum 16 og 67 ár, sum eru í arbeiði, ella sum frammanundan hava verið í arbeiði, møguleika fyri at tryggja seg móti arbeiðsloysi.

Í løtuni er støðan sum kunnugt tann, at vit hava onga arbeiðsloysistrygging í Føroyum. Einasti møguleiki at fáa útgoldnan pening í sambandi við arbeiðsloysi er eftir forsorgarlógini, og her er tað ein treyt at ein ongan pening eigur frammanundan, t.v.s. at ein verður verri fyri, um ein hevur spart nakað av peningi saman.

Skipanin gevur ikki tryggingarútgjald frá fyrsta degi til persónar, ið ikki eru í arbeiðsmegini, men sum ynskja at koma inn í hana. Skuldi hetta verið gjørt, vildi tann fíggjarliga óvissan við skipanini verið sera stór. Hesir persónar hava tó møguleika at gerast limir í tryggingini, so skjótt teir ynskja tað og fáa ávíst arbeiði gjøgnum ávísingina.

Nevndin hevur skotið upp eina so einfalda skipan sum til ber, har ábyrgdin og umsitingin er løgd til partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Hetta merkir, at skipanin verður bílig at umsita, og møguleikarnir fyri misnýtslu ikki verða stórir.

Nevndin hevur eisini fingið váttað frá danska arbeiðsmálaráðnum, at uppskotið er í samsvar við altjóða viðtøkur um arbeiðsloysistrygging.

Fylgiskjal 1

Lógaruppskot

18.12.1991

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Kapittul I
Limaskapur

§ 1. Persónar, sum eru skrásettir í fólkayvirlitinum í Føroyum, hava fylt 16 ár, men ikki fylt 67 ár og eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum, hava rætt til at tekna arbeiðsloysistrygging.

Stk. 2. Tryggingin heldur uppat,

a) við endanum á tí mánaði viðkomandi fyllir 67 ár
b) tá hin tryggjaði gerst óarbeiðsførur,
c) tá hin tryggjaði doyr.

Kapittul II
Gjald til tryggingina.

§ 2. Fæið hjá tryggingini verður fingið til vega við serligum gjaldi frá trygging-

artakara og øllum arbeiðsgevarum í Føroyum.

§ 3. Frá trygging er teknað, og til tryggingin heldur uppat, rindar tryggingartakarin 2% í tryggingargjaldi av útgoldnari A-inntøku fyri hvørja lønarútgjalding.
Stk. 2. Tryggingartakari, sum er sjálvstøðugt vinnurekandi, rindar árliga 2% av meðal B-inntøku síni fyri 3 tey seinastu árini.
Stk. 3. Tryggingartakari skal tó ongantíð gjalda meiri enn 2% av teirri upphædd, sum goldin verður í ársinntøku fyri 40 tíma arbeiðsviku sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag hækkað við 15%.
Stk. 4. Tryggingargjøld kunnu dragast frá í uppgerðini av tí skattskyldugu inntøkuni.

§ 4. Allir arbeiðsgevarar í Føroyum rinda 2% av hvørji A-lønarútgjalding til Arbeiðsloysistryggingina.
Stk. 2. Tað í stk. 1 nevnda gjald kann krevjast inn við panting.

§ 5. Landsstýrið kann einans eftir uppskoti frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingini

og arbeiðsávísingini broyta tryggingargjaldsprosentið, sum tryggingartakarin skal gjalda sambært § 3 og gjaldið, sum arbeiðsgevarin skal gjalda sambært § 4.

Stk. 2. Tryggingargjøldini, sum ásett verða sambært stk. 1, skulu vera eins stór.

§ 6. Landskassin letur 20 mió. kr. sum stovnsfæ til arbeiðsloysistryggingina sum eingangsgjald.

§ 7. Landsstýrið kann eftir tilmæli frá stýrinum fyri arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini áseta nærri reglur um inngjøld til arbeiðsloysistryggingarskipanina.

Kapittul III
Útgjalding av arbeiðsloysistrygging.

§ 8. Rætt til tryggingarútgjald fær persónur, tá hann hevur verið limur í Arbeiðsloysistryggingini í eitt ár umframt ta uppsagnartíð, hann hevði í starvinum frammanundan. Fram til tann dag, tá tryggingarskipanin hevur verið í gildi í eitt ár, verður tó bert kravdur limaskapur fyri tað tíðarskeið,

tryggingarskipanin hevur verið í gildi.

Stk. 2. Tryggingartakari, sum fer úr arbeiði í skúla ella í læru, missir ikki vunna lima-tíð. Sama regla er galdandi fyri tryggingartakara, sum fer í vinnu uttanlands. Frammanfyri nevnda áseting er bert galdandi, um so er, at arbeiðsloysistryggingin hevur fingið boð um hetta, áðrenn tryggingartakarin fer í skúla, í læru ella í vinnu uttanlands.

§ 9. Útgjaldingarupphæddin er í mesta lagi 70% av teirri upphædd, sum goldin verður fyri 40 tíma arbeiðsviku íroknað frítíðarløn sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

§ 10. Tryggingartakari, sum verður uppsagdur av egnum ávum, missir rætt til tryggingarútgjald í 4 vikur. Sama regla er galdandi, um so er, at tryggingartakari uttan haldgóða grund sigur seg úr starvi.

§ 11. Útgjaldingarupphæddin pr. dag hjá løntakarum verður grundað á 70% av A-inntøku teir seinastu 12 mánaðirnar

áðrenn arbeiðsloysi hjá tí tryggjaða og verður staðfest sambært § 12 býtt við 227 døgum.

Stk. 2. Hjá sjálvstøðugt vinnurekandi verður útgjaldingarupphæddin pr. dag grundað á 70% av meðalskattskyldugu inntøkuni tey seinastu 3 árini, áðrenn persónliga arbeiði hansara í virkinum er hildið uppat, býtt við 227 døgum.

Stk. 3. Hjá persónum, sum bæði eru sjálvstøðugt vinnurekandi og løntakarar, verður útgjaldingarupphæddin pr. dag grundað á 70% av A-inntøkuni teir seinastu 12 mánaðirnar áðrenn arbeiðsloysi hjá tí tryggjaða og verður staðfest sambært § 12, býtt við 227 døgum, og 70% av meðal skattskyldugu inntøkuni tey seinastu 3 árini, áðrenn persónliga arbeiði hansara í virkinum er hildið uppat, býtt við 227 døgum. Útgjaldingarupphæddin sambært hesi áseting má saman við møguligari aðrari lønarinntøku/skattskyldugum avlopi av vinnuvirki tó ongantíð fara upp um 70% av teirri upphædd, sum goldin verður fyri 40 tíma arbeiðsviku íroknað frítíðarløn sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum

Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Stk. 4. Frá 1. august 1992 til 1. august 1993 kann tryggingartakari krevja, at útgjaldingarupphæddin pr. dag verður grundað á 70% av A-inntøkuni seinastu 3 árini býtt við 681 døgum. Ivamál í samband við skiftisreglurnar í hesum stk. kunnu leggjast fyri stýrið fyri arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini til avgerðar.

Stk. 5. Fyri tryggingartakarar, sum nevndir eru í § 8, stk. 2 verður útrokningargrundarlagið sambært stk. 1, 2 og 3 nýtt fyri tíðarskeiðið, áðrenn tryggingartakarin fór í skúla, í læru ella í vinnu uttanlands.

§ 12. Arbeiðsloysistrygging verður útgoldin, tá hin tryggjaði gerst arbeiðsleysur, og hann leggur fram váttan um hetta frá arbeiðsgevara sínum, og arbeiðsávísingin ikki kann ávísa arbeiði til viðkomandi.

Stk. 2. Upphæddin, sum nevnd er í frammanfyri nevndu grein, verður roknað soleiðis:

1. Fyri tímalønt verður tryggingarútgjaldið roknað frá og við 2. arbeiðsloysisdegi.

"Rættarstandurin á rúsdrekkalógarøkinum í dag er ásettur í trimum ymiskum lógum, L. nr. 115 af 04.04.1928, om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m., sum hon seinast er broytt við Ll. nr. 54 frá 09.06.1988, Ll. nr. 61 frá 19.05.1980 um skamtan av rúsdrekka sum broytt við Ll. nr. 39 frá 20.05.1988 og Ll. nr. 23 frá 11.02.1950 um innflutningsgjøld v.m., sum seinast broytt við Ll. nr. 90 frá 10.10.1991.

Í høvuðsheitum inniheldur L. nr. 115 af 04.04.1928, om forbud mod at driver erhverv med berusende drikke m.m., hesi forboð:

- bann ímóti allari sølu av rúsdrekka, skeinking ímóti gjaldi og eini hvørji vinnu við rúsdrekka
- bann ímóti innflutningi av rúsdrekka til onnur
- bann ímóti at lata persónum undir 20 ár rúsdrekka
- innflutningsforboð fyri at flyta rúsdrekka inn hjá persónum undir 20 ár
- bann ímóti at skeinkja ella lata rúsdrekka ókeypis við tí fyri eyga at stimbra vinnuvegi, ein rekur
- bann ímóti at drekka rúsdrekka í hølum, har matur og/-ella drekka verður selt og almenningurin hevur atgongd
- bann ímóti at lýsa í føroyskum fjølmiðlum við rúsdrekka

Hóast frammanfyri nevnda sølubanni, so gevur lógin føroysku bryggjaríunum heimild at bryggja og selja øl við styrkini silvur/veðraøl og gulløl, og at selja hetta frá góðkendum goymslum undir somu treytum, sum rúsdrekka annars verður innflutt undir.

Í hægstarættardómi frá 1924 (almannakunngjørdur í Ugeskrift for retsvæsen 1924 bls. 416) er staðfest, at stýr-

ið fyri ein klubba í Føroyum framdi brot á bannið í lógarinnar § 1, stk. 1, (sum var einsljóðandi við núgaldandi § 1, stk. 1), tá ið tað skipaði fyri, at skeinkt varð til limirnar ímóti gjaldi. Í dóminum varð upplýst, at klubbin tók ein vinning upp á 25%, tá ið innkeypsprísur, tollur og flutningskostnaður var goldin. Vinningurin varð brúktur til viðlíkahald av hølunum, og fyri at gjalda ókeypis skeinking til veitslur.

Hóast henda hægstarættardóm, so tóku seg upp fyrst í 1960 árunum hinir sokallaðu ølklubbarnir í Føroyum, sum skeinktu til limirnar ímóti gjaldi, og har sølumynstrið var nakað hitt sama sum nevnt í áðurnevnda hægstarættardómi. Hesir virka sum kunnugt enn eftir sama mynstri.

Løgfrøðingar meta, at tá hesir klubbar hava virkað ótarnaðir í nærum 30 ár við myndugleikanna kunnleika og í stríð við orðaljóðið av § 1, stk. 1 sbr. hægstarættardóminum frá 1924, so er nú skapað ein vanarættarlig regla, sum setir til viks § 1, stk. 1 á hesum øki. Henda vanarættarliga regla er tó tulkað sera avmarkað, soleiðis at hon bert kemur upp á tal í teim førum, tá ið skeinkt verður til limirnar í klubba ímóti gjaldi, hetta rúsdrekka bert verður drukkið í hølum ølklubbans, og at støddin av vinninginum við søluni ikki er størri enn neyðugt er fyri at gjalda vanliga løn til barrvørð, høli, reingerð, sum er ájøvn við løn fyri annað arbeiði av líknandi slag her í Føroyum, har rúsdrekka ikki er uppi-
í.

Ll. nr. 61 frá 19.05.1980 um skamtan av rúsdrekka ásetir skamtan fyri rúsdrekka soleiðis, at ongum er loyvt at flyta um ársfjórðingin meira enn 9 litur av rúsdrekka við meiri enn 23% alkoholinnihaldi og/ella 9 litur av heitvíni ella likøri. Eisini er í somu lóg ásett, at um mánaðin er ikki loyvt at flyta inn ella keypa frá føroyskum bryggjaríum meiri enn 4 kassar av gulløli. Vín og veðraøl/silvurstyrki er ikki skamtað. Í lógini er landsstýri-

num heimilað at geva undantak frá skamtannarreglunum, og hevur henda regla seinastu árini verið fyrisitin soleiðis, at eykaloyvi hevur verið veitt til føðingardagshald 40, 50, 60, 65, 70, 75 ár o.s.fr., brúdleyp, silvurbrúdleyp og gullbrúdleyp, minningarhald fyri at hava sitið í starvi hjá sama arbeiðsgevara í 25, 30, 35 ár osfr., ársveitslur hjá feløgum í teim førum, har ikki fleiri av limunum eru undir 20 ár, minningarhald hjá handilsfeløgum eftir virki í 25, 50 og 60 ár, tó treytað av, at haldini ikki eru fyri at stimbra vinnuvegin. Eisini er veitt eykaloyvi til umboðan hjá almennum myndugleikum, eitt nú landsstýri, kommunum og konslum.

Í Ll. nr. 23 frá 11.02.1950 um innflutningsgjøld v.m., sum seinast broytt við Ll. nr. 90 frá 10.10.1991 er ásett, at ikki er loyvt at framleiða rúsdrekka í Føroyum. Eisini er í somu lóg ásett, at ikki er loyvt at flyta inn rúsdrekkaløg, sum er sterkari enn 60% og heldur ikki er loyvt at flyta inn ella í Føroyum at bryggja øl við hægri styrki enn hitt sokallaða gullølið.

Revsingin fyri brot á rúsdrekkalógina er sekt, hefti ella fongsul uttan at ásett er, hvør mesta heimilaða fongsulsrevsingin er. Í dómsvenju hevur harðasta revsing fyri brot á rúsdrekkalóggávuna verið fongsul í upp til 4 - 6 mánaðir í førum, har vinningurin við søluni hevur verið o.u. kr. 200.000,oo til kr. 300.000,oo. Eftir lógini verða brot á rúsdrekkalóggávuna mett so álvarsom, at serlig rættarráð eru heimilað fútanum við góðkenning sorinskrivarans, tá ið rúsdrekkamál verða eftirkannað m.a. haldlegging, rannsókn og varhaldsfongsling o.a."

1.3. Rúsdrekkamálið - 1856 - umleið 1990.

Við lógini um avtøku av Kgl. Einahandlinum í Føroyum frá 21. mars 1855 varð rúsdrekkasøla skipað sum onnur vørusøla í Føroyum. Handil við rúsdrekka var púra fríur, og einasta treytin var vinnubræv til at reka handils-

virki. Í 1860 kom serstøk lóg um handil við og skeinking av rúsdrekka. Við hesi lóg frá 3. mars 1860 varð kravt loyvi til skeinking, og sett varð avgjald á skeinkiloyvi. Endamálið við avgjaldinum var at minka um talið á skeinkistøðum. Avgjaldið varð hækkað við lóg frá 29. dec. 1876. Sum kunnugt hendu í tíðini fram til aldarmótið stórar samfelagsbroytingar í Føroyum. Eitt, sum eyðkendi hesar broytingar, var ein støðugt vaksandi rúsdrekka-nýtsla. Hetta elvdi til eina sera virkna og vælskipaða fráhaldsrørslu, ið kravdi almenn tiltøk móti rúsdrekka-nýtsluni.

Í 1906 setti fráhaldsrørslan fram krav um beinleiðis forboð fyri handli og útskeinking av rúsdrekka í Føroyum.

Eingin ivi er um, at rúsdrekkamisnýtslan um hetta mundið var vorðin til eitt hitt størsta samfelagsliga vandamálið í tíðini, so tungtvigandi orsøkir vóru til tess at gera víttgangandi tiltøk fyri at koma misnýtsluni til lívs.

Tann 6. november 1907 var fólkaatkvøða í øllum landsins kommunum um rúsdrekkaspurningin. Fólkaatkvøðan var ásett við heimild í nýggjari rúsdrekkalóg frá 19. apríl 1907. Henda lóg gav í prinsippinum loyvi at reka handil við rúsdrekka, men lógin ásetti samstundis í § 5, at slíkur handil bert kundi loyvast eftir fólkaatkvøðu í hvørjari sókn.

Eftir fólkaatkvøðuna varð so forboð sett fyri at selja rúsdrekka í Føroyum, og hevði forboðið gildi frá 6. juni 1908, tó so, at rúsdrekka kundi bíleggjast uttaneftir í óavmarkaðum nøgdum. Í 1910 varð henda lóg endurnýggjað óbroytt. Í 1917 varð gjørd tann broyting í lóggávuna, at reglan um, at fólkaatkvøða sambært lógini frá 1907 kundi verða hildin 5. hvørt ár, datt burtur. Í staðin varð sett generelt forboð fyri at selja rúsdrekka í Føroyum.

Í sama viðfangi mistu fólk rættin at bíleggja rúsdrekka í felag, og gistingarhúsini mistu útskeinkingarrættin. Klubbar og ávís feløg høvdu tó framvegis rætt

til at skeinkja út rúsdrekka. Hetta loyvið varð tikið frá klubbunum við nýggjari rúsdrekkalóg, ið kom í gildi 30. januar 1923. Uppaftur strangari gjørdust reglurnar við lóg frá 30. januar 1928, tá skattaváttanin gjørdist treyt fyri at kunna bíleggja rúsdrekka. Áhugavert er tó, at lógin frá 1928 ásetti 18 ára aldursmark fyri tann, ið loyvi hevði at bíleggja rúsdrekka.

Í 1936 var rúsdrekkamálið til umrøðu á tingi, har uppskot vórðu um stórar broytingar. Mælt varð til at seta á stovn einkarsølu fyri innflútning og sølu av rúsdrekka. Málið var útsett og ongatíð avgreitt. Um hetta mundið varð greitt, at rúsdrekkalóggávan varð vorðin ein blanding av forboðslóggávu og skattalóggávu. Rúsdrekkanýtslan var vorðin ein týðandi inntøkukelda hjá Føroya løgtingi. Í 1944 varð lógin broytt til, at rúsdrekka var skamtað soleiðis, at ikki varð loyvt at bíleggja og avgreiða meir enn 9 litrar pr. fólk pr. fjórðingsár. Árið eftir var lógin aftur broytt, soleiðis at skamtanin varð tikin av og aldursmarkið sett til 20 ár.

Í 1949 kom serstøk lóg, ið aftur skamtaði rúsdrekka til somu nøgd sum í 1943, (løgtingslóg nr. 10 frá 28. mars 1949). Henda lóg varð í 1980 avloyst av løgtingslóg nr. 61 frá 19. mai 1980 um skamtan av rúsdrekka. Endamálið við lógini frá 1980 var at minka um ólógligu søluna av rúsdrekka, at minka um nýtsluna sum heild hjá tí einstaka og at royna at benda nýtsluna móti veikari rúsdrekka.

Tann 19. december 1972 legði landsstýrið uppskot til nýggja rúsdrekkalóg fyri løgtingið. Sambært hesum uppskot mælti landsstýrið til stovnseting av einkarsølu við rúsdrekka, eins og tað var heimilað landsstýrinum sambært lógaruppskotinum at loyva føroysku bryggjaríunum at bryggja sterkt øl við styrki upp til 5 vektprocent í Føroyum. Lógaruppskotið frá 1972 varðveitti skamtanina frá 1949, eins og aldursmarkið var verandi óbroytt. Lógaruppskot landsstýrisins um nýggja rúsdrekkalóg varð við ymiskum broytingum samtykt við 3. viðgerð í apríl mánaða 1973. Samstundis sum uppskotið var samtykt, avgjørdi løg-

tingið, at lógin bert kundi verða lýst, um lógin eisini varð samtykt við fólkaatkvøðu. Sum kunnugt datt lógin burtur við tað, at uppskotið varð felt við fólkaatkvøðuni 8. november 1973.

Í 1980 varð rúsdrekkalógin frá 1928 broytt soleiðis, at loyvt var føroysku bryggjaríunum at bryggja og útflýggja øl við upp til 5 vektprocentum í. Í sama viðfeingi var tað sterkasta ølið bannað og tað sterkara ølið (gulløl) skamtað. (Løgtingslóg nr. 60 frá 19. mai 1980). Við heimild í somu lóg varð við kunngerð nr. 78 frá 11. juli 1980, sum broytt við kunngerð nr. 104 frá 15. december 1980 loyvt føroysku bryggjaríunum at útflýggja øl. Seinni er skattaváttanin avtikin, men annars eru ongar álvarsamar broytingar hendar rús- drekkamálinum, fyrr enn verandi uppskot varð lagt fyri Føroya løgting tann 10. apríl 1991.

1.4. Samandráttur av fundum og ymiskum tilfari

Sum nevnt frammanfyri hevur víðkaða rættarnevndin savnað saman ymist tilfar og havt fundir við serkøn fólk innan rúsdrekkaøkið. Nevndin skal tí í álitinum loyva sær stutt at greiða frá teimum mest týðandi viðmerkingunum frá fólki, ið nevndin hevur hitt á máli. Eisini skal nevndin stutt gera eina roynd at samanfata tær upplýsingar og tey sjónarmið í tí skrivaða tilfarinum, sum nevndin heldur hava týdning til tess at fáast kann ein rímulig heildarmynd av rúsdrekkaspurninginum í Føroyum.

Nevndin hevur havt fundir við landfútan, rúsdrekka- og narkotikaráðið, Felagsnevndina hjá Føroysku Fráhaldsfeløgunum, Blákross, umboð fyri Blákrossheimið, barnaverndina í Tórshavn, kommunulæknafelagið, yvirlækna á psykiatrisku deild, Heilbrigdi, Tórshavnar býráð, kommunufelagið, kriminalforsorgina, landsskúlafyrisitingina, tollvaldið, bryggjaríini, postverkið, ávís frítíðarfeløg og umboð fyri vínkeypsfeløg.

Av tí, sum er komið fram á hesum fundum, skal nevndin nevna fylgjandi:

Landfútin gjørdi vart við, at lógarteksturin í uppskoti landsstýrisins sum heild er ein stramming í mun til galdandi lóggávu, hóast ávís liberalisering er í uppskotinum. Eisini gjørdi fútin vart við, at verandi lóggáva er soleiðis háttað, at hon ikki letur seg umsita í dagsins samfelag. Hann helt ikki, at tað ber til at koma rúsdrekkamisnýtsluni til lívs við lóggávu. Hetta gerst bert við at reka ein miðvísan rúsdrekka- og heilsupolitikk. Men, undirstrikaði fútin, fortreytin fyri slíkum politikki er skipað og greið viðurskifti á økinum. Landfútin legði dent á, at løgreglumyndugleikarnir við lógaruppskotinum og við teimum broytingum, sum fútin mælir til, vildu fingið eitt nýtt grundarlag at arbeitt út frá. Við hesum grundarlagi helt hann góðar møguleikar vera fyri at fáa skipað viðurskifti og eftirlit við rúsdrekkadistributiónini. Víðari mælti fútin til, at einkarsølan veruliga verður ein einkarsøla, soleiðis at øll søla millum manna verður bannað. Tað er stórur tørvur á, at fáa eftirlit við rúsdrekkaviðurskiftunum - at fáa skipað og lóglig viðurskifti á økinum. Fútin heldur eisini, at tað er umráðandi at fáa steðgað óskilinum við, at heilt ung fáa hendur á sterkum øli. Hetta, heldur hann, letur seg gera, um uppskotið til nýggja rúsdrekkalóg við ymiskum broytingum verður samtykt og sett í gildi. Samanumtikið tók landfútin undir við uppskotinum við teimum broytingum, sum hann sjálvur hevur mælt til.

Umboðini fyri rúsdrekka- og narkotikaráðið løgdu dent á fylgjandi viðurskiftir:

Flestu broytingarnar, ið høvdu komið í gildi í lógaruppskotinum, eru yvirhøvur í samsvar við høvuðssjónarmiðini hjá ráðnum, um enn hetta ikki kann sigast um detaljurnar. Ráðið er ikki heilt nøgt við uppskotið um einkarsølu - ráðið heldur, at einkarsøla eigur ikki bert at verða eitt distributiónstól og hava distributiónsskyldu, men at einkarsølan eisini eigur at verða liður í tí almenna heilsupolitikkinum.

Víðari heldur rúsdrekka- og narkotikaráðið, at ein endamálsgrein er ynskilig í lógini, og henda enda-

málsgreinin skal hava sum høvuðsinnihald, at tað eigur at verða minkað um nýtsluna og misnýtsluna av rúsdrekka í samfelagnum. Ráðið heldur tað verða heilt órealistiskt at hugsa sær at seta bann fyri rúsdrekkanýtslu í Føroyum og heldur ikki, at eitt bann fyri rúsdrekkanýtslu er skilagott amboð í rúsdrekkapolitikkinum. Ráðið ger vart við, at rúsdrekka- og narkotikaráðið í framtíðini eigur at hava ein leiklut í rúsdrekkapolitikkinum, og umboðini halda, at tað eigur at verða ráðið, sum tilevnar rúsdrekkapolitikkin. Víðari ger ráðið vart við, at einkarsølan má og skal verða tað, sum tey kalla reel, altso at tað veruliga er einkarsølan, sum hevur monopolið í Føroyum. Hetta merkir eftir ráðsins uppfatan, at bryggjaríini ikki eiga at hava loyvi at selja út úr húsinum. Eisini heldur ráðið, at tað eigur at verða loyvt at bryggja rúsdrekka í Føroyum, og mælir samstundis til, at sett verður eitt mark upp á 60% fyri hægst loyvda innihaldi av alkoholi av tí rúsdrekka, sum verður bryggjað ella innflutt til Føroyar. Víðari viðvíkjandi einkarsøluni: Tað eigur at verða ein veruligur møguleiki til at keypa tað, tú skalt brúka og ikki meira. Ráðið leggur stóran dent á hetta, at koma burtur frá kassamentalitetinum, og heldur ráðið, at eitt vælútbygt distributiónssystem kann minka um kassamentalitetin.

Víðari leggja umboðini fyri rúsdrekka- og narkotikaráðið stóran dent á dokumentatión og upplýsing og miðvíst arbeiði til tess at skapa mentalitetsbroyting í fólkinum mótvegis rúsdrekka og leggja umboðini her stóran dent á tað, tey kalla fyri fyrimyndarproblematikkin. Rúsdrekka- og narkoráðið heldur eisini, at tað er hugsandi, at nýtslan fer at vaksa eitt sindur í fyrstani, men heldur síðan, at tey betri og meiri skipaðu viðurskiftini, ið verða ein fylgja av lógini, eisini fara at gera, at sum frá líður, fer nýtslan aftur at minka og kemur í eina meira akseptabla legu. Spurdir, um tað kemur ráðnum illa við, at lógaruppskotið kemur júst nú, áður enn ráðið er liðugt við at gera uppskot til nýggjan føroyskan rúsdrekkapolitikk, søgdu umboðini fyri ráðið seg ikki bein-

leiðis kunna svara upp á hetta og gjørdu bert vart við, at tað altíð, tá tú skal gera nýskipanir, er best at hava so haldgott grundarlag sum møguligt fyri hesum arbeiði, og at støða ráðslimanna møguligt hevði verið eitt sindur øðrvísi um eitt hálvt ár, tá árbeiðið var komið eitt sindur meira áleiðis. Hinvegin gjørdi talsmaðurin fyri ráðið vart við, at ráðið sum heild tók undir við lógaruppskoti landsstýrisins.

Viðvíkjandi ymiskum og ávísum evnum var støða ráðsins fylgjandi:

Aldurmarkið varð mælt at seta til 18 ár, sum ein helt verða rímiligt. Tørvur er eisini á miðvísum heilsu- og ungdómspolitikki. Nógv varð tosað um tann áhaldandi drykkjuskapin mótvegis kassadrykkjuskapinum og "fyrimunir og vansar" við hesum skipanum. Ráðið legði dent á, at vit í Føroyum ikki hava so nógvar kroniskar skaðar, men at vit í heilatikið vita lítið í Føroyum um skaðarnar av alkoholnýtslu. Virkandi formaður ráðsins vísti annars til skrivliga frágreiðing frá ráðnum, ið liggur í málinum. Tað finst eingin miðvís kanning av orsøkunum til, at fólk verða innløgd við akuttum eitringum í Føroyum. Heldur ikki eru teir sosialu faktorarnir í hesum sambandi kannaðir. Gjørt var eisini vart við frá ráðsins síðu, at dagligur drykkjuskapur hjá 12-14 ára gomlum kann verða orsøkin til persónligheitsbroytingar og eisini, at rúsdrekkanýtslan millum lógbrótarar er størri enn vanligt. Umboð fyri ráðið gjørdu aftur vart við, at tað er avgerandi, at lógarkarmarnir eru í lagi, og hildu tey, at nakað av tí rætta var í lógaruppskotinum. Eisini helt ráðið, at vinningurin av søluni skal verða nýttur í arbeiðinum at minka um rúsdrekkamisnýtsluna í landinum. Spurdur um, hvussu vit fáa ein betri rúsdrekkapolitikk, svaraði virkandi formaðurin í ráðnum, at tað var umráðandi at skilja millum misbrúk og brúk. Talað var eisini aftur og fram um týdningin og virkningin av hægri avgjøldum. Her løgdu umboðini fyri ráðið dent á, at avgjøldini ikki vóru so høg, at tey freistaðu til smugling og heimabrygging, víst verður annars til skrivliga frágreiðing frá Pál Weihe,

virkandi formanni í rúsdrekka- og narkotikaráðnum.

Eftir áheitan hevur Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu orðað notat um rúsdrekkaspurningin í Føroyum. Í notatinum, sum er orðað av Pál Weihe, serlækna í samfelagsmedisin/arbeiðsmedisin, verður víst á hetta, at Føroyar hóast alt eru rættiliga væl fyri viðvíkjandi drekkimynstrum samanborið við onnur lond. Føroyingar liggja í tí lægra endanum viðvíkjandi drykkjuskapi, um sammett verður við onnur lond. Samanborið við onnur norðanlond liggja Føroyar í miðjuni.

Í Danmark og Grønlandi er brúkið nógv størri enn okkara, og í Íslandi og í Noregi er nýtslan nakað minni enn okkara. Føroyar liggja á leið við Svøríki. Víðari verður sagt, at tøl, ið siga frá totalbrúki í meðal fyri hvønn íbúgva bert kunnu takast sum vegleiðandi tøl, tá talan verður um at meta um skaða, ið stendst av rúsdrekkanýtslu. Eisini eigur at verða hugsað um, at tølini bert sýna tað, sum myndugleikarnir hava kunnleika til. Aftrat hesum eigur at verða lagt tað, sum fólk drekka, táið tey ferðast uttanlands ella tað, sum tey taka tollfrítt við inn í landið. Hetta tal verður vanliga sett til 15%. Tá talan er um at meta heilsuskaðar, hevur býtið av rúsdrekkanýtsluni sera stóran týdning: Í Føroyum er tað so, at stórur partur av fólkinum ikki nýtir rúsdrekka yvirhøvur, samanborið við Danmark, har tað bert er lítil partur av fólkinum, ið ongatíð smakkar rúsdrekka. Hetta merkir, at vit upp á seg kunnu hava líka nógvar misbrúkarar av rúsdrekka, sum t.d. Danmark, sjálvt um okkara miðaltøl eru lág. Læknin á deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu heldur fram:

"Síðani mitt í sjeyti árunum hevur heimsheilsustovnurin WHO gjørt seg til talsman fyri, at eitt alkoholpolitiskt aðalmál eigur at verða at minka miðalnýtsluna (totalkonsumið ella talið av litrum reint alkohol, sum hvør íbúgvi í miðal drekkur um árið). WHO kom m.a. til hesar niðurstøður:

1. Tað er sera sannlíkt, at ein hækking av miðalnýtsluni av rúsdrekka førir við sær økt tal av stórnýtarum.
2. Um myndugleikarnir í einum landi ætla sær at minka um talið av stórnýtarum, fer hetta helst at eydnast, um

tað eydnast myndugleikunum at minka miðal nýtsluna. Meira miðalnýtslan minkar, færri verða stórbrúkararnir.

3. Um talið av stórbrúkarum hækkar, førir tað vanliga við sær hækking av deyðstilburðum av rúsdrekkaávum.

Orvar Olsson hevur í einari rapport frá Centralförbundet för Alkohol- og Narkotikaupplysning kannað eftir, um tað framvegis er vísindarligt grundarlag at halda, at hesi sjónarmið eru røtt. Niðurstøða hansara er soljóðandi:

""Totalkonsumtionsmodellen, så som den allmänt formulerades i WHO-rapporten 1975, är fortfarande giltig. Ju mer alkohol som det totalt sett dricks i ett samhälle, desto fler storkonsumenter kommer det att finnas och desto fler kommer att få skador av sitt drickande. Det är ganske säkert at en sänkning av totalkomsumtionen leder till en minskning av antalet storkonsumenter och till en minskning av antalet alkoholkonsumenter som får skador. Ju större sänkningen är desto, säkrare är det att den följs av en minskning av skadorna.""

Kanningar ímillum 9. floks næmingar í Føroyum vísa, at umleið helvtin av 9. floks næmingunum drekka rúsdrekka við hvørt, at hesir næmingar fáa rúsdrekka ella øl frá eldri vinum og kenningum. Tað eru ikki gjørdar kanningar í Føroyum, ið vísa rúsdrekkanýtsluna hjá vaksnum fólki. Tó tykist myndin at vera tann, at nýtslumynstrið er tað sokallaða skandinaviska mótvegis tí kontinentala. Hetta merkir, at drukkið verður nógv í senn, og so verður einki drukkið í longri tíð. Mótvegis hesum stendur tann suðurlendska javna nýtslan, har drukkið verður vín hvønn dag, og serlæknin í samfelagsmedisini heldur fram:

"Um drykkjumátin er tann fyrri, nýtist totalkonsumið fyri hvønn íbúgva í miðal ikki at vera stórt, og tó kunnu tær heilsuligu og sosialu avleiðingarnar vera alstórar. Tann, ið rúsar seg, kann gerast so eitraður, at hann onkursvegna kemur í vanlukku og møguliga doyr. Klárar hann hinvegin rúsin snikkaleysur, hevur likamið góðar møguleikar at vinna á eitranini heilt uttan mein. Annarsleiðis er við teirri støðugu nýtsluni. Av henni standast hópur av heilsubrekum. Vanliga siga vit, at talið av livrasjúkuni Cirrhosu ella livurskropnan er eitt gott mát fyri, hvussu stórt alkoholmisbrúkið er í einum samfelag. Í Danmark doyðu í 1986 288 menn og 104 kvinnur av livurskropnan vegna alkoholnýtslu. Umroknað til føroysk viðurskifti, kundu vit vænta á leið 4 deyðsboð árliga, men sambært tølini yvir deyðsorsakir í ársfrágreiðingini

hjá landslæknanum 1987 er tað færri tilburðir í Føroyum enn í Danmark. (1982: 4 tilburðir. 1983: 1 tilburður. 1984: 0. 1985: 1. 1986: 0). Sambært somu ársfrágreiðing vóru 14 av 23 óvæntað og brádliga deyðum fólkum ávirkað av rúsdrekka, t.v.s. meiri enn 0,5 o/oo. 10 høvdu meiri enn 1,75 o/oo í blóðinum. Sambært munnligan fyrispurning til landslæknan hevur hetta verið lagið í nógv ár."

Læknin á Deildini fyri Arbeiðs- og Almanna-heilsu tekur sum nevnt eisini frammanfyrinevnda spurningin um málsetningin fyri almanna heilsu hjá WHO upp í nevnda notati. Víst verður á, at endamálið er, at í seinasta lagi 1995 eigur at verða hend ein týðilig minking í heilsuniðurbrótandi atferð, t.d. nýtslu av alkoholi og heilivági. Upp á longri sikt er endamálið, at rúsdrekkanýtslan og onnur vandamikil evnanýtsla eiga at verða minkað minst 25% um ár 2000. Víst verður eisini á í nevnda notati hvørjar møguleikar, ið samfelagið hevur til tess at minka um alkoholnýtsluna. Víst verður á <u>prispolitikkin</u>, sum hevur sera stóran týdning fyri samlaðu nýtsluna.

Um hetta stendur soleiðis:

Hvørjar møguleikar hava vit at minka um alkoholnýtsluna?

1. Prisurin á rúsdrekka hevur størta týdning fyri samlaðu nýtsluna. Samanborið við aðrar mátar at tálma nýtsluna - einkarsøla, handilstíðir, upplýsing, aldursmark o.s.fr., virkar prispolitikkurin smbrt. útlendskar royndir nógv best. Príselasticiteturin er lutfallið millum fallið í prosentum av rúsdrekkanýtsluni og hækkingina í prosentum av prisinum, tá hesin hækkar eitt sindur. Kanningarúrslit sýna, at príselasticiteturin fyri brennivín liggur ímillum ÷0,3 og ÷2,4, fyri vín millum ÷0,1 og ÷1,7 og fyri øl millum ÷0,2 og ÷3,0. Hetta merkir, at um vit siga, at príselaticiteturin fyri brennivín er ÷1, so fer ein hækking av brennivínsprísinum upp á 25% at føra við sær 25% lækking av nýtsluni. Tað ber sjálvandi ikki til heilt neyvt at siga, hvussu nógv rúsdrekkanýtslan í Føroyum fer at minka, um prísurin hækkar, men tað tykist at vera greitt, at her er eitt týðiligt samband, sum ber til at nýta í rúsdrekkapolitikki. Tað er sjálvandi mark fyri,

hvussu høgur prísurin í Føroyum kann vera, tí gerst munurin millum grannalondini og okkum ov stórur, økist freistingin til ólógligan innflutning ella ólógliga framleiðslu.

2. Tað tykist at vera ein sannroynd, at lættari alkohol er at fáa fatur á, størri verður miðalnýtslan. Vit kunnu siga, at søla, sum tann í Danmark við sølu í øllum handlum, er tann skipanin, ið gevur brúkaranum lættasta vegin til rúsdrekka. Brúkarin kann keypa tað her og nú og tí nøgd honum hóvar. Okkara skipan í Føroyum liggur í hinum endanum, har rúsdrekka skal bileggjast í góðari tíð og vanliga verður tað keypt í stórum.
3. Talið av vertshúsum og matstøðum við heimild at skeinkja ávirkar eisini samlaðu nýtsluna. Í Finlandi hækkaði talið av útsølustøðum frá 1600 til 21.000 í árunum 1968 til 1970, og nýtslan hækkaði við 50%.
4. Lýsingar fyri ella ímóti rúsdrekka hava ivaleyst ávísan týdning fyri nýtsluna.

Núverandi rúsdrekkalóg við sínum forðingum at fáa fatur í rúsdrekka beinanvegin og forðingin ímóti at servera rúsdrekka á matstovum, eru uttan iva við til at halda miðal rúsdrekkanýtsluni niðri. Hetta soleiðis at skilja, at um rúsdrekka verður lættari at fáa fatur í, t.d. í einkarsølu ella á matstovum fer samlaða nýtslan at vaksa.

Ein økt nýtsla er frá einum heilsusjónarmiði óheppin. Her má WHO málið um 25% niðurskurð innan 1995 sigast at vera vælgrundað. Hinvegin vil ein broyting av rúsdrekkalógini soleiðis, at tað verður lættari at fáa fatur á rúsdrekka í smáum nøgdum, tá tørvur er, óivað eisini hava eina útjavning av nýtsluni við sær. Tað merkir, at teir stóru topparnir, tá kassin kemur, minka ella hvørva.

Avleiðingarnar fyri almannaheilsuna verða helst negativir, um vit bara broyta núverandi rúsdrekkalóg til t.d. einkarsølu og skeinkingarloyvi á matstovum og annars eingi onnur tiltøk settu í verk, tí vøksturin í miðalnýtsluni hevði havt lutfallsliga fleiri ringar avleiðingar við sær enn tær góðu avleiðingarnar av tí meiri jøvnu nýtsluni.

Tað er tó annað enn læknaligar metingar í hesum máli. Tað er ivaleyst eitt faktum, at føroyingar ikki kunnu steingja rúsdrekka úti. Rúsdrekka er ein partur av øllum tí vesturlendska samfelagnum, og samskiftið landanna millum veksur støðugt. Um vit við lóg skulu halda rúsdrekka burturfrá okkum, fer hetta at krevja eitt størri og størri eftiransingararbeiði. Royndirnar hjá fólki at fáa til vega somu kor viðvíkjandi rúsdrekka sum í grannalondunum fara at verða fleiri og fleiri.

Eg haldi, at vit skulu broyta rúsdrekkalógina, soleiðis at loyvt verður at skeinkja á matstovum, og at rúsdrekka verður selt í einkarsølum, men samtíðis eiga rúsdrekkatálmandi tiltøk at vera sett í verk, t.d. prishækkingar.

Grundgevingin fyri einkarsølu fram fyri heilt fría sølu er, at við hesum ber til at halda talið av sølustøðum niðri, t.d. svarandi til talið av sýslum í landinum. Rúsdrekka fær ein serstatus og verður ikki dagligvøra sum mjøl og sukur. Tað verður lættari at stýra lýsingunum o.s.fr. Í einkarsøluskipanina kann eisini innflættast rationering, sjálvt um hon neyvan verður virkin.

Niðurstøða:

Um rúsdrekkalógin verður broytt soleiðis, at sølustøð verða her í landinum, og tað fer at bera til at fáa fatur á rúsdrekka beinanvegin og at skeinkt verður á matstovum, fer nýtslan helst at hækka, um ikki tálmandi tiltøk verða sett í verk samtíðis. Tað er av týdningi, at landsins myndugleikar, feløg, samkomur, arbeiðspláss og einstaklingar arbeiða fyri, at rúsdrekkanýtslan verður hildin á einum støði, har heilsuvandi ikki stendst av. Her eru ymsir møguleikar:

1. Við prishækkingum á rúsdrekka ber til at tálma nýtsluna munandi.
2. Talið av sølustøðum eigur at vera avmarkað.
3. Tað hevur ikki verið siður í Føroyum at drekka á arbeiðsplássum. Hendan sið eiga vit at varðveita, serliga umborð á skipi.
4. Eitt støðugt arbeiði eigur at verða gjørt til tess at tryggja, at alkohol og bilkoyring ikki verða samanblandað.
5. Holl undirvísing um vandarnar, ið kunnu standast av alkoholi, bæði akuttar og kroniskar heilsuvandar, sosialt óføri o.s.fr.
6. Góð skráseting av nýtsluni og nýtslumynstri í ymiskum samfelagsbólkum.
7. Góð skráseting av rúsdrekkaskaðum til tess at kunna fylgja árininum á almannaheilsuna."

Nevndin hevur frá A. G. Wang, økissálarlækna fingið notat um rúsdrekka og samfelag. Av nevnda notati gongur fram, soleiðis sum ávíst av fleiri, at tað, sum hevur stóran týdning fyri heildarstøðuna í landinum viðvíkjandi rúsdrekka er totalnýtslan í meðal pr. íbúgva. A. G. Wang fer víðari við hesum spurningi og upplýsir, at tað nú tykist vísindaliga prógvað, at jú størri miðalnýtslan er í einum samfelag, jú størri verður talið av stórnýtarum, og harvið av alkoholskaðum. Tað ræður tí frá einum samfelagssjónarmiði um at halda miðalnýtsluna í samfelagnum á einum forsvarligum støði.

A. G. Wang nevnir ymist, sum virkar tálmandi fyri rúsdrekkanýtsluna í samfelagnum og vísir serstakliga á tann stóra týdning, sum rúsdrekkaprísirnir hava fyri nýtsluna:

"Ivaleyst er, at hesar forðingar hava eina tálmandi virkan, men annars hevur runt umkring okkum í aðrar mátar mest dentur verið lagdur á prísleguna, ið sum sagt, mest er stýrd av tolli og avgjøldum. Vanligt er serliga at leggja til merkis lutfallið millum prísin á rúsandi løgi og vanliga lønarstøðið. Vísast kann her til nýtslumynstrið og lønarmynstrið yvir fleiri ár, soleiðis sum hetta kann setast upp í strikumynd og sum flestu staðir tykist at vísa, at prísurin fer mun til lønarstøðið er eitt avgerandi árin til nýtsluna."

A. G. Wang, økissálarlækni, nevnir eisini onnur viðurskifti, ið hava týdning fyri alkoholnýtsluna í samfelagnum:

"Umframt hetta er sjálvandi upplagt at nýtslumynstrið eisini knýtir seg til mentan, trúgv og annan sið. Í norðanlondunum, serliga síðani aldarskiftið, eitt nú til fráhaldsrørsluna og til ymsar kristiligar bólkar, sum hava staðið fyri fráhaldni ella minimalari nýtslu. Hesar forðingar eru tískil ikki av lógarslagi ella prísslagi, men eru knýttar til hugburð hjá tí einstaka ella til ein bólk av fólki. Nógv hevur verið tosað um tey seinru árini, hvørt tað árin, sum kemur, eitt nú serliga ígjøgnum litað bløð og einamest sjónvarpið, kann hava serliga ávirkan, og einki er at ivast í, at eitt nú serliga í amerikonskum filmum verður borin fram ein mentan, har rúsdrekka ikki bert verður nýtt til gaman, men til dagligt drekka. Um hendan mentan vinnur fram, er tað beint tvørturímóti, soleiðis sum rúsdrekka hevur verið uppfatað norðanfyri, bæði av nýtarum og av avhaldsfólki."

Felagsnevnd Fráhaldsfelaganna (Henda nevnd fevnir um øll fráhaldsfeløg í Føroyum uttan Blákross) hevur á fundi við víðkaðu rættarnevndina og skrivi til somu nevnd gjørt greitt, at tað er av stórum týdningi, at uppskot til nýggja rúsdrekkalóg kemur beint nú - tað ber ikki til at bíða longur. Rúsdrekkatrupulleikarnir í samfelagnum eru vaksnir so nógv, at nú vendist ikki aftur, og haldast kann ikki fram við galdandi skipan. Um eingin lóg kemur, so verður framvegis einki eftirlit. Hetta er serliga galdandi fyri klubbarnar, har stórur tørvur er at fáa teir undir eftirlit og klubbarnar undir lógina. Umboðini fyri fráhaldsrørslurnar mæltu til at seta á stovn einkarsølu og mæltu samstundis til, at einkarsøla varð skipað í

hvørjari sýslu. Umboðini mæla til 20 ára aldursmark og frá at avtaka skamtanina, tey halda tvørturímóti, at nøgdin, sum tann einstaki kann útvega sær, eigur at minkast, og at strangari skamtan eigur at verða sett í verk. Felagsnevndin er ímóti at veita loyvi til útskeinking. Verður henda skipan kortini sett í verk, er umráðandi, at sokallaðu ølklubbarnir eisini koma undir lógina. Hesi umboð løgdu eisini stóran dent á, at greiðar reglur verða gjørdar fyri virksemið hjá loyvisnevndini, at greiðar treytir verða settar fyri skeinkistøðunum, og at sera gott eftirlit verður skipað við hesum støðum. Víðari mæltu umboðini fyri fráhaldsfeløgini til, at sett verður eitt fast tal av skeinkiloyvum fyri alt landið soleiðis, at sleppast kann undan stórum tali av skeinkiloyvum í ávísum pørtum av landinum. Fráhaldsfeløgini halda ikki, at bryggaríini eiga at varðveita loyvi til framhaldandi at útflýggja øl - øll útflýggjan av rúsandi løgi, tað veri seg spiritus, vín ella øl, eigur at fara fram ígjøgnum eina einkarsølu. Samantikið var støðan hjá fráhaldsfeløgunum tann, at tey taka undir við lógaruppskotinum við omanfyrinevndu viðmerkingum og gera vart við, at tørvur er á nýggjari lóg her og nú, at lógaruppskotið gevur møguleika fyri at fáa eina lóg, sum kann haldast uppi og virka, og sum kann fáa skil á ølklubbunum, og sum kann fáa drykkjuskapin á diskotekum og dansihølum undir eftirlit. Mælt var eisini til at gera enn strangari skamtan fyri tað sterkara ølið, at varðveita - møguliga stramma verandi rúsdrekkaskamtan og til, at einki rúsdrekka yvir 50% eigur at verða innflutt til Føroya. Mælt varð eisini til, at ávaringar verða prentaðar á alt rúsdrekka, sum verður selt og útflýggjað ígjøgnum einkarsøluna. Fráhaldsfeløgini gjørdu at enda vart við, at lógin eigur at verða fylgd upp við einum rúsdrekkapolitikki, strongum og vælskipaðum eftirliti, og lovaðu, at eisini fráhaldsrørslurnar skuldu kunna og sýna ábyrgd í samband við eina møguliga nýggja skipan.

Blákrossfelagið hevur gjørt nevndina varuga við, at Blákross ikki tekur undir við lógaruppskoti landsstýrisins til nýggja rúsdrekkalóg. Bláikrossur mælir heldur

til, at gamla lógin framvegis verður galdandi, og at møguligir skeivleikar í hesi lóg verða rættaðir. Blái krossur heldur tað ikki vera rætt at seta í verk nýggja lóg, bert tí at gamla lógin ikki verður hildin.

Á fundi við umboð fyri Blákrossheimið í Tórshavn, gjørdu umboð fyri henda stovn vart við, at galdandi rúsdrekkalóg nú er vorðin so útholað, at hon ikki virkar longur, og halda tey, at tørvur tí er at fáa nýggja lóg, men tey mæla frá heilt fríari sølu. Tey gjørdu serliga vart við ta vánaligu støðuna hjá ávísum rúsdrekkamisnýtarum í samfelagnum - fólk, ið so at siga drekka alt, sum hevur rúseitur í sær. Hesi fólk hava stóran tørv á hjálp frá tí almenna og serliga er tørvur á einum herbergi, har fólk, ið eru illa fyri av rúsdrekka, kunnu koma og gista, í longri ella styttri tíðarskeið. Í hesum sambandi gjørdu tey vart við, at neyðugt er at skilja herbergsvirksemið og viðgerðarvirksemi sundur. Umboðini fyri Blákrossheimið hildu ikki, at bryggjarlíni áttu at varðveita útflýggingarloyvið. Tey taka undir við uppskotinum um, at øll rúsdrekkaútflýggjan í Føroyum eigur at fara fram ígjøgnum eina almenna einkarsølu. Umboðini fyri Blákrossheimið løgdu stóran dent á, at loyvisnevndin setir heilt klárar og greiðar reglur fyri skeinkiloyvið, og at hildið varð strangt eftirlit og gott skil í samband við útskeinkingarstøðini. Hesi umboð løgdu stóran dent á viðgerðarpartin og hildu, at hesin partur átti at verið styrktur fíggjarliga og gjørdu vart við, at viðgerðarstovnarnir, sum støðan er í dag ikki hava møguleika at geva eina nøktandi viðgerð. Tey løgdu eisini stóran dent á afturvendandi upplýsandi herferðir, serliga vendar til ungdómin við tí endamáli at minka um rúsdrekkanýtsluna.

Nevndin hevur eisini havt fund við barnaverndina í Tórshavn. Barnaverndin gjørdi serliga vart við vaksandi drykkjuskapin millum tey heilt ungu í høvuðsstaðnum. Tey upplýstu, at tað ikki var óvanligt, at foreldur drekka so illa, at børnini verða forsømd. Barnaverndin gjørdi vart við, at tað eftir teirra tykki fer fram ólóglig søla av øli til fólk undir aldursmarkinum, og at henda søla opinlýst fer fram á ávísum støðum í Tórshavn. Barnaverndin gjørdi eisini vart við tann vaksandi vandan við tí, sum

kallast "sniffing" - hetta at anda inn ymisk sløg av gassum, eitt nú tendraragass, og hildu tey, at okkurt átti at verið gjørt við henda álvarsama vanda. Tey gjørdu eisini vart við tann vaksandi hasjvandan og vandan við øktari narkotikamisnýtslu. Samanumtikið hildu umboðini fyri barnaverndina í Tórshavn ikki, at verandi lóggáva er nýtilig, og hildu tey stóran tørv vera á nýggjari lóg. Tey tóku sum heild undir við grundarsjónarmiðunum í uppskotinum til nýggja rúsdrekkalóg frá landsstýrinum. Orsakirnar til, at tey tóku undir við uppskotinum, eru, at tey halda, at uppskotið gevur betri møguleikar fyri eftirliti og skipaðum viðurskiftum. Eisini hildu tey, at løgreglan við nýggju lógaruppskotunum fer at hava betri møguleikar til at fáa skil á svørtu søluna av øli og øðrum rúsandi til fólk undir aldursmarkinum.

Á fundi við umboð fyri kommunulæknafelagið gjørdu umboðini vart við tann stóran týdning, sum viðgerðarstovnarnir Heilbrigdið og Blákrossheimið hava í viðgerðini av rúsdrekkamisnýtarum. Teir upplýstu, at síðani hesir stovnar vóru komnir, var arbeiðsbyrðan av rúsdrekkamisnýtarum munandi minkað. Kommunulæknarnir gjørdu vart við, at galdandi lóggávan er óheppin og elvir til tann sokallaða kassamentalitetin. Lóggávan elvir til eitt ógvusligt drekkimynstur, og hildu kommunulæknarnir frægast vera, at rúsdrekkasølan stigvíst verður gjørd frí. Teir hildu ikki, at nøkur restriktiv skipan verjir borgaran fyri rúsdrekkamisnýtslu. Henda støða kemur fyrst og fremst av sambært umboðini fyri kommunulæknarnar, at galdandi lóggáva er heilt uttan samsvar við tað, sum føroyingar, ið nú ferðast ógvuliga nógv, uppliva uttanlands. Umboðini fyri kommunulæknafelagið hildu ikki nakrar fyrimunir vera við postordrasølu, við tað at postordrasølan framvegis fór at elva til kassamentalitetin. Læknarnir løgdu stóran dent á, at endamálið við lóggávu og øllum rúsdrekkapolitikki átti at verið, at minka um nýtsluna av rúsdrekka og at fáa eftirlit og skipað viðurskifti á økinum. Teir gjørdu eisini vart við vandan, at yngri og yngri bólkar nýta rúsdrekka. Kommunulæknarnir mæltu til

líðandi at avtaka allar restriktiónir, at lata tað veikara ølið verða útflýggjað í vanligum handlum og til at reka ein politikk, sum økir um nýtsluna av sterkum løgum og minkar um nýtsluna av rúsdrekka. Viðvíkjandi bestu leið til at minka um nýtsluna og misnýtsluna, hildu teir vera at skipa hetta við t.d. prísinum, við hægri avgjøldum og við upplýsing.

Nevndin hevur eisini havt fundir við umboð fyri Tórshavnar býráð og við Føroya Kommunufelag. Umboðini fyri Tórshavnar býráð ynsktu landsdekkandi loyvisnevnd í samband við møgulig skeinkiloyvi. Kommunalir myndugleikar eiga at verða hoyrdir í samband við veiting av skeinkiloyvum. Um rúsdrekkastøðuna sum heild gjørdu umboðini fyri Tórshavnar býráð vart við, at tað eftir teirra tykki, ikki ber til at halda uppi galdandi rúsdrekkalóg. Umboðini fyri Tórshavnar býráð hildu, at støðan í løtuni er óforsvarlig, og at viðurskiftini bert kunnu haldast at batna við nýggjari lóg. Víðari tóku umboðini fyri Tórshavnar býráð sum heild undir við uppskotinum til nýggja rúsdrekkalóg við møguligum neyðugum broytingum. Tey mæltu eisini til, at meiri verður gjørt við upplýsing og fyribyrging, við viðgerð og eftirviðgerð, og sóknaðust tey í hesum sambandi eftir einum almennum rúsdrekkapolitikki. Hesi umboð mæltu eisini til, at tað veikara ølið verður selt í vanligum handlum, meðan tað sterkari ølið eigur at verða útflýggjað gjøgnum rúsdrekkasølu landsins.

Hinvegin mettu umboðini fyri Føroya Kommunufelag seg ikki at hava heimild til at úttala seg um galdandi rúsdrekkalóg ella um uppskot landsstýrisins til rúsdrekkalóg. Tann einasti leikluturin hjá kommununum í hesum sambandi eigur sambært umboðini fyri Føroya kommunufelag at vera, táið skeinkiloyvi skulu latast. Í slíkum førum eigur bygda- ella býráð at fáa loyvisumsókn til ummælis, meðan myndugleikin at játta loyvi eigur at vera hjá eini landsdekkandi loyvisnevnd. Umboðini fyri Føroya Kommunufelag mæltu til varni og til hygni, tá loyvi verða latin, so ikki ov nógv útskeinkingarstøð verða.

Umframt sum frammanfyri nevnt feløgini Blákrossur og Blákrossheimið hevur nevndin eisini hildið fund við Blákrossstovuna og við tann rúsdrekkaráðgeva, ið har starvast. Hesin ráðgevi virkar mest við vitjan í heim, har rúsdrekkatrupulleikar eru, og við samtalum við rúsdrekkamisnýtarar og teirra avvarðandi. Ráðgevin frá Blákrossstovuni mælti frá at seta nýggju lógina í gildi. Hann heldur galdandi lóg vera nýtiliga, bert hon verður hildin.

Postverk Føroya hevur av fleiri orsøkum stóran áhuga í rúsdrekkalóggávuni, og hevur postverksstjórin á fundi við nevndina gjørt vart við, at postverkið er til reiðar at taka sær av avgreiðsluni av rúsdrekka í Føroyum, um so er at myndugleikarnir ynskja hetta. Postverksstjórin vísti á, at postverkið er um alt landið, at postverkið hevur flutning, at postverkið kann avgreiða toll, hevur framkomna telduútgerð o.s.fr. Postverkið avgreiðir 40.000 rúsdrekkasendingar um árið og gevur hetta postverkinum 2,6 mió. kr. í inntøku. Av hesum heldur postverkið ikki orsøk vera til at gera nýggjan stovn til rúsdrekkasølu. Postverkið mælir heldur til, at gjørd verður ein royndarskipan galdandi í 5 ár, har postverkið hevur søluna av innfluttum rúsdrekka. Skipanin eigur at virka soleiðis, at rúsdrekka verður bílagt og síðani útflýggjað á næsta posthúsi. Táið royndartíðin er farin, kann rúsdrekkalógin verða endurskoðað. Postverkið heldur ikki, at tað er átrokandi at fáa broytt útflýggingarskipanina fyri øl. Til spurningin, hvørt tað ber til hjá fólki, ið ikki hava loyvi til tess, eitt nú fólki undir 20 ár at fáa avgreitt ølsendingar á posthúsinum, svaraði postverksstjórin, at leiðsla postverksins í apríl í ár hevur skrivað til posthúsini og mint tey á, at ikki er loyvt at avgreiða rúsdrekka til fólk undir 20 ár. Um so er, at postverkið fær klagur um, at fólk undir 20 ár hava kunnað fingið avgreitt rúsdrekka á posthúsi, verður klagan kannað gjølla, og syrgt verður fyri, at mistøk ikki henda aftur.

Viðgerðarstovnurin Heilbrigdið á Velbastað hevur á fundi við nevndina greitt frá, at stovnurin onga støðu tekur til rúsdrekkalóggávuna yvirhøvur. Stovnurin kann tí hvørki mæla til at samtykkja nýggja rúsdrekkalóg ella frá. Stovnurin leggur stóran dent á sjálvan viðgerðarháttin, ið er lýstur í skjali, sum liggur við málinum.

Nevndin hevur havt fund við umboð fyri kriminalforsorgina, og snúði fundurin seg serstakliga um § 12, 1. stk. í uppskoti landsstýrisins, har mælt verður til, at banna skeinking av rúsdrekka til fólk, sum í almennari skipan eru undir avvenjingarviðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu. Stovnurin hevur í brævi til nevndina viðgjørt hendan spurningin nærri. Talan er her um fólk, ið eftir treytaðum dómi hava fingið álagt at lata seg viðgera fyri rúsdrekkamisnýtslu. Kriminalforsorgin ger vart við, at her júst er talan um samskiftisfólk hjá kriminalforsorgini. Áðrenn hesi fólk fáa dóm, verður persónskanning gjørd á kriminalforsorgini, ið skal lýsa persónligu og socialu viðurskiftini hjá tí ákærda. Í niðurstøðuni kemur kriminalforsorgin við uppskoti um dóm. Talan er ofta um fólk, sum í edrúari støðu ikki gera nøkrum mein, men sum ofta koma í óføri, tá tey hava drukkið. Aloftast heimilar tað revsiverda treytaleysan dóm til fongsul, men tað er uppgáva kriminalforsorgarinnar at kanna, um tað er møguligt at eggja tí unga til at lata seg viðgera móti misnýtslu heldur enn at fara inn at sita.

Kriminalforsorgin vísir á, at hóast dómur er almennur, so hava tey, ið arbeiða innan fyri løgreglu, fútaembætið, kriminalforsorg og sorinskrivaraembætið, øll tagnarskyldu. Tíðin, ið fólk verða dømd til viðgerð, er aloftast tvey ár, og er tí vandi fyri fyri tað fyrsta, at tað fer at vera torført at eggja fólki til at lata seg viðgera móti misnýtslu, um hesi fólk, umframt at vera undir eftirliti av kriminalforsorgini og í viðgerð móti misnýtslu, eisini skulu "heingjast upp" á støðum við útskeinkingarloyvum. Ein tílík skráseting kann fyri tað annað eisini av tí skrásetta koma at vera uppfatað sum ein eykarevsing, eins og vandi eisini er fyri, at nøvnini ikki verða strikað, tá viðgerðartíðin er úti.

Kriminalforsorgin heldur eisini, at støðan í Føroyum er vorðin soleiðis, at ein og hvør, ið vil hava fatur á rúsdrekka, altíð kann fáa fatur á hesum. Tað er tí einki avmarkandi í galdandi lóggávu, og heldur kriminalforsorgin tí, at tørvur er á nýggjari lóggávu og heldur í hesum sambandi, at uppskot landsstýrisins er, sum tikið verður til, á góðari leið.

Av tí, at tað í nevndarviðgerðini frá mongum síðum ferð eftir ferð verður víst á týdningin av upplýsandi og fyribyrgjandi virksemi, hevur nevndin hildið fund við umboð fyri landsskúlafyrisitingina til tess at fáa greiði á, hvat ið verður gjørt innan fólkaskúlan til tess at upplýsa um vandan við rúsdrekkanýtslu. Umboðini fyri landsskúlafyrisitingina boðaðu frá, at tað júst í hesum døgum verður arbeitt við uppskoti til nýggjar lestrarlesiætlan viðvíkjandi njótingar- og rúsevnum. Hetta tilfar varð lagt fyri nevndina og framgongur av hesum tilfari, at endamálið við undirvísingini er at geva næmingunum innlit í nýtslu og misnýtslu, og hvussu til ber at verja seg sjálvan og onnur móti misnýtslu, at geva næmingunum kunnleika um vanligastu njótingar og rúsevni og serliga avleiðingar teirra, at kunna teir um tiltøk, samfelagið ger til tess at forða fyri ella at tálma misnýtslu og um tiltøk fyri at hjálpa fólki burtur úr misnýtslu. Undirvísingin eigur at vera skipað soleiðis, at næmingarnir ikki eru i iva um, at einum frískum tørvar ikki eitt stimbrandi evni til at liva, og at t.d. royking er eitt slag av evni til misnýtslu, ið ringt kann vera at leggja av, um tú fyrst hevur vant kroppin til tubbakkið. Næmingarnir eiga eisini at gerast greiðir yvir tann heilsuvanda, ið kann standast av misnýtslu av njótingar- og rúsevnum. Hendan lesiætlan verður sett í verk í næstum, og heldur nevndin, at endamálið við hesari ætlan er sera skilagott. Tó ivast nevndin í, um endamálið kann vera rokkið við tí avmarkaða tímatali, ið sett er av í fólkaskúlanum til hesa undirvísing. Nevndin heitir tí á landsstýrið um at reisa hendan spurning yvir fyri landsskúlafyrisitingini.

Bryggjaríini hava gjørt nevndina varuga við ymiskar spurningar, ið serstakliga viðvíkja teirra parti av rúsdrekkamálinum. Tey greiða frá, at virksemi teirra verður munandi skert, um útflýggjan av øli bert verður loyvd gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins. Tey vísa eisini á, at eftirlitsmøguleikarnir eftir teirra tykki eru góðir, um so er, at myndugleikarnir skuldu hildið seg havt orsakir til at kanna skipanina nærri. Bryggjaríini gera eisini vart við, at tað ber væl til at útflýggja eitt nú tað veikara ølið í smærri eindum t.d. 6 fløskur í senn. Hetta kundi verið gjørt við, at goymslurnar fingu serloyvi at tollgreiða nakað av tí øli, ið er á goymslu, og at hava hetta fyri seg og selja tað í smáum eindum.

1.5 Annað tilfar.

Tann 20. apríl 1991 var ráðstevna í Norðurlanda-húsinum um rúsdrekkapolitikk. Nevndin hevur fingið tilfar frá hesi ráðstevnu, og skal taka fram her nakað av tí, sum minnilutin heldur vera áhugavert í sambandi við málið viðvíkjandi rúsdrekkalógini.

Formaðurin í rúsdrekka- og narkotikaráðnum August G. Wang, økissálarlækni, nevndi nakrar treytir, ið áttu at verið uppfyltar, fyri at talan kundi vera um skilagóðan alkoholpolitikk. Hann legði dent á, at alkoholpolitikkur fevnir um øll tey tiltøk, sum tað almenna og onnur seta í verk, tað veri seg innan rúsdrekkalóggávu viðvíkjandi atgongd til rúsdrekka, avgjøld og tollpolitikk, upplýsing og undirvísing, viðgerð og eftirgerð. Hann vísti á, at alkoholisma nú yvirhøvur er viðurkend ikki bert sum ein menniskjansligur trupulleiki, men eisini sum ein sjúka og ein sosialur trupulleiki. Tey seinastu árini hevur ein í útheiminum sæð ein almennan vaksandi áhuga fyri rúsdrekkatrupulleikum í breiðari merking, og serliga

[redacted]

sigði hann um rúsatburð og aðrar langtíðarfylgjur, sum

andi marknaðarviðurskiftum og við turismuspurninginum koma vit meiri og meiri at líkjast meginlandinum í listanum yvir øki, sum spæla inn viðvíkjandi alkoholpolitikki. Í hesum sambandi nevndi hann teir spurningar, sum WHO hevur umrøtt viðvíkjandi alkoholpolitikki og legði her aftur dent á eftirlit, avgjøld, turismu, tal av útskeinkingarstøðum og ta skiftandi støðuna millum eftirlitspolitikk og viðgerðarpolitikk. Víðari vísti formaðurin í rúsdrekka- og narkoráðnum á, at Føroyar á ávísum økjum eru betri fyri enn útheimurin t.d. við at tann nýtta totala mongdin av rúsdrekka framvegis er rættiliga lág, og at drykkjutrupulleikarnir á arbeiðsplássum ikki hava vist seg í Føroyum enn, og at gamal siður er í Føroyum at halda arbeiði og rúsdrekka frá hvørjum øðrum. Samantikið legði formaðurin í rúsdrekka- og narkotikaráðnum dent á, at fylgjandi:

Tað ræður um ikki at satsa ov einstáttað, og ikki at spæla sær av við nakrar streingir í rúsdrekkapolitikkinum, men heldur royna at fáa eitt rímuligt samanspæl. Tað er eisini av allarstørsta týdningi, at vit ikki fara ov einstáttað at svinga ímillum eftirlitspolitikk og viðgerðarpolitikk. Heldur eiga vit at halda upp á eina hóskandi blanding av hesum báðum.

Jóngerð Poulsen, heilsusystir, greiddi frá arbeiðinum hjá heilsusystrum í føroyska fólkaskúlanum, og tók hon serliga fram hesar spurningar: kjarnin í arbeiðinum hjá føroyskum heilsusystrum er fyribyrgingin. Stórur tørvur er á fyribyrgjandi arbeiði ímillum tey ungu. Umboðið fyri heilsusystrarnar vísti á, at royndir aðra staðni frá hava prógvað, at upplýsandi og kunnandi tiltøk hava lítla ávirkan:

1. Um ikki samanhang er millum trupulleikar og loysnir.
2. Um vit halda, at vitan í sjálvum sær broytir hugburð ella livihátt.
3. Um atgerðirnar ikki verða samskipaðar.
4. Um ikki tann, ið ein vil náa við einum hvørjum boðskapi, sjálvur fær høvi til at arbeiða við málinum -

verður virksamur.

Heilsusystirin vísti á nøkur dømi, hvussu eitt slíkt upplýsandi virksemi kundi fara fram og kundi verið samskipað. Hon nevndi fjølmiðlarnar og tað persónliga samskiftið millum fólk, og vísti í hesum sambandi á, at heilsusystrarnar áttu at verið nýttar til upplýsingararbeiði og til at vera við til at samskipa ymisk upplýsandi tiltøk. Hetta kundi verið gjørt við eini samskipaðari herferð, har eitt nú fjølmiðlarnir løgdu fyri, og skúlarnir síðani fylgdu upp. Ein roynd at fáa næmingarnar virksamar hevði verið at latið skúlarnar skipa fyri evnisdøgum ella evnisvikum, har arbeitt var við rúsdrekkaspurninginum, og har næmingarnir møguliga sjálvir vóru við til at gera sendingar um vandan við nýtslu av rúsdrekka. At enda vísti sami fyrilestrarhaldari á hetta, at stórt trot er á kunnandi tilfari um rúsdrekkaspurningin á føroyskum.

Umboðið fyri sosialráðgevarafelagið, Kristian Magnussen, sosialráðgevi, gav eina almenna lýsing av viðgerðarstøðuni í dag og vísti á ymiskar trupulleikar og ymisk brek við allari rúsdrekkaskipanini. Hann vísti á, at tey seinastu 5-6 árini hava føroyingar havt tilboð um veruliga viðgerð móti rúsevnismisnýtslu. Staðfestast kann eisini, at fólk í dag kunnu tala meiri opið um rúsevnismisnýtslu enn fyri fáum árum síðani. Eisini helt hann, at føroyingar eru í eini hepnari støðu, við tað at vit eru í eini byrjannar- og menningartíð hvat rúsevnisviðgerð viðvíkur. Hesar fyrimunir eiga vit at nýta. Hann vísti á 3 støð, har fólk í dag kunnu koma í eina ella aðra viðgerð, men hesi støð kunnu ikki samanberast við tað, at fortreytirnar fyri, hvussu viðgerðin eydnast, eru so ymiskar. Tann stovnur, sum sambært umboðið fyri sosialrágevarafelagið, hevur tær bestu fyritreytirnar, at føra eina neyðuga og konsekventa linju í viðgerðini er stovnurin Heilbrigdi á Velbastað, tí hesin stovnur hevur onga herbergsfunktión. Hann kann sostatt biðja viðskiftafólkini fara av stað aftur, um motivatión teirra

ikki er til staðar. Blákrossheimið hevur hinvegin tann trupulleikan, at tey umframt at hava fólk í viðgerð, skulu ella kenna seg noydd til at herberga fólki styttri ella longri tíð undir somu lon, sum viðgerðin er. Hendan samanblanding er óhaldbær og er oyðileggjandi fyri viðgerðina. Tað er tí neyðugt, at tað frá politiskari síðu verður syrgt fyri, at herbergsspurningurin verður loystur á øðrum staði enn á Blákrossheiminum. Psykiatriska deild á landssjúkrahúsinum hevur tann tyngsta endan av rúsevnismisnýtarunum, og er hetta heldur ikki annað enn rímuligt, tí har eru serfrøðingar sum psykiatarar, sálarfrøðingur, læknar, sosialráðgevi, sjúkrasystrar og onnur. Umboðið fyri sosialráðgevarafelagið vísti eisini á, at umframt at fíggja hesi trý viðgerðartilboð, letur tað almenna fígging til einstaklingar og feløg, ið arbeiða við rúsevnisviðurskiftum, bæði viðgerð og fyribyrging. Umboðið fyri sosialráðgevarafelagið vísti á trupulleikan viðvíkjandi stýring og samskipan. Í løtuni er

"eingin sum helst stýring, hvørki innan viðgerð ella fyribyrging. Eingin setir krøv um samarbeiði og samskipan. Tað hevur veruliga verið so galið, at tað almenna beinleiðis hevur fíggjað klandur og goldið fyri at niðurgera hvønn annan."

Tað eigur tí sambært umboðið fyri sosialráðgevarafelagið frá politiskari síðu nú at vera kravt og skipað fyri soleiðis, at viðgerðarstøð, felagsskapir og tað almenna skulu samarbeiða soleiðis, at sum frægast fæst burturúr fíggjarliga tilfeinginum. Verður samskipanin góð, verður úrslitið eisini betur, tí tá viðgera vit bæði einstaklingin, familjuna, umhvørvið og framtíðarútlitini samstundis. Umboðið fyri sosialráðgevarafelagið viðgekk, at trupult er at koma við avgjørdum meiningum um

"hvussu ein munagóð fyribyrging skal skipast, tí tey viðurskifti, ið ávirka okkum og rúsevnismisnýtslu okkara eru so samansett og óloysiligá bundin saman við strevinum í dagligdegnum."

Umboðið fyri sosialrágevarafelagið kom eisini inn á møguleikarnar fyri fyribyrgjandi virksemi og nevndi í hesum sambandi toll og fyriskipanir, ið tálma atgeingi til rúsdrekka, sakliga upplýsing og hetta, at tey vaksnu eru fyrimyndir fyri tey yngru, og umboðið fyri sosialráðgevarafelagið helt fram:

"Kunnu vit ikki nýtast sum fyrimyndir og skapa vit og politikkarar ikki rímuligar umstøður at liva undir og geva teimum ungu eitt gott samfelag í varðveitslu, so er vandi fyri vantrivnaði og harvið eisini misnýtslu stórur. Vit mugu beinanvegin fara í holt við fyribyrging, tí tað er ein sannroynd, at rúsevnisnýtsla er skjóttvaksandi samfelagsvandi í dag, og fólk við skaðum á likam og sál gerast yngri og yngri."

Á ráðstevnuni í Norðurlanda húsinum var m.a. eisini umboð fyri felagið Lívdina, ið rekur ungdómshúsið Djónastovu. Umboðið fyri Lívdina, Jákup J. Joensen, vísti á tann stóra tørvin, ið er á almennum dansi í rúsfríum umhvørvi:

"Vit vita væl, at sum støðan er í dag við vaksandi arbeiðsloysi, er umráðandi fáa møguleika at hittast og hugna sær, uttan at neyðugt er at fara har, ið rúsandi løgur er ella vála úti á gøtuni. Sjáldan er almennur dansur, og ynskiligt er at skipað kundi verið fyri dansi í rúsfríum umhvørvi. Vit í Lívdini hava í rúma tíð ætlað at skipa fyri almennum dansi í rúsdríum umhvørvi. Ætlanin var at fáa tónleikarar at spæla ókeypis ella fyri lítlan pening, kostnaðurin fyri at koma í dans skuldi somuleiðis liggja á einum støði, har øll kunnu gjalda."

Sambært umboðnum fyri Lívdina kemur nógv ungt fólk í Djónastovu, og stórur tørvur er á betri og hóskiligari høli hjá ungdóminum at samlast í.

Havnar Arbeiðsmannafelag hevur í skrivi gjørt vart við, at limir felagsins missa arbeiði, um skipan við útflýggjan av øli verður broytt, soleiðis at almennur stovnur tekur yvir hesa útflýggingarskipan.

2. NIÐURSTØÐUR OG TILMÆLI.

Nevndin hevur viðgjørt uppskot landsstýrisins, innsavnaða tilfarið og sjónarmið, framkomin á fundum við umboðum fyri landsstýrið, stovnar og felagsskapir.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í fýra minnilutar. Gjørt verður tó vart við, at tað er breið semja millum nevndarlimirnar Jóannes Dalsgaard, Birgir Danielsen, Bjarna Djurholm, Signar Hansen, Lisbeth L. Petersen og Helena Dam á Neystabø, um at orða uppskot til løgtingslóg um rúsdrekka at koma í staðin fyri uppskot landsstýrisins. Minnilutarnir hava hvør í sínum lagi sínar viðmerkingar saman við broytingaruppskotum.

2.1. Minnilutin (Jóannes Dalsgaard, Birgir Danielsen og Bjarni Djurholm.

Ein minniluti (Jóannes Dalsgaard, Birgir Danielsen og Bjarni Djurholm) hevur viðgjørt teir mongu spurningar og tey ymisku sjónarmið, ið eru komin fram undir nevndararbeiðinum - serstakliga á omanfyri nevndu fundum. Somuleiðis hevur minnilutin viðgjørt tað skrivliga tilfarið, ið hevur verið til taks undir nevndararbeiðinum.

Minnilutin skal í hesum sambandi serstakliga vísa á nakrar av hesum spurningum og á nøkur av teimum sjónarmiðjum, sum minnilutin heldur hevur serstakliga stóran týdning og áhuga, tá støða skal verða tikin, hvørt vit eiga at samtykkja nýggja rúsdrekkalóg júst nú ella ikki.

Í hesum sambandi skal minnilutin taka fram sjálvan spurningin, hvørt galdandi rúsdrekkalógir eru hóskiligar til dagsins samfelag. Vit eiga við øðrum orðum at gera okkum greitt, um hesar lógir enn virka eftir ætlan. Ætlanin við galdandi lógunum varð sjálvsagt, at tær skuldu virka tálmandi á rúsdrekkanýtsluna í Føroyum. Men rúsdrekkapolitikkurin hevur heilt klárt havt eisini til endamáls, at rúsdrekkanýtslan skuldi gerast ein týðandi inntøkukelda hjá løgtinginum.

Síggja vit burtur frá spurninginum um rúsdrekka sum inntøkukelda hjá tí almenna, má tað vera rímiligt at seta spurningin, hvørt lógirnar hava virkað tálmandi á rúsdrekkanýtslu føroyinga. Hesin spurningur er fløktur og torgreiddur, og skal her verða gjørd ein roynd at geva eitt svar, sum tó av góðum grundum ikki kann vera 100% dekkandi.

Líta vit at heildarnýtsluni av rúsdrekka, so kann tað við einum ávísum fyrivarni sigast, at galdandi skipan hevur havt eina ávísa tálmandi ávirkan fram til umleið 1955. Frá umleið 1955 er miðalnýtslan pr. íbúgva yvir 15 ár støðugt vaksin hetta til okkara dagar. Men hetta merkir tó ikki, at føroyingar eru í vandabólki, hvat viðvíkur rúsdrekkanýtslu, tí samanborin við onnur lond liggja Føroyar niðarliga í raðfylgjuni, soleiðis sum tað týðiliga sæst av tilfarinum í hesum áliti.

Spurningurin er so, um hetta merkir, at galdandi rúsdrekkalóg sostatt er eitt vælhóskandi amboð í føroyskum heilsu- og rúsdrekkapolitikki. Svarið tykist fyri minnilutan at vera eitt nei, tí onnur viðurskifti eiga at verða tikin við í metanini av galdandi rúsdrekkalóg. Fyri tað fyrsta er tað hetta, at hóast føroyingar liggja rættiliga væl fyri, hvat ið rúsdrekkanýtslu viðvíkur samanbornir við onnur lond, so er samlaða nýtslan í samfelagnum støðugt vaksandi og hevur verið tað síðani 1955 sum longu nevnt. Hetta merkir so í sjálvum sær, at lógin í dag ikki virkar tálmandi ella avmarkandi fyri rúsdrekkanýtsluna. Aftrat hesum kemur, at minnilutin ferð eftir ferð hevur fingið at vita, at tað ber til at fáa fatur á øllum tí rúsdrekka, ein vil hava. Hóast eingin rúsdrekkahandil er í landinum, tykist ikki at standa á hjá fólki at útvega sær rúsdrekka - tað veri seg spiritus, vín ella øl. Skamtanin, ið endaliga kom inn í lógina í 1949, hevur ført til eitt serstakt føroyskt drekkimynstur - hetta, at heilt nógv verið drukkið í senn, og so verður nær um einki drukkið ímillum tørnini. Hetta kann kanska vera minni skaðiligt fyri tann einstaka nýtaran sæð frá einum heilsuligum sjónarmiði. Men hetta ógvusliga drekkimynstur

hevur við sær so stórar og syndarligar avleiðingar fyri avvarðandi, fyri arbeiði og fyri sosialu viðurskifti nýtarans sum heild, at meirilutin má siga seg at vera samdan við tey mongu, sum mæla til, at tiltøk verða gjørd til tess, at sleppast kann burtur frá hesum óhepna mynstri. Tað er tí við øðrum orðum stórur tørvur á eini aðrari skipan, eini skipan, sum kann leiða burtur frá hesum drekkimynstri, ið vanliga verður nevnt kassamentaliteturin. Ein annar spurningur, sum er avleiddur av galdandi rúsdrekkalóg, er spurningurin um rættarhugsan fólksins. Tað er ríkiliga prógvað undir nevndarviðgerðini, at galdandi lóg ikki verður hildin, at hon ikki letur seg halda uppi (handhevja), at stórt óskil valdar á økinum, og at lógin er fullkomiliga innanholað øll, sum hon er. Henda støða og allar umstøðurnar kring rúsdrekkalóggávuna, allar tær óhepnu avleiðingarnar av, at lógin verður brotin dag og dagliga, uttan at lógarbrotini fáa fylgjur fyri lógarbrótaran ella fyri yvirvøldina, virka sterkt niðurbrótandi fyri rættarhugsan og rættartilvitan borgaranna. Serstakliga ger hendan niðurbrótandi gongd seg galdandi fyri tey ungu, og kann hetta sum frálíður fara at hava sera óhepnar fylgjur bæði so og so.

Minnilutin kann út frá hesum og annars øllum tí, sum er komið fram undir nevndararbeiðinum, bert koma til ta niðurstøðu, at tørvur er á heilt nýggjari rúsdrekkalóggávu. Spurningurin hjá minnilutanum er so, um uppskot landsstýrisins er tann rætta lógin at loysa av galdandi lóg. Minnilutin hevur gjølliga viðgjørt uppskotið frá landsstýrinum til nýggja rúsdrekkalóg og er komin til ta niðurstøðu, at uppskotið við nøkrum týðandi broytingum, sum minnilutin mælir til, er nýtiligt sum grundarlag fyri nýggjari rúsdrekkalóggávu at koma í staðin fyri galdandi lóg, sum jú er púra ónýtilig.

Minnilutin er undir arbeiðinum í hesum máli vorðin alt meira sannførdur um, at tørvur er á einum vælskipaðum og konsekventum rúsdrekkapolitikki, og at hesin politikkur eigur at vera partur av einum heilsupolitikki sum heild. Lagt kann verða aftrat, at tørvur sjálvandi er

á slíkum politikki, sjálvt um uppskot til nýggja rúsdrekkalóg ikki skuldi verðið samtykt.

Mong samfelagsviðurskifti eru umrødd undir nevndararbeiðinum - viðurskifti, ið minnilutin metir hava stóran týdning fyri rúsdrekkanýtsluna - serstakliga millum tey ungu. Talan er um eitt nú arbeiðsmøguleikar, útbúgvingarmøguleikar, frítíðar- og dansiviðurskiftini, ávirkan av sjónvarpi og samskifti við útheimin. Eisini spurningar sum t.d., hvussu tey vaksnu eru sum fyrimyndir, uppalingarspurningar, siðaligir og átrúnaðarligir spurningar, fyri ikki at tala um árin fólkaskúlans eru av stórum týdningi fyri rúsdrekkanýtslumynstrið nú og í framtíðini. Tað liggur uttan fyri setning minnilutans at koma við beinleiðis uppskotum um tiltøk innan øll hesi øki. Uppskot til tilmæli og ítøkilig tiltøk á hesum økjum eiga eftir minnilutans tykki at koma frá rúsdrekka- og narkotikaráðnum, frá áhugafelagsskapum og almennum stovnum, sum t.d. skúla-, almanna- og heilsuverki.

Hin vegin heldur minnilutin, at løgtingið eigur at gera vart við seg her og nú og lata landsstýrið og almenning vita, at løgtingið metir tørv vera á bráðneyðugum tiltøkum og á einum langtrøkkandi politikki við tí endamáli at minka um rúsdrekkanýtsluna og at fáa greið og skipað viðurskifti á økinum.

Minnilutin skal tí gera vart við, at rúsdrekkaspurningurin eigur at vera tikin í størsta álvara, og at hetta hevur við sær, at bæði løgting og landsstýri eiga at átaka sær eina størri ábyrgd fyri hesum spurninginum. Minnilutin skal her loyva sær í stuttum at lýsa hesa umsøgn eitt sindur nærri:

Minnilutin er undir viðgerðini sum longu nevnt vorðin sannførdur um, at tørvur er á álvarsamum tiltøkum til tess at minka um rúsdrekkanýtsluna og til tess at bøta um teir skaðar, ið standast av misnýtsluni. Sum høvuðssjónarmið kann minnilutin taka undir við yvirlýsing hjá WHO, har mælt verður til at minka um rúsdrekkanýtsluna fram til ár 2000. Hetta merkir, at setast má í verk eitt skipað upplýsingar- og fyribyrgingararbeiði,

serstakliga millum tey ungu bæði her og nú og upp á longri sikt. Henda uppgáva eigur sum longu nevnt eftir minnilutans tykki at vera latin rúsdrekka- og narkotikaráðnum. Tað stendur eisini minnilutanum púra greitt, at meiri peningur eigur at verða játtaður til hetta upplýsingar- og fyribyrgingarvirksemi.

Ein onnur fylgja av hesi niðurstøðu er, at tað almenna her og nú eigur at sýna viðgerðar- og eftirviðgerðarspurninginum nógv størri ans, enn gjørt hevur verið higartil. Hetta merkir so aftur, at tingið eigur at játta størri upphæddir til viðgerð og eftirviðgerð av rúsdrekkamisnýtarum. Landsmyndugleikarnir eiga í nógv størri mun enn gjørt er higartil at fylgja við tí. sum fer fram á viðgerðarsíðuni. Tað framgongur av frammanfyristandandi tilfari nevndarinnar, at stórur tørvur er á samarbeiði og samskifti á viðgerðarsíðuni. Myndugleikarnir eiga tí nú at síggja til, at allir partar - stovnar eins og einstaklingar - innan viðgerðartáttin samarbeiða, at góð javnvág er í millum viðgerð og eftirviðgerð, og møguleikar eru fyri at geva teimum misnýtarum, ið ikki eiga tak yvir høvdið, innivist og eina manssømiliga tilveru. Tað er uppgávan hjá tí útinnandi valdinum at fáa hesi viðurskifti í rætt lag.

Í samband við spurningin um at tálma rúsdrekkanýtsluni skal minnilutin eisini vísa á tann stóra týdning, ið rúsdrekkaprísirnir hava fyri samlaða rúsdrekkanýtsluna í samfelagnum. Allur spurningurin um, hvør avgjaldspolitikkur, ið eigur at verða rikin í framtíðini, eigur tí at verða tikin upp sum skjótast. Víst verður her til almennu viðmerkingarnar, har tað sæst, at ein og hvør avgjaldshækking á rúsdrekka gevur eina tilsvarandi minking í nýtsluni.

Sjálvt um minnilutin soleiðis bendir á, at avgjaldsamboðið tí kann verða nýtt, so mælir minnilutin ikki við hesum løgtinginum til at nýta hetta amboð einsamalt. Avgjaldsamboðið má verða nýtt sum ein liður í einum samskipaðum og væl tilrættisløgdum rúsdrekkapolitikki. Minnilutin heldur tað vera beint, at løgtingið gevur eina

ábending um tiltøk, ið mugu haldast at vera átrokandi her og nú. Hetta forðar sjálvsagt ikki løgtinginum í seinni at taka allan rúsdrekkapolitikkin upp aftur til endurskoðan.

Minnilutin er sannførdur um, at spurningar um lóggávu, upplýsing, fyribyrging, viðgerð, eftirviðgerð og avgjaldspolitikk hanga saman. Teir hvørki kunna ella eiga at verða skildir sundur og viðgjørdir fyri seg. Heldur eiga teir at verða viðgjørdir og so vítt møguligt loystir undir einum, og kann hetta bert verða gjørt við einum vælskipaðum heildarpolitikki, ið hevur til endamáls at bøta um fólkaheilsuna, soleiðis sum longu er ávíst fleiri ferðir í hesum áliti. Rúsdrekkapolitikkurin er ein týðandi partur av hesum nevnda heilsupolitikki, og eigur hesin partur eftir áskoðan minnilutans sum nevnt at verða tilevnaður og orðaður av rúsdrekka- og narkotikaráðnum. Minnilutin er undir arbeiðinum vorðin sannførdur um, at rúsdrekka- og narkotikaráðið er tann stovnur, ið hevur tær bestu fortreytirnar til at røkja hetta starv. Út frá hesum setir ein minniluti fram soljóðandi

I U p p s k o t

til

<u>samtyktar</u>

Samstundis sum víst verður til yvirlýsing frá WHO um at minkað eigur at vera um samlaðu rúsdrekkanýtsluna hetta fram til ár 2000, og samstundis sum víst verður til tað, sum í hesum áliti er sagt um tørvin á einum skipaðum rúsdrekkapolitikki, áleggur løgtingið landsstýrinum at seta í verk høskandi tiltøk við tí endamáli at minka um rúsdrekkanýtsluna í Føroyum.

Minnilutin mælir eisini til, at landsstýrið í seinasta lagi 1995 í samband við, at rúsdrekka- og narkotikaráðið arbeiðir víðari við øllum rúsdrekka-

spurninginum, eigur at geva løgtinginum frágreiðing um støðuna viðvíkjandi rúsdrekkanýtsluni í landinum. Út frá hesum mælir minnilutin løgtinginum til at samtykkja soljóðandi

II U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum í seinasta lagi í ólavsøkutingsetuni 1995 at leggja fyri løgtingið frágreiðing um

1. Støðuna viðvíkjandi samlaðu rúsdrekkanýtsluni í landinum.
2. Viðgerðarstøðuna í samband við rúsdrekkamisnýtslu.
3. Úrslitini av tiltøkunum áløgd landsstýrinum í løgtingssamtykt I í hesum tingmáli, og
4. Møgulig tilmæli í samband við punktini 1, 2 og 3.

Minnilutin tekur sum nevnt frammanfyri undir við grundsjónarmiðunum í uppskoti landsstýrisins til nýggja rúsdrekkalóg, men minnilutin hevur út frá nevndarviðgerðini hildið tað vera rætt at gera nakrar broytingar í uppskotið. Hesar broytingar, ið eru av principiellum eins og av tekniskum slagi, eru so mikið nógvar, at minnilutin hevur hildið tað verið hentast at skriva broytingarnar beinleiðis inn í uppskot landsstýrisins í staðin fyri at gera broytingaruppskot til tær mongu einstøku greinirnar. Av hesi orsøk setir minnilutin fram sítt egna uppskot til nýggja rúsdrekkalóg at koma í staðin fyri uppskot landsstýrisins. Tað verður tó gjørt vart við, at lítið og einki er broytt í teimum høvuðssjónarmiðum, ið eru grundarlagið undir landsstýrisuppskotinum. Uppskot minnilutans ber tí eins og uppskot landsstýrisins við sær hesar meginbroytingar í mun til galdandi rúsdrekkalóggávu nevniliga: 1) Einkarinnflutning, 2) Einkarsølu, 3) Avtøku av skamtanarkortinum, 4) Broyting í aldursmarkinum, 5) Loyvi til útskeinking.

Tær broytingar, sum minnilutin hevur gjørt, snúgva seg eitt nú um ásetingar í sambandi við Rúsdrekkasølu Landsins og ásetingar í sambandi við veiting og umsiting av útskeinkingarloyvi. Við hesum broytingum verður mælt til greiðari og strangari reglur enn tær, ið eru í landsstýrisuppskotinum. Eisini eru lagdar afturat nakrar greinir um hotel- og matstovuvirksemi, nakað ið minnilutin heldur vera neyðugar fortreytir, um hotellum og matstovum skal kunna veitast skeinkiloyvi. Ásetingarnar um revsireglur og gildissetingar eru gjørdir meira umfatandi og nágreiniligir enn tilsvarandi ásetingar í landsstýrisuppskotinum. Hesar broytingar og uppískoyti ganga fram av viðmerkingum minnilutans til tær einstøku greinirnar í uppskotinum frá sama. Áður enn greitt verður frá teimum einstøku greinunum skal minnilutin stutt lýsa støðu sína til Rúsdrekkasølu Landsins, ið inniber eina ta størstu broytingina í mun til galdandi skipan.

Sum kunnugt mælir landsstýrið í viðmerkingunum til uppskot um nýggja rúsdrekkalóg til at skipa rúsdrekkasøluna soleiðis, at tað í fyrstu atløgu eingin sølubúð verður. Rúsdrekkasølan verður eftir landsstýrisuppskotinum skipað sum postordrahandil í einum 2 ára tíðarskeiði, síðan verður skipanin endurskoðað við møguligari broyting í søluskipanini fyri eyga.

Minnilutin kann ikki góðtaka postordrasølu í einum skiftistíðarskeiði, tí minnilutin óttast, at henda skipan so kann gerast varandi. Verður skipanin við postordrasølu varandi, so sleppst ikki undan kassamentalitetinum og so er lítið vunnið við eini nýggjari rúsdrekkalóg, ið hevur til endamáls at fáa meiri skipað viðurskifti á rúsdrekkaøkinum. Minnilutin er tí samdur við minnilutanum Helenu Dam á Neystabø um, at Rúsdrekkasøla Landsins ikki eigur at fara til verka, fyrrenn hon er før fyri at røkja uppgávur sínar sum ásett eftir kap. 1, 2 og 3 í lógaruppskotinum. Minnilutin kann tí taka undir við uppskoti til samtyktar frá Helenu Dam á Neystabø seinni í álitinum, har mælt verður til at steðga við at fara undir virksemi hjá Rúsdrekkasølu Landsins, til øll viðurskifti hjá hesum stovni eru greið. Hvussu Rúsdrekkasøla Landsins ítøkiliga (organisatoriskt) eigur at verða skipað, heldur minnilutin annars eigur at standa upp til landsstýrið saman við rúsdrekka- og narkotikaráðnum at finna fram til soleiðis sum § 4, stk. 2, í uppskoti hjá minnilutanum gevur heimild til. Tað skal í hesum sambandi

bert verða mint á, at tey flestu umboð, ið hava hitt nevndina, hava mælt frá at skipa útflýggjan av rúsdrekka við postordrasølu. Í staðin hava hesi umboð mælt til eina landsdekkandi útflýggingarskipan av einumhvørjum slagi. Ein landsdekkandi útflýggingarskipan vildi havt m.a. tann fyrimun fram um eina postordrasølu í Tórshavn, at fólk kundu útvegað sær rúsdrekka í smáum nøgdum. Hvat sjálvari útflýggingarskipanini viðvíkir, verður mælt til, at Rúsdrekkasøla Landsins sum skjótast setir á stovn eitt útflýggingarstað fyri rúsdrekka í hvørjari sýslu. Hinvegin eigur møguleikin við postordrasølu at verða varðveittur saman við eini útflýggingarskipan soleiðis, at fólk eitt nú á útoyggjum skulu kunna nýta hendan møguleika.

Minnilutin ger annars vart við, at Rúsdrekkasøla Landsins verður skipað og rikin sum sjálvstøðugur almennur stovnur.

Minnilutin er eisini greiður yvir teir trupulleikar, ið kunnu gerast við at umsita reglurnar fyri rakstri av Rúsdrekkasølu Landsins. Tikið verður tí undir við tí uppskoti til samtyktar frá Helenu Dam á Neystabø, har álagt verður landsstýrinum at síggja til, at gjørd verður einhvør skipan við samleikaprógvi (identitetsprógvi).

2.2. Viðmerkingar til greinarnar:

Nýggj § 1:

- Lógin verður útgjørd við endamálsgrein, ið sigur endamálið vera at avmarka rúsdrekkanýtsluna og at minka mest møguligt um teir skaðar, sum nýtslan av rúsdrekka hevur við sær fyri einstaklingin og fyri samfelagið og harnæst at skapa greiðar reglur í samband við rúsdrekkaviðurskifti í Føroyum.

§ 2: (Uppskot landsstýrisins § 1)

Reint ethanol til tekniska nýtslu og til heilivágsframleiðslu kemur undir lógina. Hetta ger, at ethanol til nýtslu á starvsstovum ella til aðra tekniska nýtslu ella til heilivágsframleiðslu bert kann vera útvegað frá rúsdrekkasøluni, og at ethanol við størri koncentratión enn 60% als ikki kann verða innflutt. Hetta gevur so nógvar trupulleikar, at mælt verður til nýtt stykki í § 2 (Uppskot landsstýrisins § 1), ið loyvir apo-

teksverkinum at innflyta og selja ethanol til tekniska nýtslu og til heilivágsframleiðslu.

§ 3:
Svarar við redaktionellum broytingum til § 2 í uppruna-uppskoti landsstýrisins.

§ 4:
Ásetingarnar í § 4 svara í høvuðsheitinum til § 6 í upprunauppskoti landsstýrisins. Tó er mælt til at broyta uppskotið soleiðis, at reglugerð um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins verða ásettar av landsstýrinum eftir samráðingar við rúsdrekka- og narkotikaráðið. Eisini verður mælt til, at eitt møguligt rakstraravlop av Rúsdrekkasølu Landsins skal kunna verða nýtt til fígging av upplýsandi virksemi í sambandi við skaðar, ið kunnu standast av rúsdrekkanýtslu og til viðgerð at rúsdrekkanýtarum.

§ 5 og § 6:
Hesar greinir svara við redaktionellum broytingum til § 3 í uppskoti landsstýrisins. Herumframt verður mælt til, at tað ikki verður loyvt at flyta inn rúsdrekka við meira enn 60% alkoholvektprosenti í sær.

§ 7 og § 8:
Ásetingarnar svara til § 4, stk. 1, 2 og 3 í upprunauppskoti landsstýrisins. Rúsdrekkasøla Landsins hevur einkarrætt til sølu av rúsdrekka við vinnuligum endamáli. Søla ella lán av einstøkum fløskum av rúsdrekka, ið keypt er á Rúsdrekkasølu Landsins, millum privatar hevur ikki vinnuligt endamál. Ásetingin fevnir tískil ikki um tílík viðurskifti. Hinvegin er ásetingin soleiðis at skilja, at ein og hvør søla, sum bert sipast vinnuligum endamáli, ella skipaðari sølu kann verða revsað. Tað er ein fortreyt fyri øllum hesum, at ein av treytunum fyri veiting av útskeinkingarloyvi er, at rúsdrekka hvørki má útflýggjast ella seljast út av støðunum við skeinkiloyvi. Í § 7, stk. 2 verður ásett, at bryggjaríini, hóast einkarrættur er, hava loyvi at selja øl til Rúsdrekkasølu

Landsins. Tað verður eisini hildið at vera neyðugt at veita undantaksloyvi fyri tollfría sølu um borð á skipum í altjóða sigling.

§ 8. Av tí at stórir trupulleikar eru við at leggja útflýggjanina av øli undir einkarsøluna, verður mælt til eitt skiftistíðarskeið upp á í mesta lagi 4 ár, har skipanin við útflýggjan av sterkum øli fer at halda fram sum nú. Fortreytin fyri hesari skiftisskipan er, at ábyrgdin fyri útflýggjanini av sterkum øli við kunngerð um Rúsdrekkasølu Landsins verður løgd til hendan stovn. Stk. 3 ger tað møguligt at taka heimildina av sølu og útflýggjan av øli aftur, um so er at eitt bryggjarí ella umboð fyri bryggjarí brýtur treytirnar fyri heimildini til útflýggjan.

§ 9:

Endamálið við ásetingunum í hesi og fylgjandi greinum, ið snúgva seg um útskeinking, er, at tryggja at sera varliga verður farið fram, tá skeinkiloyvi verða veitt, og at tryggja, at gott skil valdar, tá tað snýr seg um eitt nú tal á útskeinkingarstøðum, upp- og afturlatingartíðum v.m.

Í § 9 verður mælt til at áseta, at rúsdrekka bert verður loyvt at skeinkja í fyritøkum ella á støðum við útskeinkingarloyvi, ið veitt verður av loyvisnevndini.

Mælt verður til, at skipan fyri loyvisnevndina verður ásett av landsstýrinum. Stk. 3 og stk. 5 svara til § 8 og § 7, stk. 4 í upprunauppskoti landsstýrisins.

Loyvisnevndin verður eftir hesum uppskoti fakliga samansett. Uppskotsstillararnir mæla til, at loyvisnevndin eigur at verða sett saman soleiðis, at valdir í nevndina verða: ein løgfrøðingur frá landsskrivstovuni (formaður), ein advokatur, ein grannskoðari, politiumsjónarmaðurin í Føroyum, landfútin, ein lækni og ein embætismaður frá almannastovuni. Uppskotsstillararnir hugsa sær, at hesir báðir samstundis eru limir í Rúsdrekka- og narkotikaráðnum.

Loyvisnevndin kemur at virka eftir reglum, ið lands-

stýrið ásetir í samráð við Rúsdrekka- og narkotikaráðið. Talan er um reglur fyri veiting og afturtøku av útskeinkingarloyvi, eftirlit við støðum við útskeinkingarloyvi v.m. Í samband við spurningin um útskeingingarloyvi hevur tað verið nevnt, at hetta bert átti at fevnt um vín og øl. Hesum mælir minnilutin frá. Hinvegin verður mint á, at loyvisnevndin sambært uppskotinum kann avmarka og treyta eitt útskeinkingarloyvi. Hetta merkir v.ø.o., at har loyvisnevndin ikki heldur tað vera ráðiligt at geva loyvi til at skeinkja brennivín, kann loyvi verða givið til at skeinkja út veikari sløg av rúsdrekka, t.d. vanligt borðvín ella øl við veðra/silvurstyrki. Samantikið merkir hetta, at loyvisnevndin kemur at virka eftir greiðum reglum, og at hon bert kann veita útskeinkingarloyvi eftir frammanundan givnum reglum.

§ 10:

Stk. 1 svarar til § 7, stk. 1 í upprunauppskoti landsstýrisins. Í stk. 2 í somu grein verður nærri ásett, hvat ið er at skilja sum hotel- og restauratiónsvirksemi. Stk. 3 er ein nærri útgreining av § 4, stk. 3 í upprunauppskoti landsstýrisins. Hetta er gjørt av tí, at tað er neyðugt at sláa fast, at útskeinkingarloyvi krevst, sjálvt um eitt felag skeinkir rúsdrekka til kostprís og í staðin leggur vinningin á t.d. eitt hægri limagjald.

Í 4. stk. verður ásett, at útskeinking av rúsdrekka umborð á skipum bæði í heimasigling eins væl og í altjóðasigling krevur útskeinkingarloyvi. Sum heild kann sigast, at endamálið við greinini, soleiðis sum hon nú er mælt til at verða orðað, er, at lógfesta hvat virksemi skal skiljast sum hotel- og restauratiónsvirksemi. Eisini er endamálið við orðingini nágreiniligari at lýsa, hvør ið kann fáa útskeinkingarloyvi og í hesum sambandi greiðari áseta, at teir sokallaðu ølklubbarnir koma undir lógina. Hetta merkir sambært uppskotinum, at hesi feløg skulu søkja loyvisnevndina um at sleppa halda fram við virksemi teirra. Tað verður tó einki krav um, at hesi feløg skulu borðreiða við mati til tess at fáa útskeinkingarloyvi

§ 11:

Stk. 1 svarar til § 7, stk. 1, síðsta pkt., og § 7, stk. 2, í upprunauppskoti landsstýrisins. Endamálið við broytingini er, at gera greiðari reglur fyri, hvør ið kann fáa loyvi til útskeinking. Í orðingini verður ásett nágreiniligari, hvørjir myndugleikar skulu verða hoyrdir, áðrenn møguligt útskeinkingarloyvi verður givið - alt fyri at tryggja at ikki ov nógv skeinkiloyvi verða veitt í sama øki. Mælt verður eisini til at áseta, at treytin fyri, at útskeinkingarloyvi verða veitt, m.a. er at samfelagslig, fráhaldslig og onnur í hesum sambandi galdandi sjónarmið verða havd í huga. Mælt verður eisini til, at gjørd verður ein meting av vinnuliga førleika umsøkjarans, av fíggjarligum viðurskiftum umsøkjarans, av hølisviðurskiftunum, av staðnum, har ætlanin er at hava hølini, og av ítøkiligum fráhaldsligum og øðrum í hesum sambandi knýttum sosialum og løgregluligum sjónarmiðjum.

§ 12:

§ 12 svarar til § 9 í upprunauppskoti landsstýrisins. Her verður mælt til, at stk. 1 verður víðkað við "løgverjumáli" og "trotabúgvi". Eisini verður mælt til, at partafeløg v.m. eftir stk. 2 skulu hava skyldu til at fráboða loyvisnevndini broytingar í stjórn ella nevnd.

Í stk. 3, síðsta punktum verður ásett, at leiðarar hava somu revsirættarligu ábyrgd sum loyvishavarar.

§ 13:

Orðingin er broytt í mun til § 10 í upprunauppskoti landsstýrisins. Orðingin ásetir meiri nágreiniligar treytir fyri áseting landsstýrisins av reglum fyri útskeinking.

§ 14:

Her verða ásettar reglurnar fyri afturtøku av útskeinkingarloyvi svarandi til § 11 í upprunauppskoti landsstýrisins.

Stk. 2, 3 og 4 fevna um reglur fyri eftirliti dómsvaldsins av avgerðum hjá loyvisnevndini um afturtøku av útskeinkingarloyvi.

Stk. 5 fevnir um reglu, ið sigur, at eisini leiðarar kunnu missa rættin at leiða fyritøkur við útskeinkingarloyvi.

Av givnum grundum er í stk. 3 ásett ein regla um, at loyvishavarin ella hjálparfólk hansara hava skyldu til at forða gestum við kenning í at koyra bil frá útskeinkingarstaðnum.

Reglan í uppruna uppskoti landsstýrisins í § 12, stk. 1, nr. 2 um forboð fyri at skeinkja fyri fólki, sum við almennari fyriskipan eru undir viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu, er strikað. Víst verður til almennu viðmerkingarnar í álitinum. Endamálið við hesum punkti er eisini dekkað av § 15, stk. 1 í hesum uppskoti.

§ 16:

Ásetingin fevnir um reglur, ið áseta, nær eitt útskeinkingarloyvi dettur burtur.

Tað verður eisini givin møguleiki fyri, at t.d. ein einkja ella einkjumaður kann reka hotel ella restauration víðari eftir, at hjúnafelagi er deyður.

§ 17:

Svarar til § 5 og § 12, stk. 1, nr. 1 í upprunauppskoti landstýrisins.

Tó verður mælt til, at tað eisini verður revsivert at "lata skeinkja" rúsdrekka fyri persónum, sum ikki eru fyltir 18 ár. Sum dømi kann hugsast, at persónur, ið bíleggur rúsdrekka, og letist at bíleggja til sín sjálvan, skal kunna revsast fyri at lata hetta rúsdrekkað skeinkja til persón, sum ikki hevur fylt 18 ár.

§ 18:

Mótsett § 13 í upprunauppskoti landsstýrisins verður mælt til, at loyvi er at nýta drekkivørur, ið havdar vera við í teimum í § 10, stk. 2, nr. 3 nevndu hølum, t.v.s. í

leigaðum hølum, har ið ein sjálvur syrgir fyri borðreiðingini.

§ 19:
Henda grein svarar til § 14 í upprunauppskoti landsstýrisins.

§ 20:
§ 20 fevnir um forboð fyri at vinnulívsrekandi v.m. útskeinkja rúsdrekka.

§ 21:
Hetta er nýggj grein, ið gevur landsstýrinum heimild til undir ávísum umstøðum at banna sølu og rúsdrekkaskeinking á støðum við útskeinkingarloyvi.

§ 22:
Ásetingin svarar við redaktionellum broytingum til § 15 í upprunauppskoti landsstýrisins. Tó verður í stk. 2 heimild til at revsa gestir í møguligúm "loyniligum" útskeinkingarstøðum.

Stk. 5 gevur heimild til at áleggja loyvishavara ella leiðara ábyrgd fyri, at hjálparfólk møguliga skeinkja til fólk, ið hava fingið í meira lagi, og til persónar, sum ikki hava fylt 18 ár. Hetta verður eisini galdandi, um loyvishavarin ella leiðarin ikki eru á staðnum. Talan er um tað, sum í rættarmáli verður kallað "lutbundin ábyrgd".

§ 23:
Henda grein svarar til § 16 í upprunauppskoti landsstýrisins. Í stk. 2 er tó undirstrikað, at verður lógin bert partvís sett í gildi, kann talan bert verða um partvís at strika ávísar galdandi reglur.

Tað verður eisini í stk. 4 ásett nágreiniliga, at eykainnflutningsloyvi av rúsdrekka er treytað av, at viðkomandi hevur útskeinkingarloyvi. Eykaloyvi eftir hesari reglu kann bert koma upp á tal til útskeinking á staði

við útskeinkingarloyvi og ikki til egnu nýtslu hjá loyvishavara.

2.3. Lógaruppskotið.

Eftir at minnilutin hevur skrivað álit sítt í hesum tingmáli, hevur rúsdrekka- og narkotikaráðið almannakunngjørt frágreiðing um rúsdrekkapolitikk í Føroyum.

Tilmæli og frágreiðing ráðsins eru sera áhugaverd og kunnu tí vera hent grundarlag hjá myndugleikunum undir framtíðar rúsdrekkapolitikkinum í Føroyum. Frágreiðingin frá Rúsdrekka- og narkotikaráðnum hevur tó ikki givið minnilutanum orsøk til at broyta sjónarmið og uppskot, al tann tíð tilmæli rúsdrekkaráðsins eru rættiliga meinlík teimum sjónarmiðum og tilmælum, ið minnilutin leggur fram í hesum løgtingsmáli. Út frá hesum mælir minnilutin (Jóannes Dalsgaard, Birgir Danielsen, Bjarni Djurholm) løgtinginum til í staðin fyri uppskot landsstýrisins samtykkja fylgjandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka.	lagtingslov om indførsel og salg af berusende drikke.
Kapittul 1	Kapitel 1
Lógarøkið, framleiðsla og innflutningur.	Lovens område, produktion og import.
§ 1. Endamálið við hesi lóg miðar ímóti at avmarka rúsdrekkanýtsluna og minka sum mest um skaðan, sum rúsdrekkanýtslan hevur við sær fyri einstaklingin og	§ 1. Formålet med loven er at begrænse brugen af berusende drikke og reducere mest muligt de skader, som brugen af berusende drikke medfører for den enkelte og

samfelagið, og til tess at røkka hesum endamáli at áseta reglur í sambandi við rúsdrekka í Føroyum.

§ 2. Sum rúsdrekka eftir lógini er at skilja allur løgur, sum hevur minst 2 1/4 vektprosent av alkoholi í sær.
Stk. 2. Sum rúsdrekka verður ikki roknað:
1) Løgur, sum ikki er drekkiligur og bert ætlaður til tekniska nýtslu ella kroppsrøkt.
2) Heilivágur, sum bert er loyvdur apotekum at selja eftir apotekaralóggávuni, hóast hesi hava í sær eitt alkoholvektprosent, ið fer upp um 2 1/4.
Stk. 3. Hóast reglurnar í lógini er apoteksverkinum loyvt at innflyta og selja ethanol til tekniska nýtslu og heilivágsframleiðslu eftir teim reglum landsstýrið ásetir.

§ 3. Tað er ikki loyvt
1) at bryggja ella framleiða rúsdrekka ella
2) at gera drekkandi tær í § 2, stk. 2, nr. 1, nevndu vørur.
Stk. 2. Landsstýrinum er tó

for samfundet, samt for at tilvejebringe klare regler i forbindelse med berusende drikke på Færøerne.

§ 2. Ved berusende drikke efter loven forstås alle vædsker, der indeholder mindst 2 1/4 vægtprocent alkohol.
Stk. 2. Til berusende drikke henregnes ikke:
1) Vædsker, der ikke er drikkelige og kun er beregnet til teknisk brug eller til legemspleje.
2) Medicin, som kun apoteker har tilladelse til at sælge i henhold til apotekslovgivningen, selv om alkolholvægtprocenten overstiger 2 1/4.
Stk. 3. Uanset reglerne i loven er det apotekervæsenet tilladt at importere og sælge ethanol til teknisk brug og medicinproduktion i henhold til regler fastsatte af landsstyret.

§ 3. Det er ikke tilladt
1) at brygge eller fremstille berusende drikke eller
2) at gøre de i § 2, stk. 2, nr. 1, nævnte varer drikkelige.

heimilað at geva bryggjaríum loyvi at bryggja øl, sum í sær hevur hægst 4,6 vektprosent av alkolholi.
Stk. 3. Landsstýrið ásetir í loyvinum nærri reglur um eftirlit við framleiðsluni av slíkum øli.

Stk. 2. Landsstyret er dog bemyndiget til at give bryggerier tilladelse til at brygge øl, som indeholder højst 4,6 vægtprocent alkohol.
Stk. 3. Landsstyret fastsætter i tilladelsen de nærmere bestemmelser om kontrol med produktionen af sådant øl.

23-d

§ 4. Sett verður á stovn Rúsdrekkasøla Landsins, við tí endamáli at innflyta og selja rúsdrekka.
Stk. 2. Landsstýrið ger eftir samráðing við rúsdrekka- og narkotikaráðið nærri reglur fyri skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins.
Stk. 3. Landsstýrið kann eftir samráðing við rúsdrekka- og narkotikaráðið gera av, at eitt rakstraravlop frá Rúsdrekkasølu Landsins heilt ella partvíst skal nýtast til fígging av upplýsandi virksemi um skaðarnar við nýtslu av rúsdrekka og til viðgerð av rúsdrekkamissnýtarum.

20-0

24-0

§ 4. Der oprettes et "Rúsdrekkasøla Landsins", der har til opgave at importere og sælge berusende drikke.
Stk. 2. Landsstyret fastsætter efter forhandling med alkohol og narkotikarådet nærmere bestemmelser om organisation og drift af "Rúsdrekkasøla Landsins"
Stk. 3. Landsstyret kan efter forhandling med alkohol- og narkotikarådet bestemme, at et overskud ved "Rúsdrekkasøla Landsins" virksomhed helt eller delvis skal anvendes til finansiering af oplysende virksomhed om skadevirkningerne af brug af berusende drikke samt til behandling af misbrugere af berusende drikke.

Kapittul 2
Innflutningur av rúsdrekka.

§ 5. Rúsdrekkasøla Landsins hevur einkarrætt til innflutning av rúsdrekka.
Stk. 2. Persónar, ið hava fylt 18 ár, og sum koma til landið við skipi ella flogfari, kunnu taka við sær rúsdrekka til egna nýtslu eftir nærri reglum, sum landsstýrið ger.
Stk. 3. Reglan í stk. 1 er ikki galdandi fyri innflutning av víni ætlað til altarnýtslu.

§ 6. Tað er ikki loyvt at innflyta øl, sum í sær hevur meira enn 4,6 vektprosent av alkoholi, og annað rúsdrekka, sum í sær hevur meira enn 60 vektprosent av alkoholi.

Kapittul 3
Søla og útflýggjan.

§ 7. Einkarrætt at selja rúsdrekka hevur Rúsdrekkasøla Landsins.
Stk. 2. Hóast reglurnar í stk. 1 kann øl, bryggjað í Føroyum, smbr. § 3, stk. 2, verða selt Rúsdrekkasølu

Kapitel 2
Import af berusende drikke

§ 5. "Rúsdrekkasøla Landsins" har eneret til import af berusende drikke.
Stk. 2. Personer, der er fyldt 18 år, og som ankommer til landet med skib eller fly, kan efter landsstyrets nærmere bestemmelser dog medbringe berusende drikke til eget brug.
Stk. 3. Bestemmelsen i stk. 1 om import gælder ikke for vin bestemt til nadverbrug.

§ 6. Det er ikke tilladt at importere øl, som indeholder mere end 4,6 vægtprocent alkohol, og berusende drikke iøvrigt, som indeholder mere end 60 vægtprocent alkohol.

Kapitel 3
Salg og udlevering.

§ 7. "Rúsdrekkasøla Landsins" har eneret til at sælge berusende drikke.
Stk. 2. Uanset bestemmelsen i stk. 1 kan øl, brygget her i landet, jfr. § 3, stk. 2, sælges til "Rús-

Landsins, eins og rúsdrekka kann verða skeinkt sbrt. reglunum í kapittul 4. Eisini kann rúsdrekka verða selt ferðafólki umborð á skipum í altjóða sigling.

drekkasøla Landsins", ligesom berusende drikke kan udskænkes efter reglerne i kapitel 4. Endvidere kan berusende drikke sælges til passagerer om bord på skibe, når de er i international fart.

§ 8. Til 1. januar 1997 kann Rúsdrekkasøla Landsins heimila føroysku bryggjaríunum at útflýggja egna framleiðslu teirra av øli, smbr. § 3, stk. 2.

Stk. 2. Landsstýrið ásetir eftir samráðing við rúsdrekka- og narkotikaráðið nærri reglur um veitan av heimild og um sølu av øli frá bryggjaríunum.

Stk. 3. Hevur bryggjarí gjørt seg sekt í grovum ella endurtiknum vansketni við sølu av øli ella brotið reglurnar fyri heimildini, kann Rúsdrekkasøla Landsins

§ 8. Indtil 1. januar 1997 kan færøske bryggerier efter bemyndigelse fra "Rúsdrekkasølu Landsins" udlevere egen produktion af øl, jfr. § 3, stk. 2.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter efter forhandling med alkohol- og narkotikarådet nærmere bestemmelser om meddelelse af bemyndigelse samt om bryggeriernes salg af øl.

Stk. 3. Såfremt et bryggeri har gjort sig skyldig i grov eller gentagen forsømmelse ved salg af øl eller har overtrådt vilkårene for

[illegible] bemyndigelsen, kan "Rús-

vera avmarkað til ávísan ella ávísar býir ella bygdir.
Stk. 4. Avgerðin hjá Rúsdrekkasølu Landsins um at taka aftur heimildina kann kærast til landsstýrið.

En tilbagekaldelse af bemyndigelsen kan begrænses til en enkelt eller enkelte byer og bygder.
Stk. 4. "Rúsdrekkasøla Landsins"s afgørelse om tilbagekaldelse af bemyndigelsen kan indbringes for landsstyret.

Kapittul 4
Útskeinking av rúsdrekka

§ 9. Tað er bert loyvt at skeinkja rúsdrekka á støðum við skeinkiloyvi.
Stk. 2. Loyvisnevndin veitir skeinkiloyvi.
Stk. 3. Loyvisnevndin, ið er ein faklig nevnd, verður vald av landsstýrinum fyri 3 ár í senn. Loyvisnevndin hevur hesar 7 limir: ein løgfrøðing á landsskrivstovuni, ein advokat, ein grannskoðara, landfútan, politiumsjónarmannin, ein lækna og ein embætismann á almannastovuni. Løgfrøðingurin frá landsskrivstovuni er formaður í loyvisnevndini.
Stk. 4. Landsstýrið ger skipan fyri loyvisnevndina.
Stk. 5. Avgerðir hjá loyvisnevndini kunnu ikki kær-

21-0

Kapitel 4
Udskænkning af berusende drikke

§ 9. Berusende drikke må kun udskænkes i virksomheder med bevilling.
Stk. 2. Bevilling meddeles af bevillingsnævnet.
Stk. 3. Bevillingsnævnet, der er et fagligt nævn, vælges af landsstyret for en treårig periode. Bevillingsnævnet består af følgende 7 medlemmer: en jurist fra landsstyrets kontor, en advokat, en revisor, landfogeden, politiinspektøren, en læge og en embedsmand fra "Almannastovan". Juristen fra landsstyrets kontor er formand i bevillingsnævnet.
Stk. 4. Landsstyret fastsætter bevillingsnævnets forretningsorden.
Stk. 5. Bevillingsnævnets

ast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

§ 10. Loyvi til útskeinking kann verða veitt persónum, partafeløgum, lutafeløgum ella tílíkum og feløgum, ið reka hotel- og restauratiónsvirksemi.
Stk. 2. Sum hotel- og restauratiónsvirksemi er at skilja:
1) Borðreiðing av mati og drykkjuvørum.
2) Móttøka av gistandi við møguleika fyri borðreiðing.
3) Útleiga av hølum til samkomur, ið sjálv reika fyri borðreiðing.
Stk. 3. Reglurnar í stk. 1 um útskeinkingarloyvi eru eisini galdandi fyri feløg í tann mun, sum virksemi teirra úteftir er at meta sum vinnuligt virksemi, og fyri feløg, ið skeinkja rúsdrekka fyri limum móti gjaldi. Loyvi til skeinking av rúsdrekka móti gjaldi verður tó ikki kravt av feløgum, ið bert halda ársveitlsur ella tílíkar einstakar veitslur fyri limunum.
Stk. 4. Reglurnar í stk. 1 um loyvi eru eisini galdandi fyri skip í sigling.

afgørelser kan ikke indankes for højere administrativ myndighed.

§ 10. Bevilling til udskænkning kan gives personer, aktieselskaber, andelsselskaber eller lignende og foreninger, der driver hotel- og restaurationsvirksomhed.
Stk. 2. Ved hotel- og restaurationsvirksomhed forstås:
1) Servering af spise- og drikkevarer.
2) Modtagelse af overnattende gæster med mulighed for servering.
3) Udlejning af lokaler til selskaber, der selv sørger for servering.
Stk. 3. Reglerne i stk. 1 om bevilling gælder også foreninger i det omfang, deres virksomhed udadtil fremtræder som erhvervsvirksomhed, og foreninger, der udskænker berusende drikke for medlemmerne mod betaling. Bevilling til udskænkning af berusende drikke mod betaling kræves dog ikke for foreninger, der alene afholder årsfest eller lignende enkelstående fester for medlemmerne.
Stk. 4. Reglerne i stk. 1 om bevilling gælder også skibe i fart.

§ 11. Áðrenn loyvi til útskeinking verður givið, skal ummæli verða fingið frá býar- ella bygdaráðum. Loyvið er galdandi í 4 ár, men kann av loyvisnevndini eftir umstøðunum avmarkast og treytast.

Stk. 2. Tá útskeinkingarloyvi verður givið, skulu samfelagslig, fráhaldslig og onnur í hesum sambandi galdandi sjónarmið havast í huga. Hesi sjónarmið verða framd m.a. við meting av:

1) Handilsliga førleikanum hjá umsøkjaranum.
2) Fíggjarlig viðurskifti umsøkjarans og fíggjarætlan.
3) Støðd, innrætting og serkenni annars á fyritøkuni.
4) Hvar fyritøkan liggur.
5) Ítøkilig fráhaldslig og onnur í hesum sambandi knýtt sosial og løgreglulig sjónarmið.

§ 11. Inden en bevilling til udskænkning meddeles, skal der indhentes en udtalelse fra by- og bygderådet. Bevillingen gælder for et tidsrum på 4 år, men kan efter omstændighederne begrænses og betinges af bevillingsnævnet.

Stk. 2. Ved meddelelse af bevilling skal samfundsmæssige, ædruelighedsmæssige og dermed sammenhængende hensyn iagttages. Disse hensyn tilgodeses bl.a. ved vurdering af:

1) Ansøgerens forretningsmæssige kvalifikationer.
2) Ansøgerens økonomiske forhold og finansieringsplan.
3) Størrelse, indretning og karakter iøvrigt af virksomheden.
4) Virksomhedens beliggenhed.
5) Konkrete ædruelighedsmæssige og dermed sammenhængende sociale og politimæssige hensyn.

§ 12. Fyri at ein persónur kann fáa útskeinkingarloyvi krevst, at hesin

1) hevur fylt 25 ár og ikki er gjørdur ómyndugur ella er undir løgverjumáli,
2) ikki er undir fíggjar-

§ 12. For at en person kan få bevilling til udskænkning, er det en betingelse, at denne

1) er fyldt 25 år og ikke er umyndiggjort eller er under lavværgemål,
2) ikke er under konkurs,

troti,
3) hevur danskan heimarætt,
4) hevur bústað í Føroyum og
5) ikki hevur vist tílíka atferð, at orsøk er at halda, at hann ikki fer at reka virksemið forsvarliga.

Stk. 2. Stjórnin og nevndarlimirnir í partafeløgum, lutafeløgum ella líknandi og feløgum skulu fyri at fáa útskeinkingarloyvi lúka treytirnar í stk. 1. Koma nýggir limir í stjórnina ella nevndina, skal hetta fráboðast loyvisnevndini.

Stk. 3. Dagligi raksturin av eini fyritøku við loyvi til útskeinking skal leiðast av loyvishavaranum sjálvum ella av einum leiðara. Er loyvishavarin eitt partafelag, lutafelag ella líknandi ella eitt felag, skal fyritøkan leiðast av einum leiðara. Leiðarin skal lúka treytirnar í stk. 1 og skal vera góðkendur av loyvisnevndini. Leiðarin hevur somu revsirættarligu ábyrgd fyri rakstrinum av virkinum sum loyvishavarin.

3) har dansk indfødsret,
4) har bopæl på Færøerne og
5) ikke har udvist sådan adfærd, at der er grund til at antage, at han ikke vil drive virksomheden på forsvarlig måde.

Stk. 2. Direktionen og bestyrelsesmedlemmer i aktieselskaber, andelsselskaber eller lignende og foreninger skal for at få bevilling opfylde betingelserne i stk. 1. Indtræder nye medlemmer i direktionen eller bestyrelsen, skal dette anmeldes til bevillingsnævnet.

Stk. 3. Den daglige drift af en virksomhed med bevilling til udskænkning skal ledes af bevillingshaveren selv eller af en bestyrer. Er bevillingshaveren et aktieselskab, andelsselskab eller lignende eller en forening, skal virksomheden ledes af en bestyrer. Bestyreren skal opfylde betingelserne i stk. 1 og skal godkendes af bevillingsnævnet. Bestyreren har samme strafferetlige ansvar for virksomhedens drift som bevillingshaveren.

§ 13. Landsstýrið ásetir
1) eftir tingingar við rús-

§ 13. Landsstyret fastsætter

drekka- og narkotikaráðið nærri reglur um metingina hjá loyvisnevndini av teimum vanligu reglunum um veiting av loyvum, sbr. § 11, stk. 2, og fyri heimildunum hjá loyvisnevndini at avmarka og treyta loyvi,

2) aftaná tingingar við rúsdrekka- og narkotikaráðið og bý- og bygda-(r)ráðini talið av loyvum, ið gevast kunnu í ásettum økjum,

3) aftan á tingingar við rúsdrekka- og narkotikaráðið nærri reglur um útskeinking av rúsdrekka,

4) eitt gjald fyri veiting av loyvi.

1) efter forhandling med alkohol- og narkotikarådet nærmere retningslinier for bevillingsnævnets vurdering af de almindelige regler for meddelelse af bevilling, jfr. § 11, stk. 2, og for bevillingsnævnets beføjelser til at begrænse og betinge bevillinger,

2) efter forhandling med alkohol- og narkotikarådet og by- og bygderådene det antal bevillinger, der kan gives inden for angivne områder,

3) efter forhandling med alkohol- og narkotikarådet nærmere bestemmelser om udskænkning af berusende drikke,

4) et gebyr for meddelelse af bevilling.

§ 14. Hevur loyvishavari brotið reglurnar í hesi løgtingslóg, reglur ásettar við heimild í hesi lóg ella treytirnar í loyvinum, kann loyvisnevndin taka loyvið aftur. Sama er, um virksemið verður rikið á slíkan hátt, at tað elvir til drykkjuskap ella revsiverdar gerðir, og løgreglan frammanundan hevur ávarað

§ 14. Har en bevillingshaver overtrådt bestemmelserne i denne lov, bestemmelser fastsat med hjemmel i denne lov eller betingelserne i bevillingen, kan bevillingsnævnet tilbagekalde bevillingen. Det samme gælder, hvis virksomheden drives på en sådan måde, at den forårsager drukkenskab eller strafbare

loyvishavaran.

Stk. 2. Loyvishavarin kann krevja, at avgerðin eftir stk. 1 skal verða løgd fyri dómsvaldið. Avgerðin skal innihalda upplýsing um rættin til at leggja avgerðina fyri dómsvaldið og fyri kærufreist.

Stk. 3. Áheitan eftir stk. 2 skal fráboðast landfútanum í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er boðað viðkomandi. Málið verður lagt fyri dómsvaldið eftir reglunum í revsilógini § 78, stk. 3.

Stk. 4. Áheitan eftir stk. 2 virkar steðgandi. Tó kann rætturin í úrskurði avgera, í hvønn mun viðkomandi kann fáa loyvi til at halda fram við fyritøkuni, meðan málið er til viðgerðar. Víðari kann rætturin gera av, at kæra ikki er steðgandi.

Stk. 5. Reglurnar í hesi grein eru eisini galdandi fyri leiðarar.

handlinger, og politiet i forvejen har advaret bevillingshaveren.

Stk. 2. Afgørelsen efter stk. 1 kan af bevillingshaveren kræves indbragt for domstolene. Afgørelsen skal indeholde oplysning om adgangen hertil og om fristen herfor.

Stk. 3. Begæringen efter stk. 2 skal fremsættes over for landfogeden inden 4 uger efter, at afgørelsen er meddelt den pågældende. Indbringelse for domstolene sker efter reglerne i straffelovens § 78, stk. 3.

Stk. 4. Begæring efter stk. 2 har opsættende virkning. Dog kan retten ved kendelse bestemme, i hvilket omfang den pågældende under sagens behandling må drive virksomheden. Retten kan endvidere bestemme, at anke ikke har opsættende virkning.

Stk. 5. Reglerne i denne paragraf finder tilsvarende anvendelse på bestyrere.

§ 15. Á støðum við útskeinkingarloyvi er tað forboðið at skeinkja rúsdrekka ella lata rúsdrekka skeinkja til persónar, tá orsøk er at halda, at teir við at drekka meira, kunnu verða sær

§ 15. I virksomheder med bevilling til udskænkning er det forbudt at servere eller lade servere berusende drikke til personer, om hvem der er grund til at antage, at de ved yderlige-

sjálvum til vanda ella verða øðrum til vanda ella ónáðir.
Stk. 2. Er nakar vorðin fullur, skal loyvishavarin ella hjálparfólk hansara taka sær av, at tann fulli undir tryggum umstøðum verður fingin til hús ella á løgreglustøðina ella boðsenda løgregluni.
Stk. 3. Hevur nakar notið rúsdrekka, og loyvishavarin ella hjálparfólk hansara vita ella hava orsøk at halda, at viðkomandi hevur akfar við, og at viðkomandi orsakað av rúsdrekkanýtslu ikki er førur fyri at koyra akfarið á forsvarligan hátt, skal loyvishavarin ella hjálparfólk hansara, møguliga við at boðsenda løgregluni royna at forða viðkomandi í at koyra akfarið.
Stk. 4. Á støðum við útskeinkingarloyvi hevur loyvishavarin skyldu at ansa eftir, at tað eisini ber til at fáa annað at drekka, sum ikki er rúsandi. Tað skal framganga av prislistum, vínkorti ella lætt lesiligum uppslagi, at tílíkt drekka fæst.
Stk. 5. Til at útskeinkja rúsdrekka mugu ikki setast fólk undir 18 ár, við undantak av kokka- og tænaralær-

re spiritusnydelse kan give anledning til fare for sig selv eller fare eller ulempe for andre.
Stk. 2. Såfremt nogen er blevet beruset, skal bevillingshaveren eller dennes medhjælpere drage omsorg for, at den berusede under betryggende omstændigheder bringes hjem eller til en politistation eller tilkalde politiet.
Stk. 3. Når nogen har indtaget spiritus, og bevillingshaveren eller dennes medhjælpere ved eller har grund til at antage, at den pågældende er fører af køretøj og på grund af spiritusindtagelse ikke er i stand til at føre køretøjet på betryggende måde, skal bevillingshaveren eller dennes medhjælpere, eventuelt ved at tilkalde politiet, søge at hindre den pågældende i at føre køretøjet.
Stk. 4. I virksomheder med bevilling til udskænkning har bevillingshaveren pligt til at drage omsorg for, at der også er mulighed for at servere alkoholfrie drikke. Det skal fremgå af prislister, vinkort eller klart læselige opslag, at sådanne

lingum við góðkendum lærusáttmála, ella persónar, ið hava lokið alla lærutíðina í tænarafakinum.

drikke føres.
Stk. 5. Til udskænkning af berusende drikke må der ikke ansættes personer under 18 år, med undtagelse af kokke- og tjenerlærlinge med godkendt lærekontrakt, eller personer, der har udstået hele læretiden i tjenerfaget.

§ 16. Útskeinkingarloyvi fellur burtur,
1) tá ið loyvishavarin doyr, smbr. tó stk. 2,
2) tá ið tíðin fyri skeinkiloyvið er útgingin, uttan at útskeinkingarloyvið er endurnýggjað,
3) um loyvishavarin ikki longur lýkur treytirnar í § 12, stk. 1, nr. 1, nr. 2, nr. 3 ella nr. 4.

Stk. 2. Doyr loyvishavarin, hevur hjúnamakin rætt til at taka yvir útskeinkingarloyvið, um samlívið hevur vart til deyða loyvishavarans, og um viðkomandi annars lýkur treytirnar í § 12, stk. 1.

Stk. 3. Loyvisnevndin kann geva loyvi til, at einkja/-einkjumaður eftir loyvishavara kann taka yvir útskeinkingarloyvi eftir stk. 2, hóast viðkomandi ikki hevur fylt 25 ár.

Stk. 4. Loyvisnevndin kann

§ 16. En bevilling til udskænkning bortfalder,
1) når bevillingshaveren dør, jfr. dog stk. 2,
2) når bevillingens gyldighedstid udløber, uden fornyelse finder sted,
3) hvis bevillingshaveren ikke længere opfylder betingelserne i § 12, stk. 1, nr. 1, nr. 2, nr. 3 eller nr. 4.

Stk. 2. Afdødes ægtefælle har ret til at overtage bevillingen, hvis vedkommende har samlevet med afdøde til dennes død og opfylder betingelserne i § 12, stk. 1.

Stk. 3. Bevillingsnævnet kan tillade, at en efterlevende ægtefælle, der ikke er fyldt 25 år, overtager bevillingen i henhold til stk. 2.

Stk. 4. Bevillingsnævnet kan endvidere tillade, at et dødsbo, en ægtefælle,

eisini játta einum deyða-
búgvi, einum hjúnamaka í
óskiftum búgvi, einum trota-
búgvi ella einum verja hjá
einum, ið gjørdur er ómynd-
ugur, at halda fram við
fyritøkuni hjá tí deyða, hjá
trotabúnum ella hjá honum,
ið gjørdur er ómyndugur, við
atliti til, at fyritøkan
verður at halda uppat, verð-
ur latin av hondum ella tí-
líkt. Loyvið kann bert verða
givið í upp til eitt ár eft-
ir, at loyvishavarin er
deyður, trotaúrskurðurin er
gjørdur, ella viðkomandi
varð gjørdur ómyndugur. Í
heilt serligum føri kann
henda freist tó verða fram-
longd.

Stk. 5. Góðkenning av leið-
ara dettur burtur, um við-
komandi ikki longur lýkur
treytirnar í § 12, stk. 1,
nr. 1, nr. 2, nr. 3 ella nr.
4.

der sidder i uskiftet bo,
et konkursbo eller en værge
for en umyndiggjort fort-
sætter afdødes, fallentens
eller den umyndiggjortes
virksomhed med henblik på
afvikling, afhændelse el-
ler lignende. Tilladelse
hertil kan kun gives i ind-
til et år efter dødsfaldet,
konkursdekretet eller umyn-
diggørelsen. I ganske sær-
lige tilfælde kan fristen
dog forlænges.

Stk. 5. Godkendelsen af en
bestyrer bortfalder, hvis
han ikke længere opfylder
betingelserne i § 12, stk.
1, nr. 1, nr. 2, nr. 3 el-
ler nr. 4.

Kapittul 5
Almennar ásetingar

§ 17. Tað er forboðið at
selja ella flýggja út rús-
drekka til persónar, sum
ikki eru fyltir 18 ár. Á
støðum við útskeinkingar-
loyvi er tað eisini bannað

Kapitel 5
Generelle bestemmelser

§ 17. Det er forbudt at
sælge eller udlevere beru-
sende drikke til personer
under 18 år. Det er endvi-
dere forbudt enhver i virk-
somheder med bevilling at

einum og hvørjum at skeinkja ella lata skeinkja rúsdrekka fyri persónum, sum ikki eru fyltir 18 ár.

Stk. 2. Tann, sum selir, flýggjar út, skeinkir ella letur skeinkja rúsdrekka, hevur skyldu til at tryggja sær, at móttakarin lýkur aldurstreytina.

Stk. 3. Á støðum við útskeinkingarloyvi hevur loyvihavarin skyldu til við uppslagi á sjónligum staði at gera vart við, at tað er forboðið at skeinkja rúsdrekka fyri persónum, sum ikki hava fylt 18 ár.

udskænke eller lade udskænke berusende drikke for personer under 18 år.

Stk. 2. Den, der sælger, udleverer, udskænker eller lader udskænke berusende drikke, har pligt til at sikre sig, at modtageren opfylder aldersbetingelsen.

Stk. 3. I virksomheder med bevilling har bevillingshaveren pligt til på et iøjnefaldende sted at anbringe opslag om, at det er forbudt at udskænke berusende drikke for personer under 18 år.

§ 18. Á støðum við útskeinkingarloyvi, tó ikki á teimum støðum, sum eru nevnd í § 10, stk. 2, nr. 3, er tað forboðið gestunum at njóta rúsdrekka, sum teir hava havt við sær. Á sjónskum staði í hølinum skal vera sligið upp, at hetta ikki er loyvt.

§ 18. I virksomheder med bevilling, dog ikke i de i § 10, stk. 2, nr. 3, omhandlede virksomheder, er det forbudt gæsterne at nyde medbragte berusende drikke. På iøjnefaldende sted i lokalet skal findes opslået, at dette ikke er tilladt.

§ 19. Øll reklama í føroyskum fjølmiðlum og tíðarritum, útbýting av reklamuseðlum o.t. viðvíkjandi sølu, skeinking og útflýggjan av rúsdrekka er forboðin.

§ 19. Al reklame i færøske massemedier og tidsskrifter, uddeling af reklamesedler o.l. vedrørende salg, udskænkning og udlevering af berusende drikke er forbudt.

§ 20. Tað er ikki loyvt at útflýggja rúsdrekka frá handlum og líknandi handilshølum hjá handlum, fyritøkum ella á almennum støðum á ein hátt, ið kann metast við útskeinking.

§ 21. Landsstýrið kann, um so er at hetta er neyðugt vegna almennan frið og alment skil, fyribils banna, at rúsdrekka verður selt og/ella borðreitt á støðum við útskeinkingarloyvi í ávísum økjum ella í øllum landinum.

§ 20. I og fra butikker og lignende forretningslokaler samt på offentlige steder må der ikke udleveres berusende drikke under sådanne omstændigheder, at det har karakter af udskænkning.

§ 21. Landsstyret kan, såfremt det er nødvendigt af hensyn til den offentlige ro og orden, midlertidigt forbyde, at berusende drikke sælges og/eller serveres i virksomheder med bevilling i bestemte områder eller i hele landet.

Kapittul 6
Revsing

§ 22. Við sekt, hefti ella fongsli upp í eitt ár verður tann sektaður, sum

1) brýtur § 3, § 5, § 6, § 7, stk. 1, § 9, stk. 1, § 12, stk. 2, 2. pkt. og stk. 3, § 15, § 17, § 18, § 19 og § 20, ella
2) setir tilsíðis treytir fyri loyvi eftir lógini ella samsvarandi ásettum forskriftum sambært lógini, ella
3) letur vera við at lýða forboð ella boð, sum eru

Kapitel 6
Straf

§ 22. Med bøde, hæfte eller fængsel op til ét år straffes den, der

1) overtræder § 3, § 5, § 6, § 7, stk. 1, § 9, stk. 1, § 12, stk. 2, 2. pkt. og stk. 3, § 15, § 17, § 18, § 19 og § 20, eller
2) tilsidesætter vilkår for en tilladelse i henhold til loven eller i henhold til forskrifter udstedt i medfør af loven, eller

givin sambært lógina ella sambært ásetingum sambært lógini.

Stk. 2. Tann, sum nýtir, keypir ella á annan hátt útvegar sær rúsdrekka í stríð við § 9 verður revsaður við bót.

Stk. 3. Í fyriskipanum, sum verða ásettar sambært lógini, kann áleggjast revsing við bót, hefting ella fongsli upp í eitt ár fyri brot á ásetingarnar í fyriskipanunum.

Stk. 4. Fyri brot framd av juridiskum persónum, heruppií partafeløgum og feløgum, kann áleggjast tí juridiska persóninum sum slíkum sektarábyrgd.

Stk. 5. Sektarábyrgd kann áleggjast loyvishavarum og leiðarum fyri brot á § 15, stk. 1, og § 17, stk. 1, 2. pkt., sum verða framd av starvsfólki í fyritøkuni, sjálvt um brotið ikki kann roknast við sum tilætlað ella av ósketni.

Stk. 6. Málini verða viðgjørd sum løgreglusakir. Rættarráðini í kapitlunum um hald og rannsókn í rættargangslógini verða nýtt í sama vavi sum í statsákæramálum.

3) undlader at efterkomme forbud eller påbud, der er meddelt i henhold til loven eller i henhold til forskrifter udstedt i medfør af loven.

Stk. 2. Den, der nyder, køber eller på anden måde forskaffer sig berusende drikke i strid med § 9, straffes med bøde.

Stk. 3. I forskrifter, der udstedes i medfør af loven, kan der fastsættes straf af bøde, hæfte eller fængsel op til et år for overtrædelse af bestemmelser i forskrifterne.

Stk. 4. For overtrædelser begået af juridiske personer, herunder selskaber og foreninger, kan der pålægges den juridiske person som sådan bødeansvar.

Stk. 5. Der kan pålægges bevillingshavere og bestyrere bødeansvar for overtrædelse af § 15, stk. 1, og § 17, stk. 1, 2. pkt., der begås af ansatte i virksomheden, selv om overtrædelsen ikke kan tilregnes dem som forsætlig eller uagtsom.

Stk. 6. Sagerne behandles som politisager. Retsmidlerne i retsplejelovens kapitler om beslaglæggelse

og ransagning finder dog anvendelse i samme omfang som i statsadvokatsager.

§ 23. Løgregluni kann ikki verða sýtt atgeingi til høli í fyritøkum við útskeinkingarloyvi. Hetta er tó ikki galdandi fyri kømur, ið leigað eru út til gistingar.

§ 23. Der vil ikke kunne nægtes politiet adgang til lokaler eller rum i virksomheder med bevilling til udskænkning. Dette gælder dog ikke værelser, der er udlejet til overnatning.

Kapittul 7
Gildisásetingar

§ 24. Landsstýrið ásetir í kunngerð, nær lógin fær gildi í síni heild ella í pørtum.

Stk. 2. Tá lógin kemur í gildi, smbr. stk. 1, setir landsstýrið úr gildi í síni heild ella í pørtum fylgjandi:

1) "Anordning nr. 649 af 21. december 1917 om hvad der i lov for Færøerne om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m. af 21. december 1917, skal forstås ved drikke.
2) "Anordning nr. 624 af 30. november 1918 om udlevering af berusende drikke fra apoteker på Færør-

Kapitel 7
Ikrafttrædelsesbestemmelser

§ 24. Landsstyret fastsætter tidspunktet for lovens ikrafttræden i sin helhed eller i dele.

Stk. 2. Ved lovens ikrafttræden, jfr. stk. 1, ophæver landsstyret helt eller delvis følgende bestemmelser:

1) Anordning nr. 649 af 21. december 1917 om hvad der i lov for Færøerne om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m. af 21. december 1917, skal forstås ved drikke.
2) Anordning nr. 624 af 30. november 1918 om udlevering af berusende drikke fra apoteker på

ne."

3) "Bekendtgørelse nr. 148 af 18. april 1923 om hvad der i lov for Færøerne om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m. af 30. januar 1923 skal henregnes til drikke."

4) "Lov nr. 115 af 4. april 1928 for Færøerne om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m.", sum broytt seinast við løgtingslóg nr. 54 frá 9. juni 1988.

5) Løgtingslóg nr. 35 frá 18. november 1954 um innflutning av denatureraðum spritti.

6) Løgtingslóg nr. 61 frá 19. mai 1980 um skamtan av rúsdrekka, sum broytt við løgtingslóg nr. 39 frá 20. maj 1988.

7) Kunngerð nr. 7 frá 29. januar 1986 um denaturerað spritt.

8) Løgtingslóg nr. 120 frá 23. december 1991 um avgjald á framleiðslu og innflutningi, §§ 1 og 3.

Stk. 3. Hesar kunngerðir hava framvegis gildi, til tær verða settar úr gildi við kunngerð heimilaðari í hesi løgtingslóg:

1) Kunngerð nr. 36 frá 19.

Færøerne.

3) Bekendtgørelse nr. 148 af 18. april 1923 om hvad der i lov for Færøerne om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m. af 30. januar 1923 skal henregnes til drikke.

4) Lov nr. 115 af 4. april 1928 for Færøerne om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m., som senest ændret ved lagtingslov nr. 54 af 9. juni 1988.

5) Lagtingslov nr. 35 af 18. november 1954 om indførsel af denatureret sprit.

6) Lagtingslov nr. 61 af 19. maj 1980 om rationering af spiritus, som ændret ved lagtingslov nr. 39 af 20. maj 1988.

7) "Kunngerð nr. 7 frá 29. januar 1986 om denatureret sprit."

8) Lagtingslov nr. 120 af 23. december 1991 om fremstillings- og indførselsafgift, §§ 1 og 3.

Stk. 3. Følgende bekendtgørelser forbliver i kraft, indtil de ophæves ved bekendtgørelser udstedt i medfør af denne lov:

1) "Kunngerð nr. 36 frá 19.

november 1954 um keyp og sølu av kumpasssprítti.

2) Kunngerð nr. 78 frá 11. juli 1980 um brygging og útflýgging av sterkum øli, sum broytt við kunngerð nr. 86 frá 1. juli 1988.

Stk. 4. Um so verður, at ásetingarnar um útskeinking í lógini verða settar í gildi áður enn kapitlini 1, 2 og 3, kann landsstýrið játta loyvishavara innflutning av rúsdrekka til útskeinkingar á útskeinkingarstaðnum.

§ 25. Landsstýrið skal leggja løgtingslógina um innflutning og sølu av rúsdrekka fyri tingið at viðgera í 1995.

november 1954 um keyp og sølu av kumpasssprítti."

2) "Kunngerð nr. 78 frá 11. juli 1980 um brygging og útflýgging av sterkum øli", som ændret ved "kunngerð nr. 86 frá 1. juli 1988"

Stk. 4. I tilfælde af, at lovens bestemmelser om udskænkning sættes i kraft før ikraftsættelse af lovens kapitel 1, 2 og 3, kan landsstyret give bevillingshavere tilladelse til import af berusende drikke til udskænkning i virksomheden.

§ 25. Landsstyret skal forelægge lagtingsloven om import og salg af spiritus for lagtinget at behandle i 1995.

2.4. Minnilutin (Signar Hansen og Lisbeth L. Petersen)

Minnilutin (Signar Hansen og Lisbeth L. Petersen) førir fram:

Beint áðrenn tingsetan endaði í 1991, legði landsstýrið fram uppskot um nýggja rúsdrekkalóg. Ætlan landsstýrisins var at avgreiða málið í somu tingsetu, ið vanliga endar 25. apríl. Undir 1. viðgerð, ið var 16. apríl, gjørdu tingmenn vart við, at hetta mál var so stórt og álvarsligt, at nevndin, ið fekk málið til viðgerðar, átti at fáa rímuliga tíð at viðgera málið. Henda áheitan varð gingin á møti.

Víðkaða rættarnevndin, har allir flokkar á tingið eru umboðaðir, hevur hildið mangar fundir og gjørt sær stóran ómak at lýsa hetta álvarsmál so gjølla sum møguligt.

Rættiliga tíðliga undir viðgerðini kom víðkaða rættarnevndin til ta niðurstøðu, at so mangar og umfatandi broytingar máttu gerast við uppskot landsstýrisins, skuldi tað verða borðbart, at betri og lættari var at gera eitt nýtt uppskot at leggja fram ístaðin fyri uppskot landsstýrisins. Ikki allir partar í víðkaðu rættarnevndini tóku undir við framlagda uppskoti, ið umboð fyri samgonguflokkarnar standa fyri, men tað varð hildið at vera skilagott at leggja tað fram á henda hátt, soleiðis at teir nevndarlimir, ið ætlaðu at koma við broytingaruppskotum, kundu gera tað til framlagda uppskot.

Minnilutin (Jóanes Dalsgaard, Birgir Danielsen og Bjarni Djurholm) mælir løgtinginum til at samtykkja framlagda uppskot.

Minnilutin (Signar Hansen og Lisbeth L. Petersen) tekur ikki undir við uppskotinum, men mælir til at gera einstakar týðandi broytingar til uppskotið, ið umboð fyri samgonguflokkarnar seta fram.

Minnilutin (Signar Hansen og Lisbeth L. Petersen) heldur, at verður uppskotið frá samgonguumboðunum samtykt, ið m.a. mælir til at matstovum og hotellum verður loyvt at skeinkja rúsdrekka, so økist nýtslan. Royndir aðrastaðni vísa, at lættari tað er at fáa fatur á rúsdrekka, meira verður drukkið. Rúsdrekka- og narkotikaráðið vísir m.a. á, at í tíðarskeiðunum 1968 til 1970 vóru útskeinkingarstøðini í Finlandi økt úr 1600 upp í 21000, og at rúsdrekkanýtslan í hesum tíðaskeiði øktist við 50 %.
Minnilutin ber stórliga ótta fyri, at hetta verður eisini galdandi hjá okkum.

Minnilutin(Signar Hansen og Lisbeth L. Petersen) mælir haraftur ímóti til, at matstovum og hotellum verður loyvt at skeinkja vín og øl upp til 23 %., um tey lúka treytir um hølisviðurskiftir, afturlatingartíðir o.a., ið verða settar. Harafturat kunnu matstovur og onnur, sum hava skeinkiloyvi sambært § 10, 4. stk., skeinkja rúsdrekka við sterkari enn 23 % av alkoholi til sonevndar privatar veitslur. Treytin verður tann, at privati verturin letur hølinum tað sterkara rúsdrekka, sum hann hevur keypt frá einkarsøluni (er talan um størri nøgdir hevur hann fingið undantaksloyvi). Hin treytin viðvíkjandi privatum veitslum er, at almenningurin (tvs tey, ið ikki eru boðin ella á annan hátt hoyra til veitsluhaldið) ikki fáa atgongd til útskeinkingarhølið.

Sami minniluti tekur ikki undir við, at skamtan av rúsdrekka og øli verður tikin av, soleiðis sum minnilutin (Jóhannes Dalsgaard, Birgir Danielsen og Bjarni Djurholm) mælir til, men setur harafturímóti nýtt uppskot um framhaldandi skamtan við teirri broyting, at tað verður landsstýrið eftir tilmæli frá Rúsdrekka- og narkotikaráðnum, ið tekur avgerð um, hvussu skamtað verður.

Minnilutin (Signar Hansen og Lisbeth L. Petersen) tekur heldur ikki undir við minnilutanum, ið umboðar samgonguflokkarnar, um at lækka aldurin úr 20 niður í 18 ár til teirra, ið skulu hava loyvi at keypa rúsdrekka. Minnilutin (Signar Hansen og Lisbeth L.Petersen) vísir á í hesum sambandi, at øll Norðurlond, uttan Danmørk, hava 20 ára aldursmark, og tað tykist løgið at koma við slíkum uppskoti, tá ið havt verður í huga, at rúsdrekkanýtslan er onganstaðni so stór í Norðurlondum sum júst í hesum landi.
Minnilutin (Signar Hansen og Lisbeth L.Petersen) tekur fult undir við málsetninginum hjá WHO um, at rúsdrekkanýtslan skal minka minst 25 % innan ár 2000.

Hin minnilutin (Jóhannes Dalsgaard, Birgir Danielsen og Bjarni Djurholm) sigur seg somuleiðis taka undir við hesum málsetningi, men uppskot hansara um at loyva matstovum og hotellum at skeinkja rúsdrekka saman við avtøku av skamtanini og lægri aldursmarki at fáa fatur á rúsdrekka, kann neyvan bera í sær, at málsetningurin hjá WHO verður náddur – heldur tvørturímóti.
Heldur ikki dugir minnilutin (Signar Hansen og Lisbeth L.Petersen) at síggja nakað samsvar ímillum endamálsorðingina í framlagda uppskoti og tær umfatandi broytingarnar, ið umboðini fyri samgonguflokkarnar mæla til.

Fyri stuttum legði Rúsdrekka- og narkotikaráðið fram álit.
Har eru nógvir áhugaverdir upplýsingar og mong skilagóð tilmæli, men so er eisini í øðrum førum, tú hevur ilt við at skilja ráðið.
Einastaðni í álitinum verður sagt, at ávís " vanliggering " eigur at fara fram soleiðis, at rúsdrekka kann keypast og bryggjast í Føroyum.

Minnilutin tekur ikki undir við framførdu sjónarmiðunum. Rúsdrekka eigur ongantíð at verða "vanliggjørt", tí júst í teimum londum, har so er gjørt, er støðan, ið stendst av rúsdrekkamisnýtslu út av lagi vánalig. Í Danmark t.d. er rúsdrekkasølan fullkomuliga frí, "vanliggjørd", og í ongum Norðurlandi eru trupulleikarnir so stórir, sum júst í hesum landi. Rúsdrekkamisnýtslan kostar danska ríkinum 8 – 10 milliardir krónur um árið í sjúkrahúsútreiðslum, lækkaðum pensiónsaldri, niðursettari arbeiðsorku o.ø.. Henda upphædd er fimm ferðir so stór, sum útreiðslurnar eru av narkotikatrupulleikum.
Danir hava vist ikki trupulleikar av nakrari kassadrekking, sum í hesum døgum verður so nógv umrødd, og sum uttan iva hevur gjørt sítt til, at uppskot um nýggja rúsdrekkalóggávu er lagt á tingborð, men danir hava aðrar rúsdrekkatrupulleikar at dragast við, sum vit kanska ikki hava so nógv av enn, t.e. hugnadrekking í heiminum, á arbeiðsplássunum og aðrastaðni, sum er økt við slíkari óhugnaligari ferð, at danir eru komir í rasshaft av henni.

Minnilutin dugir ikki at skilja, at rúsdrekka skal "vanliggerast", so sum Rúsdrekka-og narkotikaráðið heldur, tá ið hagtøl siga, at danir brúka fimm ferðir so nógvan pening til avleiðingarnar av rúsdrekkamisnýtslu, sum til avleiðingarnar av narkotikamisnýtslu, ið ikki er"vanliggjørt".
Tá ið nú tankar eru bornir fram, at vit eiga at "vanliggera" tað at drekka, og tað almenna ætlar at fremja hesa "vanliggering" við lóg, so eigur eisini tað almenna at ganga á odda at "vanliggera" trupulleikarnar sálarligar/fysiskar sjúkur, ið elvast av rúsdrekka og bjóða viðgerð og hjálp fyri hesar "sjúkur."
Tá ið rúsdrekkamálið hevur verið umrøtt á tingi, hava tilmælini verið mong um at veita hægri játtanir til upplýsing um vandarnar, ið standast av rúsdrekkanýtslu, somuleiðis hægri veitingar til at hjálpa teimum, ið eru bundin av hesum eitrandi løgi, hægri veitingar til ungdómsarbeiði o.s.fr.. Illa hevur gingist at veita meira stuðul til nevndu endamál, tað hava bert verið tóm orð. Hóast skerjingar verða framdar á so at siga øllum økjum á løgtingsins fíggjarlóg, so heldur

minnilutin (Signar Hansen og Lisbeth L. Petersen), at tað er átroðkandi neyðugt at avseta pening til umrøddu endamál. Lat tað ikki aftur hesaferð bert vera tóm orð, ið bert ljóða væl í oyrunum á fólki, men latum okkum í verki vísa, at hetta er meint í álvara.

Minnilutin (Signar Hansen og Lisbeth L. Petersen) tekur undir við, at nýggj rúsdrekkalóg verður samtykt. Á fundi í víðkaðu rættarnevndini er upplýst, at ikki ber til at umsita galdandi rúsdrekkalóggávu, og at tað tí er neyðugt við eini nýggjari og greiðari lóg. Men sami minniluti kann ikki taka undir við minnilutanum, ið umboðar samgonguflokkarnar Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin, tí hildið verður, at við eini so umfatandi broyting, ið hann skjýtur upp, verður rúsdrekkanýtslan økt munandi.

Vísandi til tað, ið minnilutin (Signar Hansen og Lisbeth L. Petersen) hevur borið fram, verða hesi broytingaruppskot sett fram:

Í § 5, 2. stk. verður "18" broytt til "20".	I § 5, 2. stk. ændres "18" til "20".
Sum nýggj § 7, 2. stk. verður sett:	Som ny § 7, 2. stk. indsættes:
"Søla av rúsdrekka við hægri enn 23 vektprosentum av alkoholi kann ikki fara fram til persónar, felløg ella onnur, sum loyvi hava til útskeinking smbært. § 10, 1. stk."	"Spiritus med højere end 23 vægtprocent af alkohol kann ikki sælges til personer, selskaber eller andre, som har udskænkningsbevilling i følge § 10, stk. 1."
Sum nýggj § 7, 3. stk. verður sett:	Som ny § 7, stk. 3. indsættes:
"Søla av rúsdrekka annars við hægri enn 23 vektprosentum av alkoholi verður skamtað eftir reglum, sum landsstýrið eftir tilmæli frá Rúsdrekka- og narkotikaráðnum ásetir í kunngerð."	"Salg af spiritus med højere end 23 vægtprocent alkohol er rationeret efter regler, der fastsættes i bekendtgørelse af landsstyret efter indstilling af Alkohol- og narkotikarådet."
§ 7, 2. stk. verður broytt til § 7, 4. stk.	§ 7, stk. 2, ændres til § 7, stk. 4.
Í § 8, 1. stk., verður "1. januar 1997" broytt til "1. juli 1993".	I § 8, stk.1, ændres "1. januar 1997" til "1. juli 1993".
§ 10, 3. og 4. stk., verður strikað, og í staðin verður nýtt 3., 4., 5. og 6. stk.:	§ 10, stk. 3 og 4. ophæves og nye stk. 3, 4, 5, og 6. indsættes:
Sum nýggj § 10, 3. stk. verður sett:	Som ny § 10, stk. 3 indsættes:
"Loyvi til útskeinking fevnir bert um rúsdrekka, ið ikki er hægri enn 23 vektprosent av alkoholi."	"Udskænkningsbevilling omfatter kun spiritus, som ikke er højere end 23 vægtprocent alkohol."

Sum nýggj § **10, 4. stk.** verður sett:

"Undantak frá skamtanini kann veitast í sambandi við serlig høvi so sum brúdleyp, føðingardagshald, ársveitslur o.l., og útskeinking kann fara fram í hølum, sum annars ikki kunnu skeinkja rúsdrekka, ið er hægri enn 23 vektprosent av alkoholi, um almenn atgongd annars verður bannað."

Som ny § **10, stk. 4** indsættes:

"Undtagelse fra rationeringen kan giver ved særlige lejligheder som bryllup, fødselsdage, årlige fester o.l., og udskænkning kan ske i lokaler, som har udskænkningsbevilling, men ellers ikke kan udskænke spiritus, der har højere end 23 vægtprocent, såfremt der ellers nægtes offentlig adgang."

Sum nýggj § **10, 5. stk.** verður sett:

"Undantak um skeinking av rúsdrekka hægri enn 23 vektprosent av alkoholi kann veitast ferðamannaskipum í altjóða sigling."

Som ny § **10, stk. 5** indsættes:

"Undtagelse om udskænkning af spiritus højere end 23 vægtprocent kan gives turistskibsfartøjer i international fart."

Sum nýggj § **10, 6. stk.** verður sett:

"Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um undantøk eftir 3., 4., 5. og 6. stk. á sama hátt, sum ásett í § 7, 3. stk."

Som ny § **10, stk. 6** indsættes:

"Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler om undtagelser i henhold til stk. 3, 4, 5 og 6 på samme måde, som fastsat i § 7, stk. 3."

Í § 15, 5. stk., verður "18" broytt til "20".

I § 15, stk. 5, ændres "18" til "20".

Í § 17, 1. stk., verður í tveimum støðum og í 3. stk., "18" broytt til "20"

I § 17, stk. 1, ændres i to steder, samt i stk. 3 "18" til "20".

Minnilutin (Lisbeth L. Petersen) hevur hesar viðmerking :

Føroyar hava í dag cina serliga rúsdrekkalóg, ið ikki líkist teimum lógum, onnur norðurlond hava á sama øki.
Við fólkaatkvøðu varð avgerð tikin um forboð fyri rúsdrekkasølu í 1907. Málið varð mett at vera so týdningarmikið fyri hvønn cinstakan føroying, at kvinnurnar, ið ikki høvdu atkvøðurætt annars, í hesum føri fingu hesi rættindi sum eitt undantak, so tær kundu gera sína ávirkan galdandi.
Okkara samfelag er, eins og onnur samfeløg, ið vit hava samband og samstarv við, nógv broytt. Tí eigur m.a. rúsdrekkalógin at endurskoðast og viðgerast av nýggjum, so lóggávan kann haldast í okkara nútímans samfelag, og so at fólk aftur kunnu fáa virðing fyri landsins lógum og lóggávuvaldi.
Minnilutin metir málið og uppskotið til løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka vera av so stórum týdningi fyri okkara samfelag, at allir føroyingar, ið atkvøðurætt hava til løgtingsval, eiga at brúka hesi rættindi til at ávirka tær samfelagsbroytingar, sum uppskotið ber í sær fyri komandi tíðir.
Løgtingslimir eiga at gera sína ávirkan galdandi viðvíkjandi innihaldinum í lógaruppskotinum, men endaligu avgerðina skal Føroya fólk taka.

Vísandi til viðmerkingar minnilutans (Lisbeth L. Petersen) verða soljóðandi hesi broytingaruppskot sett fram:

Sum nýggj § 24, 1. stk. verður sett:

"Hetta lógaruppskot kann setast í gildi við kunngerð treytað av, at tað verður samtykt við fólkaatkvøðu, sum landsstýrið skipar fyri. Lógaruppskotið kann setast í gildi, um so er, at ein meiriluti av atkvøðunum við fólkaatkvøðuna, tó í minsta lagi 33% av teimum, sum hava atkvøðurætt, ikki atkvøða ímóti lógini.

Som ny § 24, stk. 1 indsættes:

"Dette lovforslag træder i kraft ved landsstyrets bekendtgørelse, såfremt dette ved folkeafstemning, som landsstyret forestår, er vedtaget. Lovforslaget kan træde i kraft, hvis et flertal, dog mindst 33% af de stemmeberettigede, ikke stemmer imod."

2.5. Minniluti Helena Dam á Neystabø.

Ein minniluti (Helena Dam á Neystabø) hevur hesar viðmerkingar:

Víðkaða rættarnevndin hevur viðgjørt málið um nýggja rúsdrekkalóg væl og virðiliga.

Tað er ein sannroynd, at spurningurin um rúsdrekka er sera viðkvæmur. Mong og ymisk eru sjónarmiðini, hvussu vit handfara henda rúsandi løg á skynsamiligasta hátt. Semja man tó vera millum manna, at vit noyðast at háva lóggávu, ið skipar innflutning, sølu, útskeinking og nýtslu av rúsdrekka.

Høvuðsendamálið við lóggávuni skal vera at avmarka nýtsluna og minka um skaðarnar av rúsdrekka, at skapa greiðar reglur á økinum og ein karm fyri miðvísum rúsdrekkapolitikki.

Tað vóru á sinni kvinnur, ið tóku sær um reiggj og fingu sett í verk tiltøk, ið minkaðu munandi um teir skaðar og ta armóð, ið stóðst av rúsdrekkamisnýtsluni í Føroyum. Tær brutu slóð og gjørdu eitt gott arbeiði.

Tíðir og siðir broytast, og til tess at røkka sama endamáli, er tað neyðugt, at nýggj rúsdrekkalóg verður samtykt. Tann gamla er gjøgnumgatað á so mangan hátt. Rúsdrekkapolitikkur, innflutningur og søla av rúsdrekka eigur eins og onnur mál at vera á føroyskum hondum og verða stjórnað og umsitin av okkum, ið her búgva. Okkara er ábyrgdin.

Lógaruppskotið, ið nevndin leggur fyri tingið at taka støðu til, er úrslit av drúgvari og gjølligari viðgerð. Um fleiri tættir er at kalla semja fingin í lag. Minnilutin (Helena Dam á Neystabø) kann í høvuðsheitum taka undir við almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið.

Tá ið landsstýrið legði málið fyri tingið, legði sjálvstýrisflokkurin stóran dent á, at lógin skuldi hava eina endamálsorðing. Tað er av stórum týdningi, hvat stendur í hesi endamálsorðing. Eftir henni skal lógin setast í verk og umsitast. Lógaruppskotið, ið nú verður lagt fyri tingið, hevur eina góða endamálsorðing, ið ásetir, at lógin skal hava til endamáls at avmarka rúsdrekkanýtsluna, at minka sum mest um skaðan, sum rúsdrekkanýtslan hevur við sær fyri einstaklingin og fyri samfelagið og at áseta greiðar reglur í sambandi við rúsdrekka í Føroyum. Fara viðurskiftini aftur á glið eins og í dag, er í endamálsorðingini heimild til eina og hvørja tíð, at tiltøk verða sett í verk.

Okkara evni at ímynda okkum, hvussu verður í framtíðini, røkka helst ikki. Men av royndum vita vit, at dirvi skal til at nema við rúsdrekkamálið, hvussu so støðan er. Tí er best at vissa sær í lógini, at lógin fær neyðuga eftirmeting.

Til tess at tryggja, at Føroya Løgting ger sær greitt, um lógin virkar, soleiðis sum hon skal, samdist nevndin um at gera nýggja § 25, sum er soljóðalndi:

"Landsstýrið skal leggja løgtingslógina um innflutning og sølu av rúsdrekka fyri tingið at viðgera í 1995."

Kapitlarnir 2 um innflutning og 3 um útsølu av rúsdrekka eru grundaðir á, at Rúsdrekkasøla Landsins verður sett á stovn. Minnilutin metir tí, at kapitlarnir 2 og 3 um innflutning og útsølu av rúsdrekka eiga ikki at verða settir í verk, áðrenn Rúsdrekkasøla landsins er før fyri at greiða hesa uppgávu til fulnar. Tað merkir, at minnilutin kann ikki taka undir við postordrasølu sum skiftisskipan í eitt ár ella tvey ár.

Tað merkir, at minnilutin ikki kann taka undir við postordrasølu í eitt ella tvey ár. Út frá hesum setir minnilutin (Helena Dam á Neystabø) fram fylgjandi

U p p s k o t

til

<u>samtyktar</u>

Løgtingið samtykkir, at kapitlarnir 1, 2 og 3 í uppskotinum ikki kunnu verða settir í gildi, fyrrenn einkarsølan

1) er vorðin skipað sambært meginreglunum í § 4 og § 5 í lógaruppskoti minnilutans,
2) er før fyri at lúka skyldur sínar sambært §§ 4 og 5 í sama lógaruppskoti.

Eftir uppskoti minnilutans verður skamtanarkortið tikið av og aldursmarkið møguliga broytt til 18 ár. Til tess

at leggja upp fyri trupulleikum hjá Rúsdrekkasølu Landsins at umsita hesa broyting í samljóði við endamálsorðingina, skjýtur minnilutin upp, at Føroya Løgting áleggur Rúsdrekkasølu Landsins at gera eina skipan við samleikaprógvi, ið krevst til tess at keypa rúsdrekka úr Rúsdrekkasølu Landsins. Samleikaprógvið skal keypast og sostatt fíggja seg sjálvt og ein part av rakstri einkarsølunnar.

Til tess at tryggja, at ein skipan við samleikaprógvi verður sett í verk, tá Rúsdrekkasølan fer at virka, setir minnilutin (Helena Dam á Neystabø) fram hetta

U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum í samband við gerð av reglum sbrt. § 4, stk. 2 fyri skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins at tryggja, at gjørd verður skipan við samleikaprógvi, ið eigur at verða kravt av einumhvørjum, ið keypir rúsdrekka frá Rúsdrekkasølu Landsins.

Minnilutin (Helena Dam á Neystabø) setir einki uppskot fram viðvíkjandi skeinkiloyvum, men ger vart við, at sera strong krøv eiga at verða sett til umstøður, umhvørvi og afturlatingartíðir, somuleiðis mugu strong krøv setast til, hvussu skeinkiloyvi verða umsitin. Loyvisnevndini skal bert verða heimilað at veita eitt avmarkað tal av skeinkiloyvum til fyritøkur, har søla av rúsdrekka má metast týdningarmikil inntøka í dagliga rakstrinum.

Tað er ein sannroynd, at fyridømið hevur stóran týdning. Tað verður tí mælt til, at landsins myndugleikar virka eftir endamálsorðingini í rúsdrekkalógini, og at almenni politikkurin verður at avmarka skeinking mest møguligt á samkomum løgtingsins, landsstýrisins og øðrum almennum stovnum.

2.6. Minnilutin Tordur J. Niclasen.

Ein minniluti (Tordur Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:

Tá landsstýrið í apríl mánað 1991 legði uppskot á ting um nýggja rúsdrekkalóg, varð m.a. sagt í viðmerkingunum, at: "endamálið við lógini var

- at minka um teir skaðar, sum nýtslan av rúsdrekka hevur við sær fyri einstaklingin og fyri samfelagið
- at fáa greiðar reglur í samband við rúsdrekkaviðurskiftini í Føroyum.

Grundgevingin fyri tí seinra segðist at vera, at rúsdrekkalóggávan var avlagað, tambað og toygd av bæði einstaklingum og myndugleikum, og tí var hon torfør ella ógjørlig at umsita.

Tí var landsstýrisins støða m.a. tann: "at fáast mátti lóg og skipan við rúsdrekkanýtsluni, sum hóskaði til tíð og samfelag okkara."

Við m.a. hesum grundgevingum legði tí landsstýrið nevnda uppskot fyri tingið. Eitt uppskot, sum við sínum stóru prinsipiellu broytingum kløkkaði mangan og fekk enntá samgongumenn at tala ímóti og geva alment til kennar, at teir ikki kundu taka undir við uppskoti í slíkum líki!

Høvuðsbroytingarnar í mun til galdandi lóg vóru hesar:

1. Einarinnflutningur
2. Einkarsøla
3. Avtøka av skamtanarkortinum
4. Broyting í aldursmarkinum.
5. Loyvi til útskeinking.

Málið fór í rættarnevndina og hevur har fingið drúgva viðgerð. Tó má ásannast, at hóast samgonguumboðini koma við nýggjum uppskoti í staðin fyri uppskot landsstýrisins, so er einki broytt í teimum høvuðssjónarmiðum, sum var grundarlagið undir landsstýrisuppskotinum.

Tí kann minnilutin ikki taka undir við uppskoti samgonguflokkanna í rættarnevndini - líka so lítið sum takast kundi undir við uppskoti landsstýrisins.

Endamálsorðingin í § 1 er samanfallandi við uppskoti landsstýrisins, nevniliga: "at minka mest møguligt um teir skaðar, sum nýtslan av rúsdrekka hevur við sær fyri einstaklingin og

fyri samfelagið og at fáa greiðar reglur í samband við rúsdrekkaviðurskifti í Føroyum."

Í fyrra parti av § 1 verður sostattt boðað frá, at sjálvt endamálið við uppskotinum er, at minka um teir skaðar, rúsdrekka hevur við sær.

Endamálsorðingin var meiri fullfíggjað, um havt var við, at endamálið eisini var "at minka um nýtsluna av rúsdrekka her á landi".

Ein slík endamálsorðing bæði í uppskoti landsstýrisins og í uppskoti samgonguflokkanna í nevndini setir tey minimumskrøv, at <u>sjálvur lógarteksturin verður í tráð við - ella fylgir endamálsorðingini.</u>

Tíverri má ásannast, at so er ikki! Tí lógin hevur tær grundleggjandi broytingar við sær, at

1) tað ferð at vera lættari at fáa fatur í rúsdrekka
2) nýtslan fer at hækka
3) skaðarnir samsvarandi at vaksa.

Tað er burturvið at tosa um at minka skaðarnar av rúsdrekkanýtsluni og samstundis gera eina lóg, sum skapar fortreytir fyri øktari nýtslu av rúsdrekka! Hetta er at blása og hava mjøl í munninum!

<u>Tann einasti háttur at minka um skaðarnar er at minka um nýtsluna!</u>

Trupulleikarnir orsakað av rúsdrekkanýtslu eru sera álvarsligir, og mong munnu tey heimini kring landið vera, sum hava kent - og kenna avleiðingarnar av hesi nýtslu.

Ikki man tað vera uttan grund, at alheimsheilsustovnurin W.H.O. fyri árum síðan sendi út álvarsliga ávaring til øll lond - við áheitan um, at allar góðar kreftir royndu at gera tað, sum gerast kundi, at byrgja fyri rúsdrekkamisnýtsluni.

Setningurin W.,H.O.'s er, at rúsdrekkanýtslan skal minka við 25% innan ár 2000, og at í seinasta lagi 1995 eigur at verða hend ein týðilig minking í heilsuniðurbrótandi atferð, sum t.d. at nýta ov nógv alkohol.

Hvat hagtølum viðvíkur, so finnast tøl, sum í eitt <u>ávíst</u> mát lýsa gongdina í <u>nýtsluni</u> her á landi tey seinastu árini. Men helst fyriliggja eingi samskipað fullfíggjað tøl um <u>avleiðingarnar</u> av rúsdrekkanýtsluni. Her verður hugsað um t.d. sjúkratilburðir (limaligar/sálarligar), skaðatilburðir - eisini á arbeiðsplássum, lógarbrot v.m.

Verður hugt eftir londum rundan um okkum, har lætt er at fáa fatur í rúsdrekka, so kann Danmark takast sum dømi, hvat rúsdrekkatrupulleikum viðvíkur:

Her sigur kendur yvirlækni í Keypmannahavn, at 6. hvør dani hevur stórar rúsdrekkatrupulleikar, og at ikki færri enn 800.000 eru í vanda orsakað av stórari alkoholnýtslu.

Annar yvirlækni, serfrøðingur á hesum øki, sigur m.a. fylgjandi:

"Sum hepatologur (serkønur í livrasjúkum) kann ein ikki annað enn gerast hugstoyttur av at siggja, hvussu nógvir sjúklingar eru við livrasjúkum, orsakað av rúsdrekkanýtsluni .... Ein fimtipartur av øllum seingjarplássum á teim medisinsku deildunum eru í dag upptikin av rúsdrekkamisnýtarum. Á teim psykiatrisku deildunum er parturin ørandi høgur ..." Víðari sigur hesi sami: "Tær samfelagsligu útreiðslurnar eru so høgar, at ein hevur ilt við at halda; at tær inntøkur, samfelagið fær av rúsdrekkatolli, avgjøldum v.m. eru førar fyri at útjavna hesar...". Samstundis vísir hann á, at talið av teim, ið doyggja orsakað av livrasjúkum stavandi frá rúsdrekkanýtslu, er fýra faldað í tíðarskeiðinum 1968 - 1978, og at sjúkur stavandi frá øktari rúsdrekkanýtslu fór at verða tann triðstørsta deyðsorsøkin millum menn í miðal aldri - næst eftir lunga- og hjartasjúkum.

Avleiðingar av rúsdrekkanýtslu er annað enn tað, ið kann roknast út í kr. og oyrum! Her kann nevnast:

hjúnaskilnaður, har børnini gerast teir stóru tapararnir
harðskapur
sjálvmorð
kriminalitetur
børn skadd í móðurlívi
skaðar á arbeiðsplássum
ferðsluskaðar v.m.

Ein kanning í Fraklandi fyri nøkrum árum síðani vísti, at av 3500 børnum hjá foreldrum við rúsdrekka trupulleikum, vísti tað seg, at í 40% av tilburðunum kundi sigast, at rúsdrekkatrupulleikarnir hjá foreldrunum beinleiðis var orsøkin til sinnalags og likamligu vansar hjá børnunum.

Fyri at fara aftur til Danmarkar var fyri náøkrum árum síðani at lesa í sjálvum leiðaranum á Ekstra bladet fylgjandi:

"Danmark er gået på druk. Ingen skal kunne være i tvivl om, hvad der sker, når de mange flasker er tømt. Hvad gør vi med

alkoholismen - FOLKESYGDOMMEN -, som alle kender, men som kun få vil være ved???"

Mynstrið er tað sama allastaðni. Jú lættari er at fáa fatur á rúsdrekka, jú størri verður nýtslan! Føroyar fara ikki at gerast nakað undantak í so máta!

Hetta kann eisini sigast á tann hátt, at miðalnýtslan pr. íbúgva fer at hækka, og er tað júst hetta, sum hevur alstóran týdning í heildarstøðuni av rúsdrekkanýtsluni.

Formaðurin í rúsdrekka- og narkotikaráðnum sigur í notati til nevndina, at "tað tykist vísindaliga prógvað, at jú størri miðalnýtslan er í einum samfelag, jú størri verður talið av stórnýtarum og harvið av alkoholskaðum.".

Um henda spurning verður í niðurstøðu frá W.H.O. m.a. sagt:

"1. Tað er sera sannlíkt, at ein hækking av miðalnýtsluni av rúsdrekka førir við sær økt tal av stórnýtarum.

2. Um myndugleikarnir í einum landi ætla sær at minka um talið av stórnýtarum, fer hetta helst at eydnast, um tað eydnast myndugleikunum at minka miðalnýtsluna. Meir miðalnýtslan minkar, færri verða stórbrúkararnir.

3. Um talið av stórbrúkarum hækkar, førir tað vanliga við sær hækking av deyðstilburðum av rúsdrekkaávum."

Læknin á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu vísir somuleiðis á støðu W.H.O.'s og ásannar, at tað tykist at vera ein sannroynd, at lættari alkohol er at fáa fatur á, størri verður miðalnýtslan. Eisini vísir hann til dømi úr Finnlandi, har talið av vertshúsum og matstøðum við heimild at skeinkja klárliga hava ávirkað samlaðu rúsdrekkanýtsluni. Í tíðarskeiðinum 1968-70 hækkaði talið av útsølustøðum frá 1600 til 21000, og hækkaði rúsdrekkanýtslan í hesum sama tíðarskeiði við heilum 50%!!

Víðari sigur serlæknin í samfelagsmedisini m.a. hesum spurningi viðvíkjandi, at "núverandi rúsdrekkalóg við sínum forðingum at fáa rúsdrekka beinanvegin og forðingin ímóti at servera rúsdrekka á matstovum, eru uttan iva við til at halda miðal rúsdrekkanýtsluni niðri. Hetta soleiðis at skilja, at um rúsdrekka verður lættari at fáa fatur í, t.d. í einkarsølu ella á matstovum, fer samlaða nýtslan av vaksa."

Tað má ásannast og síggjast í eyguni, at jú lættari tað er at fáa fatur á rúsdrekka, størri verður nýtslan!

Hetta er eisini komið týðiliga til sjóndar her á landi, tá hugsað verður um, at eftir 1980, tá loyvi varð givið til brygging av sterkum øli í Føroyum, hækkaði nýtslan av hesum rúsdrekka munandi, og bert eftir fáum árum varð nýtslan hækkað við 100%!!

At tingmenn longu tá høvdu varhugan av, at nýtslan fór at hækka í samband við loyvi til brygging av sterkum øli her á landi, kemur týðiliga til sjóndar í álitinum frá 6-mannanevndini, ið viðgjørdi málið, har henda í uppskoti til samtyktar m.a. skeyt upp, at:

> "Álagt verður landsstýrinum at kanna avleiðingarnar, sum koma at standast av teirri broyting, sum nú er samtykt, og á ólavsøku 1981 leggja frágreiðing fyri tingið."

Víðari skeyt 6-mannanevndini upp, at landsstýrið út frá nevndu kanningum, skuldi koma við uppskoti um neyðugar broytingar í rúsdrekkalóggávuni í ólavsøkutingsetuni 1981. Hóast hesa tingsamtykt varð ongantíð nøkur kanning sett í verk, og sostatt kom landsstýrið heldur ikki við nøkrum uppskoti!

Boðað hevur verið frá, at vit nú skuldu fáa eina nýggja rúsdrekkalóg, sum var tíðarhóskandi, og hevur í hesum sambandi mangan verið víst til neyðars ferðamannin, sum kom til Føroyar og ikki hevði møguleikan fyri at "njóta eitt glas av víni aftur-við matinum". Ja, júst spurningurin um rúsdrekkalóggávuna hevur mangan verið tengdur at kjakinum um ferðavinnuna, og ikki so sjáldan ført fram, at "bara vit fingu eina útskeinkingarskipan, so var ferðavinnan nærum bjargað o.s.fr."

Tað kann væl vera, at inntøkan hjá teim, ið reka ferðavinnu (gistingarhús, matstovur v.m.) fer at hækka, tá ætlaða útskeinkinarskipanin verður sett í verk og møguligt verður hjá vitjandi at keypa sær rúsdrekka á nevndu støðum. MEN eitt má metast fyri vist, at ein útskeinkingarskipan í sær sjálvum fer ikki at draga fleiri ferðandi hendanvegin.

Hinvegin fer júst henda skipanin óivað at slóða fyri broyttari siðvenju og mentan, hvat drykkjuvanum her á landi viðvíkir og kann lýsast við orðum eins teirra, sum situr í Rúsdrekkaráðnum, har í álitinum um rúsdrekkapolitikk í Føroyum, m.a. verður sagt:

"Tað hevur t.d. ikki verið føroysk siðvenja og mentan dagliga at hava rúsandi løg á borðinum afturvið matinum, men hetta er ein siður, ið vindur meira og meira upp á seg her heima. Hesin fremmandi ósiður í okkara mentan kann fáa skaðiligar avleiðingar, um medvit fólksins ikki er økt samstundis, sum nýggir siðir í samband við rúsdrekka koma inn í land okkara. Skulu vit verja og vara um okkara mentan og sereyðkenni sum tjóð, er føroyski búnin og dansurin ikki tað einasta, sum sermerkir okkum sum tjóð. Vit eiga eisini at viðurkenna onnur eyðkenni, sum sermerkja okkum sum tjóð, og eiga vit miðvíst í uppvøkstrinum hjá komandi ættarliðum at leggja okkum eftir at fjálga um hesi eyðkenni, so komandi ættir taka henda ættarvin víðari við sær á leiðini."

Ætlaða útskeinkingarskipan fer eisini at slóða fyri einum "vertshúsmentaliteti", tí sera trupult fer at verða at avmarka hesi útskeinkingarloyvi, tá umsøkjarar annars lúka treytir, ið settar fara at verða fyri hesum virksemi.

Sostatt fer sum tíðin liður uttan iva ein mongd av útskeinkingarstøðum at síggja dagsins ljós!

Hvørjar avleiðingar hetta fer at hava fyri nýtsluna/misnýtsluna av rúsdrekka, man eingin ivi vera um, og er tí tann stóri spurningurin um prísurin fyri at verða "tíðarhóskandi" ikki verður ov høgur og kemur bæði einstaklingum, familjum og samfelagnum sum heild aftur um brekku?!

Einki at ivast í, at júst hetta hava fráhaldsfeløg havt í huga, tá mælt hevur verið frá eini útskeinkingarskipan!

Hvat aldursmarkinum viðvíkur er ætlanin, at hetta verður lækkað úr 20 árum til 18 ár, og má hetta metast at vera sera óheppið, tá hugsað verður um, at jú lægri aldursmarkið verður til tess at fáa fatur í rúsdrekka (legalt), uttan iva fer at hava við sær eina "forskjóting" av aldursmarkinum sum heild viðvíkir - bæði hvat møguleikum fyri at fáa fatur á rúsdrekka og sjálvari nýtsluni viðvíkur. Tí ikki so løgið, at fráhaldsfeløg hava mælt frá, at lækka aldursmarkið úr 20 til 18 ár.

Í Íslandi, sum hevur lægstu rúsdrekkanýtslu í Norðanlondum, er aldursmarkið 20 ár.

Í USA hevur verið roynt við 18 ára aldursmarki, men er nú vent aftur til 20 ára markið!

Nærtengt at øktari nýtslu millum ungdómin orsakað lækkað aldursmark er ætlanin um at avtaka skamtanina. Nú fer høvi at verða til at keypa óavmarkaðar nøgdir av rúsdrekka, og fer hetta sjálvandi ikki bara at økja um rúsdrekkanýtsluna millum unga fólkið.

Nei, sum heild fer hetta at føra við sær, at nýtslan kemur at vaksa!

Hóast ivasamt hvussu skamtanin hevur verið umsitin (eykaloyvi, "burturmist" skamtanarkort, nýtsla av skamtanarkortum hjá øðrum v.m.), so man eingin ivi vera um, at ein skamtanarskipan eigur at vera eitt nýtiligt amboð í einum rúsdrekkapolitikki, sum hevur til endamáls at minka um rúsdrekkanýtsluna!

Tí hava fráhaldsfeløg skilagott eisini mælt frá at avtaka skamtanina, men heldur at nøgdin, hin einstaki kann útvega sær, eigur at minkast, og at strangari skamtan eigur at setast í verk.

Hvat einkarsøluni viðvíkir, man lítil ivi vera um, at sum frálíður verða helst fleiri settar á stovn kring landið. Ein grundgeving fyri hesi skipanini hevur verið, at hetta helst fór at koma tí sokallaða "kassamentalitetinum" til lívs!

Væl kann verða, at sjálvt "kassatalið" minkar, men heilt víst fer "fløskutalið" at hækka - og ikki minst hjá teim, sum frammanundan ikki dugdu at hava ein kassa standandi!

Út frá einum nýtslusjónarmiði fer her eingin bati at vera, tvørturímóti, tí í stóran mun fer ein støðug nýtsla at vera, har áður var "steðgur", áðrenn næsti kassin kom í hús.

So her fer tann sokallaði "kassamentaliteturin" at verða avloystur av einum "fløskumentaliteti", (ið skjótt gerast fleiri kassar) sum í síðsta enda kemur at hava svárari avleiðingar fyri mangt eitt húskið kring landið við sær!

Annað sjónarmið í grundgevingini at gera nýggja rúsdrekkalóg er frá teim, ið smíða, hava, at "vit mugu hava eina lóg, sum tað ber til at halda, umsita og hava eftirlit við".

Við hesum verður sipað til, at ikki ber til at halda galdandi lóg, og tí mega vit hava eina nýggja!

At galdandi lóg verður brotin, man eingin ivi vera um, men frá tí so at siga, at tað at lógin í sær sjálvari er óbrúkilig, kann ikki umsitast o.s.fr., er eitt langt lop, og er í roynd og veru at fara ov lætt um tað løgfrøðiliga í rúsdrekka-

spurninginum sum heild. Tað, at galdandi lóg ikki verður hildin, eigur ikki at vera grundarlag fyri, at nýggj lóg verður smíðað! Slík mannagongd er sera óheppin fyri rættarhugsanina og kann hava sera óhepnar avleiðingar við sær.

Tá galdandi lóg varð smíðað, var hon heilt víst smíðað við teirri fortreyt, at hon fer at vera hildin, at hon skuldi umsitast sum fyriskrivað og eftirlitið fór at vera, sum lógin ásetti.

Tá so nú sagt verður, at lógin ikki kann haldast, ikki umsitast og ikki havast eftirlit við, so kann av røttum spyrjast, hvar í uppskotinum um nýggja lóg er skapað størri trygd fyri, at hendan kann haldast, umsitast og havast eftirlit við í mun til galdandi?

Ljóðað hevur, at eitt kostnaðarstøði á rúsdrekka kundi verið eitt hóskandi stýringsamboð til avmarkingar í nýtsluni. Hóast hetta eru møguliga ætlanir landsstýrisins, so sæst ikki í uppskotinum, at hædd er tikin fyri, at rúsandi løgur skal gerast dýrur at keypa. Heldur ikki verður nomið við aðrar avleiðingar av, at tað fyri summi á henda hátt fer at gerast truplari at fáa fatur á rúsdrekka! Hinvegin, so veitir uppskot samgonguflokkanna ikki trygd fyri, at avsláttur ikki kann gevast í samband við mongdarkeyp gjøgnum ætlaðu Rúsdrekkasølu Landsins.

Eitt er vist, verða ikki fordingar lagdar fyri, "at tað skjal loysa seg at keypa í stórum mongdum", so kemur "kvantum rabattin" skjótt at merkja sølumynstrið og uttan iva eisini nýtslumynstrið sum heild.

Fyri knøppum hálvum ári síðan vóru Oddfríd Løvdal, sálarfrøðingur og Jens Magne Strandheim, leiðari á viðgerðarstovninum Borgerstad í Noreg og vitjaðu í Føroyum. Hesi, sum greiddu frá rúsdrekkaviðgerð í Noreg, løgdu dent á, at tað loysti seg at hava eina stranga rúsdrekkalóggávu. Sum dømi nevndu tey, at tað enn funnust kommunur í Noreg, sum høvdu somu skipan sum føroyingar og at t.d. í Sogn, sum er ein kommuna við uml. 75000 borgarum, vístu kanningar, at henda kommunan hevur nógv færri trupulleikar av rúsdrekka enn aðrar. Hetta kom til sjóndar við minni kriminaliteti, færri mál hjá barnaverndini at taka sær av, og at løgreglan somuleiðis hevði minni at gera!

Havandi hetta í huga - og annað, sum fært er fram av minnilutanum (Tordur J. Niclasen) kann tað ikki annað enn undra, at eitt Rúsdrekka- og Narkotikaráð, sum hevur til endamáls at

"virka fyri at FYRIBYRGJA rúsdrekka- og narkotikamisnýtslu" er komið við einum áliti, har nærum allar forðingar fyri at fá fatur á rúsdrekka eru tiknar av vegnum, og kemur við eini "kvalifiseraðari" uppskrift um, hvussu lættari kann fáast fatur á rúsdrekka, og harvið hvussu nýtslan kann økjast!

Ótrúligt, um menn halda, at hesi "ráðini" liggja innan karmin í endamálsorðingini fyri Rúsdrekka- og Narkotakaráð Føroya!! Meir ótrúligt, um ráðið sjálvt er av teirri fatan!!

Vinnur uppskot samgonguflokkanna - og fyri tann skuld uppskotini hjá hinum minnilutunum (tjóðveldis-, sambands- og sjálvstýrisflokkinum) frama, verður úrslitið eitt tað sama, nevniliga økt nýtsla við harav standandi øktum avleiðingum fyri einstaklingin og samfelagið sum heild!

Hetta má ikki henda - men eigur heldur hinvegin øll orka at leggjast í at seta neyðug tiltøk í verk, sum hava til endamáls at minka um rúsdrekkanýtsluna her á landi! Ja, setningurin eigur at vera, at Føroyar innan fimm ár gerast tað landi, sum hevur lægstu rúsdrekkanýtslu pr. borgara í Norðanlondum.

Slíkur setningur vildi verið fult í tráð við ætlan alheims heilsustovnin WHO um minking av alkoholnýtsluni!

Slíkur setningur vildi eisini borið boð um miðvísan, skilagóðan rúsdrekkapolitikk, settan í verk av myndugleikum, sum tóku hetta mál í álvara!

Tí verður sett fram soljóðandi

I u p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at taka neyðug stig til, at rúsdrekkanýtslan her á landi minkar. Hetta við atliti til, at nýtslan innan 5 ár minkar við minst 25%.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) er sannførdur um, at hesin setningur í stóran mun kann náast innan karmarnar á gald-

andi rúsdrekkalóg - sjálvandi við teirri fortreyt, at galdandi lóg verður hildin.

Samsvarandi hesum verður sett fram soljlóðandi

II u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at heita á avvarðandi myndugleikar at taka neyðugt stig til, at galdandi rúsdrekkalóg verður hildin.

Verður nevnda uppskot samtykt og sett í verk, so fær tað tær positivu avleiðingar fyri einstaklingin og samfelagið sum heild, at steðgari verður settur fyri sokallaða "klubbavirksemi-num" kring landið.

Tá sagt verður, at "setningurin í stóran mun kann náast innan karmarnar í galdandi lóg", verður havt í huga tað neyðuga í, at skamtanin verður strammað, soleiðis, at teir 9 litrarnir av rúsdrekka pr. ársfjórðing verða settir til 6 litrar ístaðin. Eisini verður hildið rætt, at øl yvir 2,25 vektprocent styrki kemur undir skamtan, og at skamtanin verður strammað í samband við øl yvir 3,75 vektprosent.

Samlaða rúsdrekkanýtslan er síðan 1980 hækkað úr 5,7 litrar alkohol pr. íbúgva til 6,6 litrar/íbúgva yvir 15 ár í 1989. Nakað, sum tíðum er komið fram, er, at persónar undir aldursmark fáa útflýggjað rúsdrekka, og tí hevði verið skilagott við samleikaprógvi í samband við innflutning/keyp av rúsdrekka.

Samsvarandi hesum verður skotið upp at gera broytingar í galdandi lóg og setir minnilutin (Tordur J. Niclasen) tí fram soljóðandi:

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skamtan av rúsdrekka.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 61 frá 19. mai 1980 um skamtan av rúsdrekka, sum broytt við løgtingslóg nr. 39 frá 20. mai 1988, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 1, verður "9 litrar" broytt til: "6 litrar".
2) Í § 1, stk. 2, verður "9 litrar" broytt til "6 litrar".
3) § 1, stk. 3 í verður orðað soleiðis:
   "Stk. 3. Ongum er loyvt at innflyta og/ella keypa frá føroysku bryggjaríunum meir enn 42 litrar um mánaðin av øli, sum í sær hevur meira enn 2,25 vektprosent av alkoholi, og 31,5 litrar av øli um mánaðin, sum í sær hevur meira enn 3,70 vektprosent.

§ 2.

Løgtingslógin fær gildi 1. januar 1993.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om rationering af spiritus.

§ 1.

I lagtingslov nr. 61 af 19. maj 1980 om rationering af spiritus, som ændret ved lagtingslov nr. 39 af 20. maj 1988 foretages følgende ændringer:

1) I § 1, stk. 1, ændres "9 liter" til "6 liter".
2) I § 1, stk. 1, ændres "9 liter" til "6 liter".
3) § 1, stk. 3 affattes således:
   "Stk. 3. Ingen person har ret til at indføre og/eller købe fra de færøske bryggerier mere end 42 liter øl om måneden, der indeholder mere end 2,25 vægtprocent alkohol, og 31,5 liter af øl om måneden, som indeholder mere end 3,70 vægtprocent alkohol."

§ 2.

Lagtingsloven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

II Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í lóg um forboð ímóti at reka vinnu við rúsdrekka v.m.

§ 1.

Í "Lov nr. 115 frá 04.-04.1928 for Færøerne om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m.", sum broytt seinast við løgtingslóg nr. 54 frá 09.06.-1988 verður § 3, stk. 3, 2. pkt. orðað soleiðis:

"Innflutt rúsdrekka kann bert útflýggjast tí, sum við samleikaprógvi prógvar, at hann er rætti móttakarin."

§ 2.

Løgtingslógin fær gildi dagin eftir kunngerðingina.

lagtingslov om ændring i lov om forbud imod at drive erhverv med berusende drikke m.m.

§ 1.

I lov nr. 115 af 04.04.-1928 for Færøerne om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m., som ændret senest ved lagtingslov nr. 34 af 09.06.1988 affattes § 3, stk. 3, 2. pkt. således:

"Indførte berusende drikke må kun udleveres til den, der ved identifikationskort beviser, at han er den rette modtager."

§ 2.

Lagtingsloven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

Skal málið røkkast, og rúsdrekkanýtslan minka, er tað sera umráðandi, at førd verður ein miðvís upplýsing um vandarnar, ið standast av alkoholi!

Her verður einamest hugsað um miðvísa upplýsing innan skúlans gátt og gjøgnum teir almennu fjølmiðlarnar. Náttúrligt var, at ein ávísur partur av t.d. senditíð SVF's varð nýttur til hetta endamál! Endamálið við støðugari upplýsing skal verða - umframt at upplýsa um sjálvar rúsdrekkavandarnar - at gera tað "in" ikki at nýta rúsandi drykkir! Einki er at ivast í, at eitt tílíkt miðvíst upplýsingartiltak vildi verið positivt móttikið og havt gott árin - kanska einamest á uppvaksandi ættarliðið!

Hvør, ið skuldi fyriskipa hesum arbeiði, skal ikki takast støða til her, men náttúrligt var, at fráhaldsfeløgini fingið litið hetta upp í hendi - sjálvandi við fíggjarligum stuðli úr landskassanum! Samsvarandi hesum verður sett fram soljóðandi

III u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til sum skjótast at seta í verk eitt miðvíst upplýsingararbeiði, sum hevur til endamáls at minka um rúsdrekkanýtsluna her á landi.

22-0.

Her á landi hevur nógv verið tosað um vandarnar, ið standast av "rúsdrekkakoyring".

Einki er at ivast í, at sum liður í nýtsluminkandi rúsdrekkapolitikki og somuleiðis í einum ábyrgdarfullum ferðslupolitikki, eiga munabest tiltøk at setast í verk til tess at undirstrika týdningin av promillufríari koyring.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) er av teirri fatan, at skipanin hesum viðvíkjandi, sum t.d. kennist úr Svøríki, er ein gongd leið og setir tí sami minniluti fram soljóðandi

IV U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at gera broytingar í ferðslulógini við atliti til, at promillumarkið í samband við "rúsdrekkakoyring" verður lækkað og sum skjótast at leggja málið fyri tingið. 12-0.

Fyri nøkrum árum síðani, varð avgerð tikin um, at sigarettpakkar skuldu verða merktir við "Ávaringarskelti", har upplýst varð um vansar, ið stavast kundu av tubbaksnýtslu.

Ikki minni neyðugt er, at slík "ávaringarskelti" verða sett á fløskur innihaldandi rús sterkari enn 2,25 vektprosent.

Tí verður sett fram soljóðandi

V u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til, at fløskur innihaldandi rúsdrekka sterkari enn 2,25 vektprosent alkohol hava frámerki við upplýsing um alkoholvandar. 12-0.

Tey seinru árini hevur á fíggjarløgtingslógini ávís upphædd verið sett av til "Hjálpargrunn móti alkoholmisnýtslu". Einki at ivast í, at fíggjarstyrkurin úr hesum grunni til ávísar felagsskapir hevur havt týdning í arbeiðinum móti rúsdrekkanýtsluni.

Skal tað fyribyrgjandi arbeiðið móti rúsdrekkanýtslu mennast, og skulu hesir ymisku felagsskapir, sum gera eitt týdningarmikið arbeiði, fáa rúmari karm at virka undir, verður tað

neyðugt við størri játtan á fíggjarløgtingslógini framyvir.

Tá havt verður í huga, at "inntøkurnar" hjá landskassanum stavandi frá rúsdrekka eru uml. 30 mió. kr., so er einki órímiligt í, at upphæddin til nevnda "Hjálpargrunn" hækkar munandi.

Tí verður sett fram soljóðandi:

VI u p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum á komandi fíggjarløgtingslóg at hækka upphæddina til "Hjálpargrunn móti alkoholmisnýtslu" munandi. 2-0

Hvat hagtølum viðvíkir so sæst, at fyri t.d. 1989, varð samlaða nýtslan av øli, víni og spiritus ávikavist 2165000 l. 187000 l. og 266000 l.

Hesi tøl eiga sjálvandi at takast við størsta fyrivarni, tí sum kunnugt kemur ein rúgva av rúsdrekka, sum onganstaðni verður registrerað, inn í landið. Her verður hugsað um tær mongdir, sum ferðandi tollfrítt kunnu hava við sær. Hvussu stórar hesar mongdir eru, er kanska torført nágreiniliga at siga, men tá hugsað verður um talið av ferðandi, so man lítil ivi vera um, at talan helst er um fleiri 1000 l. árliga.

Í einum nýtsluavmarkandi rúsdrekkapolitikki er spurningurin, um tað ikki var rættast, at "hetta slagið av innfluttum rúsdrekka" koma undir somu toll- og avgjaldsreglur sum annað rúsdrekka, ið innflutt verður.

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) er ikki í iva, og setir tí fram soljóðandi

VII U p p s k o t

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum sum skjótast at gera neyðugar broytingar í tolllógini, soleiðis at alt rúsdrekka, ið "innflutt" verður, kemur undir somu tollreglur. 4-0

Hvat ætlaðu rúsdrekkalóg hjá samgonguflokkunum viðvíkir, víkir uppskotið so nógv frá galdandi lóg, at tingið eigur at loyva føroyska fólkinum at taka støðu í hesum máli, áðrenn eitt møguligt samtykt uppskot verður sett í verk.

Havast skal í huga, at fólkið áður hevur talað meir enn einaferð í hesum máli. Eisini tí vildi tað verið beinleiðis ein órættur móti landsins borgarum at framt ætlaðu broytingar - uttan at fólkið fyrst varð spurt eftir.

Í 1973 legði landsstýrið uppskot á ting um nýggja rúsdrekkalóg. Ætlan við hesi varð m.a. at geva loyvi til útskeinking og at seta á stovn einkarsølu.

Tá vóru broytingarnar ikki so víttgangandi sum tær, ið samgongan nú ætlar at seta í verk.

Uppskotið vann frama á tingi, men varð ongantíð sett í verk, tí tað fall við eini fólkaatkvøðu.

Undir 3. viðgerð av nevnda uppskoti vóru tvey uppskot um, at málið fór til fólkaatkvøðu.

Fyrra uppskotið var frá Agnari Nielsen, Hilmar Kass, Haldor Hansen og Hilmari Bech, meðan tað seinra kom frá J. Fr. Øregaard, Trygva Samuelsen, Hákun Djurhuus og Signari Hansen.

Sostatt tyktist breið semja í tinginum um, at fólkið átti at tala í hesum álvarsmáli!

Málið er ikki minni álvarsamt í dag, og setir tí minnilutin (Tordur J. Niclasen) fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

lógaruppskot hjá hinum minnilutunum

24, stk 5	24
Sum nýggj § 23, stk. 5, verður sett inn:	Som ny § 23, stk. 5 indsættes:
"Stk. 5. Áðrenn henda løgtingslóg verður sett í gildi við kunngerð landsstýrisins, skal hon við vanligum meiriluta verða samtykt við fólkaatkvøðu, sum landsstýrið skipar fyri og ásetir nærri reglur um."	"Stk. 5. Før denne lov sættes i kraft ved landsstyrets bekendtgørelse, skal den ved almindelig flertal være vedtaget ved folkeafstemning, som landsstyret forestår og udfærdiger nærmere regler for."

Loksins skal sigast, at minnilutin metir tað sum ein "brotasjógv" fyri føroysku tjóðina, um uppskot um ætlaðu broytingar samgonguflokkanna eins væl hinna flokanna vinnur frama og vónar tí, at uppskotini falla.

Hinvegin er sami minniluti sannførdur um, at munagóð tiltøk eiga nú at verða sett í verk til tess at minka um rúsdrekkanýtsluna her á landi, og vónar tí, at uppskot hansara vinna frama.

VÍÐKAÐA RÆTTARNEVNDIN, 11. februar 1992.

Jóannes Dalsgaard

Bjarni Djurholm

Birgir Dam Nielsen

Lisbeth L. Petersen


Signar Hansen

Helena Dam á Neystabø

Tordur Niclasen

3. SKJØL.

Skjal 1.


Mett alkoholtilgongd pr. íbúgva, alt fólkatalið og fólkatalið yvir 15 ár , l.
l_alk_pr_íb
Alk_pr_y15
0
1
2
3
4
5
6
7
8
9
51
53
55
57
59
61
63
65
67
69
71
73
75
77
79
81
83
85
87
89


Skjal 2.

Miðalfólkatalið, øl, vín og brennivín pr. íbúgva 1951-90


Ár	Miðal-fólka-tal	Miðal-fólkatal yvir 15	Alkohol l. pr. íbúgva	Alkohol l.pr. íbúgva yvir 15	Spiritus l. pr. íbúgv. yvir 15	Vín l.pr. íbúgv. yvir 15	Øl l.pr. íbúgv. yvir 15
51	32100	21635	1.8	2.6	3.2	0.4	18.6
52	32500	21905	1.2	1.9	2.3	0.5	12.4
53	32600	21842	1.2	1.7	2.1	0.4	11.4
54	32700	21648	1.2	1.7	2.4	0.5	9.3
55	32600	21581	1.2	1.8	2.3	0.6	11.5
56	32700	21091	1.2	1.9	2.9	0.8	8.1
57	33100	20820	1.4	2.3	3.4	0.8	10.6
58	33800	20685	1.5	2.4	4.0	1.0	8.5
59	34500	20562	1.2	2.1	3.1	1.0	9.4
60	34700	20101	1.1	1.9	2.9	1.0	7.4
61	35000	21175	1.4	2.3	3.4	1.7	8.3
62	35500	22401	1.6	2.5	3.7	1.4	11.7
63	35900	23622	1.7	2.5	3.7	1.4	11.3
64	36400	24898	1.8	2.7	3.8	1.3	13.0
65	37000	26257	2.3	3.3	4.5	1.2	19.2
66	37300	26469	2.3	3.2	4.6	1.4	16.4
67	37500	26363	2.5	3.5	4.8	1.4	19.1
68	38000	26448	2.5	3.6	4.7	1.6	21.8
69	38400	26457	2.6	3.7	4.4	1.4	25.8
70	38600	26343	3.0	4.4	5.0	1.4	33.0
71	38700	26548	3.2	4.7	4.6	1.7	40.9
72	38900	26802	3.8	5.6	5.5	2.1	47.3
73	39500	27334	3.9	5.6	5.9	2.4	44.1
74	40100	27870	3.7	5.3	5.7	2.9	39.0
75	40800	28983	3.4	4.8	5.5	3.8	31.5
76	41400	29021	3.6	5.2	5.7	4.7	33.6
77	41900	29479	4.1	5.9	6.7	4.4	38.0
78	42500	29995	4.3	6.1	6.9	4.4	38.3
79	43045	30589	4.0	5.6	6.6	3.9	32.6
80	43452	31038	4.3	6.0	7.7	4.6	33.3
81	43857	31590	4.4	6.1	7.4	4.3	41.3
82	44245	32176	4.3	5.9	7.1	3.7	42.8
83	44534	32670	4.7	6.4	7.6	3.9	46.7
84	45010	33349	4.5	6.1	6.6	3.0	51.4
85	45503	33928	5.3	7.1	8.9	4.0	51.4
86	45970	34444	5.0	6.7	7.4	3.8	54.3
87	46580	35012	6.1	8.1	9.9	5.1	58.0
88	47264	35573	5.7	7.5	9.5	4.1	62.0
89	47732	35928	5.2	6.9	7.4	5.0	60.8
90	47643	35963	5.0	6.7	8.0	5.2	56.0

Viðm.: Miðalfólkatalið er roknað sum miðalvirði av primo- og ultimofólkatalinum aftaná 1970. Áðrenn hetta er miðalfólkatalið eitt roknað fólkatal pr. 1. juli. Miðalfólkatalið yvir 15 ár er mett.
Kelda til fólkatøl: Framm til 1983, miðalfólkatøl frá Danmarks Statistik, eftir hetta eru tølini roknaði útfrá fólkatølunum frá Landsfólkayvirlitinum.

Skjal 3.


Tilgongd av rúsdrekka 1951-90, 1000 l.
2500
2000
1500
1000
500
0
Spiritus
Vín
Øl
51
53
55
57
59
61
63
65
67
69
71
73
75
77
79
81
83
85
87
89

Skjal 4.


Tilgongd af rúsdrekka , logaritmisk virði 1951-90
10000
1000
100
10
1
Spiritus
Vín
Øl
51
53
55
57
59
61
63
65
67
69
71
73
75
77
79
81
83
85
87
89

Skjal 5.

Tilgongd av rúsdrekka 1951-90

Ár	Spiritus 1000 l.	Vín 1000 l.	Øl 1000 l.
51	68	8	403
52	51	10	271
53	47	9	250
54	53	12	201
55	50	12	248
56	60	16	170
57	71	16	220
58	83	20	176
59	64	21	192
60	59	21	149
61	72	37	175
62	83	32	263
63	87	33	266
64	95	32	324
65	117	32	503
66	123	37	433
67	127	38	504
68	123	41	577
69	117	38	682
70	132	38	870
71	123	44	1085
72	148	56	1269
73	161	65	1205
74	159	82	1087
75	158	109	914
76	164	136	976
77	197	129	1121
78	208	131	1150
79	202	118	997
80	239	142	1033
81	234	136	1306
82	229	118	1378
83	248	129	1527
84	220	99	1715
85	302	137	1746
86	255	131	1869
87	345	178	2030
88	337	144	2207
89	267	180	2186
90	287	188	2014

Viðm.: Vín umfatar bæði borðvín og heitvín. Øl umfatar klassa I øl og sterkari øl, tó er útlendskt ljóst øl við, av tí at hetta tey fyrru árini ikki er útgreinað í innlfutnings-tølunum.

Kelda: Innflutningstøl og framleiðslutøl frá føroysku bryggjariunum.

Skjal 6.

Roknað tilgongd av alkoholi 1951-90 1000 l.

Ár	Spiritus alkohol	Vín alkohol	Øl alkohol	Alkohol tils.
51	31.2	0.6	24.0	56
52	23.3	1.2	16.0	41
53	21.4	1.0	15.0	37
54	24.2	1.4	12.0	38
55	23.0	1.6	15.0	40
56	27.6	1.9	10.0	40
57	32.5	2.0	13.0	48
58	37.8	2.6	10.0	50
59	29.3	2.7	11.0	43
60	27.0	2.7	9.0	39
61	32.9	4.9	10.0	48
62	37.9	4.2	15.0	57
63	39.8	4.3	16.0	60
64	43.4	4.2	19.0	67
65	53.5	4.2	29.0	87
66	56.2	4.9	25.0	86
67	58.1	4.9	29.0	92
68	56.2	5.0	34.0	95
69	53.5	5.0	40.0	99
70	60.4	5.0	51.0	116
71	56.2	5.7	63.0	125
72	67.7	7.4	74.0	149
73	73.6	8.5	71.0	153
74	72.7	10.8	64.0	148
75	72.2	14.3	53.0	140
76	75.0	15.8	57.0	148
77	90.1	14.0	66.0	170
78	95.1	14.3	70.4	180
79	93.6	12.5	61.7	168
80	109.4	17.7	59.8	187
81	107.3	16.8	68.2	192
82	103.5	14.5	71.4	189
83	113.2	15.9	78.7	208
84	100.9	12.2	88.7	202
85	135.5	16.7	90.3	243
86	117.2	15.4	96.6	229
87	159.2	21.0	104.7	285
88	137.1	17.3	112.9	267
89	118.1	21.1	110.3	250
90	116.5	22.1	100.9	240

Viðm.: Sí viðmerkingar til meting av alkoholtilgongdini

Skjal 7.

Viðmerkingar til meting av alkoholnýtsluni.

Henda metingin, gjørd við stuttum skotbrái, skal lesast við einum ávísum fyrivarni av tí at í fleiri av talrøðunum í metingini eru mett tøl. Hetta er galdandi fyri miðalfólkatalið og fyri partin av miðalfólkatalinum yvir 15 ár.
Alkoholprosentini eru ikki løtt at áseta fyri vørubólkar har vørur við ymsun alkholprosentum kunnu vera í og tungt hevur eisini verið at fingið fatur á nøkrum prosentsatsum sum vóru "offisiellir".
Nøkur ár hava beinleiðis feilir verið í innflutningstølunum, okkurt ári hevur innflutningurin bert verið uppgivin í tonsum osfr.
Hóast øll fyrivarni skuldi metingin givi eina mynd av hvussu gongdin í samlaðu alkoholtilgongdini hevur verið seinastu 40 árini.

Alkoholnøgdin í brennivíninum er beinleiðis uppgivin í innflutningstølunum fyri tey nógvu av teimum seinastu árunum. Tey árini har hon ikki er uppgivin er hon roknað av teimum ymisku brennivínssløgunum. Tey árini har brennivínssløgini ikki eru so útgreinaði, áðrenn 1978, er ein miðal prosentsatsur valdur fyri øll árini.

Alkoholnøgdin í vininum er fyri tey seinnu árini roknað við hesum prosentsatsum:

mousserende vin:	11 % vol.
bordvin:	11 % vol.
druevin hvis gæring er standset ved tils. af alk.:	14 % vol.
vermouth etc.	18 % vol.
annað vín.	9 % vol.

Hesir satsir eru mettir fyri bólkar, har fleiri sløg av víni, t.e. ymiskar alkoholstyrkir, kunnu vera í.
Fyri tey fyrru árini er á sama hátt sum við brennivíninum brúktur ein felags prosentsatsur fyri øll vínsløgini.

Alkoholnøgdin í ølinum er roknað útfrá umleið hesum satsum:

Klassi A:	5,8 % vol.
Klassi B:	7,5 % vol.
Klassi 1:	4,6 % vol.
Klassi 2:	2,7 % vol. (er roknað fyri tað útlendska øli)

Hesir satsir eru frá donsku bryggjaríunum og frá Føroya Bjór, tað kunnu sjálvsagt vera størri og minni frávik frá hesum satsum fyri summi sløg og tí er eisini ein ávís óvissa her.
Á sama hátt sum fyri víni og brennivíni er ein felags satsur nýttur fyri tey fyrru árini.

Skjal 8.

Tórshavn 10.04.91
J. Nr. 600-5/91
JH/pp

Tygara skriv

Føroya Løgting.

Løgtingsmál nr. 68/1990 Vetrarting: Løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka.

Kapittul 1

Lógarøkið, framleiðsla og innflutningur.

§ 1. Sum rúsdrekka eftir hesi lóg er at skilja allur løgur, sum hevur minst 2¼ vektprosent av alkoholi í sær.

Stk. 2. Sum rúsdrekka verður ikki roknað:

1) Løgur sum ikki er drekkiligur, og bert ætlaður til tekniska nýtslu ella kroppsrøkt.

2) Heilivágur sum bert er loyvdur apotekum at selja eftir apotekarlógávuni.

Stk. 3. Tjaldurs Apotekið hevur einkarætt til innflutning av denaturaðum spritti og spritti til tekniska

lagtingslov om indførsel og salg af berusende drikke.

Kapitel 1

Lovens område, produktion og import.

§ 1. Ved berusende drikke efter denne lov forstås alle vædsker, der indeholder mindst 2¼ vægtprocent alkohol.

Stk. 2. Som berusende drikke regnes ikke:

1) Vædsker der ikke er drikkelige, og kun er beregnet til teknisk brug eller til legemspleje.

2) Medicin som kun apoteker har tilladelse til at sælge i henhold til apotekslovgivningen.

Stk. 3. Tjaldurs Apotek har eneret til import af denatu-

Kapittul 2

Søla og útflyggjan.

§ 4. Einkarrætt at selja rúsdrekka hevur Rúsdrekkasøla Landsins.

Stk. 2. Rúsdrekkasøla Landsins kann eftir reglunum, sum landsstýrið ásetir, loyva føroysku bryggjaríunum at útflyggja egna framleiðslu.

Stk. 3. Undantikin frá stk. 1 eru personar og feløg, sum hava fingið loyvi til at skeinkja rúsdrekka eftir kap. 3 í hesi lóg.

Stk. 4. Feløg, ið selja rúsdrekka til limirnar, koma eisini undir reglurnar í hesi lóg. Tó ikki feløg, ið einans hava ársveitslur ella líknandi stakar veitslur fyri limunum.

§ 5. Søla og útflýggjan av rúsdrekka til persónar undir 18 ár er ikki loyvd.

Stk. 2. Útflýggjarin hevur skyldu at tryggja sær, at móttakarin lýkur aldurstreytina.

§ 6. Landsstýrið ásetir nærri reglur um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins.

Kapitel 2

Salg og udlevering.

§ 4. Enerett til at sælge berusende drikke har "Rúsdrekkasøla Landsins".

Stk. 2. "Rúsdrekkasøla Landsins" kan i henhold til bestemmelser fastsat af landsstyret give de færøske bryggerier tilladelse til at udlevere egen produktion.

Stk. 3. Undtaget fra stk. 1 er personer og selskaber/foreninger, der har fået tilladelse til at servere berusende drikke efter kap. 3 i denne lov.

Stk. 4. Selskaber/foreninger, der sælger berusende drikke til medlemmerne, er omfattet af bestemmelserne i denne lov. Dog ikke selskaber/foreninger, der kun har årsfester eller lignende enkelte fester for medlemmerne.

§ 5. Salg og udlevering af berusende drikke til personer under 18 år er forbudt.

Stk. 2. Den der foretager udlevering har pligt til at sikre sig, at modtageren opfylder aldersbetingelsen.

§ 6. Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser om organisation og drift af "Rús-

1) hevur fylt 25 ár og ikki er gjørdur ómyndugur,
2) hevur danskan heimarætt,
3) hevur bústað í Føroyum og
4) ikki hevur vist tílíka atferð, at orsøk er at halda, at hann ikki fer at reka virksemið forsvarliga.

Stk. 2. Verður útskeinkingarloyvi veitt einum felag, skal ein persónur, sum lýkur treytirnar í stk.. 1 hava ábyrgd av. at galdandi reglur og treytir verða hildnar.

§ 10. Landsstýrið ásetur í kunngerð nærri reglur um útskeinking av rúsdrekka, herundir um gjald fyri útskeinkingarloyvir.

§ 11. Hevur loyvishavari brotið reglurnar í hesi lóg, reglur ásettar við heimild í hesi lóg ella treytirnar í loyvinum, kann loyvisnevndin taka loyvið aftur. Sama er, um virksemið verður rikið á slíkan hátt, at tað elvir til drykkjuskap ella revsiverdar gerðir, og løgreglan frammanundan hevur ávarað loyvishavaran.

1) er fyldt 25 år, og ikke er umyndiggjort,
2) har dansk indfødsret,
3) har bopæl på Færøerne og
4) ikke har udvist sådan adfærd, at der er grund til at antage, at han ikke vil drive virksomheden på forsvarlig måde.

Stk. 2. Hvis en udskænkningstilladelse gives til et selskab/forening, skal en person, der opfylder betingelserne i stk. 1 have ansvaret for, at gældende bestemmelser og betingelser overholdes.

§ 10. Landsstyret fastsætter ved bekendtgørelse nærmere bestemmelser om udskænkning af berusende drikke, herunder om betaling for udskænkningstilladelser.

§ 11. Har bevillingshaveren overtrådt bestemmelserne i denne lov, bestemmelser fastsat med hjemmel i denne lov eller betingelserne i tilladelsen, kan bevillingsnævnet tilbagekalde tilladelsen. Det samme gælder, hvis virksomheden drives på en sådan måde, at den forårsager drukkenskab eller strafbare handlinger og politiet i forvejen har advaret bevillingshaveren.

uppslagi at tílíkt drekka fæst.

Stk. 5. Til at útskeinkja rúsdrekka mugu ikki setast fólk undir 18 ár, við undantak av kokka- og tænaralærlingum við sáttmála.

et alkoholfrie drikke. Det skal fremgå af prislister, vinkort eller klart læselige opslag, at sådanne drikke føres.

Stk. 5. Til udskænkning af berusende drikke må der ikke ansættes personer under 18 år, med undtagelse af kokke- og tjenerlærlinge med kontrakt.

Kapittul 4

Almennar ásetingar

§ 13. Í almennum restauratións- ella dansihølum er tað forboðið gestunum at njóta rúsdrekka, sum teir hava við sær. Á sjónskum staði í hølunum skal vera sligið upp, at hetta ikki er loyvt.

§ 14. Øll reklama í føroyskum fjølmiðlum og tíðarritum útbýting av reklamuseðlum o.t. viðvíkjandi sølu og útflýgging av rúsdrekka, er forboðin.

Kapitel 4

Særlige bestemmelser

§ 13. I offentlige restaurations- eller danselokaler er det forbudt gæsterne at nyde medbragt berusende drikke. På iøjnefaldende sted i lokalet, skal findes opslået, at dette ikke er tilladt.

§ 14. Al reklame i de færøske massemedier og tidsskrifter, uddeling af reklamesedler o.l. vedrørende salg og udlevering af berusende drikke, er forbudt.

Kapittul 5

Revsing

§ 15. Brot móti reglunum í § 2, stk. 1, §§ 3 - 5 og §§ 12-14 ella reglum ásettar við heimild í lógini ella treytum í loyvinum verður revsað við bót, hefti ella fongsul upp í eitt ár, um so er, at lóg-

Kapitel 5

Straf

§ 15. Overtrædelse af bestemmelserne i § 2, stk. 1, §§ 3-5 og §§ 12-14 eller bestemmelser fortsat med hjemmel i loven eller betingelser i tilladelsen straffes med bøde, hæfte eller fængsel

Stk. 4. Tíl lógin kemur í gildi í sini heild, fær landsstýrið heimild til at veita persónum og felagum, sum koma undir ásetingarnar í kap. 3, serloyvi til innflutning og keyp av rúsdrekka.

denne lov.

Stk. 4. Til loven træder i kraft i sin helhed, er landsstyret bemyndiget til at give personer og selskaber/foreninger der bliver omfattet af bestemmelserne i kap. 3, ekstrabevilling til import og køb af berusende drikke.

Viðmerkingar:

Endamálið við hesum lógaruppskoti, sum landsstýrið leggur fram, er mest møguligt at minka um teir skaðar, sum nýtslan av rúsdrekka hevur við sær fyri einstaklingin og fyri samfelagið og at fáa greiðar reglur í sambandi við rúsdrekkaviðurskiftini í Føroyum.

Uppskot til broytingar í rúsdrekkalóggávuni hava ofta verið fyri á tingi, og einar tríggjar ferðir hava uppskot um einkarinnflutning og einkarsølu verið frammi, men eingi av hesum eru framd.

Ymsar broytingar eru tó millum ár og dag gjørdar í sambandi við rúsdrekkaskipan okkara. Flestar hava havt sum mál at avmarka nýtsluna og gera tað truplari at fáa fatur á rúsdrekka. Men gongdin hevur í veruleikanum verið ein onnur.

Ásannast má, at skilið er vánaligt á hesum økinum í dag.

Rúsdrekkalóggávan er avlagað, tambað og toygd av bæði einstaklingum og myndugleikum, og tí er hon torfør ella rættari ógjørlig at umsita.

Tað, sum fer fram í dag í sambandi við rúsdrekka er ógvuliga óheppið fyri rættarhugsanina við tað, at tær lógir og reglugerðir, vit hava, ikki verða hildnar.

ger at tað ber til at fáa eina varna gongd við at kunna keypa rúsdrekka í landinum. Raksturin av Rúsdrekkasølu Landsins skal hvíla í sær sjálvum, umframt at peningur skal nýtast til fyribyrging og upplýsing.

ad. 3. Í lógaruppskotinum er skipanin við skamtanarkorti ikki tikin við. Orsøkin er, at henda skipan í dag ikki virkar skamtandi, tí tað vísir seg at um skamtanarkortið ikki røkkur til, ber altíð til at fáa so mikið rúsdrekka, sum tørvur er á.

ad. 4. Aldursmarkið at keypa rúsdrekka verður broytt til 18 ár, tí í dag eru 18 ára gomul myndug í øllum viðurskiftum.

ad. 5. Í nógv ár hevur verið tosað um at byggja upp eina restauratiónsvinnu í Føroyum, og er galdandi rúsdrekka-skipan ein av trupulleikunum hendan vinnan hevur. Eisini í sambandi við eina menning av ferðafólkavinnuni er víst á, at broytingar mugu gerast við loyvum til útskeinking.

Landsstýrið ásannar, at tørvur er á eini lóg um restauratiónsvirksemi. Farið verður undir at gera uppskot til slíka lóg.

Landsstýrið hevur í sambandi við fyrireikingarnar til hetta lógaruppskot, tosað við tey, sum kunnu hugsast at hava áhuga í málinum. Nevnast skal løgreglan, tey ið reka hotel- og restauratiónsvirksemi, bryggjaríini, avhaldsrørðsluna og Rúsdrekka- og Narkotikaráðið.

Hjálagt er skriv frá Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum.

Viðmerkjast skal, at fyriliggjandi lógaruppskot er broytt í mun til tað Rúsdrekka- og Narkotikaráðið hevur viðgjørt. Flestu broytingarnar eru í samsvar við uppskotini frá Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum.

Sambært lógaruppskotinum skal landsstýrið gera ymsar kunngerðir, m.a. reglur fyri raksturin av rúsdrekkasøluni, sølu og útskeink-

rúsdrekka til persónar undir 18 ár. Harafturat verður ásett, at útflýggjarin skal tryggja sær, at móttakarin er yvir 18 ár, og ásetir landsstýrið nærri reglur hesum viðvíkjandi, t.d. um krav um samleikaprógv við váttaðari andlitsmynd.

§ 6. Rúsdrekkasøla Landsins verður sjálvstøðugur stovnur undir landsstýrinum við egnum rakstrarstaði á fíggjarlógini.

Landsstýrið ger reglur um skipan og rakstur av stovninum, har m.a. verður fyriskipað:

- Landsstýrið setur leiðaran, sum mótvegis landsstýrinum hevur ábyrgd av fíggjarliga rakstrinum, skipan og uppbygging av einkarsøluni. Leiðarin setur neyðug starvsfólk.

- Stovnurin verður fíggjaður yvir raksturin.

- Tað áliggur stovninum at reka upplýsingarvirksemi til fyribyrgjan av rúsdrekkamisnýtslu.

- Um hvussu leingi og hvørjar dagar rúsdrekkasølan er opin.

- Reglur um hvussu útflýggjarin tryggjar sær, at aldursmarkið verður hildið.

- Reglur fyri útsølu av øli.

- Reglur um bert at selja kontant.

Í fyrstu atløgu verður eingin sølubúð. Fyrstu tíðina verður rúsdrekkasølan skipað sum postordrahandil. Tá 2 ár eru farin, verður skipanin endurskoðað við møguligari broyting í søluskipanini fyri eyga.

§ 7 ásetir, at loyvisnevndin, aftaná, at hava fingið ummæli frá myndugleikunum á staðnum, td. bygdaráðnum, gevur loyvi til persónar ella feløg sum reka hotel- ella restauratiónsvirksemi at skeinkja rúsdrekka fyri gestunum.

føroysku fjølmiðlunum, og er henda regla eisini galdandi í dag.

§ 15 ásetir revsireglurnar.

§ 16 sigur, at landsstýrið ásetir, nær lógin kemur í gildi. Landsstýrið ætlar fyrst at seta kap. 3 í gildi tá neyðugu kunngerðirnar eru klárar soleiðis, at lógin longu í komandi ferðamannatíð fæst at virka, tó í fyrstani soleiðis, at persónar og feløg, sum reka restauratiónsvirksemi fáa serloyvi til innflutning frá landsstýrinum, ella keyp av øli frá føroysku bryggjaríunum.

± skjal.

Marita Petersen
landsstýriskona

/ Jalgrím Hilduberg

RÚSDREKKA- OG NARKOTIKARÁÐIÐ
Deildin fyri Arbeiðs- og Almannahailsu
Sigmundargøta 5, 100 Tórshavn
Tlf. 16696 & Fax 19708

2. apríl 1991

Landsstýrið hevur í brævi dagfest 21. febr. 1991 heitt á Rúsdrekka- og narkotikaráðið, um at gera álit um samskipan av alkaholpolitikkinum í Føroyum. Ráðið er farið undir hetta arbeiðið, sum væntandi verður liðugt á heysti 1991.

22. mars 1991 hevur Føroya Landsstýri sent Ráðnum uppskot um løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka til ummælis. Ráðið hevur enn ikki greitt álitið um alkoholpolitikkin í Føroyum úr hondum, og kann tí ikki við vissu siga um fyriliggjandi lógaruppskot fer at verða í samsvar við álitið. Ráðið er tó samt um, at nýggj lóg á økinum eigur at hava slíkar karmar, at veruliga ber til at umsita lógina. Tí vil ráðið nú koma við hesum viðmerkingum til lógaruppskotið, eins og ráðið væntar at verða tikið við upp á ráð, tá kunngerðir við heimild í lógini verða gjørdar.

Í norsku lógini um "omsætning av alkoholholdig drikk m.v. af 2. juni 1989" stendur í grein 1:

> Lovens formål: Regulering av innførsel og omsetning av alkoholholdig drikk etter denne lov har som mål å begrense i størst mulig udstrekning de samfunnsmessige og individuelle skader som alkoholbruk kan innebære. Som et ledd i dette sikter loven på å begrense forbruket av alkoholholdige drikkevarer.

Ráðið heldur at føroyska lógin átti at havt líknandi endamálsgrein. Tað er vert at merkja sær, at í norsku endamálsgreinini stendur, at lógin skal avmarka ikki bert misnýtslu, men eisini nýtdslu av rúsdrekka.

Ráðið heldur at tørvur er á neyvum útgreiningum av ymsum hugtøkum sum t.d. "viðurlag", "veitingarstað", "veitingarvirksemi", "skeinkja", "útflýggja", "selja" og "fullur". Hetta fyri at gera tað møguligt at umsita lógina í verki.

Til tær einstøku greinirnar hesar viðmerkingar:

Grein 1 stk. 3: ikki eigur at standa "Tjaldurs Apotekið í Tórshavn", tí Apotekini í Klaksvík og á Tvøroyri eiga at hava sama rætt.

Grein 1 stk. 4: orðið "søla" eigur at verða útgreinað við nærri lýsing av hugtakinum "viðurlag", soleiðis at søla uppá borg ella líknandi ikki kemur fyri.

Grein 2 stk. 1: Til tess at gera tað lættari hjá løgreglu og tollvaldi at umsita lógina, eigur at verða umhugsað, at seta inn eitt triðja soljóðandi punkt: "At innflyta, selja ella gera drekkandi samansett tilfar ætlað til rúsdrekkaløg burturav".

Grein 2 stk. 2: Broytingaruppskot: "Landsstýrinum er heimilað at geva bryggjarium loyvi at bryggja rúsdrekka at selja gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins. Tað er ikki loyvt at bryggja øl, sum í sær hevur meira enn 4,6 vektprosent av alkoholi, og tað er ikki loyvt at framleiða annað rúsdrekka, sum í sær hevur meira enn 60 vektprosent av aikaholi". Hetta merkir, at øll søla verður frá Rúsdrekkasølu Landsins og at søla beinleiðis á bryggjarium ikki verður loyvd. Hin vegin kann farast undir framleiðslu av brennivíni í landinum.

Grein 2 stk. 3: Verður tískil broytt til: "Landsstýrið ásetur í loyvinum reglur um eftirlit við framleiðsluni av rúsdrekka".

Grein 3 stk. 1: Tað er umráðandi at stovnurin, ið er nevndur Rúsdrekkasøla Landsins, hevur reglugerð sum greitt sigur frá, at ein av uppávum stovnsins er at tálma rúsdrekkanýtsluni. Tað merkir, at natúrligt virkisemi hjá stovninum er at upplýsa um vandarnar við rúsdrekkanýtslu og hesum viðvíkjandi skjýtur Ráðið upp at Rúsdrekkasøla Landsins fær skyldu at fylgja tilmælum Ráðsins.

Rúsdrekka-og narkotikaráð eigur at verða sett á stovn við serstakari grein í hesi lóg.

Ráðið mælir annars til, at ein fastur partur av rúsdrekkasøluni fer til fyribyrgjandi virksemi, og møguliga eisini til viðgerð av rúsdrekkamisnýtarum.

Grein 3 stk. 2: Er "ferðandi" at skilja sum bæði ferðafólk og manning?.

Grein 3 stk. 3, broytingaruppskot: "Tað er ikki loyvt at innflyta øl sum í sær hevur meira enn 4,6 vektprosent av alkoholi, og rúsdrekka sum í sær hevur meir enn 60 vektprosent av alkoholi.

Grein 4 stk.1: Ráðið skjýtur upp, at talið av sølustøðum hjá Rúsdrekkasølu Landsins verður avmarkað til eitt fyri Vágarnar, eitt fyri Streymoynna, eitt fyri Eysturoynna, eitt fyri Norðoyggjarnar, eitt fyri Sandoynna og eitt fyri Suðuroynna.

Grein 4 stk. 3: Orðið "selja" eigur at verða "skeinkja" og at "til nýtslu í felagshølunum", verður skoytt uppí annan setning. Annar parturin av stk. 3 ið eitur: "Tó ikki feløg ið einans hava ársveitslur ella líknandi stakar veitslur fyri limunum", kann

tulkast tveir vegir og Ráðið mælir til, at hesin partur verður strikaður, tí øll føløg eiga at lúka treytirnar í kap. 3. Haraftarat skal Ráðið viðmerkja, at havast má í huga, í hvønn mun lóggávan er galdandi fyri donsk tænastustøð í Føroyum, (t.d. í Mjørkadali ella á Marinustøðini).

Grein 5: Aldursmarkið 18 ár er rímuligt, tí tá er ein persónliga myndigur. Álagt eigur at verða seljarum/útflýggjarum at krevja samleikaprógv við vællíknandi andlitsmynd, til tess at tryggja at aldursmarkið verður hildið.

Grein 5 stk. 2 annað punktum: Ístaðin fyri orðingina "kann áseta" eigur at standa "ásetur nærri reglur um útflýggjan av rúsdrekka".

Grein 6 stk. 1.: Skotið verður upp at lagt verður afturat;"Bert er loyvt at útflýggja gestum/limum rúsdrekka í opnaðum íløtum ætlað at drekka á staðnum".
Viðvíkjandi loyvisnevnd verður annars skotið upp, at loyvisdeild verður sett á stovn hjá løgregluni, sí annars viðmerkingar til grein 9 og 11.

Grein 6 stk 2.: Uppískoyti: "Ummælið skal eisini fevna um hølisviðurskifti, heilsuviðurskifti, umhvørvisviðurskifti v.m.".

Grein 7 stk. 1: Ráðið ivast í um punkt 2 "hevur danskan heimarætt" er í samsvar við rættin hjá útlendingum at dríva virksemi í Føroyum. Ráðið skjýtur upp at punkt 5 eitur "persónar sum arbeiða innan hetta økið skulu vera fyltir 18 ár".

Grein 8: Landsstýrið eigur at áseta reglur um skeinkingartíðir- "útskeinkingartíðir". Landsstýrið eigur at áseta hægsta mark av skeinkingarloyvum á sama hátt sum talið av sølustøðum , t.d. hægst 1 skeinkingarloyvi fyri hvørjar 1000 íbúgvar.

Grein 9. Ráðið mælir til ar "loyvisnenvndin" verður til " loyvisdeildin hjá løgregluni".

Í endanum á grein 9 um ávaring til loyvishavara eigur at standa: "løgreglan skrivliga frammanundan hevur ávarað loyvishavaran".

Grein 10 stk. 1, pkt. 2: Eigur ikki at verða við tí tað verður ómøguligt at umsita.

Grein 10 stk. 3: Skotið verður upp soljóðandi ískoyti "er loyvishavari ella tann í hansara staði vitandi um, at persónur ætlar at føra akfar, sjófar ella flogfar tá hann fer frá staðnum hevur loyvishavarin, ella tann sum er í hansara staði, skyldu at forða fyri hesum, ella boða løgregluni frá, um persónurin verður mettur so rúsaður, at hann ikki kann føra farið á tryggan hátt".

Grein 10 stk. 4: Her eigur at verða viðmerkt, at hugsað verður um alkoholfrítt vín og øl, sodavatn, kaffi og te.

Lars Holst

Olaus Jespersen

Torbjørn Mikkelsen

Jákup Nielsen

Gunna Thomsen var ikki á fundi.

Uni Vestureið

August G. Wang

Pál Weihe

Skjal XIX

LANDSLÆKNIN
CHIEF MEDICAL OFFICER
SIGMUNDARGØTA 5 · POSTSMOGA 5
FR-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
Tlf. + 298-11832

Telefax nr. + 298 1 76 60

Dagfesting 31. marts 1992

J. nr. 11-39-92
(Er skilla til í svari)

HDJ/js

Rættarnevd Løgtingsins
100 Tórshavn

Vísandi til fund í rættarnevndini 27.3. og skriv dagfest 28.3.1992 frá Jóannesi Dalsgaard, formanni í rættarnevndini skal eg eftir áheitan gera hesar viðmerkingar til løgtingsmál nr. 85/1991: Broyting í lóg um fosturtøku.

Í Føroyum er í løtuni galdandi lóggávan á hesum øki "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om foranstaltninger i anledning af svangerskab m. v.". Nevnda løgskipan setti í 1959 donsku lógina frá 1956 í gildi fyri Føroyar við broyting viðvíkjandi grein 3, 3. petti.

Til tess at lýsa støðuna viðvíkjandi tíðleikanum av fosturtøkum í Føroyum samanborið við onnur norðurlond verður vist til talvu 1.

Taka vit saman um viðvíkjandi tølunum í hesi talvu, so koma vit fram til, at í tíðarskeiðnum 1986 til 1989 (Finland undantikið, har tað bert snýr seg um 1986 og -87, av tí at hini tølini ikki eru tøk enn) vóru lógligar fosturtøkur pr. 1000 livandi fødd í umrødda tíðarskeiði í Danmark 361, í Finlandi 218, Íslandi 159, Noregi 282 og í Svøriki 330, meðan samsvarandi talið fyri Føroyar var 97. Vit siggja, at Føroyar liggja lægst av umrøddu londum, hvat ið viðvíkur tíðleikanum av lógliga framdum fosturtøkum, meðan Danmark og Svøriki liggja hægst, 3 til 4 ferðir hægri enn Føroyar

Upplýst kann verða, at í Danmark, Noregi og Svøriki er frí fosturtøka galdandi við ávísum avmarkingum, meðan talan ikki er um fría fosturtøku í Finlandi og Íslandi, eins og tað heldur ikki er í Føroyum.

Eg eri ongantíð í virki mínum sum landslækni ella á annan hátt komin fram á dømi, hvar ið galdandi lóggáva um fosturtøku í Føroyum ikki verður hildin.

Lagt kann verða afturat, at í Stóra Bretlandi er frí fosturtøka galdandi við ávísum avmarkingum, meðan so ikki er í Týsklandi. Í USA er lóggávan ymisk frá einum stati til annan.

Sambært umrødda uppskoti til samtyktar, har ið álagt skal verða landsstýrinum at fyrireika broyting í galdandi lóggávu viðvíkjandi fosturtøku í Føroyum og leggja fyri Tingið uppskot, sum einans loyvir fosturtøku, tá ið lív stendur ímóti lívi, so er fyrst at spyrja, hvør ið gera skal av, nær lív stendur ímóti lívi, og hvussu ið hetta skal gerast. Vit kunnu spyrja í hesum sambandi, um fosturtøka t.d. einans skal verða loyvd, tá ið móðurin við vissu doyr, um fosturtøka ikki verður framd, ella um fosturtøka

eisini skal loyvast, um tað t.d. eru eini 0,5 ella 5 % vandi fyri, at móðurin doyr. Eisini skal verða viðmerkt, at sambært uppskotinum so ger tað ongan mun, um lívlangt, álvarsamt avlamni hjá móðurini møguliga kann standast av, at fosturtøka ikki verður framd.

Uppskotið gevur ikki møguleika fyri fosturtøku hjá kvinnum, ið eru vorðnar við barn orsakað av neyðtøku.

Ei heldur fáa eitt nú tær, ið smittaðar verða av reyðlingum fyrstu 4 mánaðarnar møguleika fyri fosturtøku. Reyðlingar tíðliga í barnsburðinum kunnu sum flestum kunnugt geva sera álvarsom brek hjá fostrinum.

Tað verður í stóran mun mett sum eitt alment loyndarmál, at føroyskar kvinnur sum er í ávísan mun leita sær til Danmarkar at fáa gjørt fosturtøku. Nøkur tøl hava vit tó ikki tøk um, ið hvussu stóran mun hetta verður gjørt. Men vit vita, at tað í Danmark - áðrenn lógin um fría fosturtøku við ávísum avmarkingum var sett í gildi í 1973 - var eitt kent hugtak, at skipað varð fyri fosturtøkuferðum til Onglands og Póllands.

Verður føroyska lógin skerpt, so er lítið at ivast í, at føroyskar kvinnur í størri mun enn nú fara at leita uttanlands at fáa framda fosturtøku.

Ein orsøkin til, at danska lóggávan viðv. fosturtøku stigvist varð gjørd frælsari var - umframt støðugt vaksandi krav frá kvinnum í Danmark -, at sonevndu "illegalu abortarnir" ella ólógligu fosturtøkurnar, framdir undir ringum umstøðum og av fólkum, ið kanska ikki vóru læknar, so fóru at minka og harvið eisini heilsuvandarnir, ið stóðust av hesum fyri kvinnurnar.

Fortreytin fyri øllum tjaki um fosturtøku eigur eftir mínum tykki at byggja á tað grundsjónarmið, at so fáar eiga at verða framdar sum gjørligt, men at lóggávan eigur ikki at verða so strong, at at siga einki undantak kann verða loyvt.

Í viðmerkingunum stendur, at Etisk Ráð í virki sínum byggir á ta fortreyt, at mannalív byrjar í gitingini. Eftir umrødda uppskoti til samtyktar skal sum nevnt fosturtøka einans verða loyvd, tá ið lív stendur móti lívi. Hetta má so merkja, at fyribyrgjandi evni snyril má bannast. Eg havi ikki talið á kvinnum, ið nýta hetta slag av fyribyrging í Føroyum, men ein partur ger tað so.

Til kunningar verður annars hjálagt ljóstak av bls. 54 - 55 úr bókini Health Statistics in the Nordic Contries 1966-91 um umrødda spurning og av íslendsku lógini um fosturtøku.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður m.a. sagt, at fosturkanningar eiga at verða bannaðar í Føroyum. Í hesum sambandi skal verða sagt, at millum tær fosturvatnkanningar, ið síðani 1983 eru framdar í Føroyum, so hevur eingin havt ta avleiðing enn at fosturtøka er gjørd. Mær tykir tað galið at banna fosturvatnkanningar, av tí at hesar hjá ávísum fólkum og í ávísum aldursbólkum kunnu geva foreldrum, ið kanska himprast við at fáa

sær børn, eitt nú orsakað av vandanum fyri álvarsomum arvaligum brekum ella øðrum sjúkum, møguleikan fyri at fáa børn uttan óvissu um slík møgulig álvarsom brek hjá barninum.

Niðurstøða:

Vit hava lægsta talið av lógligum fosturtøkum í norðurlondum. Talið á lógligum fosturtøkum í Føroyum hevur verið at siga óbroytt seinastu 8 árini.

Vit hava ikki fríða fosturtøku í Føroyum, og einki er, .ið bendir á, at lógin ikki verður hildin.

Við tí, ið omanfyri er borið fram, verður mælt frá, at broytingar verða gjørdar viðvíkjandi lóggávu um fosturtøku í Føroyum, ið hvussu er ikki soleiðis, at hon verður skerpt.

Høgni Debes Joensen
landslækni

Lógligar fosturtøkur í Norðurlondum

	Tal á fosturtøkum	Fosturtøkur pr 1000 livandifødd
Danmark		
1981-85	21 139	403
1986	20 067	363
1987	20 830	371
1988	21 199	360
1989	21 456	349
Finland		
1981-85	13 764	212
1986	13 300	219
1987	12 915	216
Ísland		
1981-85	670	160
1986	685	177
1987	695	166
1988	673	144
1989	670	147
Noreg		
1981-85	13 931	275
1986	15 474	295
1987	15 422	285
1988	15 852	276
1989	16 208	273
Svørik		
1981-85	31 701	337
1986	33 124	326
1987	34 707	332
1988	37 585	335
1989	37 920	327
Føroyar		
1983	69	103
1984	83	119
1985	85	115
1986	79	100
1987	77	99
1988	75	87
1989	95	102
1990	81	86

Skjal XX

Til:
FØROYA LANDSSTÝRI
att. J. Hilduberg
Postboks 64
FR-110 Tórshavn

Tórshavn, tann 09. des. 1991

Viðvíkjandi "Lov om produktansvar".

Vísandi til áheitan Landsstýrisins, dagfest 22/10 1991, J.nr. 615-1/91, um ummæli til omanfyri nevndu lóg, metir Arbeiðseftirlitið, at lógin ikki er ímóti verðandi og ætlaðu arbeiðsumhvørvisreglum fyri Føroyar. Tvørturímóti meta vit tað bæði rímuligt og neyðugt at áseta fastar reglur á hesum øki.

Each Party may require that fishing in its area of fisheries jurisdiction by fishing vessels of the other Party shall be subject to licence. The competent authority of each Party shall, as appropriate, communicate in due time to the other Party the name, registration number, and other relevant particulars of the fishing vessels which shall be eligible to fish within the area of fisheries jurisdiction of the other Party. The second Party shall thereupon issue such licences in a manner commensurate with the possibilities for fishing granted under the provisions of Article 2(b).

Article 4

1. Fishing vessels of one Party shall, when fishing within the area of fisheries jurisdiction of the other Party, comply with the conservation measures and other terms and conditions established by that Party and with the rules and regulations of that Party in respect of fisheries.

2. Appropriate advance notice shall be given of any new terms, conditions, laws or regulations.

Article 5

1. Each Party shall take all necessary measures to ensure compliance with the provisions of this Agreement and other relevant regulations by its vessels.

2. Each Party may take within its area of fishing jurisdiction such measures, in conformity with international law, as may be necessary to ensure compliance with the provisions of this Agreement by vessels of the other Party.

Article 6

The Parties undertake to cooperate to ensure proper management and conservation of the living resources of the sea, and to facilitate the necessary scientific research in this respect, both bilaterally and through appropriate international bodies, particularly in relation to stocks of common interest occurring in areas within the fisheries jurisdiction of either Party and in the areas beyond and adjacent to such areas.

Article 7

The Parties agree to consult on questions relating to the implementation and proper functioning of this Agreement.

In the event of a dispute concerning the interpretation or application of this Agreement, such a dispute shall be the subject of consultations between the Parties.

Article 8

Nothing in the present Agreement shall affect or prejudice in any manner the views of either Party with respect to any question relating to the Law of the Sea.

Article 9

The Parties shall assist in fisheries cooperation between interested organizations, cooperatives and companies in cases, where there is a mutual interest.

Article 10

The present Agreement shall apply, on the one hand, to Lithuania and, on the other hand, to the Faroe Islands.

Article 11

This Agreement shall enter into force on the date on which the Contracting Parties notify each other of the completion of the procedures necessary for this purpose. Pending its entry into force it shall be applied provisionally with effect from 3rd March 1992.

Article 12

This Agreement shall remain in force for an initial period of 5 years after the date of its entry into force. In the event of the Agreement not being terminated by either Party through notice of termination given at least nine months before the expiry of that period, it shall remain in force for additional periods of 2 years' duration thereafter, provided that notice of termination has not been given at least six months before the expiry of any such period.

Article 13

This Agreement is drawn up in three copies in the Faroese, Danish and Lithuanian languages, each of these texts being equally authentic.

Agreed Record of Fisheries Consultations between The Faroe Islands and Lithuania Vilnius 3rd March 1992.

1. A delegation representing the Fisheries Authorities of the Faroe Islands, headed by Director of Fisheries, Kjartan Hoydal, and a delegation representing the Authorities of Lithuania, headed by Deputy Minister of the Ministry of International Economic Relations, Vytautas Gricius, met in Vilnius on 3rd March 1992 for consultations on mutual fisheries in 1992.

The participants in the two delegations are named in the ./. Annex.

2. The Delegations took note of the ongoing negotiations on a Framework Agreement between The Government of Denmark and the Home Government of the Faroe Islands on the one hand and the Lithuanian Government on the other hand on mutual fisheries relations between The Faroe Islands and Lithuania, and of the intention of the Parties to conclude such agreement as soon as practically possible.

3. With this in mind, the Delegations have agreed to recommend to their competent authorities the following arrangement for mutual fishing in 1992 :

a. The Faroese Authorities will grant a quota of 6000 tonnes of blue whiting for Lithuanian vessels. Included in these 6000 tonnes a by-catch of mackerel up to 10 % will be allowed. These 6000 tonnes will be granted in exchange for the quotas mentioned in 3. b and taking into account the special difficulties faced by the Lithuanian fishing industry trying to adapt to changed circumstances and the very depressed state of the Baltic cod resource.

b. The Lithuanian Authorities will grant the following quotas for Faroese vessels:

550 tonnes of cod

200 tonnes of herring

10 tonnes of salmon

c. The number of Lithuanian vessels licensed to fish in Faroese waters shall be 6 on the basic list and 4 present any time.

The number allowed to fish simultaneously in the "main fishing area of blue whiting", which may be established by the Faroese autorities: 2.

d. The number of Faroese vessels licensed to fish in Lithuanian waters shall be 8.

e. The vessels which on 31st December 1991 had a licence to fish in the waters of the other Party shall be regarded as having such licence for the rest of 1992 unless a change is requested by either Party.

f. Both Sides will as soon as possible inform the other Side of the applicable rules for the fishing conducted by the other Side in its waters.

4. The Delegations agreed to recommend to their authorities to facilitate co-operation between their respective commercial fisheries sectors. In the context of such co-operation, additional allocations of blue whiting for Lithuanian vessels in Faroese waters may be considered.

5. The Parties shall notify oneanother as soon as their competent authorities have decided upon the implementation of the arrangements agreed under Article 3.

Vilnius, 3rd March 1992

For the Fisheries Authorities of the Faroe Islands:

Kjartan Hoydal

For the Authorities of Lithuania:

Vytautas Gricius

Annex

Fisheries consultations between The Faroe Islands and Lithuania, in Vilnius, 3rd March 1992.

Delegation representing The Faroe Islands:

Kjartan Hoydal	Director of Fisheries, Faroese Home Government.
Ulla Wang	Head of section, department of Fisheries
Árni Olafsson	Councellor on Faroe Islands Affairs, Danish Ministry of Foreign Affairs.
B. Dan Nielsen	Ambassador of Denmark in Lithuania.

Agreed Record of Conclusions of Negotiations on a Framework Agreement on Mutual Fisheries between Lithuania and the Faroe Islands
Vilnius, 3rd March 1992

---

1. On 3rd March 1992 a delegation representing the authorities of Denmark and of the Faroe Islands and a delegation representing Lithuanian authorities met in Vilnius for negotiations on a framework agreement between the Government of Denmark and the Home Government of The Faroe Islands of the one Part and the Government of Lithuania of the other Part on Mutual Fisheries between The Faroe Islands and Lithuania.

./. A list of the two delegations is attached in the Annex.

2. The delegations agreed upon the wording of the attached initialled text, which they will recommend their respective governments to prepare for signing as soon as practically possible.

For the delegation representing Lithuania:

Vytautas Gricius

For the delegation representing Denmark and the Faroe Islands:

Árni Ólafsson

Kjartan Hoydal

Annex

Negotiations between a delegation representing The Government of Denmark and the Home Government of The Faroe Islands and a delegation representing the Authorities of Lithuania, concerning a framework agreement on mutual fisheries between the Faroe Islands and Lithuania, Vilnius 3rd March 1992.

Delegation representing The Government of Denmark and the Home Government of The Faroe Islands:

B. Dan Nielsen,	Ambassador of Denmark in Lithuania.
Árni Olafsson	Councellor on Faroe Islands Affairs, Danish Ministry of Foreign Affairs.
Kjartan Hoydal	Director of Fisheries, Faroese Home Government.
Ulla Wang	Head of section, department of Fisheries of the Faroese Home Government.

List of Lithuanian delegation

Vytautas Gricius	- Deputy Minister of Ministry of ~~Foreign~~ Economic Relations of Lithuania
Algirdas Rusakevičius	- Deputy Minister of Ministry of Ariculture of Lithuania
Bronius Bradauskas	- Deputy Director General Enviromental Protection Departament of Lithuania
Algirdas Domarkas	- Director Fishery management and pisciculture Agency Enviromental Pratection Departament of Lithuania
Bernardas Krištanavičius	- Director General of Lithuanian Fishery Fleet State plant
Kęstutis Jaskutėlis	- First secretary of Departament International Treaties (Agreement Ministry of Foreign Affairs of Lithuania
Saulius Katuoka	- Head of Constitutional Law Department Academy Police of Lithuania
Algimantas Šinkus	- Deputy Director of Fisheries Department of Ministry of Agraculture of Lithuania
Bronius Rudzinskas	- Assistant Chief of Lithuanian Fishing Fleet State Plant

Skjal XXIX

Føroya Landsskjalasavn - nýggj lóg

Frágreiðing frá nevnd sett at gera uppskot til nýggja lóg um Føroya Landsskjalasavn.

INNIHALDSYVIRLIT

	Síða
1. Samandráttur	1
1.1 Setningur og arbeiðsgongd	1
1.2 Tørvur á nýggjari lóggávu	2
2. Endamálið við at varðveita savnindi	4
2.1 Skjalasøvn - ein fortreyt fyri rættartrygdini	4
2.2 Skjalsøvn - ein kunningarkelda	4
2.3 Dagsins skjøl - morgindagsins søguligu heimildir	6
2.4 Nýggj tøkni innan fyrisiting og skrivstovuvirksemi	7
3. Føroya Landsskjalasavn	8
3.1 Eitt stutt søguligt yvirlit	8
3.2 Søvn á Landsskjalasavninum	11
Uppskot til løgtingslóg um Føroya Landsskjalasavn	13
Viðmerkingar til einstakar fyrisetingar	24
Til bólk I	24
Til bólk II	24
Til bólk III	25
Til bólk IV	26
Til bólk V	30

Fylgiskjøl.

Skjal 1: Aftale mellem Statsministeriet og Færøernes Landsstyre om statens arkivalier på Færøerne.

Skjal 2: Søvn á Landsskjalasavninum.

Skjal 3: Løgtingslóg um landsbókasavn v.m., 2.mai 1952.

Skjal 4: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsbókasavn v.m., 9.apríl 1964.

1. SAMANDRÁTTUR:

1. 1. Setningur og arbeiðsgongd

Tann 4. august 1988 samtykti Landsstýrið at seta nevnd við tí setningi at gera uppskot til nýggja lóg um Føroya Landsskjalasavn og virksemi tess. Nevndin fekk hendan arbeiðssetning:

> "at gera uppskot til lóg um Føroya Landsskjalasavn við hesum endamáli:
>
> 1. At tryggja at skjøl hjá tí almenna verða varðveitt á tryggan og skilagóðan hátt, meðan tey enn eru í nýtslu hjá fyrisitingini.
>
> 2. At varðveita tey skjøl, sum fyrisitingin, lóggávuvaldið og dómsvaldið ikki nýta í dagliga virkseminum og soleiðis tryggja privat og almenn rættarárhugamál.
>
> 3. At varðveita og røkja tann søguliga og siðsøguliga mentunararv, sum skjølini umboða.
>
> 4. At granska hetta tilfar og veita granskingini ta tænastu, sum sømir seg einum nútímans tjóðskjalasavni.
>
> 5. At tryggja at týðandi pappír, handrit og skjøl hjá privatum - einstaklingum eins og fyritøkum, verða varðveitt í landinum."

Í nevndina vórðu vald Johan Djurhuus, skrivstovustjóri, Inger Christiansen, fulltrúi og Jóannes Dalsgaard, landsskjalavørður, ið varð tilnevndur formaður av landstýrinum. Hjørdis Trónd, umsitingarleiðari á Landskjalasavninum, varð somuleiðis av landstýrinum sett sum skrivari hjá arbeiðsnevndini.

Nevndin hevur havt 20 fundir og nevndin hevur kannað galdandi lóggávu á økinum, rættarreglur og skjalasavnslóggávuna í flestu grannalondum okkara. Eisini hevur nevndin kannað ta fyristingarligu siðvenju, sum er grundarlagið undir virksemi landsskjalasavnsins og

viðurskifti savnsins við stovnar og almenning.

1. 2. Tørvur á nýggjari lóggávu

Nevndin hevur gjøgnumgingið galdandi lóggávu og siðvenju í sambandi við virksemið hjá landsskjalasavninum og skjalagoymslum hjá almennum stovnum, og heldur nevndin tørv vera á nýggjari lóggávu. Hetta stendst fyrst og fremst av, at almenna fyrisitingin er nógv vaksin, síðan lóg um Føroya Landsbókasavn, ið eisini fevnir um landsskjalasavnið, varð samtykt í 1952. Eisini eru gransking og vísindi nógv ment síðan 1952. Harvið er tørvurin á atgeingi til kunningartilfar um føroysk viðurskifti nógv vaksin í hesum skeiði.

Tørvur er eisini á meira nágreiniligum reglum fyri dagliga rakstri landsskjalasavnins og fyri journalisering og arkivering hjá almennum stovnum. Av hesum orsøkum er tað átroðkandi at skipa viðurskiftini millum landsskjalasavnið og almennu stovnarnar við formligum og skrivaðum reglum.

Í sambandi við, at landsstýrið og ríkismyndugleikarnir hava skrivað undir sáttmála um skjalasøvn danska statsins í Føroyum, verður eisini neyðugt við skrivaðum rættarreglum fyri avhendingum, eftirliti og atgeingi til nýtslu av skjølum.

Nevndin er samd um at mæla til uppskot til løgtingslóg, ið nærri fastleggur endamál og skipan landsskjalasavnsins, viðurskifti landskjalasavnsins við almennu stovnarnar, atgeingi at skjalatilfari og viðurskiftini viðvíkjandi privatum skjølum.

Nevndin mælir í lógaruppskotinum til, eins og gjørt er í fleiri av grannalondum okkara, at lýsa skjalasøvnini sum part av menuntararvinum, ið eigur at verða varðveittur av kunningarligum, mentunarligum og rættarligum orsøkum.

Eisini mælir nevndin til, at landsskjalasavnið skal hava eftirlit við skjalasøvnunum hjá almennum stovnum og annars ráðgeva teimum í spurningum um málsgerð (sagsdannelse) og í varðveitingarspurningum sum heild, herundir hvussu teir best innrætta sínar skjalagoymslur. Víðari mælir nevndin til, at eisini skjøl hjá kommununum koma undir lóg um landsskjalasavn og, at landskjalasavnið eigur at savna inn skjøl hjá privatum fyritøkum og einstaklingum.

Viðvikjandi tørvinum á skrivaðum rættarreglum fyri dagliga virksemi landsskjalasavnins, viðurskifti savnsins við lands- og ríkisstovnar v. m. mælir nevndin til, at hesi viðurskifti verða skipað við kunngerðum, reglugerðum og rundskrivum.

Spurningurin um atgeingi at savnindum, ið eru avhend landsskjalasavninum, er ein sera átroðkandi spurningur. Avtalan millum landsstýrið og stjórnina um, at savnindi hjá ríkisstovnum skulu avhendast landsskjalasavninum ger tað neyðugt, at somu atgeingireglur verða at galda í Føroyum sum í Danmark. Orsøkin til hetta er, at somu savnindi og einstøk skjøl í ávísan mun eru at finna í søvnunum hjá bæði lands- og ríkisstovnum. Donsku reglurnar, soleiðis sum tær eru orðaðar í uppskoti til fólkatingslóg um skjalasøvn, eru liberaliseraðar í mun til galdandi reglur. Sama mælir nevndin til at gera við føroysku reglurnar um atgeingi. Eins og gjørt er í danska lógaruppskotinum eru undantøk gjørd, og fyrivarni tikin til tess at tryggja almenn áhugamál og til tess at verja privat viðurskifti hjá tí einstaka. Víst verður annars til viðmerkingarnar til bólk IV í lógaruppskotinum.

2. ENDAMÁLIÐ VIÐ AT VARÐVEITA SAVNINDI

2. 1. Skjalasøvn - ein fortreyt fyri rættartrygdini

Skjalasøvnini eru samfelagsins minni. Skjalassøvnini eru vorðin til sum ein partur av fyrisitingini gjøgnum øldir. Síðan ein miðsavnað ríkisfyrisiting spakuliga vaks fram frá 1600-talinum, hevur tað verið neyðugt at festa ikki bert lógir, men eisini fyrisitingarligar avgerðir, dómar og virksemi myndugleikanna á blað. Henda siðvenja, ið er galdandi fyri øll rættarsamfeløg, hevur verið og er ein fortreyt fyri, at myndugleikarnir kunnu skjalprógva síni rættindi og sínar avgerðir mótvegis vinnulívi og borgarum.

Henda siðvenja fyri eini skrivligari og skjalfestari fyrisiting er samstundis ein fortreyt fyri rættartrygd borgaranna ella v.ø.o. ein fyritreyt fyri, at borgarin til eina og hvørja tíð skal kunna skjalprógva sín rætt mótvegis myndugleikunum og øðrum medborgarum.

2. 2. Skjalasøvn - ein kunningarkelda

Sum samfelagsgongdin hevur verið tey seinastu hundrað árini, er mongdin av skjølum, sum eru vorðin til í fyrisitngarligum høpi, vaksin nógv. Henda gongd hevur eyðkent viðurskiftini í øllum nútímans samfeløgum.

Tær upplýsingar, sum eru at finna í einum skjali ella einum savnindum, eru av einum øðrvísi slagi ella náttúru enn tað, sum finnst í bókum ella bløðum. Eitt skjal verður sum oftast til sum liður í viðgerðini av einumhvørjum máli. Skjalið er vanliga partur av eini røð av skjølum, sum hvørt sær kanska ikki eru so upplýsandi, men sum samlað kunnu siga nógv um eitt mál og um teir spurningar, ið málið snýr seg um, hvussu málið er íkomið sum heild, og hvussu tað er vorðið viðgjørt. Skjalasøvn eru soleiðis keldur til kunningar, og upplýsingarnar liggja so at siga í tveimum løgum. Í fyrsta lagi er talan um tær upplýsingar, sum hvørt einstakt skjal

goymir. Í øðrum lagi er talan um tann kunnleika, sum skjalasavnið sjálvt gevur um mál, málsviðgerð og grundarlagið undir einihvørji avgerð hjá lóggávuvaldi, fyrisiting ella dómsvaldi.

Men eitthvørt skjalasavn hjá stovni er annað og meira enn ein liður í einihvørjari fyrisitingarligari málsviðgerð. Savnið er samstundis ein heimild hjá samtíðar og framtíðar granskarum til so at siga øll sløg av vísindum - tað veri seg búskaparlig, samfelagslig, náttúruvísindalig, søgulig ella siðsøgulig vísindi. At varðveita skjøl hjá tí almenna er tí ikki bert góð og ábyrgdarfull fyrisitingarlig siðvenja - tað er eisini ein spurningur um mentunarpolitikk. Tað er hetta, hugsað verður um, tá tikið verður til, at dagsins savnindi eru framtíðarinnar heimildir.

Út frá hesum heldur nevndin, at tað er samfelagsins uppgáva at tryggja samtíð og eftirtíð so dygdargott og so væl umboðað heimildartilfar sum til ber. Tað hevur tí stóran mentanarligan týdning, at skjalasøvn hjá tí almenna eins væl og hjá privatum verða varðveitt og røkt á ein slíkan hátt, at tey eru atgeingilig og nýtilig so langt inn í framtíðina, sum til ber. Nevndin heldur tí, at varðveitsla av teimum skrivaðu heimildunum, sum skjalasøvnini goyma, eigur at verða javntsett við røkt og verju av øðrum mentanarvirðum sum t. d. fornminnum, bókmentum og list. Nevndin er sannførd um, at henda uppgáva, sum frá líður, fer at seta alt størri krøv til varðveiting, skráseting og atgeingi, av tí at samfelagið er í støðugari menning og tí, at so nógvar broytingar eru hendar og framvegis fara at henda.

Nevndin skal eisini vísa á, at heimildartilfarið fyri eftirtíðini kemur at geva eina skeiva mynd av viðurskiftunum frá eini og hvørjari tíð, um bert skjølini hjá almennum myndugleikum verða varðveitt og tryggjað fyri eftirtíðina. Privata vinnulívið, einstaklingar og felagsskapir skapa

eisini stórar mongdir av skjølum á ymiskum miðlum. Hesi skjøl eru, eins og almenn skjøl, sera týðandi heimildir til nógv ymisk samfelagsviðurskifti, sum kanska ikki verða lýst í tí heimildartilfari, sum stavar frá almennum stovnum.

Av hesi orsøk heldur nevndin tað vera eina sjálvsagda uppgávu hjá landsskjalasavninum at savna skjøl og handrit hjá privatum, men nevndin heldur tað ikki vera beint beinleiðis at áleggja privatum somu avhendingarskyldu, sum almennir stovnar hava. Heldur mælir nevndin til, at landskjalasavninum verður álagt at skráseta týðandi privatsøvn og tryggja, at tær upplýsingar, ið hesi søvn goyma, verða verandi í landinum.

2. 3. Dagsins skjøl - morgindagsins søguligu heimildir

Tað er nevnt frammanfyri, at tey skjøl, sum í dag verða til í fyrisitingini, eru at meta sum heimildir til mestsum øll viðurskifti á okkara døgum. Hetta merkir við øðrum orðum, at tað tilfar, sum verður goymt til eftirtíðina, verður varðveitt á ein slíkan hátt, at tey eru nýtilig eisini eitt nú um 50 ella 100 ár. Við teimum stóru mongdum av skjølum í huga, sum ein nútímans fyrisiting skapar, er neyðugt við nágreiniligari skráseting av dagliga virkseminum hjá almennum stovnum og við yvirlitum yvir skjalagoymslurnar hjá teimum einstøku almennu stovnunum. Tað er við øðrum orðum neyðugt at hava eina fasta journaliserings- og skjalagoymsluætlan. Hesar skipanir eiga at vera so væl innrættaðar, at tær ikki bert eru eitt amboð hjá fyrisitingini í dag, men tær skulu eisini kunna nýtast av eftirtíðini - granskingini - sum leitingarlykil til skjalasavnið hjá hvørjum einstøkum almennum stovni. Bert fáir almennir stovnar lúka hesar treytir í dag. Tað verður tí mælt til, at landsskjalasavnið, eins og líknandi stovnar í okkara grannalondum, skal verða ráðgevandi hjá almennum

stovnum í journal- og goymsluspurningum. Mælt verður eisini til, at landsskjalasavnið verður eftirlitsmyndugleiki við journalskipanum og skjalagoymslum stovnanna, meðan savnindini enn eru í varðveitslu hjá viðkomandi stovni.

2.4. Nýggj tøkni innan fyrisiting og skrivstovuvirksemi

Nýggja tøknin innan fyrisiting og skrivstovuvirksemi verður stundum hildin at gera tørvin á skjalagoymslum minni. Tað verður eisini ført fram, at nýggja tøknin verður at føra til eina pappírsleysa fyrisiting. Royndir úr útheiminum vísa, at tað er beint tvørturímóti. Hóast EDV og ETV tøkni, magnetbond, skannarar og ymsisk sløg av mikrofilmum og mikrokortum vinna alt meira fram innan almennu fyrisitingina, so veksur pappírsmongdin tilsvarandi. Hetta stendst av, at hóast alla nútímans tøkni, so hevur eingin miðil higartil kunnað avloyst útskrivtir á pappíri av einumhvørjum slagi í vanligari fyrisitingarligari málsviðgerð.

Hinvegin er eingin ivi um, at nýggja tøknin lættir munandi um í øllum vanligum fyrisitingarligum arbeiði. Men, sum nevnt, vísa royndir í teimum londum, sum eru komin longst við sokallaðari "pappírsleysari" fyrisiting, at tørvurin á skjalagoymslum er minst líka stórur sum við vanligari fyrisiting av tí "gamla" slagnum.

Men nýggja tøknin skapar ein álvarsaman trupulleika í samband við, at upplýsingarnar einaferð í framtíðini skulu nýtast í øðrum samanhangi enn fyrisitngarligum - eitt nú við granskingarendamáli. Her vísa royndirnar úr øðrum londum, at trupulleikar taka seg upp við tað, at tøknin sjálv broytist so skjótt, at eftir fáum ártíggjum eru tól ikki tøk, ið kunnu lesa tær upplýsingar, ið eru goymdar á teimum ymsu miðlunum. Hesi viðurskifti eru longu nú við at geva vísindinunum um allan heim trupulleikar. Roynt verður á ymsan hátt at vinna á hesum trupulleikum, men best er at

fyribyrgja, at teir yvirhøvur stinga seg upp. Hetta kann verða gjørt við, at onkur stovnur, aloftast ríkisskjalasavnið í viðkomandi landi, hevur myndugleika at áleggja almennum stovnum at varðveita sínar fyrisitingarligu upplýsingar á ein slíkan hátt, at hesar upplýsingar skulu kunna nýtast uttan serstaka tøkni - eisini leingi eftir, at avvarandi stovnar ikki hava brúk fyri teimum longur.

Tað skjalatilfar, sum verður til í fyrisitingini, skal við øðrum orðum kunna nýtast eisini tann dag, tað bert hevur søguligan ella annan vísindaligan áhuga. Lagt kann verða afturat, at tekniskt hevur hetta higartil borið til í teimum londum, sum hava lagt seg eftir at finna útvegir fyri varðveitslu av upplýsingum, sum í almennu fyrisitingini hava verið goymdar við nýggjari tøkni. Hetta hevur verið gjørt við samráðingum millum avvarandi ríkisskjalasavn og stovnarnar, har funnið er fram til nýtiligar reglur og hóskandi tøkni.

3. FØROYA LANDSSKJALASAVN

3. 1. Eitt stutt søguligt yvirlit

Føroya Landsskjalasavn varð sett á stovn í 1932 og fyrsta savnið, ið varð lagt á goymslu har, var skjalasavn Føroya løgtings. Søga savnsins gongur tó í veruleikanum aftur til 1859, tá Leigubúðin í Tinganesi varð innrættað til skjalagoymslu fyri landsins almennu skjøl. Her í Leigubúðini vórðu savnað skjølini hjá løgtingi, amtmanni, sorinskrivara, fúta o. ø.

Men um aldarmótið varð savnið skilt sundur aftur. Søvnini hjá teimum einstøku embætunum vórðu nú flutt til nýggju embætishúsini hjá donsku embætismonnunum, meðan onnur søvn, t. d. bøkur og skjøl hjá Kgl. Handlinum, vórðu send til

ríkisskjalasavnið í Keypmannahavn í varðveitlsu (depot). Yngri bøkur og skjøl løgtingsins vórðu flutt til amtmannshúsini av tí, at amtmaðurin um hetta mundið var avgreiðslustjóri hjá løgtinginum. Tær elstu tingbøkurnar vórðu fluttar á skrivstovu sorinskrivarans.

Spurningurin varð eftir hetta, um bøkur og skjøl, sum ikki longur vóru í nýtslu hjá løgtingi og embætum - skjøl, sum nú mest høvdu søguligan og annan vísindaligan áhuga - skuldu verða send til Ríkisskjalasavnið í Keypmannahavn ella tey skuldu verða verandi í Føroyum. Hesin spurningur var frammi á løgtingi í 1904, tá bókasavnsmálið var til umrøðu. Undir hesari viðgerð mæltu fleiri tingmenn til, at hetta tilfar varð varðveitt í Føroyum í einum møguligum nýggjum bókasavnshúsum ella einum nýggjum tinghúsi. Tingmenn vóru samdir um tann mentunarliga týdning, sum bøkur og skjøl hins almenna í Føroyum høvdu. Teir hildu eisini, at tað fór at verða alt ov uttanhanda hjá fyrisiting og dómsvaldi, um stórir partar av almennu skjalasøvnunum vóru í varðveitslu uttanlanda. Teir vóru tí lítið hugaðir at lata hetta tilfar fara av landinum.

Síðan var spurningurin um skjølini hjá donsku embætismonnunum frammi aftur av og á - eitt nú í 1911, tá embætismenninir vórðu spurdir um støðu teirra til hendan spurning. Allir embætismenn mæltu frá, at savnindir vórðu send til Danmarkar. Teir mæltu í staðin til, at sett varð á stovn eitt alment skjalasavn í Føroyum. Í 1920 mælti Jóannes Patursson til, at játtaður varð peningur til at skipa og skráseta skjalasøvnini hjá ríkisstovnunum í Føroyum. Úrslitið av hesum gjørdist, at løgtingið samtykti at mæla ríkisstýrinum til at byggja hús til amtsbókasavn, landsskjalasavn og fornminnissavn. Løgtingið grundaði støðu sína á bæði mentunarlig og fyrisitingarlig sjónarmið. Tingið vildi varðveita tað søguliga heimildartilfar, sum skjalasøvnini umboða í landinum sum ein part av føroyskum

mentunararvi. Men løgtingið helt enn sum áður, at tað eisini fór at verða alt ov óhøgligt hjá fyrisiting og dómsvaldi, at lata embætisskjølini verða í varðveitslu í Danmark.

Málið varð eisini viðgjørd av donsku savnsmyndugleikunum, sum mæltu til, at skjalasavn varð sett á stovn í Føroyum. Síðan vóru samráðingar í nøkur ár millum løgting og ríkisstýri, og endaðu hesar samráðingar við, at samtykt varð at byggja nýggj hús til bókasavn, skjalasavn og fornminnissavn. Farið varð undir at byggja í 1928, og 1. juli 1932 varð "Færø Lands Arkiv" sett á stovn við skrivstovu, goymslu og lesistovu í nýggju bókasavnshúsunum á Debesartrøð. Savnið varð yvirtikið sum sermál í 1952 og skipað við løgtingslóg nr. 31 frá 2. maj 1952 um landsbókasavn v.m..

Longu í 1940 vóru húsini ov smá, og landsskjalasavnið noyddist at leiga høli til goymslur. Í 1960 keypti landsstýrið Müllerstrøð til savnsbyggningar og í 1965 varð nýtt landsbóka- og skjalasavn detailprokjekterað. Men hetta projekt fall á løgtingi í 1966 og landsbókasavnið varð bygt einsamalt.

Í 1972 var støðan orðin tann, at Føroya Landsskjalasavn búleikaðist í 4 ymiskum bygningum í Tórshavn. Landstýrið avgjørdi tá at flyta landsskjalasavnið í starvsstovuhúsini, ið vóru í gerð á Debesartrøð. Í starvstovubygninginum fekk landsskjalasavnið høvuðsgoymslu, lesistovu og skrivstovuhøli, men framvegis var neyðugt at leiga goymsluhøli. Í áttatiárunum øktist hølistørvurin munandi, og mælti landstýrið tí á vári 1988 løgtinginum til at samtykkja lóg um bygging av nýggjum landsskjalasavni. Hetta varð samtykt av løgtinginum (Ll. nr. 58 frá 5.juni 1988). Av tí at óvæntaðir trupulleikar tóku seg upp í sambandi við grundøkið, er byggingin ikki byrjað enn. Landsskjalasavnið búleikast tí framvegis í 4 ymiskum húsum.

3. 2. Søvn á landsskjalasavninum

Frammanfyri er greitt frá, hví tað av rættarligum og mentunarligum orsøkum er umráðandi at varðveita skjøl hjá lóggávuvaldi, fyrisiting, dómsvaldi og privatum. Nevndin heldur tað vera rímiligt í sambandi við hesar almennu viðmerkingar stutt at greiða frá teimum søvnum, sum landsskjalasavnið goymir. Yvirlitið er lagt við sum skjal 2 og skal nevndin bert enda sínar almennu viðmerkingar við stutt at lýsa tey savnindi, ið eru til skjals á landsskjalasavninum.

Landsskjalasavnið goymir í dag handrit og savnindi, ið fevna um eitt út við 700 ára langt tíðarskeið. Elsta handritið stavar frá 1298 og yngstu savnindini eru frá 1986. Í vavi fevna søvnini á landsskjalasavninum um um leið 5000 hillametrar. Umframt savnindi frá almennum stovnum eru eisini bøkur og skjøl hjá privatum eitt nú vinnufyritøkum, yrkisfeløgum og einstaklingum á landsskjalasavninum. Øll hesi søvn, savnindi og handrit eru ríkar heimildir til Føroya søgu og til at kalla øll viðurskifti Føroyum viðvíkjandi í fortíð og nútíð. Tað er sermerkt fyri landsskjalasavnið, at tað, hóast savnið er landsstovnur, eisini fevnir um savnindi hjá ríkisstovnum í Føroyum. Fyri 1948, tá heimastýrislógin kom í gildi, var tað sjálvsagt, at stovnar ríkisins avhendu síni savnindi til landsskjalasavnið. Eftir 1948 helt henda siðvenja fram, hóast skjalasøvn í 1952 vórðu yvirtikin sum føroyskt sermál. Spurningurin, hvørt tað var beint at lata skjøl hjá donskum ríkisstovnum í Føroyum varðveita á savni undir heimastýrinum, var so av og á havdur á lofti. Sæð frá einum føroyskum sjónarmiði kundi tað bert vera ein fyrimunur, at savnindi hjá ríkisstovnum vóru í varðveitslu hjá landskjalasavninum. Savnindi hjá donskum ríkisstovnum snúgva seg jú um føroysk viðurskifti og eru tey tí týdningarmiklar heimildir til Føroya søgu. Tað ráddi tí um at tryggja, at

hetta søguliga tilfar varð verðandi í Føroyum og varð hendan trygd fingin til vega við avtaluni millum ríkisstýrið og landsstýrið frá 12. oktober 1990 um savnindi danska statsins í Føroyum. Sambært hesa avtalu skulu stovnar ríkisins í Føroyum avhenda síni savnindi til landsskjalasavnið eftir ávísum reglum. Fyri hesi savnindi galda tær til eina og hvørja tíð galdandi donsku atgeingisreglurnar. Við avtaluni varð sostatt tryggjað, at virðismikið søguligt tilfar við uppruna í Føroyum, men annars er vorðið til í donsku fyrisitngini í Føroyum, verður verandi í Føroyum. Avtalan um savnindi ríkismyndugleikana í Føroyum er enn ikki sett í gildi, tí hon hevur sum fortreyt, at somu reglur verða at galda fyri savnindi hjá landsstovnum, sum galda fyri savnindi hjá ríkisstovnum. Uppskot til løgtingslóg um Føroya landsskjalasavn lýkur hesar treytir. Hetta merkir sostatt, at verður uppskotið samtykt verða øll savnindi hjá ríkismyndugleikum uttan slík, sum stava frá stovnum undir verjuni, varðveitt í Føroyum. Avtalan er hjáløgd sum skjal nr. 1.

Søvnini á landsskjalasavninum eru skipað eftir altjóða grundregluni um uppruna (proveniensprincippið). Hetta merkir, at savnindini eru varðveitt og skipað eftir teimum stovnum, ið upprunaliga hava avhent tey til landsskjalasavnið. Eisini merkir hetta, at savnindi framvegis verða verðandi skipað eftir somu grundreglum, sum tey vóru skipað eftir, meðan tey enn vóru í nýtslu hjá viðkomandi stovni. Sí annars skjal 2, har sett er eitt yvirlit yvir teir stovnar, hvørs savnindi eru á landsskjalasavninum.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um Førova Landsskjalasavn.

U p p s k o t

til

løgtingslóg um Føroya Landsskjalasavn.

Bólkur I.
Endamál.

§ 1. Skjalasøvnini eru ein partur av mentunararvi landsins. Savnindi hjá almennum stovnum, samanber § 5, skulu goymast og varðveitast við tí í hyggju at síggja til rættin til og tørvin á upplýsing og gransking.
Stk. 2. Um savnindi ríkisins Føroyum viðvíkjandi verður landsstýrinum heimilað at gera avtalu við avvarðandi ríkismyndugleika.

§ 2. Føroya Landsskjalasavn, hereftir nevnt landsskjalasavnið, skal savna, skipa, varðveita, lýsa og rokja tey skjøl, sum almennir stovnar avhenda til savnið.
Stk. 2. Viðvíkjandi savnindum hjá privatum verður vist til bólk V.

§ 3. Landsskjalasavnið skal veita almennum stovnum, privatum og granskingini upplýs-

lagtingslov om Færøernes Landsarkiv.

Kapitel I.
Formål.

§ 1. Arkiverne er en del af landets kulturarv. De offentlige myndigheders arkivalier skal bevares og varetages med det for øje at tilgodese retten til og behovet for information og forskning.
Stk. 2. Om statens arkivalier vedrørende Færøerne bemyndiges landsstyret til at indgå aftale med vedkommende statsmyndighed.

§ 2. Færoernes Landsarkiv, herefter benævnt landsarkivet, skal indsamle, ordne, bevare, beskrive og varetage det materiale, som de offentlige institutioner afleverer til arkivet.
Stk. 2. Vedrørende private arkivalier henvises til kapitel V.

§ 3. Landsarkivet skal stille oplysninger fra sine samlinger til rådighed for

ingar frá søvnum sínum. Fyri hesar tænastur kann landsskjalasavnið áseta gjald eftir reglum, sum landsstýrið góðkennir.

Stk. 2. Landsskjalasavnið skal sjálvt ella í samstarvi við onnur inna gransking í tilknýti til savn tess.

offentlige institutioner, private og forskningen. For disse tjenesteydelser kan landsarkivet fastsætte vederlag efter regler, som landsstyret godkender.

Stk. 2. Landsarkivet skal alene eller i samarbejde med andre udføre forskning i tilknytning til sine samlinger.

Bólkur II.
Skipan.

§ 4. Landsskjalasavnið er stovnur undir landsstýrinum undir leiðslu av einum landsskjalavørði, sum landsstýrið setir.

Stk. 2. Landsstýrið ásetur gjøllari reglur fyri virksemi landsskjalasavnsins.

Kapitel II.
Organisation.

§ 4. Landsarkivet er en institution under landsstyret under ledelse af en landsarkivar, som landsstyret udnævner.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter de nærmere regler for landsarkivets virksomhed.

Bólkur III.
Skjalasøvn hjá almennum stovnum.

§ 5. Heitið almennur stovnur, hereftir nevndur stovnur, fevnir um løgting og landsstýri og stovnar teirra, kommunur og felagskommunur og kommunalar eins og felagskommunalar stovnar, stovnar við lógásettum einarætti, sjálvsognarstovnar og privatar stovnar, sum heilt

Kapitel III.
Offentlige institutioners arkiver.

§ 5. Betegnelsen offentlig institution, herefter benævnt institution, omfatter lagtinget og landsstyret og deres institutioner, kommuner og fælleskommuner og kommunale samt fælleskommunale institutioner, institutioner med lovbestemt monopol, selvejende institutioner

ella fyri meginpartin verða riknir fyri almennan pening, ella sum røkja uppgávur vegna tað almenna.

og private institutioner, som helt eller overvejende drives for offentlige midler, eller som varetager opgaver på det offentliges vegne.

§ 6. Heitið savnindi fevnir um skrivligt tilfar eins og øll onnur sløg av tilfari, sum gevur upplýsing og er vorðið til ella fingið til vegar í sambandi við tænastuvirki hjá stovninum og hjá starvsfólki hansara. Fyri kort, tekningar og ætlanir, ljósmyndir, filmar og smáfilmar, ljómfløgur, ljóðbond, holkort, magnetbond, disklar og aðrar miðlar til at viðgera og goyma upplýsingar galda somu reglur sum fyri savnindi annars, um tey eru partur av skjalasavninum hjá stovninum.

§ 6. Betegnelsen arkivalier omfatter såvel skriftligt materiale som enhver anden art af materiale, der formidler information og er blevet til eller tilvejebragt i forbindelse med institutionens og dens medarbejderes tjenstlige virke. For kort, tegninger og planer, fotografier, film og mikrofilm, grammofonplader, lydbånd, hulkort, magnetbånd, disketter og andre medier til behandling og opbevaring af data, gælder de samme regler som for de øvrige arkivalier, for så vidt de er en del af institutionens arkiv.

§ 7. Undir eftirliti av landsskjalasavninum hevur stovnurin ábyrgdina fyri, at skjalasavnið verður bygt upp og forsvarliga varðveitt.

Stk. 2. Landsskjalasavnið er í skjalasavnsviðurskiftum ráðgevi hjá stovninum, eitt nú í spurningum um málsgerð, uppbygging av skjalasavni og gerð av yvirlitum yvir innihaldið í skjalasøvnunum og í spurningum um vanlig

§ 7. Under tilsyn af landsarkivet har institutionen ansvaret for arkivdannelsen og for forsvarlig opbevaring af arkivet.

Stk. 2. Landsarkivet er i arkivanliggender institutionens konsulent, herunder i spørgsmål om sagsdannelse, arkivdannelse og udarbejdelse af fortegnelser over arkivernes indhold og i spørgsmål om almindelige opbevaringsfor-

goymsluviðurskifti á skjalasøvnunum.

Stk. 3. Landsskjalasavnið hevur eftirlit við skjala-søvnum stovnanna og ásetur reglur um skipan teirra.

Stk. 4. Ætlanir um nýggj skjalasavnshøli skulu verða løgd fyri landsskjalasavnið til góðkenningar.

Stk. 5. Avhendingarskyldug savnindi kunnu bert verða beind burtur eftir reglum, sum landsstýrið ásetur.

hold i arkiverne.

Stk. 3. Landsarkivet fører tilsyn med institutionernes arkiver og fastsætter regler for deres ordning.

Stk. 4. Planer for nye arkiv-lokaler skal forelægges landsarkivet til godkendelse.

Stk. 5. Afleveringspligtige arkivalier må kun kasseres ifølge regler, som landsstyret fastsætter.

§ 8. Stovnarnir avhenda eftir reglum, sum landsskjalasavnið ásetur, savnindi teirra til landsskjalasavnið, tá savnindini eru 30 ára gomul, uttan so at landsskjalasavnið ásetur aðrar freistir.

Stk. 2. Landsskjalasavnið kann sleppa stovni undan at avhenda savnindi, sum javnan verða brúkt í dagliga arbeið-inum.

Stk. 3. Avhendingaskyldan fevnir ikki um savnindi, sum eru partur av vísindaligu søvnum stovnsins.

Stk. 4. Savnindi frá stovni, sum er avtikin, skulu beinan-vegin verða avhend lands-skjalasavninum, uttan so at annar stovnur, sum yvirtekur málsøki avtikna stovnsins, skal brúka hesi savnindi.

§ 8. Institutionerne afle-verer efter regler, som landsarkivet fastsætter, deres arkivalier til lands-arkivet, når arkivalierne er 30 år gamle, medmindre lands-arkivet fastsætter andre frister.

Stk. 2. Landsarkivet kan fri-tage en institution for afle-vering af arkivalier, som til stadighed anvendes i det løbende arbejde.

Stk. 3. Afleveringspligten omfatter ikke arkivalier, som er en del af en institutions videnskabelige samlinger.

Stk. 4. Arkivalier fra en ophævet institution skal straks afleveres til landsar-kivet, medmindre en anden institution, der overtager den ophævede institutions sagsområde, skal bruge disse

arkivalier.

§ 9. Tá stovnur avhendir landsskjalasavninum savnindi, tekur landsskjalasavnið við ábyrgdini fyri forsvarligari goymslu og skipan av savnindunum.

§ 9. Når en institution afleverer arkivalier til landsarkivet, overtager landsarkivet ansvaret for arkivaliernes forsvarlige opbevaring og ordning.

§ 10. Savnindi hjá stovni kunnu ikki verða keypt, seld ella latin á annan hátt.
Stk. 2. Eru savnindi hjá stovni komin á privatar hendur, skulu tey beinanvegin og uttan viðurlag verða latin avvarðandi stovni ávikavist landsskjalasavninum aftur.
Stk. 3. Rættindi landsins til savnindi hjá stovnum verða ikki burturmist við avogning ella hevd.

§ 10. En institutions arkivalier kan ikke gøres til genstand for køb, salg eller anden overdragelse.
Stk. 2. Er en institutions arkivalier kommet i privat besiddelse, skal de straks og uden vederlag afleveres til vedkommende institution henholdsvis landsarkivet.
Stk. 3. Landets rettigheder til institutioners arkivalier kan ikke ophøre ved ekstinktion eller hævd.

Bólkur IV.
Atgeingi.

Kapitel IV.
Tilgængelighed.

§ 11. Øll hava atgeingi at savnseindum, sum stovnar hava avhent landsskjalasavninum, tá eindirnar eru 30 ára gamlar, sí tó §§ 12 og 13.

§ 11. Arkivenheder, der hidrører fra myndigheder, og som er afleveret til landsarkivet, er tilgængelige for enhver, når de er 30 år gamle, jfr. dog §§ 12 og 13.

§ 12. Stovnurin, ið avhendir, kann í samráð við landsskjalasavnið áseta eina longri atgeingifreist enn 30 ár fyri savnseindir ella

§ 12. Den afleverende myndighed kan efter droftelse med landsarkivet fastsætte en længere tilgængelighedsfrist end 30 år for arkivenheder

bólkar av hesum, um hetta er neyðugt til tess at tryggja serlig fyrilit fyri:

1) verju av skuldsettum, vitnum ella øðrum í agamálum,
2) búskaparligum áhugamálum hjá tí almenna, heruppií fremjan av vinnuvirksemi hjá tí almenna,
3) búskaparliga áhuganum hjá einstaklingum ella privatum virkjum í at verja upplýsingar um tøkniligar skipanir ella arbeiðshættir ella upplýsingar um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella tílíkt ella
4) privatum og almennum áhugamálum, har serlig viðurskifti krevja, at mál verða hildin loynilig.

eller grupper af disse, hvis dette er nødvendigt til beskyttelse af væsentlige hensyn til:

1) sigtede, vidner eller andre i sager om disciplinær forfølgning,
2) det offentliges økonomiske interesser, herunder udførelsen af det offentliges forretningsvirksomhed,
3) enkeltpersoners eller private selskabers økonomiske interesse i at beskytte oplysninger om tekniske indretninger eller fremgangsmåder eller om drifts- eller forretningsforhold eller lignende eller
4) private og offentlige interesser, hvor hemmeligholdelse efter forholdets særlige karakter er påkrævet.

§ 13. Atgeingifreistin er 80 ár fyri savnseindir ella bólkar av hesum, sum

1) innihalda upplýsingar um privat, heruppií búskaparlig viðurskifti hjá einstaklingum,
2) viðvíkja skráum, sum løgtingslóg um evnisskráir hjá almennum myndugleikum fevnir um,
3) fevna um brævaskifti

§ 13. Tilgængelighedsfristen er 80 år for arkivenheder eller grupper af disse, der

1) indeholder oplysninger om enkeltpersoners private, herunder økonomiske forhold,
2) vedrører registre, der er omfattet af lagtingslov om offentlige myndigheders registre,
3) omfatter myndigheders

millum myndugleikar og serkøn til nýtslu í rættarmálum ella tá umhugsað verður, um rættarmál eigur at verða reist, ella

4) fevna um tilfar, ið verður útvegað sum grundarlag fyri gerð av almennum hagtølum hjá Hagstovu Føroya.

Stk. 2. Stovnurin, ið avhendir, kann, har viðurskiftini tala fyri tí, í samráð við landsskjalasavnið áseta eina styttri ella longri atgeingifreist fyri savnseindir, ið eru nevndar í stk. 1.

§ 14. Atgeingifreistin verður roknað frá tí ári, tá ein savnseind endar.

§ 15. Landsskjalasavnið kann í ávísum førum loyva nýtslu av eini savnseind ella bólkum av hesum, áðrenn atgeingifreistin er úti, sí tó stk. 2-4.

Stk. 2. Loyvi eftir stk. 1 er treytað av, at avvarðandi stovnur hevur játtað hesum, um

1) stovnurin, ið avhendir, hevur ásett eina longri atgeingifreist eftir § 12,
2) ein savnseind fevnir um tilfar av tí slagnum, sum er nevnt í § 13, stk. 1,

brevveksling med sagkyndige til brug i retssager eller ved overvejelse af, om retssag bør føres, eller

4) omfatter materiale, der tilvejebringes som grundlag for udarbejdelse af offentlig statistik ved Hagstova Føroya.

Stk. 2. Den afleverende myndighed kan, hvor forholdene taler derfor, efter drøftelse med landsarkivet fastsætte en kortere eller længere tilgængelighedsfrist for arkivenheder, der er omfattet af stk. 1.

§ 14. Tilgængelighedsfristen regnes fra en arkivenheds slutningsår.

§ 15. Landsarkivet kan i konkrete tilfælde meddele tilladelse til benyttelse af en arkivenhed eller grupper af disse inden udløbet af tilgængelighedsfristen, jfr. dog stk. 2-4.

Stk. 2. Det er en betingelse for at meddele tilladelse efter stk. 1, at vedkommende myndighed har givet sit samtykke hertil, når

1) den afleverende myndighed har fastsat en længere tilgængelighedsfrist efter § 12,

pkt. 2)-4), ella

3) ein savnseind er avhend landsskjalasavninum, áðrenn hon er 30 ára gomul, og hon fevnir um tilfar av tí slagnum, sum er nevnt í § 12.

Stk. 3. Loyvi eftir stk. 1 krevur herumframt samtykki frá Skrásetingareftirlitinum, um savnseindin fevnir um tilfar av tí slagnum, sum er nevnt í § 13, stk. 1, pkt. 2).

Stk. 4. Landsstýrið ásetir gjøllari reglur um atgeingi og um treytir fyri nýtslu av teimum upplýsingum, sum atgeingi verður givið til.

§ 16. Tann, ið fær atgeingi at savnseindum, sum ikki eru beinleiðis atgeingiligar, hevur ikki loyvi uttan heimild at almannakunngera, lata víðari ella nýta upplýsingar, sum eru givnar í trúnaði, og sum viðkomandi í hesum sambandi hevur fingið kunnleika til. Ein upplýsing er givin í trúnaði, tá hon í lóg ella aðrari galdandi ásetan er ásett at vera tað, ella tá tað annars er neyðugt, at hon verður hildin loynilig av týðandi fyriliti fyri almenn-

2) en arkivenhed indeholder materiale af den karakter, der er nævnt i § 13, stk. 1, nr. 2)-4), eller

3) en arkivenhed er afleveret til landsarkivet, inden den er 30 år gammel, og den indeholder materiale af den karakter, der er nævnt i § 12.

Stk. 3. Tilladelse efter stk. 1 kræver endvidere samtykke fra Registertilsynet, hvis arkivenheden indeholder materiale af den karakter, der er nævnt i § 13, stk. 1, nr. 2).

Stk. 4. Landsstyret fastsætter nærmere regler om tilgængelighed og om vilkår for brugen af de oplysninger, der gives adgang til.

§ 16. Den, der får adgang til arkivenheder, som ikke er umiddelbart tilgængelige, må ikke uberettiget offentliggøre, videregive eller udnytte fortrolige oplysninger, hvortil den pågældende i den forbindelse har fået kendskab. En oplysning er fortrolig, når den ved lov eller anden gyldig bestemmelse er betegnet som sådan, eller når det i øvrigt er nødvendigt at hemmeligholde den for at varetage væsentlige hensyn til offentlige eller private

um ella privatum áhugamálum.

interesser.

Bólkur V.
Privat savnindi.

§ 17. Landsskjalasavnið savnar, tekur ímóti og tryggjar privat savnindi, sum verða hildin at hava stóran granskingarligan ella mentunarligan týdning.

Stk. 2. Slík privat savnindi, sum ikki eru avhend landsskjalasavninum, eigur savnið at skráseta. Skrásetingin hevur við sær, at eigarin fær skyldu at boða landsskjalasavninum frá, um eigaraviðurskiftini verða broytt, ella savnindini verða flutt.

Stk. 3. Verða skrásett savnindi flutt av landinum, hevur eigarin skyldu at geva landsskjalasavninum høvi at taka avrit av savnindunum, áðrenn tey verða útflutt.

Kapitel V.
Private arkivalier.

